’HALDIÐ TYKKUM Í KÆRLEIKA GUDS’

- Hvussu kanst tú vísa, at tú elskar Gud?
- Hvussu veitst tú, nær tú kanst líta á samvitskuna?
- Hvat vísir títt val av vinum um teg?
- Hví hevur tín áskoðan á myndugleika ávirkan á, hvussu Gud metir teg?
- Hví er tað gagnligt at fylgja Guds siðareglum?
- Hvussu kanst tú gleðast um títt arbeiði?
- Hvat kann geva tær enn størri hug at akta Jehova?

JW.ORG™

Iv-FR
161123

’HALDIÐ TYKKUM Í KÆRLEIKA GUDS’

HESA BÓKINA EIGUR

Myndir: ■ Síða 14: © COMSTOCK Images/age fotostock ■ Síða 134: Mixa/age fotostock ■ Síða 201: © bilderlounge/Tips RF/age fotostock

Henda útgávan er ikki til sølu. Hon er framleidd sum liður í einum heimsumfatandi bíbliuundirvísingararbeiði, ið verður fíggjað við sjálvbodnum stuðli.

Far inn á www.jw.org, um tú vilt lata stuðul.

Stendur einki annað viðmerkt, eru bíbliuorðini eftir umseting Victor Danielsens, endurskoðaðu útgávuni 1974. © Hin Føroyski Bíbliugrunnurin.
Styttingin *NW* vísir til *New World Translation of the Holy Scriptures.*

“Keep Yourselves in God’s Love”
Prentað í november 2016
Faroese (*lv*-FR)
© 2015
Watch Tower Bible and Tract Society of Pennsylvania
Útgevarar:
Jehova vitni
© Druck und Verlag: Wachtturm Bibel- und Traktat-Gesellschaft, Selters/Ts.
Made in Germany

INNIHALD

KAPITTUL **SÍÐA**

1. Hetta er „kærleikin til Gud“ **5**
2. Hvussu varðveita vit eina góða samvitsku? **14**
3. Elska tey, sum Gud elskar **25**
4. Hví skulu vit virða myndugleika? **36**
5. Hvussu vísa vit, at vit ikki eru av heiminum? **50**
6. Hvussu velja vit gagnligt undirhald? **62**
7. Hevur tú somu áskoðan á lívið sum Gud? **74**
8. Gud elskar tey, sum eru rein **86**
9. Flýggið undan kynsligum siðloysi **97**
10. Hjúnabandið – ein gáva frá Gudi **110**
11. Haldið hjúnabandið í æru **121**
12. Lat tína talu vera uppbyggjandi **133**
13. Høgtíðir, sum Gudi ikki dámar **144**
14. Verið ærlig í øllum **160**
15. Gleð teg um títt arbeiði **171**
16. Standið Djevulinum og svikaálopum hansara ímóti **183**
17. „Uppbyggið tykkum á heilagastu trúgv tykkara“ **196**

Uppískoyti **206**

Til øll, sum elska Jehova!

„Tit skulu skilja sannleikan, og sannleikin skal gera tykkum fríar," segði Jesus. (*Jóhannes 8:32*) *Hetta eru av sonnum hugalig orð! Ja, tað ber til at skilja sannleikan, sjálvt á hesum torføru 'síðstu døgunum', har tað er vorðið so vanligt at lúgva og svika.* (*2 Timoteus 3:1*) *Minnist tú, táið tú á fyrsta sinni varnaðist sannleikan í Guds orði? Var tað ikki ein frálík kensla?*

Tað er sera umráðandi at skilja sannleikan væl og at fortelja øðrum um hann, men tað er líka so umráðandi, at vit liva samsvarandi sannleikanum. Skulu vit gera tað, mugu vit halda okkum í kærleika Guds. Hvat ber tað í sær? Nakað, sum Jesus segði kvøldið fyri deyða sín, svarar spurninginum. Hann segði við sínar trúføstu ápostlar: „Halda tit boð Míni, verða tit verandi í kærleika Mínum, eins og Eg havi hildið boð Faðirs Míns og verði verandi í kærleika Hansara." – Jóhannes 15:10.

Legg til merkis, at Jesus varð verandi í kærleika Guds, tí hann helt boðini frá Faðir sínum. Tað sama er galdandi fyri okkum í dag. Skulu vit verða verandi í kærleika Guds, mugu vit í gerandisdegnum liva eftir sannleikanum. Hetta sama kvøldið segði Jesus: „Táið tit vita hetta – sælir eru tit, um tit gera tað!" – Jóhannes 13:17.

Vit vóna inniliga, at henda bókin fer at hjálpa tær at halda fram at liva eftir sannleikanum og soleiðis halda teg „í kærleika Guds" við útliti til ævigt lív. – Judas 21.

Stýrandi ráðið hjá Jehova vitnum

Hetta er „kærleikin til Gud“

„Tað er kærleikin til Gud, at vit halda boð Hansara; og boð Hansara eru ikki tung.“ – 1 JÓHANNES 5:3.

ELSKAR tú Gud? Um tú hevur vígt títt lív til Jehova Gud, svarar tú uttan iva ja – sjálvandi gert tú tað! Tað er heilt natúrligt hjá okkum at elska Jehova. Vit elska Gud, tí hann elskar okkum. Bíblian orðar tað soleiðis: „Vit elska, tí Hann [Jehova] elskaði okkum fyrst.“ – 1 Jóhannes 4:19.

2 Jehova hevur tikið stig til at vísa okkum kærleika. Hann hevur givið okkum jørðina sum eitt vakurt heim. Hann nøktar okkara likamliga og materiella tørv. (Matteus 5:43-48) Men tað, sum hevur enn størri týdning, er, at hann nøktar okkara andaliga tørv. Hann hevur givið okkum sítt orð, Bíbliuna. Haraftrat bjóðar hann okkum at biðja til sín og gevur okkum vissu fyri, at hann hoyrir okkum og hjálpir okkum við sínum heilaga anda. (Sálmur 65:3; Lukas 11:13) Størsta gávan av øllum er, at hann sendi sín dýrabara son at bjarga okkum undan synd og deyða. Jehova hevur av sonnum víst okkum stóran kærleika! **– Les Jóhannes 3:16; Rómbrævið 5:8.**

1, 2. Hví elskar tú Jehova Gud?



Vígsla og dópur eru byrjanin til eitt lív, har vit av kærleika akta Jehova

3 Jehova vil, at hansara kærleiki skal gagna okkum í allar ævir. Men vit gera í roynd og veru sjálv av, um tað verður so. Guds orð gevur okkum hesa áheitan: „Haldið tykkum ... í kærleika Guds,“ og júst tað kann geva okkum ævigt lív. (Judas 21) Orðini „haldið tykkum“ vísa, at vit mugu gera nakað fyri at verða verandi í kærleika Guds. Hansara kærleiki má ávirka okkara lív á ítøkiligan hátt. Tí er tað umráðandi, at vit seta okkum sjálvum henda spurningin: ’Hvussu kann

3. (a) Hvat krevur tað av okkum at verða verandi í kærleika Guds? (b) Hvønn týðandi spurning mugu vit hugsa um, og hvar finna vit svarið?

eg vísa, at eg elski Gud?’ Svarið er at finna í íblástu orðunum hjá Jóhannesi ápostli: „Tað er kærleikin til Gud, at vit halda boð Hansara; og boð Hansara eru ikki tung.“ (1 Jóhannes 5:3) Vit vilja fegin vísa okkara Gudi, hvussu góð vit eru við hann, og tí mugu vit gjølla kanna, hvat hesi orðini hava at týða.

HETTA ER „KÆRLEIKIN TIL GUD“

4 Hvat hevði Jóhannes ápostul í huga, táið hann skrivaði orðini „kærleikin til Gud“? Hann sipaði til tær djúpu kenslurnar,ið vit sum einstaklingar hava fyri Gudi. Minnist tú, nær kærleikin til Jehova fór at vaksa í tínum hjarta?

5 Steðga á eina løtu og minn teg á tíðina, táið tú komst at kenna sannleikan um Jehova og hansara ætlanir og fórt at trúgva á hann. Tú skilti, at hóast tú vart føddur sum syndari og tí vart fremmandur fyri Gudi, so hevði Jehova við Kristusi slóðað vegin fyri, at tú kundi fáa fullkomileikan, sum Ádam misti, og arva ævigt lív. (Matteus 20:28; Rómbrævið 5:12, 18) So líðandi skilti tú, hvussu stórt ofrið var, sum Jehova læt, táið hann sendi sín dýrabara son at doyggja fyri teg. Tað nam títt hjarta, og tú fórt at elska Gud, sum hevur víst tær so stóran kærleika. – **Les Fyrsta bræv Jóhannesar 4:9, 10.**

6 Við tíðini gjørdist tín kærleiki til Jehova tó uppaftur størri. Kærleiki er ikki bert ein kensla ella ein spurningur um orð. Sannur kærleiki til Gud fevnir um meira enn bert at siga: ’Eg elski Jehova.’ Eins og trúgv

---

4, 5. Lýs, hvussu kærleikin til Jehova fór at vaksa í tínum hjarta.
6. Hvussu kemur sannur kærleiki til sjóndar, og hvat fekk kærleiki til Gud teg at gera?

kemur sannur kærleiki til sjóndar í verki. (Jákup 2:26) Vit vísa okkara kærleika við at gera tað, sum gleðir tann, vit elska. Tá ið kærleikin til Jehova fór at vaksa í tínum hjarta, fekst tú tí hug at liva eitt lív, sum gleðir tín himmalska Faðir. Ert tú eitt doypt Jehova vitni? Um so er, var tað hesin djúpi kærleikin til Jehova, sum fekk teg at taka ta týdningarmestu avgerðina í tínum lívi. Tú vígdi títt lív til Jehova fyri at gera hansara vilja, og tú vísti tað við at lata teg doypa. **(Les Rómbrævið 14:7, 8.)** At halda hetta hátíðarliga lyftið ber í sær, at vit gera tað næsta, sum Jóhannes ápostul nevndi.

„VIT HALDA BOÐ HANSARA"

7 Jóhannes greiðir frá, hvat kærleikin til Gud er, nevniliga „at vit halda boð Hansara". Hvørji eru Guds boð? Jehova gevur okkum fleiri greið boð í sínum orði, Bíbliuni. Til dømis forbjóðar hann drykkjuskapi, kynsligum siðloysi, avgudadyrkan, stuldri og lygn. (1 Korintbræv 5:11; 6:18; 10:14; Efesusbrævið 4:28; Kolossebrævið 3:9) At halda Guds boð ber í sær at liva eftir greiðu siðareglunum í Bíbliuni.

8 Skulu vit gleða Jehova, mugu vit tó gera meira enn bert at halda hansara greiðu boð. Jehova hevur ikki avmarkað okkara frælsi við at áseta lógir um øll viðurskifti í okkara lívi. Tí kunnu vit í gerandisdegnum ofta koma í eina støðu, sum Bíblian ikki beinleiðis gevur leiðbeining um. Hvussu kunnu vit tá vita, hvat gleðir Jehova? Í Bíbliuni eru greiðar ábendingar

---

7. Hvørji eru nøkur av Guds boðum, og hvat ber tað í sær at halda tey?

8, 9. Hvussu kunnu vit vita, hvat gleðir Jehova, eisini tá ið talan er um onkra støðu, sum Bíblian ikki beinleiðis gevur leiðbeining um? Nevn eitt dømi.

um, hvussu Gud hugsar. Tá ið vit kanna Bíbliuna, læra vit, hvat Jehova elskar, og hvat hann hatar. **(Les Sálm 97:10;** Orðtøkini 6:16-19) Vit læra at skilja, hvønn hugburð og atburð honum dámar. Jú meira vit læra um persónleikan og framferðarháttin hjá Jehova, tess lættari verður tað at lata hansara hugsanarhátt forma okkara avgerðir og atburð. Sjálvt tá ið eingin serstøk lóg er at finna í Bíbliuni um støðuna, vit eru í, ber tað altso ofta til at 'skilja, hvat vilji Harrans er'. – Efesusbrævið 5:17.

9 Til dømis er einki beinleiðis boð í Bíbliuni, sum sigur okkum, at vit ikki mugu hyggja at filmum ella sjónvarpssendingum, sum lýsa grovan harðskap ella kynsligt siðloysi. Men er tað veruliga neyðugt við einum slíkum boði? Vit vita, hvussu Jehova metir slíkt. Bíblian sigur, at Jehova „hatar tann, ið elskar harðskap“. (Sálmur 11:5, *NW*) Hon sigur eisini, at 'Gud skal døma siðloysingar'. (Hebrearabrævið 13:4) Tá ið vit grunda á hesi íblástu orðini, skilja vit væl, hvat vilji Jehova er. Tí hyggja vit ikki at undirhaldi, ið lýsir gerðir, sum hann hatar. Vit vita, at tað gleðir Jehova, tá ið vit halda okkum frá siðspilluni, sum hesin heimurin roynir at lýsa sum óskaðiligt undirhald.*

10 Hvør er høvuðsorsøkin til, at vit halda Guds boð? Hví vilja vit hvønn dag gera tað, sum Gudi dámar? Vit velja ikki eina slíka kós bara fyri at sleppa undan revsing ella skaðiligu avleiðingunum, ið kunnu standast av at skúgva Guds vilja til viks. (Galatiabrævið 6:7)

---

* Í 6. kapitli í hesi bókini verður viðgjørt, hvussu vit kunnu velja gagnligt undirhald.

10, 11. Hví velja vit at akta Jehova, og hvat slag av lýdni er talan um?

Nei, vit meta lýdni móti Jehova sum ein dýrabaran møguleika at vísa honum, at vit elska hann. Júst sum eitt barn fegið vil gleða pápa sín, vilja vit fegin gleða Jehova. (Sálmur 5:13) Hann er Faðir okkara, og vit elska hann. Einki ger okkum meira nøgd og glað enn at vita, at vit liva á ein hátt, sum Jehova góðkennir. – Orðtøkini 12:2.

11 Tí akta vit ikki Jehova treyðugt, men villiga og treytaleyst.* Vit akta ikki bara, tá ið tað liggur fyri hjá okkum, ella tá ið tað er lætt. Nei, vit eru 'lýðin av hjarta'. (Rómbrævið 6:17) Vit kenna tað eins og sálmaskaldið, ið skrivaði: „Eg havi gleði mína í boðum Tínum, sum eg elski." (Sálmur 119:47) Ja, vit *elska* at tæna Jehova, og vit viðurkenna, at hann bæði hevur uppiborið og krevur okkara fulla og treytaleysa lýdni. (5 Mósebók 12:32) Vit vilja fegin, at Jehova skal siga tað sama um okkum, sum hann segði um Nóa. Í Bibliuni stendur um henda trúfasta mannin, sum í kærleika aktaði Gud í nógv áratíggju: 'Nóa gjørdi í einum og øllum, sum Gud hevði sagt við hann.' – 1 Mósebók 6:22.

12 Hvussu ávirkar tað Jehova, at vit eru fús at akta? Hansara orð sigur, at vit harvið 'gleða hjarta' hansara. (Orðtøkini 27:11) Kann okkara lýdni veruliga gleða alheimsins Fullveldisharra? Ja, avgjørt! Jehova skapti okkum við einum fríum vilja. Tað merkir, at vit hava frítt í at velja. Vit kunnu velja at akta Gud ella lata

* Sjálvt illu andarnir kunnu akta treyðugt. Tá ið Jesus beyð illum andum at koma út úr nøkrum fólkum, noyddust teir at viðurkenna hansara myndugleika og akta, hóast teir ikki høvdu hug til tað. – Markus 1:27; 5:7-13.

12. Nær gleðir tað Jehova, at vit akta hann?

vera. (5 Mósebók 30:15, 16, 19, 20) Tá ið vit av kærleika og fúsum hjarta velja at akta Jehova, gleða vit av sonnum okkara himmalska Faðir. (Orðtøkini 11:20) Og vit velja eisini ta bestu lívsleiðina.

„BOÐ HANSARA ERU IKKI TUNG“

13 Jóhannes ápostul sigur okkum nakað sera uggandi um boðini, sum Jehova gevur: „Boð Hansara eru ikki tung.“ (1 Jóhannes 5:3) Ein onnur bíbliutýðing endurgevur orðini soleiðis: „Boð Hansara tyngja okkum ikki.“ (*New English Translation*) Boðini, Jehova hevur ásett, eru ikki órímilig ella torfør at halda. Tað er ikki ógjørligt hjá ófullkomnum menniskjum at akta hansara lógir.

14 Vit kunnu lýsa tað við einum dømi. Ein góður vinur hjá tær skal flyta og biður teg koma at hjálpa sær. Nógvir kassar skulu flytast. Nakrir av teimum eru so mikið lættir, at tað væl ber til hjá einum manni at lyfta teir, men aðrir eru so tungir, at tað krevur tveir mans at lyfta teir. Vinurin hjá tær velur teir kassarnar, hann vil hava teg at flyta. Hevði hann biðið teg lyft kassar, sum hann visti vóru ov tungir hjá tær at lyfta? Nei. Hann hevði ikki viljað, at tú skuldi fingið skaða av at bera teir einsamallur. Á líknandi hátt áleggur okkara góði Gud okkum ikki at halda nøkur boð, sum eru ov tung. (5 Mósebók 30:11-14) Hann hevði ongantíð lagt eina so tunga byrðu á okkum. Jehova kennir okkara avmarkingar, „tí Hann veit, hvørjir skapningar vit eru, Hann minnist, at vit eru dust“. – Sálmur 103:14.

13, 14. Hví kunnu vit siga, at Guds boð ikki eru tung, og hvussu kunnu vit lýsa tað?

15 Boðini frá Jehova eru als ikki tung, nei, tað gagnar okkum at halda tey. **(Les Esaias 48:17.)** Móses kundi tí siga við fortíðar Ísrael: „HARRIN álegði okkum at halda allar hesar lógir – at óttast HARRAN Gud okkara, so *okkum kundi gangast væl allar dagar,* og Hann kundi halda okkum á lívi – soleiðis sum eisini higartil hevur verið.“ (5 Mósebók 6:24) Vit kunnu eisini vera vís í, at Jehova hevur givið okkum sínar lógir, tí hann vil okkum tað besta og hugsar um okkara ævigu vælferð. Alt annað hevði verið óhugsandi. Jehova hevur óavmarkaðan vísdóm. (Rómbrævið 11:33) Tí veit hann, hvat er best fyri okkum. Haraftrat *er* Jehova kærleiki. (1 Jóhannes 4:8) Kærleiki, altso hansara innasta lyndi, ávirkar alt, sum hann sigur og ger. Øll tey boðini, hann áleggur sínum tænarum at halda, eru grundað á kærleika.

16 Við hesum verður kortini ikki sagt, at tað altíð er lætt at vera Gudi lýðin. Vit mugu standa ímóti ávirkanini frá hesum spilta heimi, sum „liggur í hinum illa“. (1 Jóhannes 5:19) Og vit hava eisini okkara egna ófullkomileika at dragast við, sum ger, at vit hava lyndi til at bróta Guds lógir. (Rómbrævið 7:21-25) Men kærleiki til Gud kann hjálpa okkum at gera tað rætta. Jehova signar tey, sum akta hann av kærleika. Hann gevur „teimum, ið lýða Hann“, heilagan anda. (Ápostlasøgan 5:32) Hesin andin alir fram góðan ávøkst í okkum – dýrabarar eginleikar, sum kunnu hjálpa okkum at vera lýðin. – Galatiabrævið 5:22, 23.

---

15. Hví kunnu vit vera vís í, at tað gagnar okkum at halda boðini frá Jehova?
16. Hví kunnu vit vera lýðin, hóast vit verða ávirkað av hesum spilta heimi og okkara ófullkomna lyndi?

17 Í hesi bókini fara vit at kanna meginreglur og siðareglur, sum Jehova hevur ásett, og ymiskt annað, sum vísir, hvat hansara vilji er. Meðan vit gera tað, skulu vit minnast til, at Jehova ikki noyðir okkum at fylgja sínum lógum og meginreglum. Nei, hann vil, at vit skulu akta hann fús og av hjarta. Latið okkum ikki gloyma, at Jehova biður okkum liva eitt lív, sum longu nú hevur ríkar signingar við sær og gevur okkum ævigt lív í framtíðini. Og latið okkum meta okkara lýdni sum ein frálíkan møguleika at vísa Jehova, hvussu góð vit eru við hann.

18 Til at hjálpa okkum at skilja ímillum gott og ilt hevur Jehova av kærleika givið okkum eina samvitsku. Men skal hon vera ein álítandi vegleiðari, má hon venjast, sum næsti kapittulin fer at viðgera.

17, 18. (a) Hvat fara vit at kanna í hesi bókini, og hvat skulu vit hava í huga, meðan vit gera tað? (b) Hvat verður viðgjørt í næsta kapitli?

HVUSSU SVARAR TÚ?

- Hvat slag av lýdni væntar Jehova av sínum tænarum, og hví gagnar tað okkum? – 5 Mósebók 5:28-33.
- Hvussu stóran týdning hevur tað fyri Jehova, at vit akta hann? – 1 Sámuel 15:22, 23.
- Hvat kann hugburðurin hjá Jesusi til at vera Gudi lýðin læra okkum? – Jóhannes 8:29.
- Hví eiga vit at akta Jehova? – Opinberingin 4:11.

Hvussu varðveita vit eina góða samvitsku?

'Havið góða samvitsku.' – 1 PÆTUR 3:16.

EIN skipari stýrir skipi sínum um opið hav; ein ferðamaður gongur ígjøgnum óbygt og oyðið lendi; ein flogskipari stýrir flogfarinum uppi yvir skýggjum, ið strekkja seg so langt, sum eygað ber. Hvat hava hesir í felag? Allir kundu verið í stórum vanda, um teir ikki høvdu eina kumpas – serliga um teir heldur ikki høvdu onnur nútímans tól.

2 Ein kumpas er eitt einfalt tól. Vanliga er hon gjørd sum ein skiva við eini magnetnál, ið peikar norðureftir. Hon kann bjarga lívi, um hon riggar, sum hon skal, og serliga tá ið hon verður nýtt saman við einum eftirfarandi korti. Í ávísum førum kann hon samanberast við eina dýrabara gávu, sum Jehova hevur givið okkum, nevniliga samvitskuna. (Jákup 1:17) Við ongari samvitsku høvdu

1, 2. Hví er ein kumpas eitt sera týdningarmikið tól, og hvussu kann hon samanberast við samvitskuna?

vit verið púra ráðaleys. Tá ið vit brúka samvitskuna rætt, kann hon hjálpa okkum at finna rætta vegin í lívinum og fylgja honum. Latið okkum tí vita, hvat samvitskan er, og hvussu hon virkar. Síðani fara vit at kanna, (1) hvussu vit kunnu venja samvitskuna, (2) hví vit skulu hugsa um samvitskuna hjá øðrum, og (3) hvussu tað gagnar okkum at varðveita eina góða samvitsku.

HVAT ER SAMVITSKAN, OG HVUSSU VIRKAR HON?

3 Grikska orðið, sum í Bíbliuni er umsett „samvitska“, merkir bókstavliga „sam-vitan, ella at vita við sær sjálvum“. Av øllum skapningum á jørðini eru tað bert vit menniskju, sum hava fingið hesa gávuna frá Gudi at kenna okkum sjálv. Vit kunnu steðga á og rannsaka okkum sjálv fyri at vita, um vit bera okkum rætt at. Sum eitt vitni, ella ein dómari, innan í okkum kann samvitskan kanna okkara gerðir, okkara hugburð og okkara avgerðir. Hon kann hjálpa okkum at taka eina góða avgerð ella ávara okkum ímóti at taka eina ringa avgerð. Og síðani kann hon annaðhvørt geva okkum eina góða kenslu av at hava valt rætt ella plága okkum, tí vit valdu skeivt.

4 Hesin eginleikin varð lagdur í menniskjuni heilt frá byrjan. Ádam og Eva høvdu eina samvitsku. Tað kom til sjóndar í skommini, tey kendu, eftir at tey høvdu syndað. (1 Mósebók 3:7, 8) Men tá var ringa samvitskan hjá teimum til onga nyttu. Tey høvdu við vilja skúgvað Guds lóg til viks og soleiðis tilvitað gjørt uppreistur ímóti Jehova Gudi; sostatt gjørdust tey fíggindar hansara. Tey vóru fullkomin og vistu, hvat tey gjørdu, so nú vendist ikki aftur.

---

3. Hvat merkir grikska orðið fyri „samvitsku“ bókstavliga, og hvønn førleika hjá menniskjum sipar tað til?

4, 5. (a) Hvussu vita vit, at Ádam og Eva høvdu eina samvitsku, og hvat hevði tað við sær, at tey skúgvaðu Guds lóg til viks? (b) Hvørji dømi vísa, at trúfastir menn í forðum lurtaðu eftir sínari samvitsku?

5 Mótsett Ádami og Evu hava nógv ófullkomin menniskju lurtað eftir sínari samvitsku. Trúfasti maðurin Job segði til dømis: „Eg haldi fast við rætt mín, eg sleppi honum ikki – ikki ein av døgum mínum pínir hjarta mítt!“* (Job 27:6) Job var av sonnum ein samvitskufullur maður. Hann lurtaði eftir sínari samvitsku og læt hana leiða seg. Tí kundi hann nøgdur siga, at samvitskan ikki píndi hann við skomm og skuldarkenslum. Legg til merkis munin á Job og Dávidi. Tá ið Dávid ikki vísti salvaða kongi Jehova, Sauli, hóskandi virðing, var tað ikki fyrr enn aftaná, at 'samvitskan sló hann'. (1 Sámuel 24:6) At Dávid soleiðis fekk samvitskubit, gagnaði honum uttan iva og lærdi hann, at hann ikki aftur skuldi vísa slíka vanvirðing.

6 Eru tað bert tænarar hjá Jehova, sum hava fingið hesa gávuna, altso samvitskuna? Hugsa um íblástu orðini hjá Paulusi ápostli: „Táið heidningar – sum ikki hava lóg – av náttúruni gera tað, sum lógin sigur, eru teir, uttan at hava lógina, sær sjálvum lóg; teir vísa jú, at verk lógarinnar er skrivað í hjørtum teirra. Eisini samvitska teirra vitnar, og hugsanirnar sín ámillum klaga ella eisini verja hvør aðra.“ (Rómbrævið 2:14, 15) Sjálvt tey, sum als einki kenna til lógirnar hjá Jehova, kunnu av og á verða ávirkað av hesi innari røddini og fylgja meginreglum Guds.

7 Samvitskan riggar tó ikki altíð, sum hon skal. Hví? Verður ein kumpas til dømis løgd nærindis eini magnet,

---

* Í upprunaligu Hebraisku skriftunum stendur einki ávíst orð fyri „samvitsku“. Kortini er tað týðiligt, at talan er um samvitskuna í hesum dømínum. Orðið „hjarta“ sipar vanliga til hitt innara menniskjað. Í førum sum hesum vísir „hjarta“ eyðsýniliga til ein ávísan part av innara menniskjanum, nevniliga samvitskuna. Í Kristnu griksku skriftunum stendur grikska orðið fyri „samvitsku“ umleið 30 ferðir.

---

6. Hvat vísir, at samvitskan er ein gáva, sum øll menniskju hava fingið?
7. Hví riggar samvitskan ikki altíð, sum hon skal?

kann tað ávirka nálina, so hon ikki longur peikar norðureftir. Og um kumpasin ikki verður nýtt saman við einum eftirfarandi korti, er hon til lítla nyttu. Á sama hátt kann okkara samvitska vísa okkum á skeiva leið, um hon er alt ov ávirkað av okkara egnu sjálvsøknu ynskjum. Og verður hon ikki nýtt saman við eftirfarandi vegleiðingini í Guds orði, kann tað vera ógjørligt at skilja ímillum rætt og skeivt á nógvum týðandi økjum. Skal okkara samvitska virka á rættan hátt, hava vit tørv á, at heilagi andin frá Jehova leiðir okkum. Paulus skrivaði: „Samvitska mín vitnar við mær í Heilaga Andanum.“ (Rómbrævið 9:1) Men hvussu kunnu vit tryggja okkum, at okkara samvitska er í samljóði við heilaga anda Jehova? Við at venja hana.

HVUSSU VENJA VIT SAMVITSKUNA?

8 Hvussu tekur tú eina avgerð, sum er grundað á samvitskuna? Tað tykist, at nøkur rætt og slætt kanna sínar innastu tankar og kenslur og so taka eina avgerð. Síðani siga tey kanska: ’Tað órógvar ikki mína samvitsku.’ Men hjartans innastu ynski kunnu vera so sterk, at tey enntá ávirka okkara samvitsku. Bíblian sigur: „Svikafullari er hjartað enn alt annað, og ónt er tað – hvør kennir tað!“ (Jeremias 17:9) Tí eigur tað, sum okkara hjarta vil, ikki at hava mest at siga hjá okkum, men heldur tað, sum gleðir Jehova Gud.*

---

* Bíblian vísir, at tað ikki altíð er nóg mikið at hava eina *reina* samvitsku. Paulus segði til dømis: „Víst veit eg einki við mær sjálvum; tó eri eg ikki fyri tað rættvísgjørdur; nei, tann, ið dømir meg, er Harrin.“ (1 Korintbræv 4:4) Sjálvt tey, sum søkja at teimum kristnu, eins og Paulus áður gjørdi, gera tað kanska við reinari samvitsku, tí tey halda, at Gudi dámar tað, tey gera. Tað hevur tí alstóran týdning, at okkara samvitska er rein bæði í okkara egnu eygum og í Guds eygum. – Ápostlasøgan 23:1; 2 Timoteus 1:3.

---

8. (a) Hvussu kann hjartað ávirka samvitskuna, og hvat eigur at hava mest at siga, tá ið vit taka avgerðir? (b) Hví er tað ikki altíð nóg mikið, at vit sjálv halda, at vit hava reina samvitsku? (Sí undirgreinina.)

9 Ein avgerð, sum er væl grundað á okkara bíbliuvandu samvitsku, speglar okkara gudsótta og ikki okkara egnu ynski. Trúfasti landsstjórin Nehemias var eitt gott dømi um hetta. Hann hevði rættindi at krevja ymisk avgjøld og skattir frá fólkinum í Jerusalem, men gjørdi tað kortini ikki. Hví ikki? Tí honum dámdi als ikki tankan um, at hann kundi vekja misnøgd Jehova, um hann kúgaði hansara fólk. Hann segði: „Eg gjørdi ikki so, tí eg óttaðist Gud." (Nehemias 5:15) Gudsótti – ein inniligur ótti fyri at vekja misnøgd Jehova – hevur alt at siga. Ein slíkur ótti fær okkum at leita eftir vegleiðing í Bíbliuni, tá ið vit skulu taka avgerðir.

10 Hugsa til dømis um, hvussu tað er við rúsdrekka. Nógv av okkum mugu við jøvnum millumbili taka støðu til, um vit vilja njóta rúsdrekka ella ikki. Tá er neyðugt at hugsa um, hvørjar bíbilskar meginreglur kunnu brúkast í tí sambandi. Bíblian fordømir ikki, at vit njóta rúsdrekka við máta, nei, hon prísar Jehova fyri at hava givið menniskjum vín. (Sálmur 104:14, 15) Tó fordømir hon drykkjuskap og villar veitslur. (Lukas 21:34; Rómbrævið 13:13) Haraftrat javnmetir hon drykkjuskap við aðrar sera álvarsligar syndir, sum til dømis kynsligt siðloysi.* – 1 Korintbræv 6:9, 10.

11 Slíkar meginreglur kunnu venja og brýna okkara samvitsku. So tá ið vit skulu taka støðu til, um vit vilja njóta rúsdrekka ella ikki í sambandi við ymiska samveru,

---

* Tað skal nevnast, at nógvir læknar siga, at tað at drekka við máta ikki ber til hjá alkoholikarum; hjá teimum er „afturhald" tað sama sum als ikki at drekka.

---

9. Hvat er gudsótti, og hvussu eigur hann at ávirka okkara samvitsku?

10, 11. Hvørjar bíbilskar meginreglur kunnu brúkast í sambandi við rúsdrekka, og hvussu kunnu vit fáa hjálp frá Gudi til at fylgja teimum?

mugu vit seta okkum sjálvum spurningar sum hesar: ’Hvat er tað fyri ein samvera? Er vandi fyri, at fólk missa tamarhaldið á sær sjálvum, og at samveran broytist til eina villa veitslu? Hvat havi eg sjálvur lyndi til? Mungi eg eftir rúsdrekka? Eri eg bundin av tí? Drekki eg fyri at broyta lag og atburð? Havi eg tamarhald á mær sjálvum, so eg ikki drekki ov nógv?’ Umframt at hugsa um meginreglurnar í Bíbliuni og spurningarnar, ið stinga seg upp í tí sambandi, eiga vit at biðja Jehova vegleiða okkum við sínum heilaga anda. **(Les Sálm 139:23, 24.)** Á henda hátt fáa vit hjálp frá Jehova og verða før fyri at venja okkara samvitsku, so hon verður í samljóði við meginreglurnar frá Gudi. Tó er eitt aftrat, sum vit mugu hugsa gjølla um, tá ið vit skulu taka avgerðir.

HVÍ SKULU VIT HUGSA UM SAMVITSKUNA HJÁ ØÐRUM?

12 Av og á verður tú kanska bilsin um, hvussu ymisk samvitskan hjá Guds tænarum kann vera. Ein heldur kanska okkurt vera óhóskandi, meðan einum øðrum dámar tað og ikki heldur, at nakað er galið við tí. Summum dámar til dømis væl at hugna sær við einum glasi av víni ella líknandi saman við vinfólki eitt kvøldið, meðan onnur halda, at tað er óhóskandi. Hví hava vit so ymiska áskoðan, og hvussu eigur tað at ávirka okkara avgerðir?

13 Nógvar orsakir eru til, at vit eru ymisk. Eitt kann vera bakgrundin hjá okkum. Nøkur eru til dømis tilvitað um ein veikleika, tey hava stríðst við fyrr í tíðini – kanska ikki altíð við góðum úrsliti. (1 Kongabók 8:38, 39) Tá ið talan er um rúsdrekka, eru hesi fólkini helst serliga viðkvom. Kemur ein slíkur persónur at vitja teg, kann

---

12, 13. Hví er samvitskan hjá Guds tænarum ymisk, og hvat eiga vit at gera?

hansara samvitska av røttum fáa hann at siga nei takk, um tú bjóðar honum rúsdrekka. Tekur tú tað illa upp? Fert tú at noyða hann? Nei. Bróðurkærleiki fær teg at vísa umhugsni, uttan mun til um tú veitst orsøkina ella ikki. Kanska velur hann í hesum førinum at halda orsøkina fyri seg sjálvan.

14 Paulus ápostul varnaðist, at samvitskan hjá teimum kristnu í fyrstu øld ofta var sera ymisk. Tá í tíðini fingu nøkur kristin ampa av ávísum mati, sum hevði verið ofraður til avgudar og seinni varð seldur á torginum. (1 Korintbræv 10:25) Paulus fekk ikki ringa samvitsku av at eta slíkan mat. Avgudar høvdu einki at siga fyri hann; teir kundu ongantíð átt mat, sum Jehova var upphavsmaður til og tí átti. Men Paulus visti, at onnur ikki høvdu somu áskoðan sum hann. Summi høvdu kanska verið ídnir avgudadyrkarar, áðrenn tey gjørdust kristin. Alt, sum bara hevði tað minsta við avgudadyrkan at gera, var andstyggiligt í teirra eygum. Hvørji ráð gav Paulus?

15 Hann segði: „Vit, sum sterk eru, eiga at bera veikleikar hinna veiku og ikki gera, sum okkum sjálvum líkar. Kristus gjørdi jú ikki heldur, sum Honum líkaði.“ (Rómbrævið 15:1, 3) Paulus kom til ta niðurstøðu, at vit eiga at hugsa meira um okkara trúarfelagar enn um okkum sjálv, eins og Jesus gjørdi. Í eini aðrari líknandi støðu segði Paulus, at hann heldur vildi lata vera at eta kjøt enn at verða einum dýrabarum seyði, sum Jesus hevði givið sítt lív fyri, til ástoyt. – **Les Fyrra Korintbræv 8:13; 10:23, 24, 31-33.**

16 Hinvegin mugu tey, sum hava eina strangari samvitsku, ikki finnast at øðrum og halda uppá, at øll skulu

---

14, 15. Í hvørjum sambandi var samvitskan hjá teimum kristnu í fyrstu øld ymisk, og hvat mælti Paulus til?

16. Hví skulu tey, ið hava eina strangari samvitsku, ikki døma tey, sum hava eina aðra áskoðan, tá ið talan er um samvitskuspurningar?

Ein bíbliuvand samvitska kann hjálpa tær at gera av, um tú vilt njóta rúsdrekka ella ikki

hava somu áskoðan sum tey í samvitskuspurningum. **(Les Rómbrævið 14:10.)** Vit eiga at nýta samvitskuna til at døma okkum sjálv og ikki onnur. Minst til, at Jesus segði: „Dømið ikki, fyri at tit skulu ikki verða dømd!“ (Matteus 7:1) Eingin í samkomuni eigur at gera eitt stríð burtur úr nøkrum, sum er ein samvitskuspurningur. Nei, vit royna at fremja kærleika og einleika og at byggja upp heldur enn at bróta niður. – Rómbrævið 14:19.

HVUSSU GAGNAR TAÐ OKKUM AT HAVA GÓÐA SAMVITSKU?

[17] Pætur ápostul skrivaði: ’Havið góða samvitsku.’ (1 Pætur 3:16) Ein samvitska, sum er rein í Guds eygum, er ein ómetaliga stór gáva. Nú á døgum eru ikki nógv, sum

---

17. Hvat er hent við samvitskuni hjá nógvum í dag?



Ein góð samvitska hjálpir okkum á lívsins leið og gevur okkum gleði og frið í sinnið

hava eina slíka samvitsku. Paulus nevndi, at nøkur kunnu vera ’brennimerkt í síni samvitsku’. (1 Timoteus 4:2) Eitt brennijarn brennir húðina og ger hana arruta og kensluleysa. Nógv hava eina samvitsku, sum so at siga er deyð. Hon er so arrut og kensluleys, at hon ikki longur ávarar, mótmælir ella gevur samvitskubit. Tað tykist, at nógv í dag gleðast um at vera sloppin undan skomm og skuldarkenslum.

18 Hava vit skuldarkenslur, kann tað í royndum vera samvitskan, sum sigur okkum, at vit hava gjørt okkurt skeivt. Tá ið slíkar kenslur fáa ein syndara at angra,

---

18, 19. (a) Hvussu kunnu skomm og skuldarkenslur gagna okkum? (b) Hvat kunnu vit gera, um okkara samvitska heldur fram at fordøma okkum fyri syndir, sum vit langt síðani hava angrað?

kann sjálvt tann ringasta syndin verða fyrigivin. Til dømis syndaði Dávid kongur sera álvarsliga, men varð fyrigivin, fremst av øllum tí hann angraði av hjarta. Av tí at hann hataði tað skeiva, hann hevði gjørt, og setti sær fyri framyvir at akta lógirnar hjá Jehova, fekk hann sjón fyri søgn, at Jehova er „góður og til reiðar at fyrigeva“. (Sálmur 51:3-21; 86:5) Men hvat so, um vit framvegis skammast og hava skuldarkenslur, sjálvt um vit hava angrað og fingið fyrigeving?

19 Av og á kann samvitskan vera alt ov dømandi og tyngja syndaran í langa tíð, eftir at slíkar kenslur hava tænt sínum endamáli. Tá ið tað hendir, mugu vit sannføra okkara fordømandi hjarta um, at Jehova er størri enn allar menniskjaligar kenslur. Vit mugu trúgva á og góðtaka hansara kærleika og fyrigeving, eins og vit eggja øðrum til at gera. **(Les Fyrsta bræv Jóhannesar 3:19, 20.)** Ein rein samvitska gevur frið í sinnið og eina ómetaliga gleði, sum er sjáldsom í hesum heimi. Nógv, sum áður hava misbrotið seg álvarsliga, hava upplivað henda frálíka lætta og kunnu nú tæna Jehova við góðari samvitsku. – 1 Korintbræv 6:11.

20 Henda bókin er skrivað fyri at hjálpa tær at finna hesa gleðina og at varðveita eina góða samvitsku ta tíðina, sum er eftir av hesum torføru síðstu døgunum í heiminum hjá Satani. Bókin kann sjálvsagt ikki viðgera allar lógir og meginreglur í Bíbliuni, sum tú eigur at hugsa um og fylgja, tá ið ymiskar støður taka seg upp í gerandisdegnum. Hon vísir heldur ikki á einfaldar, knívskornar reglur viðvíkjandi samvitskuspurningum. Endamálið við hesi bókini er at hjálpa tær at venja og brýna tína samvitsku við at kanna, hvussu tú kanst fylgja Guds orði í tínum

---

20, 21. (a) Hvat er endamálið við hesi bókini? (b) Hvat frælsi hava vit sum Guds tænarar, og hvussu skulu vit brúka tað?

dagliga lívi. Mótsett Móselógini eggjar „lóg Kristusar“ okkum til at liva meira eftir samvitsku og meginreglum enn eftir skrivaðum reglum. (Galatiabrævið 6:2) Soleiðis gevur Jehova sínum tænarum stórt frælsi. Men hansara orð minnir okkum á, at vit ongantíð mugu brúka hetta frælsið sum umbering fyri synd. (1 Pætur 2:16) Nei, eitt slíkt frælsi gevur okkum frálíkan møguleika at vísa Jehova, hvussu góð vit eru við hann.

21 Táið tú í bøn hugsar um, hvussu tú best kanst liva eftir meginreglunum í Bíbliuni og fylgir tí, sum tú setur tær fyri, heldur tú fram í lívsneyðugu menningini, sum byrjaði, táið tú á fyrsta sinni lærdi Jehova at kenna. Tínir 'sansar at skilja millum gott og ilt' verða vandir við nýtslu. (Hebrearabrævið 5:14) Tín bíbliuvanda samvitska fer at gagna tær hvønn einasta dag í tínum lívi. Eins og kumpasin hjálpir einum ferðamanni, kann samvitskan hjálpa tær at taka avgerðir, sum gleða tín himmalska Faðir. Soleiðis kanst tú halda teg í kærleika Guds.

HVUSSU SVARAR TÚ?

- Hvussu eigur tað at ávirka okkara samvitsku at vita, at Jehova sær alt, vit gera? – Hebrearabrævið 4:13.
- Hvussu hjálpti samvitskan Jósefi at standa ímóti freisting? – 1 Mósebók 39:1, 2, 7-12.
- Hví er ein rein samvitska ein fortreyt fyri at kunna nærkast Jehova? – Hebrearabrævið 10:22.
- Hví skulu vit hugsa um samvitskuna hjá teimum, sum ikki eru Jehova vitni? – 2 Korintbræv 4:1, 2.

Elska tey, sum Gud elskar

'Kom saman við vísum, og tú verður vísur.'
– ORÐTØKINI 13:20.

MENNISKJU eru eins og svampar. Vit hava lyndi til at súgva í okkum alt, sum er uttan um okkum. Tað er øgiliga lætt – tilvitað ella ótilvitað – at taka eftir hugburðinum, normunum og lyndinum hjá okkara góðu vinum.

2 Bíblian nevnir henda grundleggjandi sannleikan: 'Kom saman við vísum, og tú verður vísur. Men vini dára, honum gongst illa.' (Orðtøkini 13:20) Er tað ikki rætt, at vit hava lyndi til at taka eftir teimum, vit koma saman við? Jú, tí vit knýta okkum kensluliga at teimum, sum vit hava felagsskap við, og tí kunnu tey hava stóra ávirkan á okkum – antin góða ella ringa.

3 Skulu vit halda okkum í kærleika Guds, er tað sera umráðandi, at vit fáa okkum vinir, sum hava góða ávirkan á okkum. Hvussu gera vit tað? Stutt sagt við at elska tey, sum Gud elskar, og gerast vinir við hansara vinir. Hugsa um hetta: Kundu vit fingið betri vinir enn fólk við eginleikum, ið Jehova hyggur eftir hjá sínum vinum? Latið okkum tí vita, hvussu tey fólkini eru, sum Gud elskar. Tá ið vit vita, hvørja áskoðan Jehova hevur, verður tað lættari hjá okkum at velja vinir, sum eru uppbyggjandi at vera saman við.

1-3. (a) Hvønn grundleggjandi sannleika nevnir Bíblian? (b) Hvussu kunnu vit velja vinir, sum hava góða ávirkan á okkum?

TEY, SUM GUD ELSKAR

4 Jehova er sera vandin, tá ið hann velur sær vinir. Og hevur hann ikki rætt til tað? Hann er hóast alt alheimsins Fullveldisharri, og vinalag við hann er størsti heiðurin, nakar kann fáa. Men hvørji velur hann so til vinir? Jehova nærkast teimum, sum hava fult álit á honum. Hugsa til dømis um Ábraham, sum var kendur fyri sína einastandandi trúgv. Tað er ilt at ímynda sær nakra størri trúarroynd hjá einum pápa enn at verða biðin at ofra sonin hjá sær.* Men Ábraham var villigur at ofra Ísak, tí hann hevði fult álit á, at „Gud var mentur enntá at reisa upp frá hinum deyðu". (Hebrearabrævið 11:17-19) Av tí at Ábraham vísti slíka trúgv og slíkt lýdni, rópti Jehova hann 'vinur mín'. – Esaias 41:8; Jákup 2:21-23.

5 Jehova virðismetir trúfesti og lýdni. Hann elskar tey, sum vísa honum størri trúfesti enn nøkrum øðrum. **(Les Sálm 101:6.)** Sum vit sóu í 1. kapitli í hesi bókini, gleðir Jehova seg stórliga um tey,ið av kærleika velja at akta hann. Í Orðtøkunum 3:32 stendur: „Hini sannhjartaðu eru næstu vinir Hansara." Tey,ið trúføst liva upp til krøvini, sum Jehova setur, fáa eina hjartaliga innbjóðing frá honum. Tey kunnu vera gestir í „tjaldi" hansara, tað vil siga tilbiðja hann og frítt venda sær til hansara í bøn. – Sálmur 15:1-5.

---

* Við at biðja Ábraham gera hetta gav Jehova eina lýsing av tí ofrinum, hann sjálvur fór at lata við at ofra sín einborna son. (Jóhannes 3:16) Í dømunum við Ábrahami kom Jehova upp ímillum og læt hann ofra ein veðr í staðin fyri Ísak. – 1 Mósebók 22:1, 2, 9-13.

---

4. Hví hevur Jehova rætt til vera vandin, tá ið hann velur sær vinir, og hví nevndi hann Ábraham 'vin sín'?

5. Hvussu metir Jehova tey, sum trúføst akta hann?

6 Jehova elskar tey, sum elska Jesus, hansara einborna son. Jesus segði: „Um nakar elskar Meg, heldur hann orð Mítt, og Faðir Mín skal elska hann, og Vit skulu koma til hansara og taka bústað hjá honum.“ (Jóhannes 14:23) Hvussu kunnu vit vísa, at vit elska Jesus? Jú, við at halda hansara boð, teirra millum boðini um at boða tey góðu tíðindini og gera lærisveinar. (Matteus 28:19, 20; Jóhannes 14:15, 21) Vit vísa eisini, at vit elska Jesus, tá ið vit „fylgja eftir í fótasporum Hansara“, altso royna at líkjast honum í orðum og gerðum eftir besta førimuni sum ófullkomin menniskju. (1 Pætur 2:21) Tað gleðir Jehova, tá ið menniskju av kærleika til hansara son, Kristus, leggja seg eftir at fylgja somu leið sum hann.

7 Trúgv, trúfesti, lýdni og kærleiki til Jesus og hansara normar eru nakrir av teimum eginleikunum, sum Jehova hyggur eftir hjá sínum vinum. Vit eiga øll at spyrja okkum sjálv: ’Er hetta nakað, ið eyðkennir mínar vinir? Havi eg fingið mær vinir, sum eru vinir við Jehova?’ Tað hevði verið skilagott. Tey, sum taka eftir Guds eginleikum og íðin boða tey góðu tíðindini um Ríkið, kunnu hava góða ávirkan á okkum og hjálpa okkum at liva upp til okkara avgerð um at gleða Gud. – Sí rammuna „Hvat er ein góður vinur?“ á síðu 29.

LÆR AV EINUM DØMI Í BÍBLIUNI

8 Í Bíbliuni eru nógv dømi um, hvussu tað gagnaði fólki at velja sær góðan felagsskap. Tú kanst lesa um

---

6. Hvussu kunnu vit vísa, at vit elska Jesus, og hvussu ávirkar tað Jehova, tá ið menniskju elska hansara son?
7. Hví er tað skilagott at fáa tey til vinir, sum eru vinir við Jehova?
8. Hvat hugtekur teg, tá ið tú hugsar um vinalagið millum (a) No’omi og Rutt? (b) teir tríggjar ungu hebreararnar? (c) Paulus og Timoteus?

vinalagið millum No'omi og verdóttur hennara Rutt, millum teir tríggjar ungu hebreararnar, sum hildu saman í Bábylon, og millum Paulus og Timoteus. (Rutt 1:16; Dániel 3:17, 18; 1 Korintbræv 4:17; Filippibrævið 2:20-22) Men latið okkum kanna eitt annað einastandandi dømi, nevniliga vinalagið millum Dávid og Jónatan.

9 Í Bíbliuni stendur, at táið Dávid hevði dripið Goliat, „varð hjarta Jónatans so bundið at hjarta Dávids, at hann elskaði hann sum sína egnu sál". (1 Sámuel 18:1) Soleiðis byrjaði eitt varandi vinalag, sum hóast stóran aldursmun vardi líka til Jónatan læt lív í einum bardaga.* (2 Sámuel 1:26) Hvat knýtti hesar báðar vinirnar saman?

10 Dávid og Jónatan vóru góðir vinir, tí teir elskaðu Gud og inniliga ynsktu at vera trúfastir ímóti honum. Teir virðismettu eginleikarnar hjá hvørjum øðrum. Jónatan var uttan iva hugtikin av dirvinum og íðinskapinum hjá tí unga manninum, sum óttaleysur vardi navnið hjá Jehova. Dávid hevði ivaleyst virðing fyri tí eldra manninum,ið trúfastur tók undir við tí, sum Jehova hevði fyriskipað, og ósjálvsøkin hugsaði meira um Dávid enn um seg sjálvan. Hugsa til dømis um tað, sum hendi, táið Dávid var hugtungur og mátti halda seg í oyðimørkini, tí hann var flýddur undan ónda konginum, Sauli,ið var pápi Jónatan. Jónatan vísti fyrimyndarligt trúfesti, táið hann „fór til Dávid ... og styrkti mót hansara í Gudi". (1 Sámuel 23:16) Hugsa

* Dávid var ein unglingi, táið hann drap Goliat og umleið 30 ára gamal, táið Jónatan doyði. (1 Sámuel 17:33; 31:2; 2 Sámuel 5:4) Jónatan, sum var okkurt um 60 ára gamal, táið hann doyði, var tí umleið 30 ár eldri enn Dávid.

9, 10. Hvat var vinalagið millum Dávid og Jónatan grundað á?

tær, hvussu Dávid man hava kent tað, tá ið hansara góði vinur kom fyri at stuðla og ugga hann.*

* Sum vit síggja í Fyrru Sámuelsbók 23:17, vísti Jónatan á fimm ymisk viðurskifti, tá ið hann uggaði Dávid: (1) Hann segði, at Dávid ikki skuldi óttast. (2) Hann vissaði Dávid um, at tað fór at miseydnast Sauli at leggja hond á hann. (3) Hann minti Dávid á, at hann fór at verða kongur, sum Gud hevði lovað. (4) Hann lovaði Dávidi trúskap. (5) Hann segði við Dávid, at sjálvt Saul visti um henda trúskapin.

HVAT ER EIN GÓÐUR VINUR?

Meginregla: „Ein sannur vinur vísir altíð kærleika og er ein bróðir, sum er føddur at hjálpa í neyð.“ – Orðtøkini 17:17, *NW*.

Spyr teg sjálvan

- Eru mínir vinir eisini vinir við Jehova og Jesus? – Jóhannes 15:14, 16; Jákup 2:23.
- Hjálpa mínir vinir mær at fáa góðar vanar? – 1 Korintbrævv 15:33.
- Eru mínir vinir so góðir við meg, at teir høvdu havt at mær um neyðugt? – Sálmur 141:5; Orðtøkini 27:6.
- Hvat vísa mín tala og mín atburður um, hvussu eg eri sum vinur? – Orðtøkini 12:18; 1 Jóhannes 3:16-18.

SOLEIÐIS FINGU VIT GÓÐAR VINIR

- „Í fyrstuni helt eg tað vera torført at fáa vinir í samkomuni. Men eg fann út av, at tá ið eg var íðin í boðanini, var tað lættari hjá mær at menna eginleikar sum tol, áhaldni og ósjálvsøknan kærleika. So hvørt sum eg lærdi at vísa hesar eginleikarnar, fingu onnur við somu eginleikum hug at vera saman við mær, og nú havi eg fingið góðar vinir.“ – Shivani.
- „Eg bað Jehova hjálpa mær at finna vinir í samkomuni. Men í langa tíð føldi eg ikki, at hann svaraði mínum bønum. Sum frá leið skilti eg, at eg so at siga einki gjørdi fyri at fáa vinir. Eg tók ikki fyrsta stigið. Men eftir at eg eri farin at liva samsvarandi mínum bønum, kann eg av sonnum siga, at Jehova hevur svarað teimum.“ – Ryan.

11 Hvat lærir dømið við Jónatani og Dávidi okkum? Vit læra, at tað, sum hevur størstan týdning hjá vinum at hava í felag, eru tey andaligu virðini. Tá ið vit fáa tætt samband við onnur, ið hava somu trúgv sum vit, fylgja somu siðareglum sum vit og eisini hava eitt ynski um at vera trúføst móti Gudi, kunnu vit tosa um tankar, kenslur og royndir, ið styrkja og uppbyggja okkum. **(Les Rómbrævið 1:11, 12.)** Slík andaliga sinnað menniskju eru at finna millum okkara trúarfelagar. Men vil tað siga, at øll, sum ganga á møti í ríkissalinum eru góður felagsskapur? Nei, tað er ikki vist.

---

11. Hvat lærir dømið við Jónatani og Dávidi okkum um vinalag?

HVUSSU VELJA VIT GÓÐAR VINIR?

12 Sjálvt tá ið vit velja vinir í samkomuni, mugu vit tryggja okkum, at teir eru andaliga uppbyggjandi. Skuldi tað komið óvart á okkum? Ikki sum so. Eins og nakrar fruktir á einum træi búnast seinni enn aðrar, búnast nøkur í samkomuni kanska ikki líka skjótt andaliga sum onnur. Í øllum samkomum eru tí brøður og systrar, sum eru á ymiskum støði, hvat andaligum vøkstri viðvíkur. (Hebrearabrævið 5:12 – 6:3) Vit hava sjálvsagt tol við nýggjum og veikum og vísa teimum kærleika, tí vit vilja hjálpa teimum at vaksa andaliga. – Rómbrævið 14:1; 15:1.

13 Ein støða kann av og á stinga seg upp í samkomuni, sum krevur, at vit ansa eftir, hvørjum vit eru saman við. Nøkur hava kanska ivasaman atburð. Onnur gerast kanska beisk og atfinningarsom. Samkomur í fyrstu øld høvdu líknandi avbjóðingar. Tey flestu vóru trúføst, men nøkur bóru seg ikki rætt at. Av tí at nøkur í samkomuni í Korint ikki hildu fast við ávísar kristnar lærur, ávaraði Paulus ápostul samkomuna og segði: „Villist ikki! Ringur felagsskapur spillir góðar siðir!“ (1 Korintbræv 15:12, 33) Paulus ávaraði Timoteus um, at sjálvt millum hansara trúarfelagar kundu vera nøkur, sum ikki bóru seg rætt at. Timoteus fekk at vita, at hann skuldi halda seg frá slíkum og ikki fáa sær tey til vinir. – **Les Seinna Timoteusbræv 2:20-22.**

14 Hvussu kunnu vit fylgja meginregluni, sum liggur í ávaringunum hjá Paulusi? Við ikki at hava tætt

---

12, 13. (a) Hví mugu vit hugsa okkum væl um, tá ið vit velja vinir, sjálvt millum trúarfelagar? (b) Hvørjar avbjóðingar høvdu samkomur í fyrstu øld, og hvørjar ávaringar fekk tað Paulus at geva?
14. Hvussu kunnu vit fylgja meginregluni, sum liggur í ávaringunum hjá Paulusi um felagsskap?

samband við nakran – hvørki í ella uttan fyri samkomuna – sum kundi havt ringa ávirkan á okkum. (2 Tessalonikabræv 3:6, 7, 14) Vit mugu verja okkara samband við Jehova. Minst til, at vit eru sum svampar – vit „súgva" í okkum hugburðin og atburðin hjá okkara góðu vinum. Eins og vit ikki kunnu dyppa ein svamp niður í edik og vænta, at hann fyllist við vatni, so kunnu vit heldur ikki vænta, at nakað gott spyrst burtur úr at koma saman við fólki, sum hava ringa ávirkan á okkum. – 1 Korintbræv 5:6.

15 Tíbetur er góður møguleiki at finna uppbyggjandi felagsskap millum okkara trúarfelagar. (Sálmur 133:1) Hvussu kanst tú finna andaliga sinnaðar vinir í samkomuni? So hvørt sum tú alir fram eginleikar og atburð, sum Gudi dámar, fáa tey, sum gera tað sama, uttan iva hug at fáa teg til vin. Men kanska noyðist tú eisini sjálvur at taka stig til at fáa nýggjar vinir. (Sí rammuna „Soleiðis fingu vit góðar vinir" á síðu 30.) Leita eftir teimum, sum hava eginleikar, ið tú fegin vilt hava. Tak við leiðbeiningini í Bíbliuni um at 'rúmka hjartað' við at knýta vinabond við trúarfelagar uttan mun til rasu, tjóðskap ella mentan. (2 Korintbræv 6:13; **les Fyrra bræv Pæturs 2:17.**) Kom ikki bert saman við javnaldrum. Minst til, at Jónatan var nógv eldri enn Dávid. Nógv, sum eru eldri, kunnu ríka eitt vinalag við sínum royndum og vísdómi.

TÁ IÐ TRUPULLEIKAR STINGA SEG UPP

16 Trupulleikar kunnu av og á stinga seg upp, tí fólk í samkomuni hava ymiskan persónleika og bak-

---

15. Hvat kanst tú gera fyri at fáa andaliga sinnaðar vinir í samkomuni?
16, 17. Hví skulu vit ikki halda okkum burtur frá samkomuni, um ein trúarfelagi særir okkum?

Vit kunnu finna uppbyggjandi felagsskap millum okkara trúarfelagar

grund. Ein trúarfelagi sigur ella ger kanska okkurt, sum særir okkum. (Orðtøkini 12:18) Onkuntíð standast trupulleikar av misskiljingum, ymiskum meiningum ella ymiskum lyndi. Fáa slíkar avbjóðingar okkum at snáva og halda okkum burtur frá samkomuni? Ikki um vit av hjartanum elska Jehova og tey, hann elskar.

17 Jehova er skapari og lívgevari okkara, og tí hevur hann uppiborið okkara kærleika og fulla trúfesti. (Opinberingin 4:11) Og samkoman, sum hann hevur valt at brúka, hevur eisini uppiborið okkara trúfasta stuðul. (Hebrearabrævið 13:17) So um ein trúarfelagi særir okkum ella onkursvegna skuffar okkum, halda vit okkum ikki burtur frá samkomuni fyri at vísa okkara ónøgd. Hví skuldu vit eisini gjørt tað? Tað er ikki Jehova, sum hevur sært okkum. Okkara kærleiki til

Jehova kundi ongantíð loyvt okkum at vent honum og hansara fólki bakið! – **Les Sálm 119:165.**

18 Kærleiki til okkara trúarfelagar eggjar okkum til at fremja frið í samkomuni. Jehova væntar ikki fullkomileika av teimum, hann elskar, og tað skulu vit heldur ikki gera. Kærleiki ger okkum før fyri at lata smá mistøk fara aftur við borðinum. Vit mugu minnast, at vit øll eru ófullkomin og gera mistøk. (Orðtøkini 17:9; 1 Pætur 4:8) Kærleiki hjálpir okkum at 'fyrigeva hvørjum øðrum' av fúsum hjarta. (Kolossebrævið 3:13) Men tað er ikki altíð lætt at fylgja hesi leiðbeiningini. Goyma vit neiligar kenslur, halda vit kanska fram at vera ill og billa okkum møguliga inn, at okkara vreiði onkursvegna kann revsa tann, ið hevur sært okkum. Men í veruleikanum skaða vit bara okkum sjálv. Tað er nógv betri at fyrigeva, tá ið grundarlag er fyri tí. (Lukas 17:3, 4) Tað gevur okkum frið í sinni og hjarta, varðveitir friðin í samkomuni, og fremst av øllum verjir tað okkara samband við Jehova. – Matteus 6:14, 15; Rómbrævið 14:19.

TÁ IÐ EITT VINALAG MÁ HALDA UPPAT

19 Tað kemur fyri, at vit mugu halda uppat at koma saman við einum, sum hevur hoyrt til samkomuna. Henda støðan tekur seg upp, tá ið onkur, sum brýtur Guds lóg uttan at angra, verður útihýstur, ella tá ið ein avnoktar trúnna við at bera fram falska læru ella við sjálvur at kvetta sambandið við samkomuna. Guds orð sigur heilt greitt, at vit 'ikki skulu umgangast' slík

---

18. (a) Hvat kunnu vit gera fyri at fremja frið í samkomuni? (b) Hvussu gagnar tað okkum at fyrigeva, tá ið grundarlag er fyri tí?
19. Hvat kann vera orsøkin til, at vit mugu halda uppat at koma saman við onkrum?

fólk.* **(Les Fyrra Korintbræv 5:11-13;** 2 Jóhannes 9-11) Tað kann vera sera torført at halda uppat at koma saman við einum, sum kanska var ein vinur, ella sum er í familju við okkum. Vísa vit, at vit veruliga seta trúfesti móti Jehova og hansara rættvísu lógum fram um alt annað? Minst til, at Jehova leggur stóran dent á trúfesti og lýdni.

20 Útihýsing er í roynd og veru ein kærleiksfull skipan frá Jehova. Hvussu tá? Jú, at útihýsa einum syndara, ið ikki angrar, vísir kærleika til Guds heilaga navn, Jehova, og alt, sum tað stendur fyri. (1 Pætur 1:15, 16) Tað verjir eisini samkomuna. Tey trúføstu í samkomuni sleppa undan ringari ávirkan frá tilvitaðum syndarum og kunnu halda fram at tilbiðja Gud, fullvís í at samkoman er eitt trygt skjól í hesum ónda heimi. (1 Korintbræv 5:7; Hebrearabrævið 12:15, 16) Henda álvarsama tyktin er eisini eitt prógv um kærleika til tann, sum hevur syndað. Og kanska er tað júst ein slík tykt, sum kann fáa hann at rakna við og taka tey neyðugu stigini til at venda aftur til Jehova. – Hebrearabrævið 12:11.

21 Tað er ein sannroynd, at okkara góðu vinir kunnu hava stóra ávirkan á okkum. Tí er tað av alstórum týdningi, at vit hugsa okkum væl um, tá ið vit velja vinir. Gerast vit vinir við tey, sum eru vinir við Jehova, og elska tey, sum hann elskar, fáa vit besta felagsskapin, ið hugsast kann. Teirra ávirkan fer at hjálpa okkum at liva upp til okkara avgerð um at gleða Jehova.

---

* Fleiri upplýsingar um, hvussu vit skulu bera okkum at í sambandi við útihýst ella tey, sum hava kvett sambandið við samkomuna, eru at finna í uppískoytinum á síðunum 207-209.

20, 21. (a) Hví er tað ein kærleiksfull skipan at útihýsa einum syndara, ið ikki angrar? (b) Hví er tað av alstórum týdningi, at vit hugsa okkum væl um, tá ið vit velja vinir?

Hví skulu vit virða myndugleika?

„Ærið øll.“ – 1 PÆTUR 2:17.

HEVUR tú nakrantíð eygleitt eitt lítið barn, tá ið tað verður biðið um at gera okkurt, sum tað als ikki hevur hug til? Ónøgdin stendur týðiliga málað í andlitsbránum. Barnið hoyrir, hvat mamman ella pápin sigur, og veit, at tað eigur at virða myndugleikan hjá foreldrunum. Men í hesum førinum hevur barnið bara ikki *hug* at akta. Hetta innara stríðið lýsir væl, hvussu vit øll hava tað av og á.

2 At virða myndugleika fellur okkum ikki altíð líka lætt. Heldur tú onkuntíð, at tað er ringt at virða tey, sum hava ein ávísan myndugleika yvir tær? Um so er, ert tú ikki tann einasti. Vit liva í eini tíð, har virðing fyri myndugleika tykist at vera so lítil sum ongantíð áður. Men Bíblian sigur, at vit skulu vísa teimum virðing, sum hava myndugleika yvir okkum. (Orðtøkini 24:21) Í roynd og veru er tað alneyðugt, um vit skulu halda okkum í kærleika Guds. Men av hesum stinga nakrir spurningar seg sjálvsagt upp. Hví kann tað vera so torført hjá okkum at virða myndugleika? Hví biður Jehova okkum gera tað, og hvat kann hjálpa okkum at akta? Og at enda, á hvønn hátt kunnu vit vísa virðing fyri myndugleika?

HVÍ ER TAÐ TORFØRT?

3 Latið okkum í stuttum kanna tvær orsakir til, at tað

1, 2. (a) Hví er tað ofta torført at virða myndugleika? (b) Hvørjar spurningar fara vit at kanna?
3, 4. Hvussu tóku synd og ófullkomileiki seg upp, og hví er tað torført hjá okkum at virða myndugleika?

kann vera torført hjá okkum at virða tey, sum hava myndugleika. Fyri tað fyrsta eru vit ófullkomin, og fyri tað næsta eru tey menniskjuni, sum hava myndugleika yvir okkum, eisini ófullkomin. Menniskjans synd og ófullkomileiki komu upp í leikin fyri langari tíð síðani, tá ið Ádam og Eva í Edens urtagarði gjørdu uppreistur ímóti Guds myndugleika. Syndin byrjaði altso við uppreistri. Og síðani tá hava vit havt eitt viðføtt lyndi til at gera uppreistur. – 1 Mósebók 2:15-17; 3:1-7; Sálmur 51:7; Rómbrævið 5:12.

4 Vegna okkara syndiga lyndi verða tey flestu av okkum lætt stolt og hástór, meðan vit harafturímóti mugu stríðast fyri at menna og varðveita tann heldur sjáldsama eginleikan, eyðmjúkleika. Sjálvt um vit hava tænt Gudi trúføst í áravís, kunnu vit gerast treisk og stolt. Hugsa til dømis um Kora, sum trúfastur helt seg til fólkið hjá Jehova í nógvum trongdum. Men hann vildi hava størri myndugleika, og tí birti hann skammiliga upp undir uppreistur ímóti Mósesi, sum var eyðmjúkari enn nakað annað menniskja á tíð síni. (4 Mósebók 12:3; 16:1-3) Hugsa eisini um Uzzias kong, ið var so stoltur, at hann fór inn í tempul Jehova at gera heilaga tænastu, sum bert prestarnir høvdu myndugleika til. (2 Krønikubók 26:16-21) Hesir menninir rindaðu ein høgan prís fyri, at teir gjørdu uppreistur. Við sínum vánaligu atburði kunnu teir kortini læra okkum nakað, sum er av stórum týdningi. Vit mugu stríðast ímóti stoltleikanum, sum ger tað so torført hjá okkum at virða myndugleika.

5 Ófullkomin menniskju, sum hava vald, hava eisini gjørt sítt til at bróta niður virðingina fyri myndugleika. Nógv hava verið miskunnarleys, harðrend og eru farin illa við fólki. Mannasøgan er í stóran mun ein long frásøga um valdsmisnýtslu. **(Les Prædikaran 8:9.)** Saul var til dømis ein góður og eyðmjúkur maður, tá ið Jehova valdi hann til kong. Men hann gav eftir fyri stoltleika og øvundsjúku og fór at søkja at trúfasta manninum Dávidi.

---

5. Hvussu hava ófullkomin menniskju misnýtt sín myndugleika?

(1 Sámuel 9:20, 21; 10:20-22; 18:7-11) Seinni gjørdist Dávid ein tann besti kongurin í søgu Ísraels. Men hann misnýtti eisini sítt vald, táið hann tók konu Uria hetit og setti henda óseka mannin fremstan í einum bardaga, so hann skuldi verða dripin. (2 Sámuel 11:1-17) Ja, ófullkomileiki ger tað ringt hjá menniskjum at brúka valdið rætt. Og táið tey, sum hava vald, ikki hava virðing fyri Jehova, gongst uppaftur verri. Eftir at hava lýst, hvussu nakrir katólskir pávar høvdu sett í verk eina ógvisliga atsókn, skrivaði ein bretskur embætismaður: „Vald spillir, og fullkomið vald spillir fullkomiliga." Latið okkum við hesum í huga kanna spurningin: Hví skulu vit virða myndugleika?

HVÍ SKULU VIT VIRÐA MYNDUGLEIKA?

6 Bestu orsakirnar til at virða myndugleika koma av kærleika – okkara kærleika til Jehova, okkara næsta og enntá okkum sjálv. Av tí at vit elska Jehova fram um alt, vilja vit so fegin gleða hansara hjarta. **(Les Orðtøkini 27:11; Markus 12:29, 30.)** Vit vita, at ivi hevur verið sáddur um hansara fullveldi, hansara rætt at stjórna alheiminum, líka síðani uppreisturin í Eden, og at meginparturin av mannaættini hevur tikið undir við Satani og víst stjórn Jehova frá sær. Vit fegnast um, at vit hava valt at vera í parti við Jehova. Táið vit lesa tignarligu orðini í Opinberingini 4:11, nema tey okkara hjarta. Hjá okkum er eingin ivi um, at tað er Jehova, sum eigur rættin at stjórna alheiminum. Vit taka undir við fullveldi Jehova og vísa tað í okkara gerandisdegi.

7 Slík virðing ber í sær, at vit eru lýðin, men ikki bert tað. Vit eru fús at akta Jehova, tí vit elska hann. Men onkuntíð kann tað vera sera torført hjá okkum at vera lýðin. Tá mugu vit, eins og lítla barnið,ið varð lýst fyrst í kapitlinum, læra at vera undirgivin. Vit minnast, at Jesus gav seg undir vilja Faðir síns, sjálvt undir sera truplum umstøðum. „Verði

---

6, 7. (a) Hvat fær kærleikin til Jehova okkum at gera, og hví? (b) Hvat ber tað í sær at vera undirgivin?

ikki vilji Mín, men Tín," segði hann við Faðir sín. – Lukas 22:42.

8 Jehova tosar sjálvsagt ikki beinleiðis við okkum í dag, men hann nýtir sítt orð, Bíbliuna, og menn, sum umboða hann á jørðini. Tí kemur okkara virðing fyri myndugleikanum hjá Jehova oftast til sjóndar, tá ið vit virða menninar, hann hevur sett yvir okkum ella framvegis loyvir at hava myndugleika yvir okkum. Um vit settu okkum upp ímóti hesum monnum – eitt nú við at nokta at taka við bíbilskum ráðum og rættleiðing frá teimum – høvdu vit sært Gud. Tá ið ísraelsmenn knarraðu og gjørdu uppreistur ímóti Mósesi, kendi Jehova tað sum uppreistur ímóti sær persónliga. – 4 Mósebók 14:26, 27.

9 Vit vísa eisini virðing fyri myndugleika, tí vit elska okkara næsta. Hvussu tá? Jú, ímynda tær, at tú ert hermaður í einum heri. Skal avrikið hjá herinum eydnast – og skal herurin yvirhøvur yvirliva – kann tað vera treytað av, at hvør einstakur hermaður samstarvar, aktar og virðir allar, sum hava myndugleika yvir honum. Um tú hevði máað støðið undan hesi leiðsluskipanini við at gera uppreistur, kundi tú lætt sett lívið hjá øllum tínum samhermonnum í váða. Gaman í gera herlið á jørðini í dag stóran skaða, men herliðini hjá Jehova útinna bara tað, sum er gott. Í Bíbliuni verður Jehova fleiri hundrað ferðir nevndur „Gud herskaranna". (1 Sámuel 1:3) Hann leiðir ein ómetaliga stóran her av veldigum andaskapningum. Og viðhvørt samanber Jehova sínar tænarar á jørðini við ein her. (Ezekiel 37:1-10) Um vit settu okkum upp ímóti monnunum, sum Jehova hevur givið myndugleika yvir okkum, høvdu vit so ikki sett lívið hjá okkara andaligu samhermonnum í váða? Tá ið ein

---

8. (a) Hvat ber virðing fyri myndugleikanum hjá Jehova ofta í sær, og hvat avdúka kenslurnar hjá Jehova í hesum sambandi? (b) Hvat kann hjálpa okkum at lurta eftir ráðum og taka við rættleiðing? (Sí rammuna á síðunum 46-47.)
9. Hví fær kærleikin til okkara næsta okkum at virða myndugleika? Lýs við einum dømi.

Ein kristin pápi tekur eftir Kristusi, tá ið hann nýtir sín myndugleika

tænari hjá Gudi ger uppreistur ímóti útnevndum elstum, kunnu onnur í samkomuni eisini koma at líða undir tí. (1 Korintbræv 12:14, 25, 26) Tá ið eitt barn ger uppreistur, kann øll familjan koma at líða undir tí. Vit vísa altso, at vit elska okkara næsta, tá ið vit eru fús at vísa virðing og samstarva.

10 Vit virða eisini myndugleika, tí tað er til okkara egna besta. Tá ið Jehova biður okkum virða myndugleika, vísir hann ofta á, hvussu tað gagnar okkum at gera tað. Til dømis sigur hann við børn, at tey skulu akta síni foreldur, so tey kunnu fáa eitt langt og gott lív. (5 Mósebók 5:16; Efesusbrævið 6:2, 3) Hann biður okkum virða teir elstu í samkomuni, tí um vit ikki gera tað, skaðar tað okkum andaliga. (Hebrearabrævið 13:7, 17) Og hann biður okkum vera teimum verðsligu myndugleikunum lýðin, tí tað verjir okkum. – Rómbrævið 13:4.

10, 11. Hvussu kann eitt hóskandi ynski um, at tað skal gangast okkum væl, fáa okkum at akta myndugleika?

11 Heldur tú ikki, at tað er lættari at virða myndugleika, tá ið vit vita, hví Jehova vil hava okkum at akta? Latið okkum tí kanna, hvussu vit kunnu vísa virðing fyri myndugleika á trimum týðandi økjum í lívinum.

VIRÐING Í FAMILJUNI

12 Tað er Jehova, sum hevur stovnað familjuskipanina. Hann er jú skils Gud, og tí hevur hann skipað familjuna soleiðis, at hon kann virka væl. (1 Korintbræv 14:33) Hann hevur givið manninum myndugleika at vera høvd í familjuni, tað vil siga at hava leiðsluna í familjuni. Maðurin skal vísa virðing fyri sínum høvdi, Jesusi Kristi, við at kanna, hvussu hann nýtti sín myndugleika yvir samkomuni og taka eftir honum. (Efesusbrævið 5:23) Tí má maðurin ikki royna at sleppa sær undan síni ábyrgd, men liva upp til hana sum ein rættur maður. Hann má heldur ikki vera harður ella ógvisligur, men tvørturímóti kærligur, rímiligur og blíður við konuna og børnini. Hann skal minnast til, at hansara myndugleiki altíð er undirlagdur myndugleika Jehova.

13 Ein kona skal vera manninum ein hjálp, ið hóskar honum. Hon hevur eisini fingið myndugleika

12. Hvønn myndugleika hevur Jehova givið manninum í familjuni, og hvussu kann hann liva upp til ta ábyrgdina?
13. Hvussu kann konan liva upp til sín leiklut í familjuni á ein hátt, sum Jehova dámar?

HVØNN MYNDUGLEIKA EIGI EG AT AKTA?

Meginregla: „HARRIN er dómari okkara, HARRIN er lóggevari okkara, HARRIN er kongur okkara." – Esaias 33:22.

Spyr teg sjálvan

- Hvat hevði eg gjørt, um eg varð biðin um ikki at fylgja normunum, sum Jehova hevur ásett? – Matteus 22:37-39; 26:52; Jóhannes 18:36.
- Hvat hevði eg gjørt, um eg fekk boð um at halda uppat at fylgja boðum Jehova? – Ápostlasøgan 5:27-29; Hebrearabrævið 10:24, 25.
- Hvussu kann eg fáa hug at akta tey, sum hava myndugleika yvir mær? – Rómbrævið 13:1-4; 1 Korintbræv 11:3; Efesusbrævið 6:1-3.

í familjuni, tí í Bíbliuni verður sagt við børn, at tey ikki mugu 'vraka tað, ið móðir teirra lærir tey'. (Orðtøkini 1:8) Tó er hennara myndugleiki undirlagdur tí hjá manninum. Ein kona vísir virðing fyri myndugleikanum hjá manninum við at hjálpa honum at liva upp til sín leiklut sum tann, ið hevur leiðsluna í familjuni. Hon eigur ikki at lítilsvirða hann, royna at ávirka hann við svikum ella at taka leiðsluna frá honum. Hon eigur heldur at stuðla honum og samstarva við hann. Tá ið henni ikki dámar hansara avgerðir, kann hon fólkaliga siga, hvat hon hugsar, men hon má framvegis vera undirgivin. Er maður hennara ikki Jehova vitni, kunnu avbjóðandi støður taka seg upp, men við at vera lagalig og undirgivin kann hon møguliga ávirka mannin, so hann eisini fær hug at søkja Jehova. – **Les Fyrra bræv Pæturs 3:1.**

14 Børn gleða Jehova, tá ið tey akta pápa sín og mammu

14. Hvussu kunnu børn gleða síni foreldur og Jehova?

sína, og harvið æra og gleða tey eisini síni foreldur. (Orðtøkini 10:1) Í familjum við bert einum uppihaldara, mugu børnini fylgja somu meginreglu um at akta og minnast, at pápin ella mamman kann hava enn størri tørv á, at tey samstarva og stuðla honum ella henni. Tá ið øll í familjuni liva upp til tann leiklutin, Gud hevur givið teimum, fáa tey stóran frið og stóra gleði. Og haraftrat prísa tey Jehova Gudi, sum hevur stovnað familjuskipanina. – Efesusbrævið 3:14, 15.

VIRÐING Í SAMKOMUNI

15 Jehova hevur sett sín son at stjórna kristnu samkomuni. (Kolossebrævið 1:13) Jesus hevur síðani sett sín 'trúgva og skilagóða tænara' at nøkta andaliga tørvin hjá Guds fólki á jørðini. (Matteus 24:45-47) Stýrandi ráðið hjá Jehova vitnum tænir sum „hin trúgvi og skilagóði tænarin". Eins og í kristnu samkomunum í fyrstu øld fáa teir elstu í dag ráð og leiðbeining frá Stýrandi ráðnum, annaðhvørt beinleiðis ella frá teimum, sum umboða tað, eitt nú frá ferðandi umsjónarmonnum. Tá ið vit sum einstaklingar virða myndugleikan hjá teimum elstu, akta vit Jehova. – **Les Fyrra Tessalonikabræv 5:12; Hebrearabrævið 13:17.**

16 Elstar og samkomutænarar eru ikki fullkomnir. Teir gera mistøk eins og vit. Tó eru teir elstu „gávur", sum vit hava fingið, fyri at samkoman kann vera andaliga sterk. (Efesusbrævið 4:8, 11) Elstar verða útnevndir við heilagum anda. (Ápostlasøgan 20:28) Hvussu tá? Soleiðis at skilja, at slíkir menn fyrst mugu lúka krøvini í Guds orði, sum er íblást av heilaga andanum. (1 Timoteus 3:1-7, 12; Titus 1:5-9) Haraftrat biðja teir elstu inniliga um leiðslu frá heilaga anda Jehova, tá ið teir kanna, um ein bróðir lýkur krøvini.

---

15. (a) Hvussu kunnu vit í samkomuni vísa, at vit virða myndugleikan hjá Jehova? (b) Hvørjar meginreglur kunnu hjálpa okkum at akta okkara vegleiðarar? (Sí rammuna á síðunum 48-49.)
16. Á hvønn hátt eru teir elstu útnevndir við heilagum anda?

17 Í samkomuni kann tað koma fyri, at eingin elsti ella samkomutænari er til at taka sær av einari uppgávu, ið teir vanliga hava um hendi, sum til dømis at leiða eitt boðanarmøti. Í slíkum førum kunnu aðrir doyptir brøður kanska taka uppgávuna á seg. Og ber tað ikki til, so kunnu skikkaðar systrar møguliga klára uppgávuna. Men tá ið ein systir tekur eina uppgávu á seg, sum ein doyptur bróðir vanliga tekur sær av, skal hon hava eitt turriklæði ella okkurt líknandi á høvdinum.* (1 Korintbræv 11:3-10) Hetta kravið ger ikki kvinnur minni verdar. Tað gevur teimum tvørturímóti høvi at vísa, at tær virða leiðsluskipanina hjá Jehova, bæði í familjuni og í samkomuni.

VIRÐING FYRI VERÐSLIGUM MYNDUGLEIKA

18 Sonn kristin fylgja samvitskufull meginreglunum í **Rómbrævinum 13:1-7. (Les.)** Tá ið vit lesa hesi ørindini, skilja vit, at 'yvirvøldin', sum verður umrødd, er verðsligu myndugleikarnir. So leingi sum Jehova loyvir hesum myndugleikunum at ráða, tæna teir einum týðandi endamáli, við tað at teir í ein vissan mun tryggja lóg og landaskil og veita neyðugar tænastur. Vit vísa, at vit virða hesar myndugleikarnar við at halda lógirnar. Vit syrgja fyri at rinda skatt, eru nærløgd, tá ið vit fylla út oyðubløð ella skjøl, sum myndugleikarnir áleggja okkum, og halda allar lógir, sum hava við okkum, okkara familju, arbeiði ella ognir at gera. Men vit akta ikki verðsligar myndugleikar, um teir biðja okkum gera nakað, ið er ímóti Guds boðum. Tá siga vit heldur, sum ápostlarnir søgdu í forðum: „Ein eigur at lýða Gud meir enn menniskju." – Ápostla-

* Á síðunum 209-212 í uppískoytinum verður við fáum dømum lýst, hvussu henda meginreglan kann fylgjast.

17. Hví skulu systrar av og á hava eitt turriklæði ella okkurt líknandi á høvdinum í samkomuhøpi?
18, 19. (a) Hvussu hevði tú greitt frá meginreglunum í Rómbrævinum 13:1-7? (b) Hvussu vísa vit verðsligum myndugleikum virðing?

søgan 5:28, 29; sí rammuna „Hvønn myndugleika eigi eg at akta?“ á síðu 42.

19 Vit vísa eisini verðsligu myndugleikunum virðing við okkara atburði. Tað kemur kanska fyri, at vit koma í beinleiðis samband við onkran, ið hevur myndugleika. Paulus ápostul tosaði við stjórnarharrar sum kongin Heródes Agrippa og landshøvdingan Festus. Hóast hesir menninir livdu eitt sera ósømiligt lív, vísti Paulus teimum virðing. (Ápostlasøgan 26:2, 25) Vit eiga at taka eftir Paulusi, uttan mun til um persónurin, vit tosa við, hevur stórt vald ella er ein vanligur løgreglumaður. Ung í samkomuni, sum ganga í skúla, stremba eftir at vísa lærarum og øðrum starvsfólkum í skúlanum líknandi virðing. Vit virða sjálvsagt ikki bara tey, sum viðurkenna okkara trúgv, men eisini tey, sum finnast at okkum. Ja, fólk, sum ikki eru Jehova vitni, eiga í roynd og veru at síggja á okkum, at vit virða øll menniskju. – **Les Rómbrævið 12:17, 18;** 1 Pætur 3:15.

20 Vit mugu ikki aftra okkum við at vísa virðing. Pætur ápostul skrivaði: „Ærið øll.“ (1 Pætur 2:17) Tá ið fólk føla, at vit veruliga hava virðing fyri teimum, kann tað hava stóra ávirkan á tey. Hugsa um, at hesin eginleikin gerst meira og meira sjáldsamur. Ein máti, vit kunnu vísa henda eginleikan, er við at fylgja Jesu boðum: „Latið soleiðis ljós tykkara lýsa menniskjum, so tey kunnu síggja góðu verk tykkara og æra Faðir tykkara, sum er í Himli!“ – Matteus 5:16.

21 Í hesum myrka heimi verða sannhjartað menniskju drigin at andaliga ljósinum. So um vit vísa virðing í familjuni, í samkomuni og í verðsligum høpi, kann tað ávirka onkran, so hann kemur at ganga í ljósinum saman við okkum. Er tað ikki ein frálíkur tanki? Og sjálvt um tað ikki hendir, er eitt tó vist: Tá ið vit vísa øðrum virðing, gleðir tað Jehova Gud, og tað hjálpir okkum at verða verandi í hansara kærleika. Hvør løn kundi verið størri?

20, 21. Hvussu kann tað gagna okkum at vísa virðing fyri myndugleika?

LURTA EFTIR RÁÐUM OG TAK VIÐ RÆTTLEIÐING

Andi Satans – hansara uppreistrarlyndi og stríðshugur – gjøgnumsúrgar heimin í dag. Bíblian umrøður Satan sum 'høvdingan yvir hervaldinum í luftini' og sigur, at 'andin, sum virkar í børnum ólýdnisins', stavar frá honum. (Efesusbrævið 2:2) Nógv í dag vilja ikki, at onnur skulu siga teimum, hvat tey skulu gera. Tíverri hevur hesin sjálvræðisandin eisini ávirkað nøkur í samkomuni. Ein elsti gevur kanska nøkur vinalig ráð um vandarnar við siðleysum ella harðligum undirhaldi, men summi vilja kanska ikki lurta ella taka tað enntá illa upp. Vit mugu øll fylgja tí, sum stendur í Orðtøkunum 19:20: „Lurta eftir ráðum og tak við tykt, so tú kanst verða vísur til endan!"

Hvat kann hjálpa okkum í hesum sambandi? Latið okkum umhugsa tríggjar vanligar orsakir til, at fólk ikki vilja lurta eftir ráðum ella taka við rættleiðing, og síðani leggja til merkis, hvat Bíblian sigur.

- „Eg haldi ikki, leiðbeiningin hóskar til mín." Vit halda kanska ikki, at leiðbeiningin er viðkomandi í okkara føri, ella at hann, sum gav hana, visti nóg mikið um málið. Tað fyrsta, ið fellur okkum inn, er kanska enntá at lítilsvirða leiðbeiningina. (Hebrearabrævið 12:5) Tá ið vit nú øll eru ófullkomin, er tað so ikki hugsandi, at tað er okkara egna áskoðan, sum hevur tørv á at verða rættað? (Orðtøkini 19:3) Var ikki *onkur* góð grund til, at leiðbeiningin varð givin? So er tað *tað*, vit mugu hugsa um. Guds orð gevur okkum hesi ráð: „Halt fast í tyktina, slepp henni ikki, varða hana, tí hon er lív títt!" – Orðtøkini 4:13.

- „Mær dámar ikki mátan, leiðbeiningin varð givin." Tað er rætt, at Guds orð setur høg krøv um, hvussu ráð og leiðbeining eiga at verða givin. (Galatiabrævið 6:1) Men

Bíblian sigur eisini: „Øll hava syndað, og teimum fattast dýrd Guds.“ (Rómbrævið 3:23) Einasti mátin, vit nakrantíð kunnu fáa fullkomna leiðbeining, ið verður givin heilt, sum hon eigur, er at fáa hana frá einum, ið er fullkomin. (Jákup 3:2) Jehova brúkar ófullkomin menniskju at geva okkum leiðbeining, og tí er tað skilagott ikki at hugsa ov nógv um, *hvussu* leiðbeiningin verður givin. Vit mugu heldur hugsa um innihaldið í leiðbeiningini og umhugsa í bøn, hvussu vit kunnu fylgja henni.

- „Hann hevur ongan rætt at leiðbeina meg!“ Halda vit, at vit kunnu skúgva eina leiðbeining til viks, tí hann, sum gevur hana, sjálvur hevur ymiskar veikleikar, mugu vit hugsa um tað, sum stendur omanfyri. Og um vit halda, at okkum ikki tørvar nakra leiðbeining vegna okkara aldur, royndir ella ábyrgdaruppgávur í samkomuni, mugu vit endurskoða okkara hugsanarhátt. Í fortíðar Ísrael hevði kongurin stóra ábyrgd, men hann noyddist kortini at taka við leiðbeining frá profetum, prestum og øðrum av sínum tegnum. (2 Sámuel 12:1-13; 2 Krønikubók 26:16-20) Í dag útnevnir samskipanin hjá Jehova ófullkomnar menn at geva leiðbeining, og búgvin kristin fylgja henni við gleði. Hava vit størri ábyrgdaruppgávur ella fleiri royndir enn onnur, mugu vit vera enn meira tilvitað um, hvussu umráðandi tað er at vera góð fyridømi í at vera rímilig og eyðmjúk við at taka ímóti leiðbeining og fylgja henni. – 1 Timoteus 3:2, 3, *NW;* Titus 3:2.

Tað er eyðsæð, at okkum øllum tørvar leiðbeining. Tí mugu vit seta okkum fyri fús at taka við henni, lýðin fylgja henni og av hjartanum takka Jehova fyri hesa lívbjargandi gávuna. Ráð og leiðbeining vísa í royndog veru, at Jehova elskar okkum, og vit vilja fegin verða verandi í kærleika Guds. – Hebrearabrævið 12:6-11.

„AKTIÐ VEGLEIÐARAR TYKKARA“

Í fortíðar Ísrael var stórur tørvur á samskipan. Móses fekk ikki einsamallur havt umsjón við milliónatals fólkum, sum ferðaðust saman í eini vandamiklari oyðimørk. Hvat gjørdi hann? „Hann valdi dugandi menn av øllum Ísrael og setti teir til høvuðsmenn yvir fólkinum, til fyristøðumenn, summar at vera yvir 1.000, summar yvir 100, summar yvir 50 og summar yvir 10.“ – 2 Mósebók 18:25.

Soleiðis er eisini tørvur á samskipan í kristnu samkomuni í dag. Tí er tað, at ein tænastubólkur hevur ein umsjónarmann, ein samkoma hevur elstar, ein bólkur av samkomum hevur ein fylkisumsjónarmann, og eitt land hevur eina landsnevnd ella eina deildarskrivstovu við eini nevnd. Við hesi samskipan ber tað til hjá øllum monnum, ið virka sum hirðar, at ansa væl eftir fylginum, sum Jehova hevur litið teimum til. Hesir hirðarnir skulu standa Jehova og Kristusi til svars. – Ápostlasøgan 20:28; Rómbrævið 8:32.

Hesin samskipanarhátturin krevur, at hvør einstakur av okkum er lýðin og undirgivin. Vit vilja als ikki líkjast Diotrefes, sum onga virðing hevði fyri vegleiðarunum tá í tíðini. (3 Jóhannes 9, 10) Vit vilja heldur fylgja orðunum hjá Paulusi ápostli, sum skrivaði: „Aktið vegleiðarar tykkara, og gerið, sum teir siga tykkum! Tí teir vakja yvir sálum tykkara, sum teir, ið skulu gera roknskap – so teir kunnu gera tað við gleði og ikki suffandi – tað er tykkum ikki til gagn!“ (Hebrearabrævið 13:17) Summi akta, tá ið tey taka undir við leiðbeiningini, sum vegleiðararnir geva, men nokta at vera undirgivin og gera, sum teir siga, tá ið tey eru ósamd ella ikki skilja orsøkina til, at leiðbeiningin varð givin. Vit mugu tó minnast, at skulu vit gera, sum teir

siga, ber tað í sær, at vit mugu akta, sjálvt tá ið vit ikki hava hug til tað. Tí mugu vit øll spyrja okkum sjálv: 'Akti eg vegleiðarar mínar og geri, sum teir siga?'

Í Guds orði er sjálvandi ikki leiðbeining um allar skipanir og mannagongdir, sum eru neyðugar, um samkoman skal virka væl. Men Bíblian sigur: „Alt gangi sømiliga og við skili!" (1 Korintbræv 14:40) Stýrandi ráðið fylgir hesi leiðbeiningini og skipar fyri góðum mannagongdum og leiðreglum, so samkoman kann virka væl og á skipaðan hátt. Ábyrgdarfullir brøður leggja seg eftir at vera góðar fyrimyndir í at akta, tá ið teir fylgja hesum skipanum. Teir vísa eisini, at teir eru 'rímiligir og fúsir at akta' aðrar, sum hava umsjónaruppgávur. (Jákup 3:17, *NW*) Í øllum bólkum, samkomum, fylkjum og londum er tí ein skari av sameindum, væl skipaðum tænarum, sum prísa hinum lukkuliga Gudi. – 1 Korintbræv 14:33; 1 Timoteus 1:11.

Orðini hjá Paulusi í Hebrearabrævinum 13:17 vísa eisini, hví ein ólýðin hugburður er skaðiligur. Hann kann vera atvoldin til, at teir, sum hava ábyrgd í samkomuni, koma at røkja sínar uppgávur „suffandi". Tað, ið ein bróðir annars hevði mett sum ein framíhjárætt í heilagari tænastu, kann kennast sum ein tung byrða, tá ið hann hevur við ein í Guds fylgi at gera, sum er uppreistrarhugaður og ikki vil samstarva. Tá ið nøkur nokta at geva seg undir teokratiska leiðslu, skaðar tað alla samkomuna, men tað skaðar sjálvsagt eisini tey sjálv. Eru tey ov stolt at geva seg undir, skaðar tað teirra andaligu støðu og skapar eina gjógv ímillum tey og himmalska Faðir teirra. (Sálmur 138:6) Latið okkum tí øll seta okkum fyri at akta vegleiðarar okkara og gera, sum teir siga.

Hvussu vísa vit, at vit ikki eru av heiminum?

„Tit eru ikki av heiminum.“
– JÓHANNES 15:19.

SEINASTA kvøldið Jesus var á jørðini sum menniskja, setti hann orð á sína stúran fyri, hvussu tað skuldi gangast hansara lærisveinum í framtíðini. Hann nevndi tað enntá fyri Faðir sínum í bøn: „Eg biði ikki, at Tú skalt taka tey úr heiminum, men at Tú skalt varðveita tey frá illum. Tey eru ikki av heiminum, eins og Eg eri ikki av heiminum.“ (Jóhannes 17:15, 16) Henda inniliga bønin vísti, at Jesus veruliga elskaði sínar lærisveinar, og hon legði eisini dent á týdningin av tí, sum hann sama kvøldið hevði sagt við nakrar av teimum: „Tit eru ikki av heiminum.“ (Jóhannes 15:19) Tað hevði eyðsæð nógv at siga hjá Jesusi, at hansara lærisveinar ikki vóru av heiminum.

[2] Tá ið Jesus brúkti orðið ’heimur’, sipaði hann til tann partin av mannaættini, ið er fremmandur fyri Gudi, og sum verður stjórnaður av Satani og letur seg leiða av sjálvsøkna og stolta andanum, ið stavar frá honum. (Jóhannes 14:30; Efesusbrævið 2:2; 1 Jóhannes 5:19) Jákup brúkti orðið ’heimur’ á sama hátt, tá ið hann segði, at „vinskapur við heimin er fíggindskapur móti Gudi“. (Jákup 4:4) Men hvussu kunnu tey, sum fegin vilja halda seg í kærleika Guds, liva í heiminum og kortini ikki vera

1. Hvat legði Jesus dent á seinasta kvøldið, hann var á jørðini sum menniskja?
2. Hvat er ’heimurin’, sum Jesus nevndi?

av heiminum? Vit fara at kanna fimm dømi um hetta. Vit kunnu vísa, at vit ikki eru av heiminum við at vera trúføst móti Guds ríki undir Kristusi og uttanveltað í politikki, við at standa ímóti heimsins anda, við at vera nosslig og sømiliga ílatin, við at liva eitt einfalt lív og við at lata okkum í tey andaligu herklæðini.

VIT MUGU VERA TRÚFØST OG UTTANVELTAÐ

3 Heldur enn at taka lut í politikki legði Jesus dent á at boða um Guds ríki, framtíðar stjórnina í himli, sum hann skuldi verða kongur í. (Dániel 7:13, 14; Lukas 4:43) Táið Jesus stóð framman fyri rómverska landshøvdinganum Pontiusi Pilatusi, kundi hann tí siga: „Ríki Mítt er ikki av hesum heimi.“ (Jóhannes 18:36) Jesu lærisveinar taka eftir honum við at vera trúfastir móti honum og hansara ríki og við at boða um hetta ríkið í øllum heiminum. (Matteus 24:14) „Vit eru tá sendiboð [sendiharrar, *NW*] í stað Kristusar,“ skrivaði Paulus ápostul. „Vit biðja í stað Kristusar: Verðið sátt við Gud!“* – 2 Korintbrævið 5:20.

4 Av tí at sendiharrar umboða ein fremmandan stjórnarharra ella eitt fremmant land, blanda teir seg ikki upp í innanhýsis mál í landinum, sum teir eru sendir til; teir eru uttanveltaðir. Men sendiharrar fremja áhugamálini hjá stjórnini í tí landinum, teir umboða. Tað sama

---

* Síðani hvítusunnudagin í ár 33 e.o.t. hevur Kristus verið kongur yvir samkomu síni av salvaðum lærisveinum á jørðini. (Kolossebrævið 1:13) Í 1914 fall „kongadømi heimsins“ Kristusi í lut. Tí tæna salvað kristin í dag eisini sum sendiharrar fyri Messianska ríkið. – Opinberingin 11:15.

---

3. (a) Hvussu metti Jesus politikk? (b) Hví kunnu vit siga, at salvaðu lærisveinarnir hjá Jesusi tæna sum sendiharrar? (Sí eisini undirgreinina.)
4. Hvussu hava øll sonn kristin verið trúføst móti Guds ríki? (Sí rammuna á síðu 52.)

TEY FYRSTU KRISTNU VÓRU UTTANVELTAÐ

Nógvir vitnisburðir eru í søguni um, at tey fyrstu kristnu vóru politiskt uttanveltað og noktaðu at fara í kríggj. Ein bók um fyrstu tíðina hjá kristindóminum sigur: „Teir, sum stovnaðu kristindómin, stríddust ídnir ímóti einum og hvørjum lyndi at blanda seg upp í ta viðurkendu politisku skipanina." (*The Beginnings of Christianity*) Ein onnur bók sigur: „Frumkristindómurin varð oftani misskiltur og illa dámdur av heidnum heimsstjórnarum. ... Tey kristnu noktaðu at gera ymiskt, sum varð kravt av rómverskum borgarum. ... Tey tóku ikki við politiskum embætum." – *On the Road to Civilization.*

Viðvíkjandi áskoðanini, sum tey fyrstu kristnu høvdu á hertænastu, segði týski gudfrøðingurin Peter Meinhold: „At vera kristin og hermaður varð mett at vera ósambæriligt." Í eini ritgerð um kríggj og kristindóm skrivaði Jonathan Dymond, at lærisveinar Jesusar í rúma tíð eftir deyða hansara „ikki tóku lut í [kríggi], uttan mun til um avleiðingarnar vóru skomm, fongsul ella deyði". Hann legði aftrat: „Hesar sannroyndir eru óreingiligar." (An Inquiry Into the Accordancy of War With the Principles of Christianity) Tey kristnu gjørdust ikki hermenn, fyrr enn „kristindómurin varð spiltur", segði ein annar rithøvundur.

er galdandi fyri salvaðu lærisveinarnar hjá Kristusi, sum hava 'borgaraskap í Himlunum'. (Filippibrævið 3:20) Í roynd og veru hava teir vegna sítt ídni í boðanini hjálpt milliónum av 'hinum seyðinum' hjá Kristusi at 'verða

sáttar við Gud'. (Jóhannes 10:16; Matteus 25:31-40) Teir síðstnevndu stuðla salvaðu brøðrum Kristusar. Sum eitt sameint fylgi, ið boðar um Messianska ríkið, eru báðir bólkar púra uttanveltaðir í heimsins politisku málum. – **Les Esaias 2:2-4.**

5 Trúfesti móti Kristusi er ikki einasta orsøkin til, at sonn kristin eru uttanveltað. Guds fólk í forðum búði bert í *einum* landi, men í dag eru vit partur av einum altjóða brøðralagi. (Matteus 28:19) Um vit stuðlaðu politiskum flokkum í heimlandinum, høvdu vit ikki kunnað boðað um Guds ríki við dirvi, og haraftrat hevði okkara kristni einleiki liðið stóran skaða. (1 Korintbræv 1:10) Og um kríggj brast á, skuldu vit kanska barst ímóti okkara trúarfelagum, sum vit hava fingið boð um at elska. (Jóhannes 13:34, 35; 1 Jóhannes 3:10-12) Tí var tað við góðari grund, at Jesus segði við lærisveinarnar, at teir ikki skuldu taka til svørð. Og hann segði enntá, at teir skuldu elska sínar fíggindar. – Matteus 5:44; 26:52; sí rammuna „Eri eg uttanveltaður?" á síðu 55.

6 Sum sonn kristin, hava vit vígt okkara lív til Gud, ikki til nakað menniskja, nakran stovn ella nakra tjóð. Í Fyrra Korintbrævi 6:19, 20 stendur: „Tit eru ikki tykkara egnu. Tit eru dýrt keypt." So hóast tey, ið fylgja Jesusi, geva verðsligu myndugleikunum tað, sum teir skulu hava, við at lata skatt, vísa æru og vera lutfalsliga undirgivin, geva tey eisini „Gudi tað, ið Guds er". (Markus 12:17; Rómbrævið 13:1-7) Tað fevnir um tilbiðing, trúfesti, lýdni og kærleika. Skuldi tað verið neyðugt, eru tey villig at lata lívið fyri Gud. – Lukas 4:8; 10:27; **les Ápostlasøguna 5:29; Rómbrævið 14:8.**

---

5. Hvør munur er á kristnu samkomuni og fortíðar Ísrael, og hvussu sæst hesin munurin?
6. Hvussu verður títt samband við verðsligu myndugleikarnar ávirkað av, at tú hevur vígt títt lív til Gud?

VIT MUGU STANDA ÍMÓTI „ANDA HEIMSINS“

7 Eitt annað, vit kunnu gera fyri ikki at vera av heiminum, er at standa ímóti heimsins ónda anda. „Vit hava ikki fingið anda heimsins, men Andan, ið er frá Gudi,“ skrivaði Paulus. (1 Korintbræv 2:12) Við tey í Efesus segði hann: 'Tit livdu áður í hesum heimi, eftir høvdinganum yvir hervaldinum í luftini, andanum, sum nú virkar í børnum ólýdnisins.' – Efesusbrævið 2:2, 3.

8 Heimsins 'luft', ella andi, er ein ósjónlig kraft, sum eggjar til ólýdni móti Gudi og fremur 'lyst holdsins og lyst eygnanna'. (1 Jóhannes 2:16; 1 Timoteus 6:9, 10) Heimsins andi hevur 'hervald' í teirri merking, at hann talar til syndiga holdið, er sniðfundigur, áhaldandi og sleppur eins og luft inn allastaðni. Hann „virkar“ í ólýdnum menniskjum soleiðis at skilja, at hann fremur ringar eginleikar í teimum, eitt nú sjálvsøkni, hugmóð og ærusjúku. Hann gevur teimum hug at áseta sínar egnu siðareglur og at gera uppreistur ímóti myndugleika.* Stutt sagt fær heimsins andi so líðandi eginleikar Djevulsins at vaksa í hjarta menniskjans. – Jóhannes 8:44; Ápostlasøgan 13:10; 1 Jóhannes 3:8, 10.

9 Kann heimsins andi festa rót í tínum sinni og hjarta? Ja, tað kann hann, men bara um tú ikki ert á varðhaldi. **(Les Orðtøkini 4:23.)** Ávirkanin kemur ofta sníkjandi, til dømis tá ið tú kemur saman við nøkrum, sum sýnast hampilig, men í royndum ikki elska Jehova. (Orðtøkini 13:20; 1 Korintbræv 15:33) Heimsins andi kann eis-

---

* Sí *Lad os ræsonnere ud fra Skrifterne*, síðurnar 419-423, sum Jehova vitni hava givið út.

7, 8. Hvat er 'andi heimsins', og hvussu „virkar“ hesin andin í ólýdnum menniskjum?

9. Á hvønn hátt kunnu okkara sinni og hjarta verða ávirkað av heimsins anda?

ini ávirka okkum, um vit lesa óhóskandi lesnað, hyggja at pornografi, fara inn á heimasíður hjá fráfalnum, fáast við niðurbrótandi undirhald ella ganga upp í sera kappingarkendan ítrótt. Ja, heimsins andi er í øllum, sum speglar hugsanarháttin hjá Satani ella hansara skipan.

10 Hvussu kunnu vit standa ímóti sníkjandi ávirkanini frá heimsins anda og halda okkum í kærleika Guds?

---

10. Hvussu kunnu vit standa ímóti heimsins anda?

ERI EG UTTANVELTAÐUR?

Meginregla: „Ríki Mítt er ikki av hesum heimi.“ – Jóhannes 18:36.

Spyr teg sjálvan

- Hvussu kann eg greiða frá, at tað er eitt slag av avgudadyrkan at heilsa flagginum?* – 2 Mósebók 20:4, 5; 1 Jóhannes 5:21.
- Hvussu kann eg vísa virðing fyri teimum, ið ikki hava somu trúgv sum eg, tá ið eg skal greiða frá, hví eg ikki vil taka lut í tjóðskaparligum hátíðarhaldi? – 1 Pætur 3:15.
- Hvørjar orsakir havi eg til ikki at stuðla nøkrum politiskum flokki ella vera við í nøkrum slagi av hertænastu? – Jóhannes 13:34; 1 Jóhannes 3:10-12.

---

* Sí uppískoytið á síðunum 212-215.

Tað kunnu vit bara, um vit taka ímóti teimum andaligu gávunum frá Jehova og støðugt biðja um heilagan anda. Jehova er nógv størri enn Djevulin og hansara óndi heimur. (1 Jóhannes 4:4) Tað er ógvuliga umráðandi, at vit halda okkum nær til Jehova í bøn.

VIT MUGU VERA NOSSLIG OG SØMILIGA ÍLATIN

11 Klæði, útsjónd og reinføri siga nakað um, hvussu ein persónur er. Í nógvum londum er støðið fyri klædnabúna vorðið so lágt, at ein sjónvarpsviðmerkjari róði fram undir, at skjótt eru eingi klæði eftir, sum kunnu eyðmerkja skøkjur. Sjálvt gentur, sum ikki eru tannáringar enn, fylgja rákinum at „vísa nógva húð, men lítlan sóma", stóð at lesa í einum tíðindablaði. Eitt annað rák er ein ófantaligur klædnastílur, sum speglar uppreistraranda og vantandi tign og sjálvsvirðing.

12 Sum tænarar Jehova vilja vit síggja so væl út sum gjørligt, og tað merkir, at okkara klæði mugu vera nosslig, rein, sømilig og hóskandi til høvið. Okkara útsjónd eigur til eina og hvørja tíð at spegla „blúgv og heiður", sum saman við „góðum verkum" hóskar til øll – menn og kvinnur – „ið játta seg undir gudsótta". Tað, sum hevur mest at siga, er sjálvsagt ikki at gera vart við okkum sjálv, men at vit 'halda okkum í kærleika Guds'. (1 Timoteus 2:9, 10; Judas 21) Ja, vit vilja, at okkara størsta prýði skal vera „dulda menniskja hjartans ..., sum er Gudi ógvuliga dýrabart". – 1 Pætur 3:3, 4.

13 Minst eisini til, at okkara klædnastílur og útsjónd annars kunnu ávirka, hvussu onnur meta sanna tilbiðing. Tá ið grikska orðið, ið er umsett „blúgv", verður nýtt í siðiligum høpi, lýsir tað hávirðing, ærufrykt og virðing

---

11. Hvussu hevur heimsins andi ávirkað støðið fyri klædnabúna?
12, 13. Hvørjar meginreglur eiga at eyðkenna okkara klæði og útsjónd?

fyri kenslum og meiningum hjá øðrum. Vit mugu tí leggja okkum eftir at hugsa meira um samvitskuna hjá øðrum enn um rættindini, vit kanska sjálv halda okkum hava í sambandi við klædnastíl. Fram um alt vilja vit æra Jehova og hansara fólk og vísa, at vit eru tænarar Guds við at 'gera alt Gudi til dýrd'. – 1 Korintbræv 4:9; 10:31; 2 Korintbræv 6:3, 4; 7:1.

Æri eg Jehova við míni útsjónd?

14 Tað hevur enn størri týdning, at vit eru sømiliga ílatin, nosslig og rein, tá ið vit eru í boðanini ella á møti. Spyr teg sjálvan: 'Eru míni klæði og mítt persónliga reinføri óhóskandi? Verða onnur illa við av mær? Meti eg míni rættindi á hesum økinum at hava størri týdning enn tað at gerast skikkaður at fáa tænastuforrættindi í samkomuni?' – Sálmur 68:7, *Dahl/Viderø*; Filippibrævið 4:5, *NW*; 1 Pætur 5:6.

15 Eingin listi er at finna í Bíbliuni við reglum um klæði, útsjónd og reinføri hjá kristnum. Jehova hevur ongan áhuga í at taka okkara frælsi at velja og hugsa sjálv frá okkum. Tvørturímóti vil hann, at vit skulu gerast búgvin menniskju, ið grunda um bíbilskar meginreglur, og sum við at „nýta sansarnar hava vant teir at skilja

---

14. Hvørjar spurningar eiga vit at seta okkum sjálvum viðvíkjandi klæðum og reinføri?
15. Hví er eingin listi við reglum um klæði, útsjónd og reinføri at finna í Bíbliuni?

millum gott og ilt“. (Hebrearabrævið 5:14) Mest av øllum vil hann, at vit skulu lata okkum leiða av kærleika – kærleika til Gud og næstan. **(Les Markus 12:30, 31.)** Innan fyri hesi mørk er møguleiki fyri stórum fjølbroytni í klæðum og útsjónd. Hetta kemur týðiliga til sjóndar í ymiska klædnastílinum hjá tænarum Jehova, uttan mun til hvar í heiminum teir savnast.

VIT MUGU LIVA EITT EINFALT LÍV

16 Heimsins andi er svikaligur og fær milliónir av menniskjum at halda, at pengar og materiellar ognir kunnu gera tey lukkulig. Men Jesus segði: „Lívið hjá ongum stendur í tí, sum hann eigur, um hann so hevur almikið góðs.“ (Lukas 12:15) Jesus, sum ikki talaði

16. Hvussu er heimsins andi í stríð við Jesu læru, og hvørjar spurningar eiga vit at seta okkum sjálvum?

fyri sjálvsnoktan ella strangari og fráhaldandi lívsførslu, lærdi, at tey, sum „ásanna, at tey hava ein andaligan tørv“ og liva eitt einfalt lív, ið er savnað um tað andaliga, finna sanna lukku. (Matteus 5:3, *NW*; 6:22) Spyr teg sjálvan: ’Trúgvi eg veruliga tí, sum Jesus lærdi, ella lati eg meg ávirka av „faðir lygnarinnar“? (Jóhannes 8:44) Hvat vísir mín tala, míni mál, mínar raðfestingar og mín lívsførsla?’ – Lukas 6:45; 21:34-36; 2 Jóhannes 6.

17 Bíblian sigur: „Verið gerarar orðsins!“ (Jákup 1:22) Hugsa um nakrar av fyrimununum, sum tey, ið liva eitt einfalt lív, kunnu gleðast um. Tey fáa nýggja styrki í tænastuni fyri Guds ríki. (Matteus 11:29, 30, *NW*) Tey sleppa undan óneyðugari stúran og harvið eisini nógvari sálarligari og kensluligari pínu. **(Les Fyrra Timoteusbræv 6:9, 10.)** Tey eru nøgd við tað, sum er neyðugt til lívsins uppihald, og tí hava tey meira tíð til familju og vinir. Hetta ger helst, at tey sova betur um næturnar. (Prædikarin 5:11) Tey uppliva gleðina, tað hevur við sær at geva eftir førimuni. (Ápostlasøgan 20:35) Og tey eru „rík í vónini“, nøgd og gleðast um at hava frið í sinninum. (Rómbrævið 15:13; Matteus 6:31, 32) Er tað ikki einastandandi?

VIT MUGU LATA OKKUM Í „ØLL HERKLÆÐI GUDS“

18 Tey, sum halda seg í kærleika Guds, verða eisini andaliga vard móti Satani, ið ikki bert vil taka gleðina, men eisini æviga lívið frá teimum. (1 Pætur 5:8) Paulus segði: „Hjá okkum stendur bardagin ikki við blóð og hold, men við tignirnar og veldini, við harrar heimsins í hesum myrkri, við andaher óndskaparins

---

17. Nevn nakrar av fyrimununum, sum tey, ið liva eitt einfalt lív, kunnu gleðast um.
18. Hvussu lýsir Bíblian okkara fígginda, hansara framferðarhátt og tað slagið av ’bardaga’, vit eru í?

í himmalrúminum." (Efesusbrævið 6:12) Grikska orðið, sum her er umsett 'bardagi', sipar ikki til eitt stríð, har stríðandi partarnir standa langt frá hvørjum øðrum – í fjaldum bumbuskýlum so at siga – men til ein bardaga mann móti manni. Haraftrat vísa orðini „tignirnar", „veldini" og „harrar heimsins", at álopini úr andaheiminum eru nágreiniliga skipað og tilætlað.

19 Hóast menniskjaligar veikleikar og avmarkingar kunnu vit kortini vinna sigur. Hvussu? Við at lata okkum í „øll herklæði Guds". (Efesusbrævið 6:13) Í Efesusbrævinum 6:14-18 verða hesi herklæðini lýst soleiðis: „Standið tá gyrd um lendar tykkara við sannleika og latin í brynju rættvísinnar! Havið sum skógvar á fótunum bardagahugin, ið evangelium friðarins gevur! Og lyftið umframt alt hetta skjøld trúarinnar! Við honum skulu tit vera ment at sløkkja allar gløðandi pílar hins ónda. Takið hjálm [ella vón] frelsunnar og svørð Andans – sum er orð Guds, biðjandi í Andanum eina og hvørja tíð við allari ákallan og bøn."

20 Av tí at hesi andaligu herklæðini eru frá Gudi, kunnu tey altíð verja okkum, um vit væl at merkja altíð eru í teimum. Í mun til bókstavligar hermenn, sum ikki altíð eru í bardaga, stríða vit eitt stríð um lív og deyða, sum ikki endar, fyrr enn Gud hevur oyðilagt heimin hjá Satani og kastað allar teir óndu andarnar niður í avgrundina. (Opinberingin 12:17; 20:1-3) Gev tí ikki uppat, um tú hevur veikleikar ella skeiv ynski at stríðast við, tí vit mugu øll 'kúga' okkum sjálv fyri at vera trúføst móti Jehova. (1 Korintbræv 9:27) Tað er, tá ið vit *ikki* stríðast, at vit skulu vera stúrin!

---

19. Lýs andaligu herklæðini.
20. Hvussu er okkara støða øðrvísi enn tann hjá einum bókstavligum hermanni?

21 Haraftrat kunnu vit ikki vinna hetta stríðið í egnari megi. Tí minnir Paulus okkum á, at vit mugu biðja til Jehova „í Andanum eina og hvørja tíð“. Vit mugu eisini lurta eftir Jehova við at kanna hansara orð og koma regluliga saman við teimum, sum ’stríðast saman við okkum’, tí vit eru ikki einsamøll í hesum bardaganum. (Filemon 2; Hebrearabrævið 10:24, 25) Tey, sum eru trúføst á øllum hesum økjum, vinna ikki bara sigur, men verða eisini før fyri at verja sína trúgv, tá ið hon verður roynd.

VIT MUGU VERA TIL REIÐAR AT VERJA OKKARA TRÚGV

22 „Við tað at tit eru ikki av heiminum,“ segði Jesus, „hatar heimurin tykkum.“ (Jóhannes 15:19) Tí mugu vit altíð vera til reiðar at verja okkara trúgv og samstundis vera mild og vísa virðing. **(Les Fyrra bræv Pæturs 3:15.)** Spyr teg sjálvan: ’Skilji eg, hví Jehova vitni av og á taka eina støðu, sum er øðrvísi enn tann, tey flestu taka? Tá ið eg skal taka eina slíka støðu, eri eg tá sannførdur um, at tað, sum Bíblian og trúgvi og skilagóði tænarin siga, er satt? (Matteus 24:45; Jóhannes 17:17) Og tá ið eg skal gera tað, sum er rætt í eygum Jehova, eri eg so til reiðar at vera øðrvísi og eisini errin av tí?’ – Sálmur 34:3; Matteus 10:32, 33.

23 Okkara ynski um ikki at vera av heiminum verður ofta roynt á ein meira sniðfundigan hátt. Sum áður nevnt, roynir Djevulin til dømis við undirhaldi at lokka tænarar Jehova at blíva ein partur av heiminum. Hvussu kunnu vit velja gagnligt undirhald, ið er uppbyggjandi, og sum vit kunnu njóta við góðari samvitsku? Tað verður viðgjørt í næsta kapitli.

---

21. Hvussu kunnu vit vinna sigur í okkara andaliga bardaga?
22, 23. (a) Hví skulu vit altíð vera til reiðar at verja okkara trúgv, og hvørjar spurningar kunnu vit seta okkum sjálvum? (b) Hvat verður viðgjørt í næsta kapitli?

Hvussu velja vit gagnligt undirhald?

„Gerið alt Gudi til dýrd!“
– 1 KORINTBRÆV 10:31.

HUGSA tær, at tú ert um at bíta í eina leskiliga frukt, men varnast, at eitt petti av henni er spilt. Hvat gert tú? Tú kundi etið alla fruktina, eisini tað spilta, tú kundi blakað alla fruktina burtur, ella tú kundi skorið tað spilta pettið burtur og etið restina. Hvat velur tú?

2 Undirhald kann á ein hátt samanberast við eina slíka frukt. Av og á hevur tú helst hug at taka tær av løttum, men tú veitst, at nógv undirhald í dag er siðiliga vánaligt, ja beinleiðis spilt. Hvat gert tú so? Nøkur halda kanska, at alt er í lagi, eisini tað vánaliga, og lata seg tí undirhalda av øllum, sum hesin heimurin hevur at bjóða. Onnur halda seg kanska púra frá øllum undirhaldi fyri at tryggja sær, at einki skaðiligt ávirkar tey. Uppaftur onnur ansa kanska sera væl eftir ikki at lata seg undirhalda av nøkrum skaðiligum, men njóta av og á gagnligt undirhald. Hvat eigur tú at velja, um tú skalt halda teg í kærleika Guds?

3 Tey flestu av okkum høvdu helst valt tann triðja møguleikan. Vit hava øll tørv á at taka okkum av løttum, men vilja bert lata okkum undirhalda av tí, sum er siðiliga reint. Tí mugu vit kanna, hvussu vit fáa greiðu á, hvat undirhald er gagnligt, og hvat ikki er

1, 2. Hvat mugu vit velja í sambandi við undirhald?
3. Hvat fara vit at kanna?

gagnligt. Men latið okkum fyrst vita, hvussu tað, vit velja til undirhald, kann ávirka okkara samband við Jehova.

„GERIÐ ALT GUDI TIL DÝRD“

4 Eitt eldri Jehova vitni, sum bleiv doypt í 1946, hevur sagt: „Eg syrgi altíð fyri at vera til staðar, tá ið dópsfyrilestur er á stevnunum, og eg lurti so væl eftir, sum var tað eg sjálvur, ið skuldi doypast.“ Hví? Hann greiddi frá: „At hava mítt vígslulyfti greitt í huga hevur hjálpt mær at vera trúfastur.“ Tú tekur helst undir við hesum. Minnir tú teg sjálvan á, at tú hevur lovað Jehova at tæna honum alt títt lív, hjálpir tað tær at halda á. **(Les Prædikaran 5:3.)** Tá ið tú grundar um tína vígslu til Jehova, ávirkar tað ikki bara tína áskoðan á kristnu tænastuna, men eisini á alt annað í lívinum – eitt nú undirhald. Paulus ápostul legði dent á henda sannleikan, tá ið hann skrivaði til tey kristnu tá í tíðini: ’Annaðhvørt tit eta ella drekka – ella hvat tit gera – so gerið *alt* Gudi til dýrd!’ – 1 Korintbræv 10:31.

5 Alt, sum tú gert í lívinum,

---

4. Hvussu eigur okkara vígslulyfti at ávirka okkum, tá ið vit velja undirhald?
5. Hvussu hjálpir Triðja Mósebók 22:18-20 okkum at síggja ávaringina, sum liggur í orðunum í Rómbrævinum 12:1?

ávirkar títt samband við Jehova. Í Rómbrævinum brúkti Paulus eina sterka mynd til at prenta henda sannleikan inn í sínar trúarfelagar. Hann áminti teir: 'Berið fram likam tykkara sum livandi, heilagt, Gudi dámligt offur – hetta er andaliga gudsdýrkan tykkara.' (Rómbrævið 12:1) Títt likam fevnir um tín huga, títt hjarta og tína likamligu styrki. Og alt hetta brúkar tú í tíni tilbiðing. (Markus 12:30) Paulus lýsir eina slíka heilhugaða tænastu sum eitt offur. Í hesum liggur í roynd og veru ein ávaring. Undir Móselógini tók Gud ikki ímóti einum ofri, sum hevði brek. (3 Mósebók 22:18-20) Og Gud tekur heldur ikki ímóti einum ofri frá sínum tænarum í dag, um tað onkursvegna er „brekað". Men hvussu kundi tað hent?

6 Paulus gav teimum kristnu í Róm hesi boð: „Bjóðið ... ikki syndini fram limir tykkara." Hann bað tey eisini lata „gerðir likamsins" doyggja. (Rómbrævið 6:12-14; 8:13) Hann hevði fyrr í brævinum givið teimum nøkur dømi um slíkar „gerðir likamsins". Um syndafullu mannaættina lesa vit: „*Muður* teirra er fullur av banni." „*Føtur* teirra eru kvikir at úthella blóð." „Gudsótti er ikki fyri *eygum* teirra." (Rómbrævið 3:13-18) Ein tænari hjá Gudi hevði dálkað sítt likam, um hann brúkti sínar „limir", ella likamslutir, til slíkar syndigar gerðir. Um vit til dømis við vilja hyggja at siðspillandi tilfari sum pornografi ella sadistiskum harðskapi, 'bjóða [vit] syndini fram [eygu okkara]' og dálka soleiðis alt likamið. Øll okkara tilbiðing verður eitt offur, sum ikki longur er heilagt, og tí kann Jehova ikki góðtaka tað. (5 Mósebók 15:21; 1 Pætur 1:14-16; 2 Pætur 3:11) Tað

6, 7. Hvussu kundu vit dálkað okkara likam, og hvørjar avleiðingar kundi tað fingið?

er av sonnum ein høgur prísur at gjalda fyri óhóskandi undirhald!

7 Tað er greitt, at tað, vit velja til undirhald, kann hava álvarsligar avleiðingar. Tí velja vit sjálvsagt undirhald, sum ikki dálkar okkara offur til Gud. Latið okkum nú kanna, hvussu vit fáa greiðu á, hvat er gagnligt undirhald, og hvat ikki er.

„SKÝGGIÐ HITT ILLA"

8 Undirhald kann sum heild býtast upp í tveir bólkar. Annar fevnir um undirhald, sum sonn kristin avgjørt ikki vilja fáast við; hin fevnir um undirhald, sum nøkur sonn kristin halda vera hóskandi, og onnur halda vera óhóskandi. Vit kunnu leggja fyri við at kanna fyrra bólkin – undirhald, sum sonn kristin halda seg frá.

9 Sum nevnt í 1. kapitli fevna nøkur sløg av undirhaldi um gerðir, sum Bíblian týðiliga fordømir. Hugsa til dømis um heimasíður, filmar, sjónvarpssendingar og tónleik, sum lýsa sadismu, demonismu og pornografi, ella sum eggja til andstyggiligar siðleysar gerðir. Av tí at slíkt spillandi undirhald gevur atburði, sum stríðir ímóti bíbilskum meginreglum og lógum, ein jaligan dám, eiga sonn kristin avgjørt at halda seg frá tí. (Ápostlasøgan 15:28, 29; 1 Korintbræv 6:9, 10; Opinberingin 21:8) Tá ið vit gera tað, vísa vit Jehova, at vit veruliga 'skýggja hitt illa' og støðugt 'halda okkum frá illum'. Á tann hátt er okkara 'trúgv ikki bert eiti'. – Rómbrævið 12:9; Sálmur 34:15; 1 Timoteus 1:5.

10 Men nøkur halda kanska, at tey kunnu hyggja at undirhaldi, sum lýsir siðleysar gerðir, uttan at tað er

---

8, 9. (a) Hvørjar tveir bólkar kann undirhald sum heild býtast upp í? (b) Hvørjum slagi av undirhaldi halda vit okkum frá, og hví?
10. Hvør hugsan um undirhald er vandamikil, og hví?

skaðiligt. Tey hugsa: 'Eg hyggi kanska at sovorðnum undirhaldi í filmum ella í sjónvarpinum, men eg kundi ikki funnið uppá at gjørt tað sjálvur.' At hugsa soleiðis er villleiðandi og vandamikið. **(Les Jeremias 17:9.)** Skýggja vit veruliga „hitt illa", um okkum dámar at hyggja at tí, sum Jehova fordømir? Um vit ferð eftir ferð hyggja at, lesa um ella lurta eftir sovorðnum, doyva vit okkara sansar. (Sálmur 119:70; 1 Timoteus 4:1, 2) Og tað kann ávirka okkara atburð og okkara áskoðan á skeivu gerðirnar hjá øðrum.

11 Hetta er í roynd og veru hent hjá summum. Nøkur sonn kristin hava framt siðloysi, tí tey vóru ávirkað av undirhaldinum, sum tey vóru von at hyggja at. Tey lærdu av ringum royndum, at „tað, sum menniskjað sáar, skal tað eisini heysta". (Galatiabrævið 6:7) Men tað nýtist ikki at enda so galið. Leggur tú tær eina við at sáa nakað gagnligt í sinnið, fert tú eisini at heysta nakað gagnligt. – Sí rammuna „Hvat undirhald skal eg velja?" á síðu 67.

PERSÓNLIGAR AVGERÐIR GRUNDAÐAR Á BÍBILSKAR MEGINREGLUR

12 Latið okkum nú kanna seinna bólkin – undirhald, ið hvørki er beinleiðis fordømt ella beinleiðis góðkent í Guds orði. Tá ið vit velja undirhald úr hesum bólkinum, mugu vit hvør sær meta um, hvat er gagnligt. **(Les Galatiabrævið 6:5.)** Leiðbeining er tó at fáa í hesum sambandi. Í Bíbliuni eru meginreglur, ella grundleggjandi sannleikar, sum kunnu hjálpa okkum at skilja, hvørja áskoðan Jehova hevur. Hava vit slíkar

---

11. Hvussu kunnu vit siga, at Galatiabrævið 6:7 talar satt í sambandi við undirhald?
12. Hvat samband hevur Galatiabrævið 6:5 við undirhald, og hvørja leiðbeining kunnu vit brúka, tá ið vit skulu taka avgerðir?

HVAT UNDIRHALD SKAL EG VELJA?

Meginregla: „Skýggið hitt illa, haldið fast við hitt góða!“ – Rómbrævið 12:9.

Hevði tað dámt Gudi, um ...

- teksturin til tónleikin, eg lurti eftir, ger tað torført hjá mær at hava reinar tankar? – 1 Korintbræv 6:9, 10.
- eg tosi ljótt og beri meg illa at sum fólkini í filmunum, eg hyggi at? – Lukas 6:40.
- eg spæli telduspøl, har eg skal vera ein harðligur ella siðleysur persónur? – Sálmur 11:7; Orðtøkini 6:16-19.
- eg, táið eg velji undirhald, ikki sjálvur fylgi normunum, sum eg eggi øðrum til at fylgja? – Rómbrævið 2:21, *Dahl/Viderø.*

meginreglur í huga, verða vit før fyri at skilja, „hvat vilji Harrans er“ í øllum, eisini tá ið vit skulu velja undirhald. – Efesusbrævið 5:17.

13 Øll sonn kristin hava sjálvsagt ikki ment síni fatanarevni, ella skynsemi, líka væl. (Filippibrævið 1:9, *Dahl/Viderø*) Haraftrat ásanna vit, at tað er ymiskt, hvat okkum dámar og ikki dámar, tá ið talan er um

13. Hvat hjálpir okkum at halda okkum frá undirhaldi, sum Jehova ikki dámar?

Fylgja vit meginreglunum frá Gudi, tá ið vit velja undirhald, verða vit vard andaliga

undirhald. Tí kunnu vit ikki vænta, at øll taka akkurát tær somu avgerðirnar. Men jú meira vit lata meginreglurnar í Bíbliuni ávirka okkara sinni og hjarta, tess meira ansa vit eftir at halda okkum frá undirhaldi, sum Jehova ikki dámar. – Sálmur 119:11, 129; 1 Pætur 2:16.

14 Tá ið tú velur undirhald, er eitt aftrat, tú skalt hugsa um, og tað er um tíðina hjá tær. Tað slagið av undirhaldi, tú velur, vísir, hvat tú heldur vera í lagi, men tíðin, tú brúkar til tað, vísir, hvat tú heldur vera umráðandi. Hjá Guds tænarum hevur tað andaliga sjálvsagt mest at siga. **(Les Matteus 6:33.)** Hvat kanst tú so gera fyri at tryggja tær, at tað, sum hevur við tína gudsdyrkan at gera, hevur fremsta plássið í tínum lívi? Paulus ápostul skrivaði: 'Aktið væl eftir, hvussu tit liva, ikki sum óvís, men sum vís, og keypið hina lagaligu tíð.' (Efesusbrævið 5:15, 16) Setur tú mark fyri, hvussu nógva tíð, tú brúkar til undirhald, hjálpir tað tær uttan iva at hava nóg nógva tíð til tað, sum „beinast er", ella meira týðandi – tað, sum gagnar tær andaliga. – Filippibrævið 1:10.

15 Tað er eisini skilagott at binda um heilan fingur, tá ið vit velja undirhald. Hvat vil tað siga? Hugsa aftur um dømið við fruktini. Skulu vit tryggja okkum, at vit ikki eta nakað spilt, skera vit ikki bara tað spilta burtur, men eisini eitt petti rundanum. Nakað líknandi er gott at gera, tá ið vit velja undirhald. Eru vit skilagóð, halda vit okkum ikki bara frá undirhaldi, sum beinleiðis gongur ímóti meginreglunum í Bíbliuni, men

---

14. (a) Hvat skulu vit hugsa um, tá ið vit velja undirhald? (b) Hvussu tryggja vit okkum, at okkara gudsdyrkan hevur fremsta plássið í okkara lívi?

15. Hví er tað best at binda um heilan fingur, tá ið vit velja undirhald?

eisini undirhaldi, ið er ivasamt, ella sum tykist at hava innihald, ið kann skaða okkum andaliga. (Orðtøkini 4:25-27) Halda vit okkum neyvt til Guds orð, hjálpir tað okkum at halda okkum frá skaðiligum undirhaldi.

„ALT, SUM REINT ER"

16 Tá ið sonn kristin velja undirhald, hugsa tey fremst av øllum um, hvørja áskoðan Jehova hevur. Í Bíbliuni ber til at síggja, hvørjar kenslur og normar Jehova hevur. Til dømis nevnir Sálomon kongur nógv, sum Jehova hatar, eitt nú 'falska tungu, hendur, ið úthella sakleyst blóð, hjarta, sum smíðar saman ónd ráð, føtur, sum eru kvikir til tað, ið ilt er'. (Orðtøkini 6:16-19) Hvussu eigur áskoðanin hjá Jehova at ávirka tína áskoðan? Sálmaskaldið segði: „Tit, ið elska HARRAN, hatið hitt illa!" (Sálmur 97:10) Títt val av undirhaldi má vísa, at tú veruliga hatar tað, sum Jehova hatar. (Galatiabrævið 5:19-21) Minst til, at tað er tað, sum tú gert, tá ið tú ert einsamallur, heldur enn tað, tú gert, tá ið tú ert saman við øðrum, sum avdúkar, hvør tú veruliga ert. (Sálmur 11:4; 16:8) So um tú hevur eitt inniligt ynski um at spegla Guds áskoðan á siðalag, fert tú altíð

16. (a) Hvussu kunnu vit vísa, at vit hava somu áskoðan sum Jehova á siðalag? (b) Hvussu kann tað gerast ein lívsháttur hjá tær at fylgja meginreglunum í Bíbliuni?

Áðrenn vit velja undirhald, eiga vit at spyrja okkum sjálv

- Hvussu kann tað ávirka mítt samband við Gud?
- Hvussu kann tað ávirka meg sjálvan?
- Hvussu kann tað ávirka onnur?

at taka avgerðir, sum eru í samljóði við meginreglurnar í Bíbliuni. Tað verður ein lívsháttur hjá tær. – 2 Korintbræv 3:18.

17 Hvussu kanst tú annars tryggja tær, at tú hevur somu áskoðan sum Jehova, tá ið tú velur undirhald? Hugsa um henda spurningin: 'Hvussu ávirkar hetta meg og mítt samband við Gud?' Áðrenn tú til dømis gert av at hyggja at einum ávísum filmi, kundi tú spurt teg sjálvan: 'Hvussu fer hesin filmurin at ávirka mína samvitsku?' Latið okkum kanna nakrar meginreglur, sum eru viðkomandi í hesum sambandi.

18 Ein týðandi meginregla er at finna í Filippibrævinum 4:8. Har stendur: „Alt, sum satt er, alt, sum sámiligt er, alt, sum rætt er, alt, sum reint er, alt, sum elskuligt er, alt, sum væl verður talað um, eina og hvørja dygd og ein og hvønn heiður – *hugsið um hetta!*" Gamban í tosaði Paulus ikki um undirhald, men um hugsanir hjartans, sum eiga at vera savnaðar um tað, sum Gudi dámar. (Sálmur 19:15) Men orðini hjá Paulusi kunnu eisini nýtast í sambandi við undirhald. Hvussu?

19 Spyr teg sjálvan: 'Er tað, sum eg velji av filmum, telduspølum, tónleiki ella øðrum sløgum av undirhaldi, ein hjálp til at fylla sinnið við tí, „sum reint er"?' Hvørjar myndir sita til dømis eftir í tínum huga, tá ið tú hevur hugt at einum filmi? Um tær eru dámligar, reinar og lívgandi, so veitst tú, at undirhaldið var gagnligt. Men um filmurin fær teg at hugsa um

---

17. Hvørjar spurningar eiga vit at seta okkum sjálvum, áðrenn vit velja undirhald?

18, 19. (a) Hvussu kann meginreglan í Filippibrævinum 4:8 hjálpa okkum at gera av, um okkara undirhald er gagnligt? (b) Hvørjar aðrar meginreglur kunnu hjálpa tær at velja gott undirhald? (Sí undirgreinina.)

tað, sum er óreint, so var undirhaldið niðurbrótandi, ja enntá skaðiligt. (Matteus 12:33; Markus 7:20-23) Hví? Tí at hugsa um tað, sum er siðleyst, órógvar tín innara frið, brennimerkir tína bíbliuvandu samvitsku og kann oyðileggja títt samband við Gud. (Efesusbrævið 5:5; 1 Timoteus 1:5, 19) Av tí at slíkt undirhald hevur ringa ávirkan á teg, mást tú seta tær fyri at skýggja tað.* (Rómbrævið 12:2) Ver sum sálmaskaldið, ið bað til Jehova: „Vend eygum mínum burtur frá at hyggja eftir fáfongd." – Sálmur 119:37.

HUGSA UM TAÐ, SUM ER BEST FYRI ONNUR

20 Paulus nevndi eina týðandi meginreglu, sum vit mugu minnast til, tá ið vit skulu taka avgerðir. Hann segði: „Alt er loyviligt – men ikki alt byggir upp! Eingin søki sítt egna, men ein og hvør næstans." (1 Korintbræv 10:23, 24) Hvussu kanst tú brúka hesa meginregluna, tá ið tú skalt velja gagnligt undirhald? Spyr teg sjálvan: 'Hvussu verða onnur ávirkað av tí undirhaldinum, sum eg velji?'

21 Kanska er eitt ávíst slag av undirhaldi sambært tínari samvitsku „loyviligt", ella í lagi. Men varnast tú, at nakrir av tínum trúarfelagum, sum hava eina strangari samvitsku, ikki halda, at slíkt undirhald er í lagi, velur tú kanska at halda teg frá tí. Hví? Tí tú ikki vilt „synda móti brøðrunum" – og als ikki „synda ... móti Kristusi", sum Paulus skrivaði – við at gera tað verri hjá tínum trúarfelagum at vera trúgvir móti Gudi. Tú vilt fylgja

* Fleiri meginreglur, ið kunnu brúkast í sambandi við undirhald, eru at finna í Orðtøkunum 3:31; 13:20; Efesusbrævinum 5:3, 4 og Kolossebrævinum 3:5, 8, 20.

20, 21. Hvussu kunnu vit brúka Fyrra Korintbræv 10:23, 24 í sambandi við at velja gagnligt undirhald?

áminningini: „Verið ongum til ástoyt!“ (1 Korintbræv 8:12; 10:32) Sonn kristin nú á døgum fylgja umhygnu og skynsomu leiðbeiningini frá Paulusi við at halda seg frá undirhaldi, sum kanska er „loyviligt“, men ikki „byggir upp“. – Rómbrævið 14:1; 15:1.

22 Men har er eitt aftrat, vit mugu minnast til, tá ið vit hugsa um tað, sum er best fyri onnur. Ein, sum hevur eina strangari samvitsku, eigur ikki at krevja, at øll í samkomuni skulu hava somu áskoðan sum hann, tá ið talan er um, hvat undirhald er hóskandi. Tá hevði hann verið sum ein bilførari, ið koyrir á landsvegnum og krevur, at øll, sum koyra har, skulu halda ta ferðina, sum honum dámar best. Eitt sovorðið krav hevði ikki verið rímiligt. Ein, sum hevur eina strangari samvitsku, má í kærleika virða trúarfelagar, ið hava eina aðra áskoðan á undirhald, sum tó er innan fyri karmarnar av bíbilskum meginreglum. Ger hann tað, vísir hann, at hann er rímiligur. – Filippibrævið 4:5, *NW*; Prædikarin 7:16.

23 Hvussu kanst tú so tryggja tær, at tú velur gagnligt undirhald? Halt teg langt burtur frá undirhaldi, sum týðiliga lýsir spiltar, siðleysar gerðir, ið Guds orð eyðsæð fordømir. Fylg bíbilskum meginreglum, ið kunnu brúkast í sambandi við undirhald, sum ikki beinleiðis er nevnt í Bíbliuni. Slepp tær undan undirhaldi, ið kann skaða tína samvitsku, og ver fúsur at siga nei til undirhald, sum kanska býður øðrum ímóti, serliga tínum trúarfelagum. Tín avgerð um at bera teg soleiðis at ærir Gud og hjálpir tær og tínari familju at halda tykkum í kærleika Guds.

---

22. Hví loyva Guds tænarar sær at hava ymiska áskoðan á undirhald?
23. Hvussu kanst tú tryggja tær, at tú velur gagnligt undirhald?

Hevur tú somu áskoðan á lívið sum Gud?

„Hjá Tær er kelda lívsins.“
– SÁLMUR 36:10.

OKKARA himmalski Faðir hevur givið okkum eina sera dýrabara gávu – lívið sum vitig menniskju, ið duga at spegla hansara eginleikar. (1 Mósebók 1:27) Henda dýrabara gávan ger okkum før fyri at hugsa um og skilja, hvussu meginreglurnar í Bíbliuni gagna okkum. Fylgja vit hesum meginreglunum, kunnu vit gerast andaliga búgvin menniskju, ið elska Jehova, og sum „við at nýta sansarnar hava vant teir at skilja millum gott og ilt“. – Hebrearabrævið 5:14.

2 At vit eru før fyri at skilja, hvussu meginreglurnar í Bíbliuni gagna okkum, hevur serliga stóran týdning í dag. Heimurin, vit liva í, er nevniliga vorðin so fløktur, at líkamikið hvussu nógvar lógir vit hava, so kunnu tær ikki fevna um eina og hvørja hugsandi støðu. Læknavísindini eru eitt gott dømi um hetta, serstakliga tá ið hugsað verður um heilivág og viðgerðarhættir, sum fevna um nýtslu av blóði. Hetta er nakað, sum øll, ið vilja akta Jehova, taka í álvara. Skilja vit meginreglurnar í Bíbliuni, verða vit før fyri at taka klókar avgerðir, sum eru í samsvari við okkara samvitsku, og sum halda okkum í kærleika Guds. (Orðtøkini 2:6-11) Latið okkum kanna nakrar av hesum meginreglunum.

LÍVIÐ OG BLÓÐIÐ ERU HEILAG

3 Fyrstu ferð, Jehova gjørdi vart við, at tætt samband er

1, 2. Hvør gáva frá Gudi er serliga dýrabar í dag, og hví?
3, 4. Nær hoyra vit fyrstu ferð í Bíbliuni, at blóðið er heilagt, og hvørjar meginreglur er tað grundað á?

millum lívið og blóðið, og at lívið og blóðið eru heilag, var stutt eftir, at Káin drap Ábel. Gud segði við Káin: „Blóð bróður tíns rópar til Mín av jørðini.“ (1 Mósebók 4:10) Í eygum Jehova ímyndaði blóð Ábels hansara lív, sum á ógvisligan hátt var kvett av. Tí kann sigast, at blóð Ábels rópti til Gud um hevnd. – Hebrearabrævið 12:24.

4 Eftir Vatnflóðina á Nóa døgum gav Gud menniskjunum loyvi at eta dýrakjøt, men ikki blóðið í tí. Gud segði: „Tó – kjøt við sálini, tað er blóðinum, í, tað skulu tit ikki eta. Men fyri tykkara egna blóð krevji Eg hevnd.“ (1 Mósebók 9:4, 5) Hetta boðið er galdandi fyri allar eftirkomararnar hjá Nóa, heilt fram til okkara tíð. Tað staðfestir tað, sum lá í tí, Gud hevði sagt við Káin – at blóðið ímyndar sálina, ella lívið, hjá øllum skapningum. Boðið vísir eisini týðiliga, at Jehova, sum er kelda lívsins, fer at krevja øll tey, sum vanvirða lívið og blóðið, til svars. – Sálmur 36:10.

5 Tað, at blóðið ímyndar lívið, og at tað er heilagt, varð endurspeglað í Móselógini. Í Triðju Mósebók 17:10, 11 stendur: „Um onkur ... etur nakað sindur av blóði, so vendi Eg ásjón Míni móti tí, sum blóðið etur, og týni hann úr fólki hansara. Tí sálin í øllum holdi er í blóðinum, og Eg havi givið tykkum tað at nýta á altarinum at gera bót fyri sálir tykkara; tað er blóðið, ið ger bót, tí sálin er í tí.“* – Sí rammuna „Blóð kann bøta synd“ á síðu 76.

6 Tá ið eitt dýr varð dripið, og blóðið ikki varð brúkt á altarinum, skuldi tað renna út á jørðina. Soleiðis fór lívið ímyndarliga sæð aftur til upprunaliga eigaran, Jehova. (5 Mósebók 12:16; Ezekiel 18:4) Men legg kortini til merkis, at

---

* Viðvíkjandi orðingini hjá Gudi, um at „sálin í øllum holdi er í blóðinum“, hevur eitt tíðarrit skrivað: „Umframt at orðingin kann hava ímyndarligan týdning, er hon eisini sonn heilt bókstavliga: lívið er treytað av teimum ymisku sløgunum av blóðkroppum.“ – *Scientific American.*

5, 6. Hvussu vísti Móselógin, at blóðið bæði er heilagt og dýrabart? (Sí eisini rammuna á síðu 78.)

BLÓÐ KANN BØTA SYND

Í Guds orði verður blóðið javnmett við lívið. Tí kundi ein ísraelsmaður í forðum, sum hevði brotið Guds boð, sleppa undan fordøming Jehova, um hann angraði og læt eitt dýraoffur á altari Guds. (3 Mósebók 4:27-31) Eitt slíkt offur gjørdi bót fyri hansara syndir, men bert fyribils.

Í Bíbliuni fevnir orðingin „at gera bót" um tað „at býta um" ella „at fjala", sum til dømis tá ið rætta lokið fullkomiliga fjalir opið á einum ílati. Tað er eyðsæð, at einki dýraoffur fullkomiliga kundi „fjala", ella gera bót fyri, syndirnar hjá einum menniskja. Men dýraoffur vístu tó fram til tað komandi fullkomna bótarofrið. – Hebrearabrævið 10:1, 4.

Tann bótin var fingin til vegar „við ofring likams Jesu Krists eina ferð fyri allar". (Hebrearabrævið 10:10) Fullkomna menniskjalívið hjá Jesusi, ið var umboðað við hansara dýrabara blóði – „sum av lýtaleysum og ódálkaðum lambi" – svaraði fult og heilt til lívið, Ádam misti. (1 Pætur 1:19) Soleiðis varð rættvísi útint á ein vakran og kærleiksfullan hátt, og okkara „æviga endurloysing" gjørdist møgulig. – Hebrearabrævið 9:11, 12; Jóhannes 3:16; Opinberingin 7:14.

ísraelsfólk ikki høvdu fyri neyðini at fara so vítt sum at kroysta hvønn blóðdropa úr kjøtinum, tey ætlaðu at eta. Var dýrið dripið á rættan hátt og blóðið runnið av, kundi ein ísraelsmaður við góðari samvitsku eta tað, tí so var virðing víst Lívgevaranum.

7 Dávid, sum var ein maður „eftir hjarta [Guds]", skilti

7. Hvussu vísti Dávid, at hann hevði virðing fyri, at blóðið er heilagt?

meginreglurnar, ið búðu undir Guds lóg um blóðið. (Ápostlasøgan 13:22) Einaferð, tá ið Dávid var sera tystur, brutu tríggir av hansara monnum seg gjøgnum tilhaldið hjá fíggindanum, drógu vatn upp úr einum brunni og komu til hansara við tí. Hvat gjørdi Dávid? Hann segði: „Skuldi eg drukkið blóð teirra manna, ið settu lív sítt í váða og fóru avstað!“ Dávid metti vatnið sum blóðið hjá hesum monnunum. Tí 'helti hann tað út' fyri Jehova, hóast hann var tystur. – 2 Sámuel 23:15-17.

8 Umleið 2.400 ár eftir at forboð varð sett fyri at eta blóð á Nóa døgum, og umleið 1.500 ár eftir at Lógarsáttmálin kom í gildi, læt Jehova stýrandi ráðið hjá tí fyrstu kristnu samkomuni skriva hetta: 'Heilagi Andin og vit hava gjørt av, onga aðra byrði at leggja á tykkum enn hetta – sum neyðugt er – at tit halda tykkum frá tí, ið ofrað er til avgudar, frá blóði, frá tí, sum kvalt er, og frá siðloysi.' – Ápostlasøgan 15:28, 29.

9 Tað er eyðsæð, at stýrandi ráðið í fyrstu øld skilti, at blóðið er heilagt, og at tað er líka so skeivt at misnýta blóð sum at taka lut í avgudadyrkan ella at fremja kynsligt siðloysi. Sonn kristin í dag hava somu áskoðan. Og av tí at tey fylgja bíbilskum meginreglum, tá ið tey taka avgerðir viðvíkjandi nýtslu av blóði, gleða tey Jehova.

NÝTSLA AV BLÓÐI Í LÆKNAVIÐGERÐ

10 Jehova vitni skilja, at um tey skulu 'halda seg frá blóði', merkir tað, at tey hvørki taka við blóðflutningi, lata øðrum sítt blóð ella loyva, at tað verður goymt til blóðflutning seinni. Av tí at tey virða Guds lóg, vilja tey heldur ikki hava viðgerð við teimum fýra høvuðslutunum í blóðinum, sum eru reyðir blóðkroppar, hvítir blóðkroppar, blóðplátur og blóðvæta.

8, 9. Broyttist Guds áskoðan á lívið og blóðið, tá ið kristna samkoman varð stovnað? Greið frá.

10, 11. (a) Hvussu meta Jehova vitni flutning av fullblóði og av teimum fýra høvuðslutunum í blóðinum? (b) Á hvørjum økjum viðvíkjandi blóði hava Guds tænarar møguliga ymiska meining?

VIT MUGU VIRÐA LÍVIÐ HJÁ DÝRUM

Hóast Jehova loyvir okkum at drepa dýr fyri at fáa mat og klæði, ella um tey eru til vanda fyri okkum, mugu vit útinna henda myndugleikan við skili og á góðan hátt. (1 Mósebók 3:21; 9:3) Vit drepa ikki dýr bara til stuttleika. Nei, vit skulu heldur royna at líkjast Jehova, sum vil, at øll dýr skulu hava tað gott, eisini teir smáu spurvarnir. – Jónas 4:11; Matteus 10:29, *NW*.

Guds umsorgan sást aftur í Móselógini. (2 Mósebók 23:4, 5, 12; 5 Mósebók 22:10; 25:4) Í samsvari við hesa lógina stendur í Orðtøkunum 12:10: „Hin rættvísi hevur umsorgan fyri fæi sínum, men hjarta hins gudleysa er hart." Skjótt vera hvørki gudleys ella teirra óndu gerðir til longur.

11 Í dag verða hesir høvuðslutirnir ofta býttir sundur í smærri eindir, sum verða nýttar á fjølbroyttan hátt. Kann ein tænari hjá Gudi taka við slíkum úrdráttum? Metir hann teir sum „blóð"? Hvør einstakur av okkum má sjálvur taka støðu til hetta. Tað sama er galdandi í viðgerðum, sum fevna um okkara egna blóð – eitt nú tað at reinsa blóðið (hæmodialysa), at tynna blóðið (hæmodilutión) ella at endurvinna blóðið (cell-saver) – tó treytað av, at tað ikki hevur verið goymt. – Sí uppískoytið á síðunum 215-218.

12 Ger tað mun hjá Jehova, hvat vit velja at gera í samvitskuspurningum? Ja, tí hann er sera áhugaður í at vita, hvat vit hugsa, og hví vit gera, sum vit gera. **(Les Orðtøkini 17:3; 24:12.)** Tá ið vit hava biðið til Jehova um hjálp

---

12. Hvørja áskoðan eiga vit at hava á samvitskuspurningar, og hvussu skulu vit bera okkum at í tílíkum málum?

og hava leitað fram upplýsingar um ein ávísan heilivág ella eina ávísa læknaviðgerð, eiga vit at fylgja okkara bíbliuvandu samvitsku. (Rómbrævið 14:2, 22, 23) Onnur skulu sjálvandi ikki noyða okkum at gera, sum tey høvdu gjørt, og vit skulu heldur ikki spyrja onnur, hvat tey høvdu gjørt, um tey vóru í okkara støðu. Í tílíkum málum eigur hvør einstakur at „bera sína egnu byrði“.* – Galatiabrævið 6:5; Rómbrævið 14:12; sí rammuna „Meti eg blóðið at vera heilagt?“ á síðu 81.

LÓGIRNAR HJÁ JEHOVA VÍSA, AT HANN ER EIN GÓÐUR FAÐIR

13 Lógirnar og meginreglurnar í Bíbliuni vísa, at Jehova bæði er ein vísur lóggevari og ein góður faðir, sum elskar síni børn og vil, at tað skal gangast teimum væl. (Sálmur 19:8-12) Hóast boðið um at ’halda seg frá blóði’ ikki varð givið sum eitt ráð um heilsu, verjir tað okkum kortini fyri trupulleikum, ið kunnu standast av blóðflutningi. (Ápostlasøgan 15:20) Tá ið talan er um nútímans skurðviðgerð, meta nógvir læknar í roynd og veru blóðleysa viðgerð sum „ta bestu viðgerðina“. Hjá sonnum kristnum staðfestir ein slík menning, at Jehova er einastandandi í vísdómi og í kærleika. – **Les Esaias 55:9;** Jóhannes 14:21, 23.

14 Guds umsorgan fyri sínum fólki kom til sjóndar í nógvum av lógunum til ísraelsfólk. Til dømis var tað eitt krav, at tey skuldu gera rimaverk rundanum á húsatekjunum til at verja fyri vanlukkum, tí nógv av dagliga virkseminum fór fram har. (5 Mósebók 22:8; 1 Sámuel 9:25, 26; Nehemias 8:16; Ápostlasøgan 10:9) Gud kravdi eisini, at ansað varð eftir

---

* Sí *Vågn op!* august 2006, síðurnar 3-12, sum Jehova vitni hava givið út.

---

13. Hvat vísa lógirnar og meginreglurnar hjá Jehova um hann? Lýs við einum dømi.
14, 15. (a) Í hvørjum lógum kom tað til sjóndar, at Gud elskaði sítt fólk? (b) Hvussu kanst tú fylgja meginreglunum undir hesum trygdarásetingunum?

vandamiklum tarvum. (2 Mósebók 21:28, 29) Vórðu hesar lógirnar skúgvaðar til viks, var tað tekin um vantandi virðing fyri øðrum og kundi hava blóðskyld við sær.

15 Hvussu kanst tú fylgja meginreglunum, sum eru grundarlagið undir hesum lógunum? Tað kanst tú millum annað gera við at hugsa um bilin hjá tær, um hvussu tú koyrir, um dýrini hjá tær, heimið, arbeiðsplássið og tað, sum tú velur at stuttleika tær við. Óhapp eru í nøkrum londum størsta deyðsorsøkin millum ungdómar, ofta tí tey vága ov nógv. Men ung, sum vilja halda seg í kærleika Guds, virðismeta lívið og leita ikki eftir spenningi í vandamiklum frítíðarítrivi. Tey eru ikki so tápulig, at tey halda, at tey eru ósærilig, bara tí tey eru ung. Nei, tey njóta ungdómin við ikki at koma sær í vanda. – Prædikarin 11:9, 10.

16 Sjálvt ófødda barnið er dýrabart í Guds eygum. Um onkur í fortíðar Ísrael voldi einari barnakonu skaða og *annaðhvørt* hon *ella* ófødda barnið doyði av tilburðinum, metti Gud tann seka sum ein manndrápara, og viðkomandi skuldi gjalda 'lív fyri lív'.* **(Les Aðru Mósebók 21:22, 23.#)** Hugsa tær so, hvussu Jehova man hava tað, tá ið hann sær, at óteljandi ófødd børn á hvørjum ári verða tikin við fosturtøku vegna sjálvsøkni og siðloysi.

---

* Hóast nakrar bíbliutýðingar endurgeva hesi ørindini soleiðis, at sipað verður til, at tað bara hevði deyðarevsing við sær, um tað var mamman, sum doyði, siga nakrir bíbliuviðmerkjarar, at orðingin í hebraiska tekstinum „eftir øllum at døma útilokar, at orðini kunnu vísa til eina vanlukku, ið bara rakti kvinnuna sjálva". Legg eisini til merkis, at Bíblian einki sigur um, at aldurin á fostrinum hevði týdning fyri dómin hjá Jehova.

2 Mósebók 21:22, 23 (*NW*): „Fara menn at berjast og fíra undir barnakonu, so hon eigur, men eingin deyðsvanlukka hendir, so skal hann, ið gjørdi tað, lata tað í bót, sum maður konuna áleggur honum; hann skal lata tað, ið dómararnir áleggja. Men hendir ein deyðsvanlukka, so skal lív latast fyri lív."

---

16. Hvør bíbilsk meginregla er galdandi í sambandi við fosturtøku? (Sí eisini fyrru undirgreinina.)

METI EG BLÓÐIÐ AT VERA HEILAGT?

Meginregla: 'Haldið tykkum frá blóði.' – Ápostlasøgan 15:20.

Spyr teg sjálvan

- Dugi eg at greiða frá, hvør munur er á blóðúrdráttum og teimum fýra høvuðslutunum í blóðinum?*
- Hví skal eg sjálvur gera av, um eg vil góðtaka ella ikki góðtaka blóðúrdráttir ella ávísa læknaviðgerð, har mítt egna blóð verður nýtt? – Rómbrævið 12:2; Galatiabrævið 6:5.
- Hvussu kann eg greiða mínum lækna frá, hví eg góðtaki ella ikki góðtaki viðgerð við blóðúrdráttum? – Orðtøkini 13:16.

* Fleiri upplýsingar eru at finna í uppískoytinum á síðunum 215-216.



17 Men hvat um ein kvinna hevur fingið fosturtøku, áðrenn hon kom at kenna sannleikan í Bíbliuni? Merkir tað

17. Hvussu kanst tú ugga eina kvinnu, sum hevur fingið fosturtøku, áðrenn hon kom at kenna sannleikan í Bíbliuni?

so, at Gud ikki vil vísa henni miskunn? Als ikki! Ein, sum veruliga angrar, kann vera vísur í, at Jehova fyrigevur vegna úthelta blóð Jesusar. (Sálmur 103:8-14; Efesusbrævið 1:7) Jesus segði sjálvur: „Eg eri ikki komin at kalla rættvís, men syndarar, til umvendingar." – Lukas 5:32.

HATA IKKI!

18 Umframt at vit ikki skulu gera øðrum nakað ilt, vil Jehova, at vit skulu beina tað burtur úr okkara hjarta, sum ofta elvir til blóðúthelling, nevniliga hatur. „Hvør tann, ið hatar bróður sín, er manndrápari," skrivaði Jóhannes ápostul. (1 Jóhannes 3:15) Ein sovorðin persónur hevur ikki bert mótvilja móti bróður sínum, men vildi ynskt, at hann var deyður. Hansara illvilji kemur kanska til sjóndar sum óreint slatur ella falskar ákærur, ið, um tær vóru sannar, høvdu elvt til Guds dóm. (3 Mósebók 19:16; 5 Mósebók 19:18-21; Matteus 5:22) Tí er tað sera umráðandi, at vit slíta ein og hvønn feril av hatri, sum kundi búð í okkara hjarta, upp við rót. – Jákup 1:14, 15; 4:1-3.

19 Tey, ið hava somu áskoðan á lívið sum Jehova, og sum vilja halda seg í hansara kærleika, skýggja eisini alt slag av harðskapi. Sálmur 11:5 sigur: „Tann, ið elskar órætt [harðskap, *NW*], hatar sál Hansara." Hesi orðini siga okkum ikki bara nakað um persónleikan hjá Gudi, men vísa eisini á eina meginreglu, sum eigur at ávirka okkara lívsvátt. Hon fær tey, sum elska Gud, at halda seg frá øllum undirhaldi, ið kann fáa tey at dáma harðskap. Á sama hátt eggja orðini um, at Jehova er „Gud friðarins", hansara tænarum til at fylla sinn og hjarta við øllum, sum er elskuligt, gott og dámligt, tí tað fremur frið. – **Les Filippibrævið 4:8, 9.**

HALT TEG FRÁ BLÓÐSEKUM SAMSKIPANUM

20 Í Guds eygum hevur heimurin hjá Satani, allur sum

---

18. Hvat er sambært Bíbliuni ofta orsøkin til blóðúthelling?
19. Hvussu metir ein persónur, ið letur seg leiða av meginreglunum í Bíbliuni, skriftstøð sum Sálm 11:5 og Filippibrævið 4:8, 9?
20-22. Hvørja støðu hava sonn kristin til heimin, og hví?

Hvussu kann eg greiða einum lækna frá mínari avgerð viðvíkjandi blóðúrdráttum?

hann er, drigið blóðskyld oman yvir seg. Heimsins politisku skipanir, ið verða lýstar í Bíbliuni sum glúpsk dýr, hava dripið milliónir av menniskjum, eisini nógvar tænarar hjá Jehova. (Dániel 8:3, 4, 20-22; Opinberingin 13:1, 2, 7, 8) Hesar dýralíknandi maktirnar hava saman við handils- og vísindaheiminum framleitt nøkur av teimum ræðuligastu vápnunum, ein kann hugsa sær, og forvunnið sær nógvan pening av tí. Ja, eingin ivi er um, „at allur heimurin liggur í hinum illa“. – 1 Jóhannes 5:19.

21 Av tí at Jesu lærisveinar ’ikki eru av heiminum’, men halda seg púra uttanveltaðar í sambandi við politikk og kríggj, draga teir ikki blóðskyld oman yvir seg, hvørki sum einstaklingar ella sum heild.* (Jóhannes 15:19; 17:16) Teir taka eftir Jesusi og løna ikki aftur við harðskapi, tá ið teir verða atsøktir. Tvørturímóti elska teir sínar fíggindar og biðja enntá fyri teimum. – Matteus 5:44; Rómbrævið 12:17-21.

---

* Sí kapittul 5, „Hvussu vísa vit, at vit ikki eru av heiminum?“

22 Fremst av øllum hava sonn kristin einki at gera við ta mest blóðseku samskipanina, ið er til, 'Bábylon hina stóru', heimsveldið av følskum átrúnaði. Biblian sigur: „Í henni varð funnið blóð profeta og heilagra – og alra teirra, ið myrd eru á jørðini." Tí fáa vit ávaringina: „Farið út frá henni, fólk mítt!" – Opinberingin 17:6; 18:2, 4, 24.

23 At fara út frá Bábylon hini stóru krevur meira enn bert at melda seg úr einum trúarsamfelagi. Tað krevur eisini, at vit hata óndu gerðirnar, sum falskur átrúnaður góðtekur ella opinlýst stuðlar – eitt nú siðloysi, politiskari uppíblanding og grammari tráan eftir ríkidømi. **(Les Sálm 97:10;** Opinberingin 18:7, 9, 11-17) Slíkt hevur ferð eftir ferð elvt til blóðskyld.

24 Áðrenn vit tóku undir við sannari tilbiðing, stuðlaðu vit øll onkursvegna skipanini hjá Satani og drógu harvið eina ávísa blóðskyld oman yvir okkum. Men av tí at vit broyttu okkara atburð, fingu trúgv á Kristi endurloysingaroffur og vígdu okkara lív til Gud, vísti Jehova okkum miskunn og gav okkum andaliga verju. (Ápostlasøgan 3:19) Henda verjan minnir okkum á griðstaðirnar í fortíðar Ísrael. – 4 Mósebók 35:11-15; 5 Mósebók 21:1-9.

25 Hvussu virkaði henda skipanin? Um ein ísraelsmaður av óvart varð atvold til, at onkur doyði, skuldi hann flýggja til ein av griðstøðunum. Eftir at skikkaðir dómarar høvdu tikið eina avgerð í málinum, noyddist hin óviljaði manndráparin at verða verandi í griðstaðnum, inntil høvuðspresturin doyði. Síðani kundi hann sjálvur gera av, hvar hann vildi búgva. Er hetta ikki eitt frálíkt dømi um, hvussu miskunnsamur Gud er, og hvussu virðismikið eitt mannalív er í hansara eygum? Eins og griðstað-

---

23. Hvat ber tað í sær at fara út frá Bábylon hini stóru?

24, 25. (a) Við støði í hvørjum kann Gud vísa einum angrandi persóni, sum hevur drigið blóðskyld oman yvir seg, miskunn? (b) Hvørja skipan í fortíðar Ísrael minnir hetta okkum á?

irnir í forðum verjir tann fyriskipanin, Gud hevur gjørt við støði í Kristi endurloysingarofri, okkum, so vit ikki doyggja afturfyri, at vit óviljað hava brotið hansara boð um, at lívið og blóðið eru heilag. Virðismetir tú hesa fyriskipanina? Hvussu kanst tú vísa tað? Eitt, tú kanst gera, er at hjálpa øðrum at taka við verjuni, Gud bjóðar, serliga tá ið hugsað verður um, hvussu nær stóra trongdin er. – Matteus 24:21; 2 Korintbræv 6:1, 2.

VÍS, AT TÚ VIRÐISMETIR LÍVIÐ VIÐ AT BOÐA UM RÍKIÐ

26 Guds fólk á okkara døgum er í eini líknandi støðu sum Ezekiel profetur, ið Jehova setti til andaligan vaktara yvir húsi Ísraels. „Táið tú hoyrir orð av munni Mínum, skalt tú ávara tey frá Mær," segði Jehova. Um Ezekiel ikki gjørdi, sum hann var biðin, skuldi blóðið av teimum, sum vórðu dripin, tá ið Jerusalem varð drigið til svars fyri sínar gerðir, krevjast av hansara hond. (Ezekiel 33:7-9) Men Ezekiel var lýðin og dró ikki blóðskyld oman yvir seg.

27 Allur heimur Satans verður skjótt fyribeindur. Tí meta Jehova vitni tað bæði sum eina skyldu og ein framíhjárætt at boða um „hevndardag Guds" og hansara ríki. (Esaias 61:2; Matteus 24:14) Gert tú títt ítasta í hesum týðandi arbeiðinum? Paulus ápostul tók uppgávuna at boða gleðiboðskapin í álvara. Av tí sama kundi hann siga: „Eg eri reinur fyri blóð alra. Tí eg havi einki hildið aftur, men kunngjørt tykkum alt ráð Guds." (Ápostlasøgan 20:26, 27) Ein frálík fyrimynd hjá okkum at taka eftir!

28 Tað er tó ikki nóg mikið at hava somu áskoðan á lívið og blóðið sum Jehova, um vit skulu halda okkum í hansara kærleika. Vit mugu eisini halda okkum rein, ella heilag, í hansara eygum, sum næsti kapittulin snýr seg um.

26-28. Hvussu líkist okkara støða í dag tí hjá Ezekieli profeti, og hvussu kunnu vit halda okkum í kærleika Guds?

Gud elskar tey, sum eru rein

„Tú vísir Teg reinan móti hinum reina.“
– SÁLMUR 18:27.

EIN mamma ger sonin hjá sær kláran at fara út. Hon syrgir fyri, at hann er væl vaskaður, og at klæðini eru rein og nosslig. Hon veit, at reinføri er umráðandi fyri heilsuna. Hon veit eisini, at útsjóndin hjá soninum sigur nakað um foreldrini.

2 Okkara himmalski Faðir, Jehova, vil, at hansara tænarar skulu vera reinir. Hansara orð sigur: „Tú vísir Teg reinan móti hinum reina.“* (Sálmur 18:27) Jehova elskar okkum, og hann veit, at tað er til okkara egna besta, at vit eru rein.

* Orðið 'reinur' á upprunamálinum lýsir av og á bókstavligt reinføri, men oftari siðiligt ella andaligt reinføri.

1-3. (a) Hví syrgir ein mamma fyri, at sonur hennara er reinur og nossligur? (b) Hví vil Jehova, at hansara tænarar skulu vera reinir, og hvat eggjar okkum til at halda okkum rein?

Hann væntar eisini av okkum, sum eru hansara vitni, at vit geva øðrum eina dámliga mynd av honum. Tá ið vit eru rein og hava góðan atburð, æra vit av sonnum Jehova og hansara heilaga navn heldur enn at vanæra tað. – Ezekiel 36:22; **les Fyrra bræv Pæturs 2:12.**

3 At vita, at Gud elskar tey, sum eru rein, eggjar okkum til at halda okkum rein. Vit elska Jehova, og tí vilja vit æra hann í øllum. Vit vilja eisini halda okkum í hansara kærleika. Latið okkum tí kanna, hví vit mugu halda okkum rein, hvat tað merkir at vera reinur, og hvussu vit kunnu halda okkum rein. Tað kann vísa okkum, um vit eiga at betra okkum á nøkrum økjum.

HVÍ MUGU VIT HALDA OKKUM REIN?

4 Jehova leiðir okkum millum annað við at vera ein fyrimynd. Tí sigur Bíblian, at vit skulu 'verða eftirfylgjarar Guds'. (Efesusbrævið 5:1) Týdningarmesta orsøkin til, at vit mugu halda okkum rein, er, at Jehova Gud, sum vit tilbiðja, er fullkomiliga reinur og heilagur. **– Les Triðju Mósebók 11:44, 45.**

5 Reinleikin hjá Jehova sæst, eins og nógvir av hansara eginleikum, týðiliga í hansara sjónliga skapanarverki. (Rómbrævið 1:20) Jørðin varð skapt til at vera eitt reint heim hjá menniskjunum. Jehova hevur sett í verk vistfrøðiskipanir, sum reinsa luftina og vatnið. Ávísar smáverur umskapa rusk til óskaðiligt tilfar. Vísindafólk hava gagnnýtt nakrar av hesum svongu smáverunum til at taka upp eftir oljulekum og aðrari dálking, sum er farin fram vegna menniskjans sjálvsøkni og grammleika. Tað er eyðsæð, at reinleiki hevur stóran týdning fyri 'tann, sum skapti jørðina'. (Jeremias 10:12) Reinleiki eigur eisini at hava stóran týdning fyri okkum.

4, 5. (a) Hvat er týdningarmesta orsøkin til, at vit mugu halda okkum rein? (b) Hvussu sæst reinleikin hjá Jehova týðiliga í hansara sjónliga skapanarverki?

6 Ein onnur orsøk til, at vit mugu halda okkum rein, er, at Jehova, okkara Fullveldisharri, krevur, at tey, sum tilbiðja hann, eru rein. Í Lógini, sum Jehova gav ísraelsfólki, vóru reinleiki og tilbiðing samantvinnað. Á bótardegnum skuldi høvuðspresturin sambært Lógini vaska sær ikki bara eina ferð, men tvær ferðir. (3 Mósebók 16:4, 23, 24) Prestar, sum gjørdu tænastu, skuldu vaska sær um hendurnar og føturnar, áðrenn teir ofraðu til Jehova. (2 Mósebók 30:17-21; 2 Krønikubók 4:6) Lógin vísti á umleið 70 sløg av bókstavligari óreinsku og aðrari óreinsku, sum gjørdi, at ein ikki kundi taka lut í hátíðarligu tilbiðingini. So leingi ein ísraelsmaður var óreinur, kundi hann ikki taka lut í tilbiðingini, og í ávísum førum hevði tað deyðarevsing við sær, um hann gjørdi tað. (3 Mósebók 15:31) Ein og hvør, sum ikki vildi fylgja ásetingunum um reinføri, eitt nú at vaska sær um kroppin og at vaska klæðini hjá sær, skuldi „oyðast úr samkomuni". – 4 Mósebók 19:17-20.

7 Sjálvt um vit ikki skulu fylgja Móselógini, hjálpir hon okkum at skilja, hvat Gud heldur um ymiskt. Móselógin vísti týðiliga, at Gud kravdi, at tey, sum tilbóðu hann, vóru rein. Og Jehova er ikki broyttur. (Malakias 3:6) Hann góðtekur bara okkara tilbiðing, um hon er „rein og lýtaleys". (Jákup 1:27) Tí mugu vit vita, hvat hann væntar av okkum í hesum sambandi.

HVAT MERKIR TAÐ AT VERA REINUR Í GUDS EYGUM?

8 Í Bíbliuni sipar reinleiki ikki bert til bókstavligan reinleika. At vera reinur í Guds eygum hevur við allar síður av okkara lívi at gera. Jehova væntar, at vit halda okkum rein á fýra grundleggjandi økjum – andaliga, siðiliga, í okkara

6, 7. Hvussu vísti Móselógin, at tey, sum tilbóðu Jehova, skuldu vera rein?
8. Á hvørjum økjum væntar Jehova, at vit eru rein?

tonkum og bókstavliga. Latið okkum kanna, hvat hvørt av hesum økjunum fevnir um.

9 *Andaligur reinleiki.* Stutt sagt merkir andaligur reinleiki, at sonn tilbiðing ikki verður blandað við falska tilbiðing. Tá ið ísraelsfólk vendu aftur til Jerusalem úr Bábylon, skuldu tey fylgja hesum boðnum frá Gudi: „Farið út haðani, nemið einki óreint! ... Reinsið tykkum!“ (Esaias 52:11) Ísraelsfólk fór fremst av øllum heimaftur, tí tey skuldu endurreisa sonnu tilbiðingina. Og tilbiðingin mátti vera rein. Hon mátti ikki vera dálkað av gudvanærandi lærum, gerðum og siðum úr gudsdyrkanini í Bábylon.

10 Sum sonn kristin mugu vit ansa væl eftir ikki at lata okkum dálka av falskari tilbiðing. **(Les Fyrra Korintbræv 10:21.)** Vit mugu vera sera varin hesum viðvíkjandi, tí ávirkanin frá følskum átrúnaði er allastaðni. Í nógvum londum hava ymiskar siðvenjur, tiltøk og ritual samband við falskar trúarlærur, eitt nú læruna um, at okkurt innan í okkum livir víðari eftir deyðan. (Prædikarin 9:5, 6, 10) Sonn kristin halda seg frá siðum, sum hava við falskan átrúnað at gera.* Vit lata okkum ikki trýsta til at slaka viðvíkjandi tí, Bíblian hevur ásett um reina tilbiðing. – Ápostlasøgan 5:29.

11 *Siðiligur reinleiki.* At vera siðiliga reinur ber í sær at halda seg frá øllum slagi av kynsligum siðloysi. **(Les Efesusbrævið 5:5.)** Tað er lívsneyðugt, at vit halda okkum siðiliga rein. Sum vit fáa at síggja í næsta kapitlinum í hesi bókini, mugu vit flýggja undan kynsligum siðloysi, um vit skulu halda okkum í kærleika Guds. Tey, sum fremja

---

* Í 13. kapitli í hesi bókini verða ymiskar høgtíðir og ymiskir siðir viðgjørdir, sum sonn kristin halda seg frá.

9, 10. Hvat merkir tað at vera andaliga reinur, og hvørjum halda sonn kristin seg frá?

11. Hvat ber siðiligur reinleiki í sær, og hví er tað lívsneyðugt, at vit halda okkum siðiliga rein?

kynsligt siðloysi uttan at angra, „skulu ikki arva ríki Guds“. (1 Korintbræv 6:9, 10, 18) Í Guds eygum eru tey 'viðurstyggilig'. Og gerast tey ikki siðiliga rein, er „lutur teirra ... hin annar deyðin“. – Opinberingin 21:8.

12 *Reinur hugsanarháttur.* Hugsanir elva til gerðir. Lata vit skeivar hugsanir festa røtur í okkara sinni og hjarta, er tað ógvuliga sannlíkt, at vit fyrr ella seinni gera okkurt skeivt. (Matteus 5:28; 15:18-20) Men fylla vit okkara sinni við reinum tonkum, eggjar tað okkum til at halda okkara atburð reinan. **(Les Filippibrævið 4:8.)** Hvussu kunnu vit varðveita ein reinan hugsanarhátt? Eitt, vit kunnu gera, er at sleppa okkum undan øllum undirhaldi, sum kundi dálkað okkara hugsanarhátt.* Haraftrat kunnu vit fylla okkara sinni við reinum tonkum, um vit regluliga kanna Guds orð. – Sálmur 19:9, 10.

13 Skulu vit verða verandi í kærleika Guds, er tað alneyðugt, at vit halda okkum rein andaliga, siðiliga og í tonkunum. Hesar síðurnar av reinleika verða viðgjørdar gjøllari í øðrum kapitlum her í bókini. Latið okkum nú kanna tað fjórða økið, sum er *bókstavligur reinleiki.*

HVUSSU HALDA VIT OKKUM BÓKSTAVLIGA REIN?

14 Bókstavligur reinleiki fevnir bæði um at halda okkum sjálv rein og alt rundan um okkum. Er slíkur reinleiki eitt persónligt mál, sum onnur ikki skulu blanda seg uppí? Tað er tað ikki hjá teimum, ið tæna Jehova. Sum vit longu hava umrøtt, hevur okkara bókstavligi reinleiki týdning fyri Jehova, ikki bara tí tað gagnar okkum sjálvum, men eisini tí tað hevur ávirkan á, hvat onnur hugsa um hann. Hugsa um myndina fyrst í kapitlinum. Er tað ikki so, at eitt barn,

* Í 6. kapitli í hesi bókini verður viðgjørt, hvussu vit velja gagnligt undirhald.

12, 13. Hvat samband er millum hugsanir og gerðir, og hvussu kunnu vit varðveita ein reinan hugsanarhátt?
14. Hví er bókstavligur reinleiki ikki bert eitt persónligt mál?

Bókstavligur reinleiki fevnir bæði um at halda okkum sjálv rein og alt rundan um okkum

sum altíð er skitið og ófantaliga ílatið, fær okkum at hugsa um, hvørji foreldrini munnu vera? Vit vilja ikki, at nakað í sambandi við okkara útsjónd ella lívsháttt skal vanæra okkara himmalska Faðir ella leiða tankarnar burtur frá boðskapinum, vit bera. Guds orð sigur: „Vit eru á ongan hátt til ástoyt – fyri at tænastan skal ikki verða lastað. Nei, í øllum prógva vit okkum sum tænarar Guds.“ (2 Korintbræv 6:3, 4) Men hvussu halda vit okkum bókstavliga rein?

15 *Okkara persónliga reinføri og útsjónd.* Hóast mentan og livikor eru ymisk í nógvum londum, ber vanliga til at finna so mikið av sápu og vatni, at vit kunnu vaska okkum og okkara børnum regluliga. Reinføri fevnir millum annað um at vaska sær um hendurnar við sápu og vatni, áðrenn vit fara at eta ella gera mat, tá ið vit hava verið á vesi, og

---

15, 16. Hvat fevnir reinføri um, og hvussu eiga okkara klæði at vera?

tá ið vit hava vaskað ella skift blæu á einum pinkubarni. At vaska sær um hendurnar við sápu og vatni kann fyribyrgja sjúku og enntá bjarga lívi. Tað kann forða fyri spjaðing av skaðiligum virusum og bakterium og harvið hjálpa fólki at sleppa undan ymiskari magailsku. Í londum, har húsini vanliga ikki eru bundin í eina kloakkskipan, kann skarn møguliga verða fyribeint við at grava tað niður, eins og tey gjørdu í fortíðar Ísrael. – 5 Mósebók 23:12, 13.

16 Tað er eisini neyðugt, at vit vaska okkara klæði regluliga, so tey eru rein og hampilig. Klæðini hjá okkum nýtast ikki at vera dýr ella nýggjasti móti, men tey skulu vera nosslig, rein og sámilig. **(Les Fyrra Timoteusbræv 2:9, 10.)** Líkamikið hvar vit eru, vilja vit, at okkara útsjónd skal „prýða læru Guds, Frelsara okkara". – Titus 2:10.

17 *Okkara bústaður og ognir.* Okkara heim er kanska ikki tað vakrasta ella stásiligasta, men tað eigur at vera so reint og nossligt sum gjørligt. Tað sama er galdandi, um vit hava bil, sum vit brúka, tá ið vit skulu á møti og í boðanina. Tá mugu vit eisini syrgja fyri, at hann er reinur bæði innan og uttan. Vit mugu ikki gloyma, at tá ið okkara bústaður og tað, vit eiga, er reint, er tað ein vitnisburður í sjálvum sær. Vit fortelja jú øðrum, at Jehova er ein reinur Gud, at hann fer at „oyða tey, sum oyða jørðina", og at hansara ríki skjótt fer at umskapa okkara jarðiska heim til eitt paradís. (Opinberingin 11:18; Lukas 23:43) Vit ynskja sjálvandi, at okkara bústaður og ognir skulu vísa øðrum, at vit longu nú hava fingið okkum góðar vanar, sum spegla tann reinleikan, ið fer at vera í komandi nýggja heiminum.

18 *Staðið, har vit tilbiðja.* Av tí at vit elska Jehova, virðismeta vit okkara ríkissal, sum er staðið, har vit tilbiðja Gud. Tá ið nýggj koma á møti hjá okkum, vilja vit so fegin, at

---

17. Hví eiga bæði okkara bústaður og tað, vit eiga, at vera reint og nossligt?
18. Hvussu kunnu vit vísa, at vit virðismeta okkara ríkissal?

ríkissalurin skal virka dámligur í teirra eygum. Tað er neyðugt, at salurin regluliga verður vaskaður og hildin við líka, so hann altíð er reinur og nossligur. Vit vísa, at vit virðismeta okkara ríkissal, tá ið vit gera okkara til, at hann er reinur og í góðum standi. Tað er ein framíhjárættur, at vit kunnu bjóða okkum til at hjálpa við reingerðini, og eisini tá ið ábøtur skulu gerast í okkara møtisali. (2 Krønikubók 34:10) Somu meginreglur eru galdandi, tá ið vit koma saman í stevnuhøllum ella aðrastaðni, har vit hava fylkis- ella økisstevnur.

VIT MUGU HALDA OKKUM FRÁ ÓREINUM VANUM OG GERÐUM

19 Skulu vit vera bókstavliga, ella likamliga, rein, mugu vit halda okkum frá óreinum vanum og gerðum, eitt nú royking, alkoholmisnýtslu og vanabindandi evnum, ið ikki verða nýtt sum heilivágur. Bíblian nevnir ikki ítøkiliga allar óreinar og ótespiligar vanar og gerðir, sum síggjast so týðiliga í dag, men hon vísir á meginreglur, sum hjálpa okkum at skilja, hvat Jehova uttan iva heldur um slíkt. Av tí at vit elska Jehova og vita, hvørja áskoðan hann hevur á reinleika, fáa vit hug at gera tað, sum honum dámar. Latið okkum kanna fimm bíbilskar meginreglur.

20 *„Táið vit nú hava hesi lyfti, elskaðu míni, so latið okkum reinsa okkum frá øllum, ið ger okkum órein – á holdi og á anda – og soleiðis fullføra heilaggering í gudsótta!“* (2 Korintbræv 7:1) Jehova vil, at vit skulu reinsa okkum frá øllum, sum dálkar okkara likam og hevur ringa ávirkan á okkara hugsanarhátt. Tí mugu vit ansa eftir, at vit ikki verða bundin av nøkrum, sum skaðar okkara likam ella hugsanarhátt.

21 Bíblian gevur okkum góða grund til at „reinsa okkum

---

19. Hvørjum mugu vit halda okkum frá, um vit skulu vera likamliga rein, og hvussu hjálpir Bíblian okkum í hesum sambandi?
20, 21. Hvørjum gerðum vil Jehova, at vit halda okkum frá, og hvørja góða grund hava vit til tað?

STRÍÐIST EG FYRI AT GERA TAÐ RÆTTA?

Meginregla: „Eg kúgi likam mítt og haldi tað í trældómi, fyri at eg, sum prædikað havi fyri øðrum, skal ikki sjálvur verða vrakaður." – 1 Korintbræv 9:27.

Spyr teg sjálvan

- Biði eg um hjálp frá Guds heilaga anda, beint sum eg kenni trongd at slaka fyri einum óreinum vana? – Matteus 6:13.
- Hvussu verður mín avgerð um at halda meg leysan av ringum vanum ávirkað av teimum, sum eg komi saman við, filmunum, eg hyggi at, og tónleikinum, eg lurti eftir? – 1 Pætur 4:3, 4.
- Hví rættvísgera góð verk ikki syndigan atburð? – Matteus 23:25-28.
- Hví eri eg eins og Jesus til reiðar at líða fyri at gera Guds vilja? – 1 Pætur 2:21; 4:1.
- Hvussu kann eg greiða øðrum frá, hví eg ikki vil roykja? – Rómbrævið 12:1, 2.
- Um eg detti aftur í ein óreinan vana, minnist eg so til, at tað ikki merkir, at als eingin vón er fyri mær? – Rómbrævið 7:21-25.

frá øllum, ið ger okkum órein“. Legg til merkis, at Seinna Korintbræv 7:1 leggur fyri við at siga: „Táið vit nú hava hesi lyfti.“ Hvørji lyfti? Í teimum undanfarnu ørindunum lovar Jehova: „Eg [skal] taka ímóti tykkum, og Eg skal vera tykkum Faðir.“ (2 Korintbræv 6:17, 18) At hugsa sær – Jehova lovar at verja og elska okkum, sum ein pápi elskar síni børn. Men Jehova heldur bara hesi lyftini, um vit halda okkum frá øllum, ið ger okkum órein „á holdi og á anda“. Tí hevði tað verið tápuligt at latið ótespiligar vanar ella gerðir verða orsøk til, at vit missa eitt so dýrabart og tætt samband við Jehova.

22 *„Tú skalt elska Harran Gud tín av øllum hjarta tínum, av allari sál tíni og av øllum huga tínum.“* (Matteus 22:37) Jesus vísti á hetta boðið sum tað størsta av øllum. (Matteus 22:38) Jehova hevur uppiborið, at vit elska hann á henda hátt. Um vit elska hann av øllum hjarta, allari sál og øllum huga, halda vit okkum frá øllum, sum kundi stytt um okkara lív ella kámað okkara hugsanarevni.

23 *Jehova „gevur øllum lív og anda og alt“.* (Ápostlasøgan 17:24, 25) Lívið er ein gáva frá Gudi, og av tí at vit elska hann, virða vit hesa gávuna. Vit skýggja allar vanar og gerðir, sum skaða okkara heilsu, tí vit vita, at slíkar gerðir vanvirða lívsins gávu. – Sálmur 36:10.

24 *„Tú skalt elska næsta tín sum teg sjálvan.“* (Matteus 22:39) Ofta ávirka óreinu vanarnir og gerðirnar hjá einum persóni ikki bert viðkomandi sjálvan, men eisini tey rundan um hann. Tað kann til dømis vera heilsuskaðiligt hjá einum, sum ikki roykir, at vera í tubbaksroyki. Ein, ið skaðar tey, sum eru rundan um hann, brýtur boðini frá Gudi um at elska næsta sín. Hansara gerðir vísa, at tað ikki er satt, tá ið hann sigur, at hann elskar Gud. – 1 Jóhannes 4:20, 21.

22-25. Hvørjar bíbilskar meginreglur kunnu hjálpa okkum at halda okkum frá óreinum vanum og gerðum?

HJÁ GUDI ER ALT MØGULIGT

„Tá ið eg var 15 ára gomul, roykti eg hvønn dag, og í vikuskiftunum drakk eg saman við vinfólki," sigur Helen.* „Seinni gjørdist eg bundin av kokaini, hóast eg tá var einlig mamma við trimum børnum. Mítt lív var ein hurlivasi. Men so fór eg at kanna Bíbliuna, og við hjálp frá Jehova fekk eg skil á mínum lívi og gjørdi meg leysa av mínari misnýtslu. Tað var eitt stríð, serliga at sleppa kokaininum. Eg haldi, at tað hevði verið ómøguligt hjá mær at broytt alt hetta einsamøll. Men nú kann eg veruliga siga, at eg havi sannað tað, sum Jesus segði: 'Gudi er alt møguligt.'" – Matteus 19:26.

* Navnið er broytt.

25 *„Minn tey á at vera yvirvøldini og teimum, ið valdið hava, undirgivin."* (Titus 3:1) Í nógvum londum er tað lógarbrot at eiga ella nýta ávís rúsevni. Sonn kristin hvørki eiga ella nýta ólóglig rúsevni. – Rómbrævið 13:1.

26 Skulu vit verða verandi í kærleika Guds, mugu vit halda okkum rein, ikki bara á einum ella tveimum økjum, men á øllum økjum. Tað er kanska ikki so lætt at sleppa óreinum vanum og gerðum og halda seg frá teimum, men tað ber til.* Satt at siga finst eingin betri lívsháttur, tí Jehova lærir okkum altíð tað, sum er okkum til gagn. **(Les Esaias 48:17.)** Tað týdningarmesta er tó at vita, at tá ið vit halda okkum rein, geva vit øðrum eina dámliga mynd av okkara Gudi, sum vit elska, og halda okkum soleiðis í hansara kærleika.

* Sí rammurnar „Stríðist eg fyri at gera tað rætta?" á síðu 94, og „Hjá Gudi er alt møguligt" omanfyri.

26. (a) Hvat mugu vit gera, um vit skulu verða verandi í kærleika Guds? (b) Hví er tað at vera reinur í Guds eygum besti lívsháttur?

Flýggið undan kynsligum siðloysi

„Deyðið tí hinar jørðisku limirnar: Siðloysi, óreinsku, girndarbruna, ónda tráan – og havisjúkuna, sum jú er avgudadýrkan!“ – KOLOSSEBRÆVIÐ 3:5.

STUTTLEIKAFISKARIN er á veg hagar, sum honum dámar best at fiska. Hann hevur eitt ávíst slag av fiski í huga. Hann velur sær agn og sleingir dorgina út. Eina løtu seinni bítur á hjá honum, tráðan bognar, og hann dregur fongin inn. Hann smílist við, tí hann hevur valt rætta agnið.

2 Í ár 1473 f.o.t. hugsaði ein maður, sum æt Bileam, eisini nógv um, hvat agn hann skuldi brúka. Fongurin, hann hevði í huga, var Guds fólk, sum tjaldaði á Móabsheiðum beint við lovaða landið. Bileam segði seg vera ein profet hjá Jehova, men í roynd og veru var hann bara ein grammur maður, sum var leigaður til at banna Ísrael. Jehova legði tó uppí, so Bileam bert var førur fyri at signa Ísrael. Altráur eftir lønini hugsaði Bileam nú, at um hann fekk lokkað ísraelsfólk í álvarsama synd, kundi hann kanska fáa Gud at banna sínum egna fólki. Við hesum í huga valdi Bileam sær eitt agn – tær tølandi ungu kvinnurnar úr Móab. – 4 Mósebók 22:1-7; 31:15, 16; Opinberingin 2:14.

3 Riggaði ætlanin? Ja, í ein ávísan mun. Túsundtals ísraelitiskir menn bitu á agnið og ’drivu hor við kvinnum Móabs’. Teir fóru enntá at tilbiðja móabitiskar gudar, teirra millum tann andstyggiliga Ba’al-Peor, sum var ein gudur fyri fruktbæri, ella kynslív. Úrslitið varð, at 24.000

1, 2. Hvat ætlaði Bileam at gera fyri at skaða fólkið hjá Jehova?
3. Í hvussu stóran mun riggaði ætlanin hjá Bileami?

ísraelsfólk doyðu á markinum beint við lovaða landið. Tað var av sonnum ein ræðuligur sorgarleikur. – 4 Mósebók 25:1-9.

4 Hvussu kundi tað enda so galið? Nógv ísraelsfólk høvdu hert sítt hjarta við at flyta seg burtur frá Jehova, tí Gudi, sum hevði bjargað teimum úr Egyptalandi, breyðføtt tey í oyðimørkini og leitt tey trygt at markinum til lovaða landið. (Hebrearabrævið 3:12) Við hesum í huga skrivaði Paulus ápostul: „Latið okkum ikki heldur dríva siðloysi, eins og nakrir av teimum drivu siðloysi – og fullu 23.000 ein dag!“* – 1 Korintbræv 10:8.

5 Í frásøguni í Fjórðu Mósebók er nógvur týðandi lærdómur til Guds fólk í dag, sum stendur á gáttini til nakað nógv betri enn lovaða landið. (1 Korintbræv 10:11) Til dømis er heimurin sjúkliga upptikin av tí kynsliga eins og móabsfólk í forðum, bara í enn størri mun. Hvørt ár falla fleiri túsund av Guds tænarum fyri freistingini at fremja

* Talið í Fjórðu Mósebók fevnir ætlandi um „høvdingar fólksins“, sum dómararnir drupu, ið væl kann hava verið 1.000 mans, umframt teir, sum Jehova drap sjálvur. – 4 Mósebók 25:4, 5.

4. Hví lótu fleiri túsund ísraelsfólk seg freista at fremja siðloysi?
5, 6. Hvussu gagnar frásøgan um syndina hjá ísraelsfólki á Móabsheiðum okkum í dag?

Útsýni yvir Móabsheiðar

siðloysi – tí sama gamla agninum, sum fekk ísraelsfólk at falla. (2 Korintbræv 2:11) Eins og Zimri, sum so nasadjarvur leiddi eina midjanitiska kvinnu inn í leguna hjá ísraelsfólki og inn í tjald sítt, hava nøkur, sum koma saman við Guds fólki í dag, og enntá nøkur fá doypt, spillandi ávirkan á onnur í samkomuni. – 4 Mósebók 25:6, 14; Judas 4.

6 Sært tú í fluttari merking teg sjálvan á nútíðar Móabsheiðum? Sært tú lønina fyri tær – nýggja heimin, ið vit hava bíðað eftir so leingi, og sum nú stendur beint fyri durum? Um so er, ger tá alt, tú ert mentur fyri at halda teg í kærleika Guds við at fylgja boðnum um at flýggja undan kynsligum siðloysi. – 1 Korintbræv 6:18.

HVAT ER KYNSLIGT SIÐLOYSI?

7 Tá ið orðið „siðloysi“ (á grikskum *pornei'a*) verður nýtt í Bíbliuni, sipar tað til kynsligt samband uttan fyri eitt bíbilskt viðurkent hjúnalag. Tað fevnir um hjúnabandsbrot, skøkjulevnað og kynsligt samband millum ógift, og haraftrat at brúka munnin til at øsa kynsgøgnini, kynsligar gerðir í sambandi við endatarmin og øsing av kynsgøgnunum hjá einum, mann ikki er giftur við. Tað fevnir eisini um slíkar gerðir millum fólk av sama kyni og um kynsligt samband við dýr.*

8 Bíblian er púra greið. Sambært henni kunnu tey, sum fremja kynsligt siðloysi, ikki verða verandi í samkomuni, og tey fáa ikki ævigt lív. (1 Korintbræv 6:9; Opinberingin 22:15) Haraftrat skaða tey seg sjálv longu nú, eitt nú við tað at onnur ikki líta á tey, at tey missa sjálvsvirðið, fáa trupulleikar í hjúnabandinum, fáa samvitskubit,

---

* Ein frágreiðing um, hvat óreinska og skammleysur atburður merkja, er at finna í greinini „Spørgsmål fra læserne“ í *Vagttårnet,* 15. juli 2006, sum Jehova vitni hava givið út.

7, 8. Hvat er kynsligt siðloysi, og hvussu heysta tey, ið fremja slíkt, tað, sum tey hava sáað?

verða óviljað við barn, gerast sjúk og enntá doyggja. **(Les Galatiabrævið 6:7, 8.)** Hví gera nakað, ið hevur so nógvar álvarsligar avleiðingar? Tíverri hugsa nógv ikki so langt, tá ið tey taka fyrsta skeiva stigið, sum ofta er pornografi.

PORNOGRAFI – OFTA FYRSTA STIGIÐ

9 Í nógvum londum liggur pornografiskt tilfar frammi í kioskum. Pornografi verður eisini lýst í tónleiki og sjónvarpi, og haraftrat gjøgnumsúrgar hon internetið.* Er pornografi óskaðilig, sum nøkur vilja vera við? Avgjørt ikki! Tey, sum hyggja at pornografi, kunnu fáa til vana at nøkta seg sjálv og nøra óstýriligar „vanærandi lystir", so tey verða bundin av kynsligum ovurhuga og perversum girndum, fáa trupulleikar í hjúnabandinum og enntá verða skild.# (Rómbrævið 1:24-27; Efesusbrævið 4:19) Ein granskari hevur samanborið tað at vera bundin av tí kynsliga við krabbamein. „Tað bara veksur og spjaðist," sigur hann. „Tað fer sjáldan burtur av sær sjálvum, og tað er eisini sera torført at viðgera og grøða."

10 Hugsa um orðini í Brævi Jákups 1:14, 15: „Ein og hvør verður freistaður, táið hann verður drigin og lokkaður av síni egnu girnd. Síðani, táið girndin er farin at ganga við fostri, føðir hon synd, og táið syndin er fullvaksin, føðir hon deyða." Fært tú ónærisligar tankar, mást tú alt fyri eitt vísa teimum frá tær. Um tú til dømis av óvart sært ónæris-

---

* Orðið „pornografi", sum tað verður nýtt her, sipar til ónærisligt tilfar, ið verður lýst í myndum, teksti ella ljóði til at elva kynsliga øsing. Pornografi kann fevna um alt frá eini mynd av einum persóni í eini ónærisligari støðu til myndir av kynsligum gerðum av ljótasta slag millum tvey ella fleiri fólk.

Fleiri upplýsingar um sjálvsnøktan eru at finna í uppískoytinum á síðunum 218-219.

---

9. Er pornografi óskaðilig, sum nøkur vilja vera við? Greið frá.
10. Hvussu kunnu vit brúka meginregluna í Brævi Jákups 1:14, 15? (Sí eisini rammuna á síðu 101.)

ligar myndir, hygg so beinanvegin burtur, sløkk telduna ella skift sjónvarpsrás. Ja, ger alt, sum er neyðugt, fyri ikki at geva eftir fyri siðleysari girnd, áðrenn hon verður so sterk, at hon vinnur á tær! – **Les Matteus 5:29, 30.***

11 Tað er við góðari grund, at Jehova, sum kennir okkum betur, enn vit sjálv gera, sigur: „Deyðið tí hinar jørðisku limirnar: Siðloysi, óreinsku, girndarbruna, ónda

* Matteus 5:29, 30 (*NW*): „Um nú høgra eyga títt fær teg at snáva, so rív tað út og kasta tað frá tær. Tað er betri, at tú missir ein lim, enn at alt likam títt verður kastað í Gehenna. Og um høgra hond tín fær teg at snáva, so høgg hana av og kasta hana frá tær. Tað er betri, at tú missir ein lim, enn at alt likam títt endar í Gehenna.“

11. Hvussu kunnu vit vísa, at vit líta á Jehova, tá ið vit stríðast við óreinar tankar?

EG FEKK STYRKI TIL AT GERAST SIÐILIGA REINUR

„Tá ið eg var tannáringur, fekk eg til vana at hyggja at pornografi og at nøkta meg sjálvan,“ sigur ein ungur maður. „Mínir javnaldrar í skúlanum hildu tað vera púra vanligt hjá ungum at bera seg soleiðis at. Men samvitskan hjá mær fekk skaða, og eg læt meg lokka út í siðloysi. Við tíðini skilti eg, at mínir lystir høvdu tamarhald á mær og ikki øvut. Men tað eydnaðist mær við hjálp frá Jehova og samkomuni at vinna á mínum óreinu vanum. Nú ansi eg væl eftir, hvørjum eg komi saman við, tí eg veit, at onnur kunnu hava stóra ávirkan á meg. Tað er sera umráðandi hjá mær at biðja ofta og at kanna Bíbliuna regluliga, tí tað hjálpir mær, so eg ikki detti aftur í ringar vanar. Nú havi eg tamarhald á mínum lystum, og eg havi tann framíhjárætt at vera pionerur.“

tráan – og havisjúkuna, sum jú er avgudadýrkan!" (Kolossebrævið 3:5) Tað er rætt, at tað kann vera torført. Men minst til, at vit hava ein góðan og tolnan Faðir í himli, sum vit kunnu venda okkum til. (Sálmur 68:20) Vend tær tí alt fyri eitt til hansara, táið tú fært óreinar tankar. Bið um 'hina ómetaligu kraftina frá Gudi', og noyð teg sjálvan at hugsa um okkurt annað. – 2 Korintbræv 4:7; 1 Korintbræv 9:27; sí rammuna „Hvussu vinni eg á einum ringum vana?" á síðu 104.

12 Hin vísi Sálomon kongur skrivaði: „Varðveit hjarta títt, fram um alt, ið varðveitt verður, tí úr tí gongur lívið út!" (Orðtøkini 4:23) Okkara „hjarta" er okkara innara menniskja, tann persónurin, vit veruliga eru í Guds eygum. Og tað er Guds, ikki menniskjans, meting av okkara „hjarta", sum ger av, um vit fáa ævigt lív ella ikki. So einfalt er tað, og eisini so álvarsamt. Trúfasti maðurin Job gjørdi ein sáttmála, ella formliga avtalu, við eygu síni um ikki at hyggja við girndarhuga at eini kvinnu. (Job 31:1) Tað er ein frálík fyrimynd hjá okkum at taka eftir. Eitt sálmaskald vísti sama hugburð, tá ið hann bað: „Vend eygum mínum burtur frá at hyggja eftir fáfongd!" – Sálmur 119:37.

SKILALEYSA AVGERÐIN HJÁ DINU

13 Sum vit sóu í 3. kapitli, kunnu okkara vinir hava stóra ávirkan á okkum, antin góða ella ringa. (Orðtøkini 13:20; **les Fyrra Korintbræv 15:33.)** Hugsa um dømið við Dinu, dóttur Jákup. Hóast Dina var væl upplærd, var hon so skilaleys at fáa sær kána'anitiskar vinkonur. Eins og móabitar vóru kána'anitar kendir fyri at vera siðleysir. (3 Mósebók 18:6-25) Kána'anitiskir menn, eisini Sikem, sum 'hevði mest at siga' í húsi faðirs síns, hildu, at Dina var líka

12. Hvat er okkara „hjarta", og hví mugu vit verja tað?
13. Hvør var Dina, og hví var hennara val av vinum skilaleyst?

Tað er skilagott bara at brúka internetið í einum felagsrúmi

siðleys sum tær ungu kvinnurnar í Kána'an. – 1 Mósebók 34:18, 19.

14 Dina hevði helst einki siðleyst í huga, tá ið hon sá Sikem. Men hann gjørdi tað, sum teir flestu kána'anitar hildu vera natúrligt, tá ið teir vórðu kynsliga eggjaðir. Um Dina stríddist ímóti í síðstu løtu, nyttaði tað lítið, tí hann „tók hana" og „neyðtók hana". Tað tykist, at Sikem seinni gjørdist góður við Dinu, men tað broytti ikki tað, sum hann hevði gjørt við hana. **(Les Fyrstu Mósebók 34:1-4.)** Og tað var ikki bara Dina, sum kom at kenna sviðan av hesum. At hon valdi sær vánaligar vinir elvdi til hendingar, sum gjørdu allari familjuni fyri skommum. – 1 Mósebók 34:7, 25-31; Galatiabrævið 6:7, 8.

15 Um Dina lærdi nakað týðandi av hesum, so var tað av ringum royndum. Tíbetur er tað ikki neyðugt hjá teimum,

---

14. Hvør vanlukka stóðst av, at Dina valdi sær vánaligar vinir?
15, 16. Hvussu kunnu vit fáa sannan vísdóm? (Sí eisini rammuna á síðu 109.)

HVUSSU VINNI EG Á EINUM RINGUM VANA?

Meginregla: „Tit, ið elska HARRAN, hatið hitt illa!" – Sálmur 97:10.

Spyr teg sjálvan

- Syrgi eg fyri ikki at koma í eina støðu, sum kann freista meg at gera nakað skeivt? – Matteus 5:27, 28.
- Hugsi eg djúpt um avleiðingarnar av at slaka fyri freistingum? – Orðtøkini 22:3.
- Hvørji ítøkilig stig eri eg villigur at taka fyri at vinna á mínum ringa vana? – Matteus 5:29, 30.

- Eri eg til reiðar at tosa um trupulleikan við mammu ella pápa ella ein vin, sum er andaliga búgvin? – Orðtøkini 1:8, 9; Galatiabrævið 6:1, 2.
- Hvussu vísi eg, at eg líti á, at Jehova kann geva mær styrki og vísdóm, so eg vinni stríðið? – Orðtøkini 3:5, 6; Jákup 1:5.

sum elska og akta Jehova, at læra um lívið á henda hátt. Av tí at tey lurta eftir Gudi, velja tey at 'koma saman við vísum'. (Orðtøkini 13:20a) Soleiðis læra tey at skilja „eina og hvørja góða leið" og sleppa undan óneyðugum trupulleikum og líðingum. – Orðtøkini 2:6-9; Sálmur 1:1-3.

16 Tað ber til hjá øllum, sum veruliga ynskja tað, at fáa vísdóm frá Gudi, um tey gera nakað fyri at fáa hann, eitt

nú biðja til Gud og regluliga kanna hansara orð og tilfarið, sum trúgvi og skilagóði tænarin gevur út. (Matteus 24:45; Jákup 1:5) Tað er eisini týðandi at vera eyðmjúkur, og tann eginleikin kemur til sjóndar, tá ið vit eru fús at fylgja vegleiðingini í Bíbliuni. (2 Kongabók 22:18, 19) Til dømis viðurkennir ein tænari hjá Gudi kanska, at hansara hjarta er svikafult og ónt. (Jeremias 17:9) Men er hann, tá ið samanum kemur, so eyðmjúkur, at hann tekur ímóti hjálp og vegleiðing, um tað verður neyðugt?

17 Hugsa tær hesa støðuna: Ein pápi vil ikki lata dóttur sína og ein ungan mann í samkomuni fara út einsamøll. Dóttirin sigur: „Altso babba, lítur tú ikki á meg? Vit fara ikki at gera nakað skeivt.“ Hon elskar kanska Jehova og hevur bara gott í huga, men gongur hon 'fram í vísdóminum' frá Gudi? Flýggjar hon undan kynsligum siðloysi? Ella er hon tápulig og 'lítur á sítt [egna] vit'? (Orðtøkini 28:26) Møguliga kemur tú at hugsa um fleiri meginreglur, sum kundu hjálpt hesum pápanum og dóttrini í eini slíkari støðu. – Sí Orðtøkini 22:3; Matteus 6:13; 26:41.

JÓSEF FLÝDDI UNDAN KYNSLIGUM SIÐLOYSI

18 Ein ungur maður, sum elskaði Gud og flýddi undan kynsligum siðloysi, var Jósef, hálvbeiggi Dinu. (1 Mósebók 30:20-24) Longu sum smádrongur hevði Jósef við egnum eygum sæð, hvørjar avleiðingar tað fekk, at systir hansara bar seg tápuliga at. Minnið um hetta og ynskið hjá Jósefi um at verða verandi í kærleika Guds, kom honum uttan iva til hjálpar fleiri ár seinni, tá ið kona harra hansara í Egyptalandi „dag eftir dag“ royndi at tøla hann. Av tí at Jósef var trælur, kundi hann ikki bara siga seg úr starvi og rýma. Hann mátti nýta skil og vera djarvur. Og

---

17. Lýs eina støðu, sum kann taka seg upp í einari familju, og hvussu ein pápi kundi tosað við dóttur sína um støðuna.

18, 19. Hvussu varð Jósef freistaður, og hvussu bar hann seg at?

tað gjørdi hann við støðugt at siga seg undan konu Potifar og at enda við at flýggja undan henni. – **Les Fyrstu Mósebók 39:7-12.**

19 Hevði Jósef verið førur fyri at varðveitt sítt trúfesti móti Gudi, um hann í huganum tráaði eftir kvinnuni ella plagdi at dagdroyma um kynslívið? Allarhelst ikki. Heldur enn at dvølja við tílíkar tankar virðismetti Jósef veruliga sítt samband við Jehova. Tað sæst týðiliga av tí, hann segði við konu Potifar: „Harri mín ... hevur einki sýtt mær – uttan teg, tí tú ert kona hansara! Hvussu skuldi eg nú kunnað gjørt eina so ónda gerð – og syndað móti Gudi!“ – 1 Mósebók 39:8, 9.

20 Hugsa tær, hvussu glaður Jehova gjørdist av at síggja tann unga Jósef, sum dag eftir dag var trúfastur, hóast hann var langt heimanífrá. (Orðtøkini 27:11) Seinni fekk Jehova tað at passa soleiðis, at Jósef ikki bert varð leyslatin úr fongslinum, men eisini bleiv ovasti ráðharri og matvørufyrisitari í Egyptalandi. (1 Mósebók 41:39-49) Hetta staðfestir tað, sum stendur í Sálmi 97:10: „Tit, ið elska HARRAN, hatið hitt illa! – Hann varðar sálirnar í hinum heiløgu Sínum og fríar tey úr hondum hinna gudleysu.“

20. Hvussu ávirkaði Jehova støðuna hjá Jósefi?

21 Nógvir av Guds tænarum í dag vísa á sama hátt, at teir 'hata hitt illa og elska hitt góða'. (Amos 5:15) Ein ungur bróðir í Afrika hevur fortalt, at ein genta í flokkinum bjóðaði sær at fara í song við honum, um hann vildi hjálpa henni í eini støddfrøðiroynd. „Eg vísti beinanvegin tilboðnum aftur," sigur hann. „Við at vera trúfastur móti Jehova havi eg varðveitt mín virðileika og mítt sjálvsvirði, og tað er nógv meira vert enn gull og silvur." Tað er satt, at synd kann geva „stutta njóting", men slíkur stokkutur stuttleiki hevur ofta nógva sorg við sær. (Hebrearabrævið 11:25) Haraftrat bliknar hann púrasta, tá ið hann verður samanborin við varandi lukkuna, vit fáa, um vit akta Jehova. – Orðtøkini 10:22.

LAT OKKARA MISKUNNSAMA GUD HJÁLPA TÆR

22 Av tí at vit eru ófullkomin, stríðast vit øll fyri at standa ímóti holdligum lystum og fyri at gera tað, sum er rætt í Guds eygum. (Rómbrævið 7:21-25) Hetta veit Jehova, og hann „minnist, at vit eru dust". (Sálmur 103:14) Men av og á syndar ein tænari hjá Gudi kanska álvarsliga. Er støðan tá vónleys? Als ikki! Tað kann væl vera, at hann eins og Dávid kongur kemur at kenna beiskar avleiðingar av síni gerð. Men Gud er tó altíð „til reiðar at fyrigeva" teimum, sum angra og opið 'játta syndir' sínar. – Sálmur 86:5; Jákup 5:16; **les Orðtøkini 28:13.**

23 Harumframt hevur Gud í kærleika sínum givið samkomuni andaliga búnar umsjónarmenn, sum bæði eru skikkaðir og til reiðar at hjálpa. (Efesusbrævið 4:8, 11, 12; Jákup 5:14, 15) Teir royna at hjálpa honum, sum hevur

---

21. Á hvønn hátt vísti ein ungur bróðir í Afrika, at hann var trúfastur móti Jehova?

22, 23. (a) Hví er støðan ikki vónleys, um ein tænari hjá Gudi syndar álvarsliga? (b) Hvørja hjálp kann ein, sum hevur syndað álvarsliga, fáa?

syndað álvarsliga, at fáa sítt samband við Gud aftur á beint og at 'vinna sær vit', so hann ikki ger tað sama umaftur. – Orðtøkini 15:32.

'VINN TÆR VIT'

24 Bíblian tosar um ein persón „við ongum skili" og um ein,ið „vinnur sær vit". (Orðtøkini 7:7) Av tí at tey, sum 'einki skil' hava, eru andaliga óbúgvin og óroynd í tænastuni fyri Jehova, duga tey kanska ikki so væl á at skyna. Eins og tann ungi maðurin, sum verður lýstur í Orðtøkunum 7:6-23, eru tey kanska í størri vanda fyri at synda álvarsliga. Men „tann,ið vinnur vit", rannsakar sítt innara menniskja við regluliga at biðja til Gud og kanna hansara orð. Og so vítt tað er møguligt í hansara ófullkomnu støðu, roynir hann at fáa bæði tankar, ynski, kenslur og mál at samsvara við tað, sum Gud góðkennir. Soleiðis vísir hann, at hann „elskar lív sítt", og hann „finnur lukku". – Orðtøkini 19:8.

25 Spyr teg sjálvan: 'Eri eg púra sannførdur um, at Guds boð eru røtt? Trúgvi eg veruliga, at tað hevur stóra lukku við sær at fylgja teimum?' (Sálmur 19:8-11; Esaias 48:17, 18) Ivast tú bert eitt lítið sindur, mást tú gera nakað við støðuna. Hugsa um avleiðingarnar av at skúgva Guds lógir til viks. Royn eisini at 'smakka og síggja, at HARRIN er góður' við at liva í samsvari við sannleikan og við at fylla sinnið við reinum tonkum – við tí, sum er satt, rætt, reint, elskuligt og við eini og hvørji dygd. (Sálmur 34:9; Filippibrævið 4:8, 9) Tú kanst vera vísur í, at jú meira tú gert tað, tess meira fert tú at elska Gud og elska tað, hann elskar, og hata tað, hann hatar. Jósef var ikki fullkomin. Men hann var førur fyri at flýggja undan kynsligum sið-

---

24, 25. (a) Hvussu vísti ungi maðurin, sum vit lesa um í Orðtøkunum 7:6-23, at hann 'einki skil' hevði? (b) Hvussu kunnu vit 'vinna okkum vit'?

SKRIFTSTØÐ AT HUGSA UM

„Tit,ið elska HARRAN, hatið hitt illa!“ – Sálmur 97:10.

„Hvør tann,ið hyggur á kvinnu og hevur hug á henni, hevur longu drivið hor við henni í hjarta sínum.“ – Matteus 5:28.

„Tann,ið drívur siðloysi, syndar móti sínum egna likami.“ – 1 Korintbræv 6:18.

„Eg kúgi likam mítt og haldi tað í trældómi, fyri at eg, sum prædikað havi fyri øðrum, skal ikki sjálvur verða vrakaður.“ – 1 Korintbræv 9:27.

„Tað, sum menniskjað sáar, skal tað eisini heysta. Tann, sum sáar í holdi sínum, skal av holdinum heysta oyðing; men tann, sum sáar í Andanum, skal av Andanum heysta ævigt lív.“ – Galatiabrævið 6:7, 8.

„Deyðið tí hinar jørðisku limirnar: Siðloysi, óreinsku, girndarbruna.“ – Kolossebrævið 3:5.

„Ein og hvør av tykkum eigur at vita, hvussu hann fær tamarhald á sínum egna kroppi í heilagleika og æru, ikki í ótamdari kynsligari girnd.“ – 1 Tessalonikabræv 4:4, 5, *NW*.

loysi, tí hann gjøgnum nógv ár hevði ’vunnið sær vit’ við at lata Jehova forma seg. Vónandi fert tú at gera tað sama. – Esaias 64:7.

26 Táið Skaparin gjørdi kynsgøgnini, vóru tey ikki ætlað til leikutoy, men til at geva menniskjunum møguleika at fáa børn og at gleðast um kynslívið í hjúnabandinum. (Orðtøkini 5:18) Guds áskoðan á hjúnabandið verður viðgjørd í teimum báðum næstu kapitlunum.

26. Hvat týðandi evni fara vit nú at kanna?

Hjúnabandið – ein gáva frá Gudi

„Trífaldur tráður er ikki so góður at slíta.“
– PRÆDIKARIN 4:12.

DÁMAR tær at vera í brúdleypi? Tey flestu halda tað vera sera hugnaligt. Brúðarparið er í fínasta stási, og gleðin lýsir av andlitunum. Henda dagin eru tey serliga lukkulig, og framtíðin tykist bert at hava gott at bjóða.

2 Men vit mugu tó viðganga, at hjúnabandið sum heild er í eini syndarligari støðu í dag. Sjálvt um vit altíð ynskja nýgiftum tað besta, hugsa vit kanska av og á: ’Verða tey lukkulig? Fer hjúnabandið at halda?’ Svarini eru treytað av, um tey líta á og fylgja Guds leiðbeining um hjúnabandið. **(Les Orðtøkini 3:5, 6.)** Tað mugu tey gera, um tey skulu halda seg í kærleika Guds. Latið okkum kanna, hvussu Bíblian svarar hesum fýra spurningunum: Hví gifta seg? Um tú vilt giftast, hvønn skalt tú tá velja? Hvussu kanst tú fyrireika teg til hjúnabandið? Og hvat kann hjálpa hjúnum at verða verandi lukkulig?

HVÍ GIFTA SEG?

3 Nøkur halda, at hjúnalag er ein fortreyt fyri at gerast lukkuligur, og at tað ikki ber til at finna nøgdsemi og gleði í lívinum uttan ein maka. Tað er púra skeivt! Jesus, sum var ógiftur, segði, at ógifta støðan er ein gáva, og hann eggjaði teimum, ið vóru før fyri tí, til at verða ver-

---

1, 2. (a) Hvat hugsa vit kanska av og á um nýgift, og hví? (b) Hvørjar spurningar fara vit at viðgera í hesum kapitlinum?
3. Hví er tað ikki skilagott at gifta seg á leysum grundarlagi?

andi støk. (Matteus 19:11, 12, *NW*) Paulus ápostul nevndi eisini fyrimunirnar við at vera stakur. (1 Korintbræv 7:32-35) Hvørki Jesus ella Paulus ásetti nakra reglu hesum viðvíkjandi. Í roynd og veru hoyrir tað at forbjóða fólki at giftast upp í „lærdómar ilra anda“. (1 Timoteus 4:1-3) At vera stakur hevur tó nógvar fyrimunir hjá teimum, sum óhindrað vilja tæna Jehova. Tí er tað ikki skilagott at gifta seg á leysum grundarlagi, eitt nú vegna bólkatrýst.

4 Men eru hinvegin góðar grundir til at gifta seg? Ja, hjúnabandið er eisini ein gáva frá Gudi. **(Les Fyrstu Mósebók 2:18.)** Tað hevur ávísar fyrimunir og kann gera ein lukkuligan. Til dømis er eitt gott hjúnaband besta grundarlagið fyri familjulívinum. Børn hava tørv á at vaksa upp í einum tryggum umhvørvi við foreldrum, sum elska, upplæra og leiðbeina tey. (Sálmur 127:3; Efesusbrævið 6:1-4) Men at fáa børn er ikki einasta orsøkin til at gifta seg.

5 Legg til merkis, hvørjum samanhangi evnisskriftstaðið til henda kapittulin stendur í: „Betri er at vera sjálvurannar enn einsamallur, tí teir báðir fáa góða løn fyri strev sítt; og um annar fellur, kann hin reisa felaga sín upp aftur. Men vanlukkuliga er hin einsligi staddur; tí fellur hann, er eingin at reisa hann upp aftur! Somuleiðis, táið tveir sova saman, verða teir heitir; men hvussu kann hin einsligi verða heitur! Og um so onkur kann vinna hann, ið einsamallur er, kunnu tveir standa seg ímóti honum; og trífaldur tráður er ikki so góður at slíta.“ – Prædikarin 4:9-12.

6 Hesi ørindini snúgva seg fremst av øllum um gott vinalag. Og í hjúnabandinum ber til at fáa tættasta

---

4. Hví er eitt gott hjúnaband besta grundarlagið fyri familjulívinum?
5, 6. (a) Hvørjar fyrimunir hevur eitt tætt vinalag sambært Prædikaranum 4:9-12? (b) Hvussu kann eitt hjúnaband vera sum ein trífaldur tráður?

vinalagið yvirhøvur. Sum skriftstaðið vísir, kunnu hjúnafelagar hjálpa, ugga og verja hvønn annan. Eitt hjúnaband er serliga sterkt, um talan ikki bert er um *tveir* partar, ið eru knýttir saman. Ørindið rør fram undir, at tað ber til at slíta ein tvífaldan tráð. Men tríggir træðrir, sum eru tvunnir saman ella flættaðir, eru ikki so lættir at slíta. Hugsa bæði maður og kona mest um at gleða Jehova, er teirra hjúnaband sum ein trífaldur tráður. Tá ið Jehova er ein partur av hjúnabandinum, verður tað altso sera sterkt.

7 Tað er eisini bert í hjúnalagnum, at tað er loyvt at nøkta tann kynsliga tørvin. Innan fyri hesar karmarnar kann kynsliga samlívið av røttum metast sum ein kelda til gleði. (Orðtøkini 5:18) Nøkur ógift, ið eru farin um tað, Bíblian nevnir „ungdómsárini" – altso ta tíðina, tá ið kynsligi hugurin er serliga sterkur – stríðast kanska enn ímóti kynsligum lystum. Hava tey ikki tamarhald á hesum lystunum, kann tað føra til óreinan ella ósømiligan atburð. Paulus fekk íblástur frá Gudi til at geva ógiftum hesi ráð: „Kunnu tey ikki vera fráhaldandi, so giftist tey! Betri er at giftast enn at brenna av girnd." – 1 Korintbræv 7:9, 36; Jákup 1:15.

8 Uttan mun til hvat fær fólk at gifta seg, er tað gott at hava røttu myndina av hjúnabandinum. Tí sum Paulus orðaði tað, fáa tey, sum gifta seg, „trongd í holdinum". (1 Korintbræv 7:28) Hjún fáa trupulleikar, sum støk ikki fáa. Um tú velur at giftast, hvussu kanst tú tá minka um trupulleikarnar og økja um gleðina og nøgdsemið? Tað kanst tú millum annað gera við at hugsa teg væl um, áðrenn tú velur ein hjúnafelaga.

7, 8. (a) Hvørji ráð gav Paulus ógiftum kristnum, sum stríðast ímóti kynsligum lystum? (b) Hvørja sanna mynd gevur Bíblian okkum av hjúnabandinum?

HVUSSU VELUR TÚ EIN GÓÐAN HJÚNAFELAGA?

9 Paulus fekk íblástur til at festa eina týðandi meginreglu á blað, sum vit eiga at fylgja, tá ið vit skulu velja ein hjúnafelaga: „Farið ikki undir ójavnt ok saman við vantrúgvandi.“ (2 Korintbræv 6:14) Myndin, hann nýtir, er frá landbúnaðinum. Verður eitt ok lagt á tvey kríatúr, sum eru sera ymisk til støddar ella í styrki, koma bæði at líða undir tí. Fara tí tvey, ein, sum tænir Jehova, og ein, sum ikki tænir honum, undir ok saman í hjúnalagi, koma tey uttan iva at uppliva ósemju og stríð. Vil annar av hjúnafelagunum fegin halda seg í kærleika Jehova og hin lítlan ella ongan hug hevur til tað, hóska teirra mál í lívinum ikki saman, og tað kann elva til nógvar trupulleikar. Tí eggjaði Paulus kristnum til ’bert at giftast í Harranum’. – 1 Korintbræv 7:39.

10 Í summum førum eru støk Jehova vitni komin til ta niðurstøðu, at eitt ójavnt ok er betri enn tað einsemið, tey í løtuni kenna. Nøkur velja at skúgva bíbilsku leiðbeiningina til viks og gifta seg við einum, sum ikki tænir Jehova. Hetta hevur ferð eftir ferð havt syrgiligar avleiðingar. Tey, sum hava valt hesa støðuna, koma at sanna, at tey ikki kunnu tosa við hjúnafelagan um tað týdningarmesta í lívinum. Einsemið, tey nú kenna, kann vera uppaftur størri enn tað, tey kendu, áðrenn tey giftust. Men tíbetur velja túsundtals støk at líta á og fylgja Guds leiðbeining hesum viðvíkjandi. **(Les Sálm 32:8.)** Hóast tey fegin vilja giftast, verða tey verandi støk, inntil tey finna ein hjúnafelaga, ið tænir Jehova Gudi.

11 Eitt og hvørt Jehova vitni er ikki av sær sjálvum ein

9, 10. (a) Hvørja mynd nýtti Paulus til at lýsa vandan við at gifta seg við einum, sum ikki tænir Jehova? (b) Hvussu verður úrslitið ofta, tá ið Guds leiðbeining um ’bert at giftast í Harranum’ verður skúgvað til viks?

11. Hvat kann hjálpa tær at velja ein góðan hjúnafelaga? (Sí eisini rammuna á síðu 114.)

HVØRJUM HYGGI EG EFTIR HJÁ EINUM KOMANDI HJÚNAFELAGA?

Meginregla: „Tey bæði skulu verða eitt hold.“ – Matteus 19:5.



Spyr teg sjálvan

- Hví er tað umráðandi, at eg eri „farin um ungdómsárini“, áðrenn eg giftist? – 1 Korintbræv 7:36; 13:11; Matteus 19:4, 5.
- Hvussu kann tað gagna mær at vera stakur í eina tíð, hóast eg eri nóg gamal at giftast? – 1 Korintbræv 7:32-35.
- Um eg velji at giftast, hví er tað tá umráðandi, at komandi hjúnafelagin longu hevur tænt Jehova trúfastur eina tíð? – 1 Korintbræv 7:39.
- Hvussu kunnu hesi skriftstøðini hjálpa eini systur at skilja, hvørjar eginleikar ein maður eigur at hava? – Sálmur 119:97; 1 Timoteus 3:1-7.
- Hvussu kunnu Orðtøkini 31:10-31 hjálpa einum bróður at velja eina góða konu?

hóskandi hjúnafelagi. Hugsar tú um at gifta teg, mást tú leita eftir einum, sum elskar Gud og hevur eginleikar og andalig mál, ið hóska til tín. Trúgvi og skilagóði tænarin hevur givið nógv tilfar út um hetta evnið. Tað er skilagott at hugsa um slíka bíbilska leiðbeining og at biðja til Jehova, tí so fer hann at hjálpa tær at taka hesa týðandi avgerðina.* – **Les Sálm 119:105.**

12 Í nógvum londum er tað siður, at foreldrini velja børnunum ein hjúnafelaga. Fólk í hesum mentanum eru sum heild samd um, at foreldur hava tann vísdóm og tær royndir, ið skulu til fyri at taka eina so týðandi avgerð. Eins og á Bíbliunnar døgum rigga fyriskipað hjúnaløg ofta væl. Dømið við Ábrahami, ið sendi tænara sín at finna Ísaki eina konu, kann vera sera læruríkt hjá foreldrum í dag, sum eru í eini líknandi støðu. Ábraham hugsaði ikki um pengar ella sosiala støðu. Men hann gjørdi nógv burtur úr at finna Ísaki eina konu, sum tænti Jehova.# – 1 Mósebók 24:3, 67.

HVUSSU KANST TÚ FYRIREIKA TEG, SO TÚ FÆRT EITT GOTT HJÚNALAG?

13 Gongur tú og hugsar um at giftast, eigur tú at spyrja teg sjálvan: 'Eri eg veruliga til reiðar?' Svarið er ikki bert

---

* Sí kapittul 2 í bókini *Hemmeligheden ved et lykkeligt familieliv,* sum Jehova vitni hava givið út.

Nakrir trúfastir tænarar í forðum, eitt nú Ábraham og Jákup, høvdu meira enn eina konu. Tá í tíðini loyvdi Jehova hesum trúføstu tænarum og ísraelsmonnum fleirkonuhjúnalag. Hann stovnaði tað ikki, men hann lóggav um tað. Tó vita hansara tænarar í dag, at hann ikki longur loyvir fleirkonuhjúnalagi. – Matteus 19:9; 1 Timoteus 3:2.

---

12. Hvør siður í sambandi við hjúnalag er vanligur í nógvum londum, og hvat dømi í Bíbliuni kann brúkast sum leiðbeining?

13-15. (a) Hvussu kann meginreglan í Orðtøkunum 24:27 hjálpa einum ungum manni, sum hugsar um at giftast? (b) Hvat eigur ein ung kvinna at gera, um hon hugsar um at giftast?

treytað av tínum kenslum viðvíkjandi kærleika, kynslívi, vinalagi ella at fáa børn. Ein komandi maður og ein komandi kona eiga eisini at hugsa um ábyrgdina, sum fylgir við.

14 Ein ungur maður, sum leitar sær eftir einari konu, eigur at hugsa gjølla um hesa meginregluna: „Fullfør verk títt harúti, ger teg lidnan á markini! So kanst tú byggja tær hús." (Orðtøkini 24:27) Hvat skulu vit læra av hesum? Tá í tíðini mátti ein maður, sum vildi giftast og hava familju, spyrja seg sjálvan: 'Eri eg til reiðar at syrgja fyri einari konu og børnunum, vit møguliga fáa, og vísa teimum umsorgan?' Hann noyddist fyrst at arbeiða, altso taka sær av økrunum og grøðini. Sama meginreglan er galdandi í dag. Ein maður, sum fegin vil giftast, má hugsa um ábyrgdina, sum fylgir við. So leingi hann er førur fyri tí, má hann arbeiða. Guds orð vísir, at ein maður, sum ikki syrgir fyri familjuni likamliga, kensluliga og andaliga, er verri enn ein uttan trúgv. – **Les Fyrra Timoteusbræv 5:8.**

15 Ein kvinna, sum fegin vil giftast, má eisini vera til reiðar at átaka sær fleiri ábyrgdaruppgávur. Bíblian rósar dugnaskapinum og eginleikunum, sum ein kona má hava fyri at kunna stuðla manni sínum og syrgja væl fyri húskinum. (Orðtøkini 31:10-31) Menn og kvinnur, ið vilja giftast sum skjótast uttan at hugsa um ábyrgdina, eru í roynd og veru sjálvsøkin. Tey hugsa als ikki um, hvat tey kunnu bjóða einum møguligum hjúnafelaga. Tey, sum fegin vilja giftast, mugu fremst av øllum vera andaliga fyrireikað.

16 At fyrireika seg til hjúnalag ber í sær at grunda um leiklutin, Gud hevur givið manninum og konuni. Ein

---

16, 17. Hvørjar bíbilskar meginreglur eiga tey, sum fegin vilja giftast, at grunda um?

maður má vita, hvat tað vil siga at vera høvd, ella at hava leiðsluna, í eini kristnari familju. Hesin leikluturin gevur ikki manninum loyvi at stýra familjuni við harðari hond. Hann skal heldur hugsa um, hvussu Jesus útinnir sína leiðslu og taka eftir honum. (Efesusbrævið 5:23) Ein kvinna má eisini skilja, at hon hevur ein týðandi leiklut sum kona. Er hon fús at vera manni sínum undirgivin? (1 Korintbræv 11:3) Hon er longu undir lóg Jehova og Kristusar. (Galatiabrævið 6:2) Men myndugleikin, maðurin hevur í húskinum, umboðar eina aðra lóg. Er hon eisini sinnað at stuðla og geva seg undir myndugleikan hjá einum ófullkomnum manni? Dámar henni ikki hesi útlitini, eigur hon ikki at gifta seg.

17 Haraftrat mugu báðir hjúnafelagar vera fúsir at vísa hvørjum øðrum umhugsni. **(Les Filippibrævið 2:4.)** Paulus skrivaði: „Ein og hvør tykkara [skal] elska konu sína sum seg sjálvan. Og konan skal vísa manninum virðing.“ Við íblástri frá Gudi skilti Paulus, at maðurin hevur serligan tørv á, at konan vísir honum djúpa virðing. Og konan hevur serligan tørv á at vita, at maðurin elskar hana. – Efesusbrævið 5:21-33.

18 Tá ið tvey ganga saman, er tað ikki bara ein tíð at stuttleika sær. Tað er ein tíð, sum gevur teimum møguleika at læra hvørt annað væl at kenna og finna útav, um tað er skilagott hjá teimum at gifta seg. Tað er eisini ein tíð at læra sjálvstamarhald. Freistingin at gera nakað, sum bert hoyrir heima í hjúnalagnum, kann vera sera stór – tað er jú heilt natúrligt at kenna seg drignan at hvørjum øðrum. Men tey, sum veruliga elska hvørt annað, vilja ikki gera nakað, ið kann skaða hin andaliga. (1 Tessalonikabræv 4:6) So um tú gongur saman við einum, mást tú hava tamarhald á tær sjálvum. Hesin

---

18. Hví skulu pør hava tamarhald á sær sjálvum, meðan tey ganga saman?

eginleikin kann gagna tær alt lívið, antin tú giftist ella ikki.

HVUSSU FÁA TIT HJÚNABANDIÐ AT HALDA?

19 Skal hjúnabandið halda, mugu maður og kona hava røttu áskoðanina á lyftið, tey hava givið. Skaldsøgur og filmar enda ofta við einum vøkrum brúdleypi, sum júst er tann lukkan, fólki leingist eftir. Men í veruliga lívinum er brúdleypið ikki ein endi, tað er ein byrjan – byrjanin til nakað, sum eftir Guds ætlan skuldi vara við. (1 Mósebók 2:24) Tíverri er hetta ikki vanliga áskoðanin í dag. Í summum mentanum verður sagt um fólk, ið giftast, at tey „knýta bond". Tað er ikki vist, at tey, sum siga tað, hugsa um, hvussu væl henda myndin lýsir vanligu áskoðanina á hjúnabandið. Hvussu tá? Jú, ein góður knútur eigur at halda, so leingi tað er neyðugt, og hann skal eisini vera lættur at *loysa*.

20 Nógv í dag meta hjúnabandið sum nakað fyribils. Tey gifta seg við gleði, tí tey halda, at tað fer at nøkta teirra tørv, men tey vænta eisini at kunna fara frá hvørjum øðrum, so skjótt sum hjúnabandið gerst ov krevjandi. Til samanberingar kunnu vit hugsa um myndina, Bíblian nýtir til at lýsa hjúnabandið – trífaldaða tráðin. Í Prædikaranum 4:12 kann hebraiska orðið, sum er umsett „tráður", eisini sipa til eitt reip. Reip, sum verða brúkt umborð á seglskipum, eru gjørd til at halda, soleiðis at tey sjálvt í ringasta ódnarveðri hvørki flosna ella slitna. Hjúnabandið er á sama hátt ætlað til at halda. Minst til, at Jesus segði: 'Tað, sum Gud hevur bundið saman, má menniskja ikki skilja sundur.' (Matteus 19:6) Velur tú at giftast, mást tú hava somu áskoðan á hjúnabandið. Verður hjúnabandið ein byrða av hesum? Nei.

19, 20. Hvussu eigur okkara áskoðan á hjúnabandið at vera øðrvísi enn tann, sum er vanlig í dag? Lýs við einum dømi.

21 Maður og kona mugu varðveita røttu áskoðanina á hvørt annað. Hugsa bæði mest um teir góðu eginleikarnar og gerðirnar hjá hinum, verður hjúnabandið gott. Ber tað yvirhøvur til at hava eina so jaliga áskoðan á ein ófullkomnan maka? Hjá Jehova ber tað væl til at hava eina jaliga áskoðan á okkum, og tað líta vit á, at hann hevur. Sálmaskaldið skrivaði: „Gavst Tú misgerðum gætur,

21. Hvørja áskoðan eiga maður og kona at hava á hvørt annað, og hvat kann hjálpa teimum í hesum sambandi?

Nógv pør, sum ganga saman, ansa eftir ikki at vera einsamøll

HARRI, hvør varð tá standandi, Harri!“ (Sálmur 130:3) Maður og kona mugu á líknandi hátt hava eina jaliga áskoðan á hvørt annað og vera fyrigevandi. – **Les Efesusbrævið 4:32.**

22 Hjúnabandið kann gerast enn betri, sum árini ganga. Í Bíbliuni lesa vit um hjúnabandið hjá Ábrahami og Sáru, táið tey vóru blivin gomul. Tey høvdu eisini sítt at stríðast við. Hugsa tær, hvussu tað var hjá Sáru, sum møguliga var í trýssunum, at fara úr sínum trygga og góða heimi í ríka býnum Ur til at búgva í tjøldum restina av lívinum. Men hon læt mannin skipa fyri. Hon var ein góð kona, sum vísti manni sínum virðing og stuðlaði teimum avgerðunum, hann tók. Og hon gjørdi tað ikki bara av plikt. Sjálvt 'fyri sær sjálvari' ropti hon mann sín harra. (1 Mósebók 18:12; 1 Pætur 3:6) Hennara virðing fyri Ábrahami kom frá hjartanum.

23 Tað vil tó ikki siga, at Ábraham og Sára altíð høvdu somu áskoðan. Einaferð kom hon við einum uppskoti, sum „gjørdi Ábrahami ógvuliga ilt“. Men eftir ávísing frá Jehova lurtaði Ábraham kortini eyðmjúkur eftir konu síni, og tað vísti seg at vera gott fyri familjuna. (1 Mósebók 21:9-13) Í dag kunnu hjún, sjálvt tey sum hava verið gift í fleiri áratíggju, læra nógv av Ábrahami og Sáru.

24 Í kristnu samkomuni eru túsundtals lukkulig hjúnabond, har konan hevur djúpa virðing fyri manninum, har maðurin elskar og ærir konu sína og bæði seta Jehova á fremsta plássið. Gert tú av at gifta teg, fert tú vónandi at velja ein góðan hjúnafelaga, at fyrireika teg væl til hjúnabandið og at arbeiða upp á at fáa eitt gott og varandi hjúnaband, sum ærir Jehova Gud. Tá hjálpir títt hjúnaband tær at verða verandi í kærleika Guds.

22, 23. Hvussu eru Ábraham og Sára ein góð fyrimynd hjá hjúnum í dag?

24. Hvørji hjúnabond æra Jehova Gud, og hví?

Haldið hjúnabandið í æru

„Gleð teg í konu ungdóms tíns!“
– ORÐTØKINI 5:18.

ERT tú giftur? Um so er, ert tú tá lukkuligur, ella hava tit álvarsligar trupulleikar í hjúnabandinum? Eru tú og hjúnafelagin gliðin frá hvørjum øðrum? Roynir tú bara at halda út í hjúnabandinum uttan at gleðast um tað? Er hetta støðan, ert tú ivaleyst harmur um, at gleðin, tú einaferð kendi í hjúnalagnum, er fánað. Sum ein sannur kristin vilt tú uttan iva fegin, at títt hjúnaband skal æra Jehova Gud, sum tú elskar. Tí kunnu tínar umstøður, sum nú er, helst vera orsøk til sorg og stúranir. Men tú mást kortini ikki halda, at støðan er vónleys.

2 Nógv kristin pør, sum einaferð bert hildu út í hjúnalagnum uttan at trívast, hava í dag eitt gott hjúnalag. Tey funnu góða stevið aftur. Tú kanst eisini gerast glaðari og meira nøgdur í tínum hjúnabandi. Hvussu?

FÁ TÆTTARI SAMBAND VIÐ GUD OG HJÚNAFELAGAN

3 Tú og hjúnafelagin fáa tættari samband tykkara millum, um tit leggja tykkum eftir at fáa tættari samband við Gud. Hvussu tá? Vit kunnu lýsa tað við einum dømi: Ímynda tær eitt keyluformað fjall, altso eitt sum er breitt í neðra og gongur upp í ein spíss. Ein maður stendur undir fjallinum á norðara skráanum, og ein

1, 2. Hvat fara vit at kanna, og hví?
3, 4. Hví fáa maður og kona tættari samband sínámillum, um tey leggja seg eftir at fáa tættari samband við Gud? Lýs við einum dømi.



Tá ið tit brúka kunnskapin í Bíbliuni, styrkir tað hjúnabandið

kvinna stendur hinumegin fjallið við sunnara skráan. Bæði fara til gongu niðan á fjallið. Meðan tey eru niðarliga á fjallinum, er langt ímillum tey. Men so hvørt sum tey koma longri og longri niðaná, minkar frástøðan teirra millum. Skilir tú, hvussu henda myndin kann vera ein uggi hjá tær og hjúnafelaganum?

4 Vit kunnu samanbera orkuna, tú leggur í at tæna Jehova av heilum huga, við orkuna, tú skalt brúka fyri at koma niðan á ein fjallatind. Tú elskar Jehova, og tí stríðist tú so at siga longu fyri at koma niðan á fjallið. Men um tú og hjúnafelagin eru gliðin frá hvørjum øðrum, tykist tað, sum tit ganga hvør sínumegin fjallið. Hvat hendir, um tit halda fram at ganga? Gaman í er frástøð-

an millum tykkum rættiliga stór í fyrstuni. Men størri orku tit leggja í at nærkast Gudi – at ganga longri niðan – tættari samband fáa tú og hjúnafelagin. Ja, lykilin til at fáa tættari samband við hjúnafelagan er at fáa tættari samband við Gud. Hvussu fært tú so tað?

5 Eitt, sum tú og hjúnafelagin mugu leggja tykkum eftir, meðan tit so at siga ganga niðan eftir fjallinum, er at fylgja leiðbeiningini í Bíbliuni um hjúnabandið. (Sálmur 25:4; Esaias 48:17, 18) Hugsa tí um eini ávís ráð, sum Paulus ápostul gav. Hann segði: „Hjúnabandið veri hildið í æru hjá øllum.“ (Hebrearabrævið 13:4) Hvat vil tað siga? Orðið 'æra' merkir nakað, sum er virðingarvert og dýrabart. Og tað er akkurát soleiðis, Jehova metir hjúnabandið – sum nakað dýrabart.

DRÍVMEGIN – INNILIGUR KÆRLEIKI TIL JEHOVA

6 Av tí at tit eru tænarar hjá Gudi, *vita* tú og hjúnafelagin sjálvsagt, at hjúnabandið er dýrabart, enntá heilagt. Tað var jú Jehova, sum stovnaði tað. **(Les Matteus 19:4-6.)** Men um tú í løtuni hevur trupulleikar í hjúnabandinum, fara tú og hjúnafelagin neyvan at vísa hvørjum øðrum kærleika og virðing, bara tí tit vita, at hjúnabandið er dýrabart. Hvat kann so fáa tykkum at gera tað? Tá ið vit kanna, hvørjum samanhangi Hebrearabrævið 13:4 stendur í, síggja vit, at tað, sum Paulus segði um hjúnabandið, er ein partur av nøkrum áminningum til hebrearanar. (Hebrearabrævið 13:1-5) So tað, sum Paulus segði, var altso ikki bert ein eygleiðing, men ein áminning um hjúnabandið. At hava hetta í huga kann

---

5. (a) Hvussu ber til at fáa tættari samband við Jehova og hjúnafelagan? (b) Hvussu metir Jehova hjúnabandið?

6. Hvat vísir samanhangið í leiðbeiningini hjá Paulusi um hjúnabandið, og hví er tað umráðandi at hava tað í huga?

kanska hjálpa tær at gera nakað fyri aftur at kveikja tína virðing fyri hjúnafelagnum. Hvussu kann tað tað?

7 Hugsa um, hvussu tú metir onnur boð í Bíbliuni, til dømis at gera lærisveinar ella at koma saman fyri at tilbiðja Gud. (Matteus 28:19; Hebrearabrævið 10:24, 25) Tað er rætt, at tað av og á kann vera ein avbjóðing at fylgja hesum boðum. Fólkini, sum tú møtir í boðanini, eru kanska ikki serliga blíð, og títt verðsliga arbeiði kann eisini møða teg so nógv, at tú næstan ikki orkar at fara á møti. Og kortini heldur tú fram at boða tey góðu tíðindini um Ríkið og at ganga á møti. Eingin fær steðgað tær – heldur ikki Satan! Hví ikki? Tí tú elskar Jehova, og tað fær teg at halda hansara boð. (1 Jóhannes 5:3) Hvat gott spyrst burturúr? Jú, at vera við í boðanini og at ganga á møti gevur tær frið í sinnið og djúpa gleði, tí tú veitst, at tú gert vilja Guds. Og hesar kenslurnar geva tær nýggja styrki. (Nehemias 8:10) Hvat lærir hetta okkum?

8 Eins og djúpi kærleikin til Jehova fær teg at akta boðini um at boða gleðiboðskapin og at koma saman á møtum hóast forðingar, kann hesin kærleikin eisini fáa teg at fylgja bíbilsku áminningini um at halda hjúnabandið í æru, sjálvt tá ið tað er torført. (Hebrearabrævið 13:4; Sálmur 18:30; Prædikarin 5:3) Og eins og Jehova signar tína stremban eftir at vera við í boðanini og at koma á møti, signar hann eisini tínar royndir at æra hjúnabandið. – 1 Tessalonikabræv 1:3; Hebrearabrævið 6:10.

9 Men hvussu kanst tú halda hjúnabandið í æru? Tú mást ikki hava atburð og talu, sum skaðar sambandið

---

7. (a) Hvørji boð í Bíbliuni halda vit, og hví? (b) Hvat gott spyrst burtur úr at akta?
8, 9. (a) Hvat kann fáa okkum at fylgja áminningini um at æra hjúnabandið, og hví? (b) Hvat fara vit at kanna nærri?

millum teg og hjúnafelagan. Haraftrat mást tú taka stig til at styrkja hjúnabandið.

HAV IKKI TALU OG ATBURÐ, SUM VANÆRA HJÚNABANDIÐ

10 Ein gift systir segði einaferð: „Eg biði Jehova hjálpa mær at halda út.“ Halda hvat út? Hon greiddi frá: „Maður mín slær meg við orðum. Eg havi kanska ikki sjónligar snuddir, men hansara áhaldandi speisku orð, so sum ’eg havi bara stríð av tær’, og ’tú nyttar einki’, stinga meg í hjartað.“ Henda systirin nevnir nakað sera álvarsamt – háðandi talu í hjúnabandinum.

11 Tað er syndarligt, táið hjúnafelagar sleingja særandi orð eftir hvørjum øðrum, orð sum lata kenslulig sár eftir seg,ið eru ring at grøða. Tað er týðiligt, at eitt hjúnaband, sum er eyðmerkt av særandi talu, ikki verður hildið í æru. Hvussu er støðan í tínum hjúnabandi? Tú kundi spurt hjúnafelagan: ’Hvussu verður tú ávirkaður av tí, sum eg sigi?’ Svarar hjúnafelagin, at tín tala ferð eftir ferð er særandi, mást tú vera fúsur at bøta um støðuna. – Galatiabrævið 5:15; **les Efesusbrævið 4:31.**

12 Hav altíð í huga, at orðalagið, tú nýtir í hjúnabandinum, ávirkar títt samband við Jehova. Bíblian sigur: „Um onkur heldur seg dýrka Gud – og heldur ikki tungu sína í teymum, men dárar hjarta sítt – gudsdýrkan hansara er til einkis.“ (Jákup 1:26) Tín tala er ein partur av tíni tilbiðing. Bíblian stuðlar ikki hugsanini um, at tað, sum gongur fyri seg heima við hús, einki hevur upp á seg, bara mann sjálvur heldur seg tæna Gudi. Lumpa ikki teg sjálvan. Hetta hevur alstóran

---

10, 11. (a) Hvør atburður vanærir hjúnabandið? (b) Hvønn spurning kundu vit sett okkara hjúnafelaga?
12. Hvussu kann okkara tilbiðing gerast nyttuleys í Guds eygum?

týdning. **(Les Fyrra bræv Pæturs 3:7.)** Tú ert kanska dugnaligur og íðin í sannleikanum, men um tú við vilja særir hjúnafelagan við hvøssum orðum, vanærir tú hjúnabandið, og tín gudsdyrkan kann vera nyttuleys í Guds eygum.

13 Hjúnafelagar mugu eisini ansa eftir ikki at særa hvønn annan óbeinleiðis. Hugsa um hesi bæði dømini: Ein einlig mamma ringir ofta til ein giftan bróður í samkomuni, tí hon hevur tørv á ráðum, og tey tosa saman leingi. Ein stakur bróðir brúkar rættiliga nógva tíð saman við eini giftari systur í boðanini hvørja viku. Gifti bróðirin og gifta systirin í hesum dømunum hava kanska bara gott í huga. Men hvussu ávirkar teirra atburður hjúnafelagarnar hjá teimum? Ein gift kona, sum er í eini líknandi støðu, sigur: „Tað særir meg at síggja, at maður mín brúkar so nógva tíð upp á eina aðra systur í samkomuni og vísir henni so nógv uppmerksemi. Eg føli meg setta til viks."

14 Tað er væl skilligt, at henda konan og onnur, sum eru í eini líknandi støðu, kenna seg særd. Hjúnafelagarnir hjá teimum geva sær ikki far um ta grundleggjandi leiðbeiningina frá Gudi um hjúnabandið: „Maðurin [fer] frá faðir og móður og *heldur seg til konu sína."* (1 Mósebók 2:24) Tey, sum gifta seg, hava sjálvsagt framvegis virðing fyri sínum foreldrum, men Gud hevur skipað tað soleiðis, at tey fremst av øllum skulu hugsa um hvørt annað. Og hóast hjúnafelagar eru góðir við sínar trúarfelagar, eiga maður og kona fyrst og fremst at taka sær av hvørjum øðrum. So um ein, ið er giftur,

---

13. Hvussu kundi ein maður ella ein kona sært hjúnafelagan?

14. (a) Hvørja skyldu í hjúnabandinum verður dentur lagdur á í Fyrstu Mósebók 2:24? (b) Hvønn spurning eiga vit at seta okkum sjálvum?

brúkar ov nógva tíð upp á ella fær ov tætt samband við ein trúarfelaga, serliga um tað er ein av hinum kyninum, kann tað tyngja støðuna í hjúnabandinum. Kundi hetta verið orsøkin til, at støðan er, sum hon er, í tínum hjúnabandi? Spyr teg sjálvan: 'Gevi eg hjúnafelaga mínum ta tíð, uppmerksemi og kærleika, sum hann ella hon av røttum eigur at fáa?'

15 Haraftrat koma gift kristin sær í eina vandamikla støðu, um tey vísa einum av hinum kyninum, sum tey ikki eru gift við, óhóskandi uppmerksemi. Tíverri hava nøkur fingið romantiskar kenslur fyri einum, sum tey hava fingið í so tætt samband við. (Matteus 5:28) Og hesar kenslurnar hava ført til atburð, sum vanærir hjúnabandið uppaftur meira. Legg til merkis, hvat Paulus ápostul skrivaði um hetta evnið.

„HJÚNASONGIN VERI ÓDÁLKAÐ“

16 Beint eftir at Paulus gav áminningina um at halda hjúnabandið í æru, legði hann hesi orðini aftrat: „Hjúnasongin veri ódálkað! Tí siðloysingar og horkallar skal Gud døma.“ (Hebrearabrævið 13:4) Paulus brúkti orðingina „hjúnasongin“ til at lýsa kynslívið. Og tað er bert „ódálkað“, ella siðiliga reint, um tað fer fram í hjúnabandinum. Tí fylgja sonn kristin íblástu orðunum: „Gleð teg í konu ungdóms tíns!“ – Orðtøkini 5:18.

17 Tey, sum hava kynsligt samband við ein, tey ikki eru gift við, vanvirða siðareglurnar, sum Gud hevur ásett. Tað er rætt, at nógv halda, at tað mestsum er í lagi at vera hjúnafelaganum ótrúgvur. Men sonn kristin eiga ikki at lata seg ávirka av tí, sum onnur *menniskju* halda um hjúnabandsbrot. Tey vita, at tá ið samanum kemur, eru tað ikki menniskju, men *Gud,* sum skal 'døma siðloysingar og horkallar'. (Hebrearabrævið 10:31; 12:29) Og tí hava sonn kristin somu áskoðan á hetta málið sum Jehova. **(Les Rómbrævið 12:9.)** Minst til orðini hjá Job: „Sáttmála hevði eg gjørt við eygu míni.“ (Job 31:1) Fyri

---

15. Hví eiga gift kristin sambært Matteus 5:28 ikki at vísa einum av hinum kyninum óhóskandi uppmerksemi?
16. Hvørji boð gevur Paulus um hjúnabandið?
17. (a) Hví lata sonn kristin seg ikki ávirka av heimsins áskoðan á hjúnabandsbrot? (b) Hvussu kunnu vit gera sum Job?

ikki at stíga so mikið sum eitt fet inn á vegin,ið kann føra til hjúnabandsbrot, mugu sonn kristin hava tamarhald á eygunum og ongantíð hyggja við girnd at einum av hinum kyninum, sum tey ikki eru gift við. – Sí uppískoytið, síðurnar 219-221.

18 Hvussu álvarsamt er hjúnabandsbrot í eygum Jehova? Móselógin hjálpir okkum at skilja, hvørjar kenslur Jehova hevur í tí sambandi. Í Ísrael vóru hjúnabandsbrot og avgudadyrkan millum tey lógarbrotini, sum deyðarevsing var fyri. (3 Mósebók 20:2, 10) Sært tú, hvat hesi bæði lógarbrotini hava í felag? Jú, ein ísraelsmaður,ið tilbað ein avgud, breyt sáttmálan við Jehova. Og ein ísraelsmaður, sum framdi hjúnabandsbrot, breyt sáttmálan við hjúnafelagan. Í báðum førum var talan um trúloysi. (2 Mósebók 19:5, 6; 5 Mósebók 5:9; **les Malakias 2:14.**) Tí metti Jehova, hin trúfasti og álítandi Gud, báðar menninar at vera revsiverdar. – Sálmur 33:4.

19 Sum skilst eru Guds tænarar í dag ikki undir Móselógini. Men at minna seg á, at hjúnabandsbrot var eitt so álvarsamt lógarbrot í fortíðar Ísrael, kann hjálpa teimum at halda fast við sína avgerð um ikki at gera nakað slíkt. Hví? Hugsa um hesa samanberingina: Hevði tú nakrantíð farið inn í eina kirkju, lagt teg á knæ og biðið framman fyri einari gudamynd? 'Ongantíð!' sigur tú. Men hevði tú verið freistaður, um onkur bjóðaði tær nógvar pengar afturfyri? 'Als ikki!' svarar tú. Nei, bara tankin um at svíkja Jehova við at tilbiðja ein avgud er andstyggiligur hjá sonnum kristnum. Á líknandi hátt eigur sjálvur tankin um at svíkja Jehova og hjúnafelagan

---

18. (a) Hvussu álvarsamt er hjúnabandsbrot í eygum Jehova? (b) Hvat hava hjúnabandsbrot og avgudadyrkan í felag?
19. Hvat kann hjálpa okkum at halda fast við okkara avgerð um ikki at fremja hjúnabandsbrot, og hví?

við at fremja hjúnabandsbrot at vekja andstygd hjá Guds tænarum – uttan mun til hvat tað er, sum eggjar til eina slíka synd. (Sálmur 51:3, 6; Kolossebrævið 3:5) Vit vilja als ikki gera nakað, sum gleðir Satan, men vanærir Jehova og hjúnabandið.

HVUSSU KANST TÚ STYRKJA HJÚNABANDIÐ?

20 Umframt at sleppa tær undan atburði, sum vanærir hjúnabandið, kanst tú spyrja teg sjálvan: 'Hvørji stig kann eg taka fyri aftur at fáa virðing fyri mínum hjúnafelaga?' Ímynda tær hjúnabandið sum eitt heim. Hugsa síðani, at vinaligu orðini, umhugsnið og annað, sum maður og kona gera fyri at vísa, at tey eru góð við hvørt annað, eru prýðislutir, ið fríðka um heimið. Hava tú og hjúnafelagin eitt gott og tætt samband, er tykkara hjúnaband sum eitt heim, ið er prýtt við lutum, sum gera heimið fjálgt og hugnaligt. Minkar kærleikin tykkara millum, hvørva prýðislutirnir so líðandi, og hjúnabandið verður eins dapurt og eitt heim við ongum prýðislutum. Av tí at tit fegin vilja fylgja Guds boðum um at halda hjúnabandið í æru, kenna tit tykkum eggjað til at betra um støðuna. Nakað, sum er dýrabart og ærumikið, er hóast alt vert at umvæla. Hvussu kunnu tit gera tað? Guds orð sigur: „Við vísdómi verður hús bygt, við viti verður tað grundfest, og við kunnskapi verða kømurini fylt við øllum, ið dýrabart er og nógv vert." (Orðtøkini 24:3, 4) Hugsa um, hvussu hesi ørindini kunnu brúkast í sambandi við hjúnabandið.

21 Sannur kærleiki, gudsótti og sterk trúgv hoyra til teir dýrabaru skattirnar, ið gera eina familju lukkuliga.

---

20. Hvat er hent í nøkrum hjúnabondum? Lýs við einum dømi.
21. Hvussu kunnu vit so við og við styrkja okkara hjúnaband? (Sí eisini rammuna á síðu 131.)

HVUSSU KANN EG BETRA UM MÍTT HJÚNABAND?

Meginregla: **„Ein og hvør tykkara [skal] elska konu sína sum seg sjálvan. Og konan skal vísa manninum virðing.“ – Efesusbrævið 5:33.**

Spyr teg sjálvan

■ Hvørjar góðar eginleikar hevur hjúnafelagi mín, og hvussu kann eg vísa, at eg virðismeti hann ella hana? – Orðtøkini 14:1; 31:29; 1 Pætur 3:1, 6; 4:8.

■ Æri eg hjúnafelaga mín við at royna at skilja tankarnar og kenslurnar hjá honum ella henni? – Filippibrævið 2:4.

■ Eri eg fúsur at lata mistøkini hjá hjúnafelaga mínum fara aftur við borðinum? – Matteus 6:14, 15.

■ Nær segði eg seinast við hjúnafelaga mín, at eg elski hann ella hana? – Hásongurin 2:9-14.

■ Hvørji andalig mál hava vit? – Matteus 6:33, 34; 1 Korintbræv 9:24-27.

■ Hvat kann eg gera fyri at geva hjúnafelaga mínum hug til at lesa í Bíbliuni saman við mær og at tosa um dagstekstin?

(Orðtøkini 15:16, 17; 1 Pætur 1:7) Hetta eru eginleikar, sum styrkja hjúnabandið. Men legði tú til merkis, *hvussu* kømrini í áðurnevnda orðatakinum verða fylt við øllum, ið er dýrabart? „Við kunnskapi." Ja, tá ið hjúnafelagar nýta kunnskapin í Bíbliuni, kann hann broyta hugsanarháttin hjá teimum og fáa tey at vekja kærleikan aftur sínámillum. (Rómbrævið 12:2; Filippibrævið 1:9, *Dahl/Viderø*) So tá ið tú og hjúnafelagin seta tykkum saman í friði og náðum at tosa um okkurt úr Bíbliuni, sum til dømis dagstekstin ella eina grein í *Vagttårnet* ella *Vågn op!* um hjúnabandið, er tað, sum hyggja tit at einum vøkrum prýðisluti, ið kann fríðka um heimið. Tá ið tað er kærleikin til Jehova, sum fær tykkum at fylgja ráðunum, tit júst hava lisið, bera tit so at siga henda prýðislutin inn í kømrini í tykkara heimi. Úrslitið kann verða, at tað aftur verður fjálgt og hugnaligt í tykkara hjúnabandi.

22 Tað kann gaman í taka bæði tíð og orku at seta prýðislutirnar upp á pláss aftur ein og ein. Men um tú gert títt, fyri at tað skal eydnast, kanst tú veruliga gleðast um, at tú fylgir hesum boðnum í Bíbliuni: „Kappist um at vísa hvør øðrum heiður!" (Rómbrævið 12:10; Sálmur 147:11) Og tað besta av øllum er, at um tú strembar eftir at halda hjúnabandið í æru, heldur tú teg í kærleika Guds.

---

22. Hvørja gleði fáa vit, um vit gera okkara til at styrkja hjúnabandið?

Lat tína talu vera uppbyggjandi

„Eingin ólíklig tala komi tykkum av munni, nei, slík, sum góð er til uppbygging.“ — EFESUSBRÆVIÐ 4:29.

UM TÚ gavst einum, tú ert góður við, eina gávu, hvussu hevði tú so havt tað, um hann við vilja misnýtti hana? Latið okkum siga, at tú gavst honum ein bil, og at tú seinni frætti, at hann hevði koyrt uttan fyrilit og løstað onnur. Hevði tú ikki verið vónbrotin?

2 Jehova hevur givið okkum gávuna at tosa, ja, ’allar góðar gávur og allar fullkomnar gávur’ koma frá honum. (Jákup 1:17) Henda gávan, sum dýrini ikki hava, ger okkum før fyri at seta orð á bæði hugsanir og kenslur. Men eins og ein bilur kann misnýtast, kann gávan at tosa eisini verða misnýtt. Sum tað man harma Jehova, tá ið vit tosa uttan fyrilit og eru orsøk til sorg og pínu hjá øðrum.

3 Skulu vit halda okkum í kærleika Guds, mugu vit brúka taluna soleiðis, sum Jehova hevði ætlað tað. Hann letur ongan iva vera um, hvat slag av talu gleðir hann. Hansara orð sigur: „Eingin ólíklig tala komi tykkum av munni, nei, slík, sum góð er til uppbygging, sum nú tørvar, so tey, sum hoyra, kunnu fáa náði við henni!“ (Efesusbrævið 4:29) Latið okkum kanna, hví vit mugu

1-3. (a) Hvørja gávu hevur Jehova millum annað givið okkum, og hvussu kann hon misnýtast? (b) Hvussu skulu vit brúka gávuna at tosa, um vit skulu halda okkum í kærleika Guds?

Mild tunga er lívgandi

hava tamarhald á okkara talu, hvussu vit ikki eiga at tosa, og hvussu okkara tala kann vera 'góð til uppbygging'.

HVÍ SKULU VIT ANSA EFTIR, HVUSSU VIT TOSA?

4 Ein týðandi orsøk til, at vit mugu ansa eftir, hvussu vit tosa, er, at *orð hava megi.* Í Orðtøkunum 15:4 stendur: „Spakfør tunga er træ lívsins, men rangvørg tunga særir hjartað.“* Eins og vatn fær eitt tyst træ at koma fyri seg, kann ein mild tunga við sissandi talu lívga tey, sum hoyra hana. Sum mótsetningur til hetta kunnu rangvørg orð frá eini spiltari tungu bróta onnur niður. Ja, tað, vit siga, hevur megi at skaða ella grøða. – Orðtøkini 18:21.

5 Eitt annað orðatak lýsir megina, ið orð hava, soleiðis: „Mong tala orð, ið stinga sum svørð.“ (Orðtøkini 12:18) Orð, sum verða søgd í tankaloysi, kunnu geva djúp kenslulig sár og oyðileggja vinaløg. Hava orð nakrantíð kenst sum ein svørðstingur í tínum hjarta? Sama orðatakið sigur eisini: „Tunga hinna vísu

* Hebraiska orðið, sum í Orðtøkunum 15:4 er umsett 'rangvørgur', kann eisini týðast „óreiðiligur, spiltur“.

4, 5. Hvussu lýsa nøkur orðatøk í Bíbliuni megina, ið orð hava?

er heilsubót.“ Umhugsin orð frá einum, ið speglar vísdómin frá Gudi, kunnu grøða eitt sært hjarta og fáa eitt vinalag aftur á rætt. Hevur tú onkuntíð upplivað ta grøðandi megina í vinaligum orðum? **(Les Orðtøkini 16:24.)** Tá ið vit vita, hvørja megi orð hava, mugu vit hugsa okkum væl um, so okkara tala kann grøða onnur og ikki skaða tey.

6 Líkamikið hvussu nógva orku vit leggja í, ber tað ikki til hjá okkum at hava fult tamarhald á tunguni. Tað fær okkum at hugsa um eina aðra orsøk til, at vit skulu ansa eftir, hvussu vit tosa. *Vit hava vegna synd og ófullkomileika lyndi til at misnýta tunguna.* Orð spretta úr hjartanum, og „menniskjahjartans tankar eru óndir“. (1 Mósebók 8:21; Lukas 6:45) Tí er tað eitt satt stríð at halda tunguni í teymum. **(Les Bræv Jákups 3:2-4.)** Hóast vit ikki til fulnar kunnu fáa tamarhald á tunguni, kunnu vit áhaldandi royna at betra um støðuna. Eins og ein, sum svimur í streymasjógvi, alla tíðina má stríðast ímóti streyminum, mugu vit eisini halda á at stríðast ímóti okkara syndiga lyndi til at misnýta tunguna.

7 Ein triðja orsøk til, at vit skulu ansa eftir, hvussu vit tosa, er, at *vit skulu standa Jehova til svars fyri okkara talu.* Okkara nýtsla av tunguni ávirkar ikki bara okkara samband við onnur menniskju, men eisini okkara samband við Jehova. Í Brævi Jákups 1:26 stendur: „Um onkur heldur seg dýrka Gud – og heldur ikki tungu sína í teymum, men dárar hjarta sítt – gudsdýrkan hansara er til einkis.“ Sum nevnt í undanfarna kapitli er okkara tala ein óloysandi partur av okkara tilbiðing. Hava vit ikki tamarhald á okkara tungu, men oysa út særandi og

---

6. Hví er tað eitt satt stríð at halda tunguni í teymum?
7, 8. Í hvussu stóran mun skulu vit standa Jehova til svars fyri tað, vit siga?

eitrandi talu, kann øll okkara gudsdyrkan vera nyttuleys í Guds eygum. Er hetta ikki vert at hugsa um? – Jákup 3:8-10.

8 Tað er týðiligt, at vit hava sera góðar grundir til at ansa eftir, at vit ikki misnýta gávuna at tosa. Áðrenn vit fara at viðgera talu, sum er uppbyggjandi, skulu vit umrøða talu, sum als ikki hoyrir heima hjá sonnum kristnum.

NIÐURBRÓTANDI TALA

9 *Skammiligt tos.* Bannan, blótan og annað skammiligt tos er púra vanligt at hoyra í dag. Nógv hava lyndi til at tosa á henda hátt fyri at leggja dent á okkurt ella fyri at viga upp ímóti sínum avmarkaða orðfeingi. Skemtarar tosa ofta ljótt og ónærisligt fyri at fáa fólk at flenna. Men skammiligt tos er einki at flenna at. Fyri umleið 2.000 árum síðani gav Paulus ápostul samkomuni í Kolosse boð um at gevast við 'skammiligum tosi'. (Kolossebrævið 3:8) Og við samkomuna í Efesus segði hann, at „ótilhoyriligt skemt" ikki so mikið sum mátti nevnast millum sonn kristin. – Efesusbrævið 5:3, 4.

10 Jehova heldur, at skammiligt tos er andstyggiligt. Og tey, sum elska hann, halda eisini, at tað er andstyggiligt. Okkara kærleiki til Jehova fær okkum at skýggja skammiligt tos. Tá ið Paulus uppreksaði „verk holdsins", nevndi hann millum annað 'óreinsku', sum kann fevna um óreina talu. (Galatiabrævið 5:19-21) Hetta er eitt álvarsligt mál. Ein í samkomuni kann verða útihýstur, um viðkomandi stívrendur heldur fram at hava sera ónærisliga, niðurbrótandi og siðspill-

---

9, 10. (a) Hvat tos er púra vanligt at hoyra í dag? (b) Hví mugu vit skýggja skammiligt tos? (Sí eisini undirgreinina.)

andi talu, hóast hann ferð eftir ferð hevur fingið leiðbeining um hetta.*

11 *Skaðiligt tos og útspilling.* Tað er ógvuliga vanligt at tosa um onnur. Men er tað altíð skaðiligt? Ikki tá ið talan er um meinaleyst prát, har tosað verður um okkurt gott ella nyttuligt, til dømis um hvør akkurát er blivin doyptur, ella hvør hevur tørv á troyst. Tey kristnu í fyrstu øld vóru sera áhugað í, hvussu teirra trúarfelagar høvdu tað, og í tí sambandi fortaldu tey eisini hvørjum øðrum viðkomandi tíðindi. (Efesusbrævið 6:21, 22; Kolossebrævið 4:8, 9) Men at tosa um onnur kann vera skaðiligt, um vit reingja sannleikan ella avdúka trúnaðarmál. Og tað kann elva til nakað enn meira álvarsamt, nevniliga útspilling, sum altíð er skaðilig. Útspilling kann lýsast sum falskar ákærur, ið vanæra og oyðileggja umdømið hjá einum øðrum. Til dømis spiltu farisearanir Jesus út í síni roynd at koma honum í ringt orð. (Matteus 9:32-34; 12:22-24) Útspilling elvir ofta til klandur og stríð. – Orðtøkini 26:20.

12 At summi brúka gávuna at tosa til at spilla onnur út ella sáa split, tekur Jehova í stórum álvara. Hann hatar tey, sum 'seta split millum brøður'. (Orðtøkini 6:16-19) Grikska orðið, sum verður umsett „útspillari", er *dia'bolos,* og tað er eitt heiti, ið verður nýtt um Satan. Hann er „Djevulin", sum óndskapsfullur spillir Gud út. (Opinberingin 12:9, 10) Vit vilja sjálvandi ikki hava

* Í Bíbliuni hevur orðið „óreinska" breiðan týdning, sum kann fevna um fleiri ymisk sløg av syndum. Hóast óreinska ikki altíð krevur, at ein dómsnevnd tekur málið upp, kann ein í samkomuni verða útihýstur, um hann heldur fram at fremja *grova* óreinsku og ikki angrar. – 2 Korintbræv 12:21; Efesusbrævið 4:19; sí „Spørgsmål fra læserne" í *Vagttårnet,* 15. juli 2006.

11, 12. (a) Nær kann tað gerast skaðiligt at tosa um onnur? (b) Hví mugu tey, ið tæna Jehova, ikki hava útspillandi talu?

eina talu, sum í roynd og veru kundi gjørt okkum til ein djevul. Einki pláss er í samkomuni fyri útspillandi talu, sum millum annað elvir til 'stríð' og 'tvídrátt'. (Galatiabrævið 5:19-21) Tí mást tú, áðrenn tú fortelur nakað víðari um onkran, spyrja teg sjálvan: 'Er tað satt? Hevði tað verið vinaligt at sagt øðrum tað? Er tað neyðugt ella ráðiligt at fortelja tað fyri øðrum?' – **Les Fyrra Tessalonikabræv 4:11.**

13 *Háðandi tala.* Sum áður nevnt hava orð megi at skaða. Av tí at vit eru ófullkomin, siga vit øll av og á okkurt, sum vit angra. Men Bíblian ávarar okkum um eitt slag av talu, sum hvørki hoyrir heima í familjuni ella í samkomuni. Paulus segði við tey kristnu: „Allur beiskleiki, alt illsinni, øll vreiði, allur gangur og øll háðan veri langt frá tykkum!" (Efesusbrævið 4:31) Í øðrum umsetingum verður orðið „háðan" endurgivið „ónd orð", „særandi tala" og „spottan". Háðandi tala – eitt nú at geva eyðmýkjandi eyknevni og at koma við ógvisligum og áhaldandi atfinningum – er nakað, sum kann taka virðileikan frá øðrum og fáa tey at kenna seg nyttuleys. Háðandi tala er ógvuliga niðurbrótandi, og í hesum sambandi eru børn, sum jú eru sera kensluborin og vóngóð, serliga viðbrekin. – Kolossebrævið 3:21.

14 Bíblian fordømir strangliga tað at háða – altso vanan at spotta onnur við eyðmýkjandi ella vanærandi talu. Ein, sum heldur fram at tosa soleiðis, kemur sær sjálvum í eina vandamikla støðu, tí ein, ið háðar onnur, kann verða koyrdur úr samkomuni, um hann ikki lurtar eftir tí, sum ferð eftir ferð verður gjørt fyri at hjálpa honum at broyta seg. Og um hann ikki broytir seg, kann hann eisini missa útlitini til signingarnar

---

13, 14. (a) Hvussu kann háðandi tala ávirka onnur? (b) Hví kemur ein, sum heldur fram at háða onnur, sær í eina vandamikla støðu?

í nýggja heiminum. (1 Korintbræv 5:11-13; 6:9, 10) So tað er týðiligt, at vit ikki kunnu halda okkum í kærleika Guds, um vit halda fram at hava skaðiliga, ósanna ella óvinaliga talu. Sovorðin tala er niðurbrótandi.

UPPBYGGJANDI TALA

15 Hvussu kunnu vit brúka gávuna at tosa, soleiðis sum Jehova ætlaði tað? Minst til, at Guds orð eggjar okkum til bert at tala tað, sum er 'gott til uppbygging'. (Efesusbrævið 4:29) Tað gleðir Jehova, táið vit hava uppbyggjandi talu, sum uggar og styrkir onnur. Slík tala krevur, at vit hugsa okkum væl um. Vit finna onga reglugerð í Bíbliuni, sum vit skulu fylgja í hesum sambandi, og har er heldur eingin listi við góðkendum sløgum av 'heilnæmari', ella gagnligari, talu. (Titus 2:8) Skulu vit hava talu, sum er 'góð til uppbygging', mugu vit hava tríggjar einfaldar men týðandi lutir í huga, sum eyðmerkja uppbyggjandi talu, nevniliga at hon skal vera gagnlig, sonn og vinalig. Latið okkum tí kanna nøkur fá dømi um uppbyggjandi talu. – Sí rammuna „Er mín tala uppbyggjandi?“ á síðu 140.

16 *Ektað rós.* Bæði Jehova og Jesus vita, hvussu umráðandi tað er at rósa og viðurkenna onnur. (Matteus 3:17; 25:19-23; Jóhannes 1:48) Sum sonn kristin eiga vit at rósa øðrum av hjartanum. Hví? Í Orðtøkunum 15:23 stendur: „Hvussu gott er ikki orð, sagt í rættari tíð!“ Spyr bara teg sjálvan: 'Hvussu havi eg tað, táið onkur rósar mær av hjartanum? Er tað ikki nakað, sum gleðir og uppbyggir meg?' Jú, ektað rós vísir, at onkur hugsar um teg og er góður við teg, og at tað, sum

---

15. Hvør tala er 'góð til uppbygging'?
16, 17. (a) Hví skulu vit rósa øðrum? (b) Nær kunnu vit rósa øðrum í samkomuni? í familjuni?

ER MÍN TALA UPPBYGGJANDI?

Meginregla: „Tala tykkara veri altíð dámlig!“ – Kolossebrævið 4:6.

Spyr teg sjálvan

■ Er tað langt síðan, at eg rósti onkrum fyri okkurt ávíst? – 1 Korintbræv 11:2; Opinberingin 2:1-3.

■ Vísi eg øðrum virðing við at tosa fólkaliga og siga takk? – 1 Mósebók 50:17; Jóhannes 11:41.

■ Tosi eg mest um meg sjálvan, ella havi eg eisini áhuga fyri, hvat onnur hugsa og føla? – Filippibrævið 2:3, 4; Jákup 1:19.

■ Brúki eg tað, sum eg veit um onnur, til at byggja tey upp ella bróta tey niður? – Orðtøkini 15:1, 2.

■ Hvussu meti eg tað at banna, og hvussu vísir mín hugburður hesum viðvíkjandi, hvat býr í mínum hjarta? – Lukas 6:45; Jákup 3:10, 11.

tú gjørdi, var stríðið vert. At fáa sovorðna viðurkenning styrkir sjálvsálitið, og tú fært hug at gera tær enn størri ómak. Tá ið tær nú dámar at *fáa* rós, eigur tú so ikki eisini at gera alt, tú kanst, fyri at *geva* rós? – **Les Matteus 7:12.**

17 Ven teg at hyggja eftir tí góða í øðrum og rósa teimum. Tú hoyrir kanska ein góðan fyrilestur á einum møti í samkomuni, leggur til merkis, at ein av teimum ungu ger andalig framstig, ella sært ein av teimum eldru koma trúfast á møtini hóast avmarkingar, ið kunnu koma við aldrinum. Ektað rós kann nema teirra hjarta og styrkja tey andaliga. Í familjuni hava maður og kona tørv á at fáa rós og viðurkenning frá hvørjum øðrum. (Orðtøkini 31:10, 28) Serliga børn hava brúk fyri uppmerksemi og kærleika. Børn hava líka stóran tørv á at fáa rós og viðurkenning, sum ein planta hevur tørv á sólarljósi og vatni. Tit foreldur mugu leita eftir møguleikum at rósa børnunum fyri teirra góðu eginleikar og tað góða, tey gera. Gera tit tað, fáa børnini helst størri dirvi og sjálvsálit, og tað kann geva teimum enn størri hug til at gera tað rætta.

18 *Uppbygging og troyst.* Jehova hevur inniliga umsorgan fyri teimum 'niðurboygdu' og 'sundursoraðu'. (Esaias 57:15) Hansara orð eggjar okkum til at 'uppbyggja hvør annan' og at 'troysta hini mótfalnu'. (1 Tessalonikabræv 5:11, 14) Vit kunnu vera vís í, at Jehova bæði varnast tað og verður glaður, tá ið vit uppbyggja og troysta okkara trúarfelagar, sum ikki hava tað gott.

19 Men hvat kanst tú siga fyri at uppbyggja ein trúarfelaga, sum hevur mist mótið ella er tunglyndur?

18, 19. Hví eiga vit at gera okkara besta fyri at uppbyggja og troysta okkara trúarfelagar, og hvussu gera vit tað?

Jehova verður glaður, tá ið vit uppbyggja onnur við okkara talu

Tú skalt ikki føla, at tú noyðist at loysa trupulleikan. Fá orð eru ofta tað, sum riggar best. Vissa tann niðurboygda um, at tú ert góður við hann og hugsar um hann. Bjóða tær at biðja eina bøn saman við honum. Tú kanst biðja Jehova hjálpa viðkomandi at skilja, at bæði Jehova og onnur eru góð við hann. (Jákup 5:14, 15) Lat hann vita, at hann er virðismettur, og at tørvur er á honum í samkomuni. (1 Korintbræv 12:12-26) Les eitt uggandi ørindi fyri honum úr Bíbliuni, sum vissar hann um, at Jehova veruliga leggur í hann. (Sálmur 34:19; 55:23) Gevur tú tær góða tíð til at siga eitt „blídligt orð" við tann mótfalna og gert tað av hjarta, hjálpir tað honum uttan iva at kenna seg elskaðan og virðismettan. – **Les Orðtøkini 12:25.**

20 *Munagóð vegleiðing.* Av tí at vit eru ófullkomin, hava vit øll tørv á vegleiðing av og á. Bíblian sigur: „Lurta eftir ráðum og tak við tykt, so tú kanst verða vísur til endan!" (Orðtøkini 19:20) Tað eru ikki bara teir elstu, sum kunnu geva vegleiðing. Foreldur vegleiða børn. (Efesusbrævið 6:4) Búnar systrar noyðast kanska at vegleiða yngri kvinnur. (Titus 2:3-5) Kærleiki fær okkum at geva øðrum vegleiðing, sum er løtt hjá teim-

20, 21. Hvussu verður vegleiðing munagóð?

um at taka við, uttan at tey missa mótið. Hvat kann hjálpa okkum at geva slíka vegleiðing? Hugsa um trý viðurskifti, sum kunnu gera vegleiðingina meira munagóða – hugburðurin og ætlanin hjá vegleiðaranum, grundarlagið undir vegleiðingini, og hvussu hon verður givin.

21 Munagóð vegleiðing byrjar hjá vegleiðaranum. Spyr teg sjálvan: 'Nær er tað lætt hjá mær at lurta eftir vegleiðing?' Tá ið tú veitst, at tann, sum vegleiðir teg, er góður við teg, ikki er illur og ikki hevur nakra dulda ætlan, er tað lættari at taka við vegleiðingini. Eigur tað sama so ikki at vera galdandi fyri teg, tá ið tú vegleiðir onnur? Góð vegleiðing er eisini grundað á Guds orð. (2 Timoteus 3:16) Uttan mun til um vit endurgeva beinleiðis úr Bíbliuni ella ikki, eigur hon at vera grundarlagið undir allari vegleiðing, sum vit geva. Tí mugu teir elstu ansa væl eftir, at teir ikki noyða onnur at hava somu meining sum teir; og teir royna heldur ikki at benda og snara tí, sum stendur í Bíbliuni, so tað sýnist, sum hon stuðlar teirra persónligu áskoðan. Vegleiðing riggar eisini betur, um hon verður givin á rættan hátt. Tá ið vegleiðing er kryddað við vinsemi, er hon lættari at taka ímóti, og tann, sum fær hana, varðveitir sín virðileika. – Kolossebrævið 4:6.

22 At kunna tosa er av sonnum ein dýrabar gáva frá Gudi. Okkara kærleiki til Jehova eigur at fáa okkum at brúka, ikki misbrúka, hesa gávuna. Latið okkum minnast til, at tað, vit siga, hevur megi – megi at byggja upp ella bróta niður. Tí mugu vit leggja okkum eftir at brúka gávuna, soleiðis sum Jehova ætlaði tað – „til uppbygging". So fer tað, vit siga, at gleða onnur og hjálpa okkum at verða verandi í kærleika Guds.

---

22. Hvussu vilt tú brúka gávuna at tosa?

Høgtíðir, sum Gudi ikki dámar

„Rannsakið, hvat Harranum toknast!“
– EFESUSBRÆVIÐ 5:10.

„HINIR sonnu tilbiðjarar skulu tilbiðja Faðirin í anda og sannleika; tí tað er slíkar tilbiðjarar, Faðirin vil hava,“ segði Jesus. (Jóhannes 4:23) Tá ið Jehova finnur sovorðin menniskju – eins og hann fann teg – dregur hann tey til sín og til son sín. (Jóhannes 6:44) Tað er av sonnum ein heiður! Men tey, sum elska sannleikan í Bíbliuni, mugu halda fram at 'rannsaka, hvat Harranum toknast', tí Satan er ein meistari í sviki. – Efesusbrævið 5:10; Opinberingin 12:9.

2 Hugsa um, hvat hendi nærindis Sinaifjalli, tá ið ísraelsmenn bóðu Áron gera sær ein gud. Áron eftirlíkaði teimum og gjørdi ein gullkálv, men gav teimum ta fatan, at kálvurin umboðaði Jehova. „Í morgin verður høgtíð fyri HARRANUM,“ segði hann. Legði Jehova einki í, at tey blandaðu sonnu trúnna við falska? Jú. Hann læt umleið 3.000 avgudadyrkarar drepa. (2 Mósebók 32:1-6, 10, 28) Hvat læra vit av hesum? Vilja vit halda okkum í kærleika Guds, mugu vit 'einki óreint nema' og íðin verja sannleikan móti eini og hvørjari spillu. – Esaias 52:11; Ezekiel 44:23; Galatiabrævið 5:9.

3 Í fyrstu øld virkaðu ápostlarnir sum verja fyri fráfalli. Men eftir at teir vóru deyðir, gjørdist støðan ein onnur. Tá fóru sokallað kristin, ið ikki elskaðu sannleikan, at halda

---

1. Hvørji menniskju dregur Jehova til sín, og hví mugu tey altíð vera á varðhaldi?
2. Greið frá, hvussu Jehova metir tey, sum royna at blanda sonnu trúnna við falska.
3, 4. Hví skulu vit geva okkum far um bíbilskar meginreglur, tá ið vit kanna væl umtóktar siðir og høgtíðir?

heidnar siðir, høgtíðir og heiligdagar, sum tey nú søgdu vera kristnar. (2 Tessalonikabræv 2:7, 10) Tá ið vit nú fara at kanna nakrar av hesum høgtíðunum, legg so til merkis, hvussu tær endurspegla anda heimsins og ikki anda Guds. Sum heild hava verðsligar høgtíðir eitt felagsevni: Tær tala til tað, sum holdið ynskir, og tær fremja falskar trúarlærur og okkultismu, sum eyðkenna 'Bábylon hina stóru'.* (Opinberingin 18:2-4, 23) Vit mugu eisini minnast til, at Jehova hevur verið vitni til teir andstyggiligu heidnu halgisiðirnar, sum nógvir væl umtóktir siðir stava frá. Eingin ivi er um, at hann heldur slíkar høgtíðir vera líka andstyggiligar í dag. Eigur hansara áskoðan ikki at hava mest at siga hjá okkum? – 2 Jóhannes 6, 7.

4 Sum sonn kristin vita vit, at Jehova ikki dámar ávísar høgtíðir, og tí mugu vit vera púra avgjørd um als einki at hava við tær at gera. At kanna, hví Jehova ikki dámar tílíkar høgtíðir, kann styrkja okkum í avgerðini um at sleppa okkum undan øllum, sum kann forða okkum í at verða verandi í kærleika Guds.

JÓLINI – FRÁ SÓLDYRKAN TIL „KRISTNA" HØGTÍÐ

5 Bíblian nevnir einki um nakað føðingardagshald fyri Jesusi. Í roynd og veru vita vit ikki, akkurát nær hann varð føddur. Men eitt vita vit tó við vissu, hann varð ikki føddur 24. ella 25. desember, tá ið vetrarkuldi er í tí partinum av heiminum.# Sambært tí, Lukas skrivaði, „lógu [nakrir

---

* Sí rammuna „Skal eg taka lut í høgtíðini?" á síðunum 148-149. Víst verður til nógvar heiligdagar og høgtíðir í *Register til Vagttårnets publikationer,* sum Jehova vitni hava givið út.

Sambært bíbilskari tíðarrokning og verðsligari søgu varð Jesus ætlandi føddur í ár 2 f.o.t. í jødiska mánaðinum etanim, sum svarar til september/oktober í okkara kalendara. – Sí *Indsigt i Den Hellige Skrift*, bind 1, síðu 1115, sum Jehova vitni hava givið út.

---

5. Hví kunnu vit vera vís í, at Jesus ikki varð føddur 24. ella 25. desember?

hirðar] úti á markini og hildu náttarvakt yvir fylgi sínum", tá ið Jesus varð føddur. (Lukas 2:8-11) Um tað var vanligt at 'liggja úti á markini og halda náttarvakt' alt árið, hevði hetta ikki verið nøkur merkisverd upplýsing. Men av tí at tað er kalt og regnar og kavar í Betlehem um veturin, vórðu fylgini leidd inn hesa árstíðina, og hirðarnir lógu tí ikki „úti á markini og hildu náttarvakt". Haraftrat fóru Jósef og Maria til Betlehem, tí Augustus keisari hevði givið boð um, at fólkið skuldi skrivast í manntal. (Lukas 2:1-7) Tað er ógvuliga ósannlíkt, at keisarin gav boð um, at eitt fólk, sum frammanundan ikki dámdi rómversku stjórnina, skuldi fara til heimbý sín á hávetri.

6 Upprunin til jólini er ikki at finna í Bíbliuni, men í gomlum heidnum høgtíðum, eitt nú í rómversku saturnaliuni, ið var eitt hátíðarhald fyri landbúnaðargudinum, Saturn. Eitt katólskt leksikon sigur, at tey, sum tilbóðu gudin Mithra, hildu „føðingardag fyri hini ósigrandi sólini" tann 25. desember. „Jólini tóku seg upp í eini tíð, tá ið sóldyrkanin hevði serliga góða undirtøku í Róm," umleið trý hundrað ár eftir at Kristus doyði. – *New Catholic Encyclopedia*.

7 Í sambandi við hesar heidnu veitslurnar góvu tey hvørjum øðrum gávur og ótu veitslumat – siðir, sum síggjast aftur í jólunum. Men eins og í dag góvu nógv ikki gávur í tí andanum, sum er nevndur í Seinna Korintbrævi 9:7. Har stendur: „Ein og hvør gevi, eftir sum hann setur sær fyri í hjartanum, ikki av óhugi ella av tvingsli – tí Gud elskar glaðan gevara!" Sonn kristin geva av kærleika og kenna seg ikki noydd at geva gávur onkran ávísan dag, og tey vænta heldur ikki at fáa nakrar gávur afturfyri. (Lukas 14:12-14; **les Ápostlasøguna 20:35.**) Tey virðismeta eisini at sleppa undan øllum jólarokinum og at sleppa undan at seta seg í

6, 7. (a) Hvar er upprunin til nógvar jólasiðir at finna? (b) Hvør munur er á, hvussu gávur verða givnar á jólum, og hvussu sonn kristin geva gávur?

Sonn kristin geva av kærleika

skuld, sum nógv annars gera ta tíðina á árinum. – Matteus 11:28-30; Jóhannes 8:32.

8 Nú spyr onkur kanska: ’Góvu vísmenninir, ella stjørnuspámenninir, ikki Jesusi føðingardagsgávur?’ Nei. Teir góvu gávur, tí teir vildu vísa einum týðandi persóni virðing, og tað var vanligur siður á Bíbliunnar døgum. (1 Kongabók 10:1, 2, 10, 13; Matteus 2:2, 11) Satt at siga komu teir ikki ta náttina, Jesus varð føddur. Tá ið teir komu, var Jesus ikki longur eitt pinkubarn í eini krubbu, men nógvar mánaðar gamal og búði í einum húsi.

HVAT SIGUR BÍBLIAN UM FØÐINGARDAGAR?

9 Hóast tað altíð hevur verið sett í samband við stóra

---

8. Góvu stjørnuspámenninir Jesusi føðingardagsgávur? Greið frá.
9. Hvat hendi í teimum einastu føðingardøgunum, sum standa nevndir í Bíbliuni?

SKAL EG TAKA LUT Í HØGTÍÐINI?

Meginregla: „Farið tí út frá teimum og skiljið tykkum frá teimum – sigur Harrin – og nemið einki óreint! Tá skal Eg taka ímóti tykkum.“ – 2 Korintbræv 6:17.

Nakrir spurningar tú kanst seta tær sjálvum í sambandi við eina væl umtókta høgtíð ella siðvenju

- Er tað týðiligt, at hon hevur røtur í følskum átrúnaði ella okkultismu? – Esaias 52:11; 1 Korintbræv 4:6; 2 Korintbræv 6:14-18; Opinberingin 18:4.
- Er endamálið at vísa einum menniskja, einari samskipan ella einum tjóðarmerki óhóskandi æru? – Jeremias 17:5-7; Ápostlasøgan 10:25, 26; 1 Jóhannes 5:21.
- Verður ein tjóð ella rasa tikin fram um eina aðra? – Ápostlasøgan 10:34, 35; 17:26.
- Speglar hon „anda heimsins“, sum stríðir ímóti Guds heilaga anda? – 1 Korintbræv 2:12; Efesusbrævið 2:2.
- Kann tað fáa onnur at snáva, um eg taki lut í høgtíðini? – Rómbrævið 14:21.
- Um eg velji ikki at luttaka, hvussu kann eg tá virðiliga greiða øðrum frá orsøkini? – Rómbrævið 12:1, 2; Kolossebrævið 4:6.

Hesi skriftstøðini kunnu hjálpa tær at svara spurningum um væl umtóktar høgtíðir og siðvenjur:

- „[Trúleysir ísraelsmenn] blandaðu seg við heidningarnar og lærdu at bera seg at sum teir.“ – Sálmur 106:35.

- „Tann, sum er trúgvur í hinum minsta, er eisini trúgvur í nógvum, og tann, sum er órættvísur í hinum minsta, er eisini órættvísur í nógvum.“ – Lukas 16:10.
- „Tit eru ikki av heiminum.“ – Jóhannes 15:19.
- „Tit kunnu ikki hava part í borði Harrans og í borði ilra anda.“ – 1 Korintbræv 10:21.
- „Tað er nóg mikið, at tit tíðina, ið farin er, hava gjørt vilja heidninganna – livað í siðloysi, girndum, fyllskapi, svirri, drykkjuskapi og skammiligari avgudadýrkan.“ – 1 Pætur 4:3.

gleði, at eitt barn verður føtt, nevnir Bíblian ongan føðingardag, sum bleiv hildin fyri einum tænara hjá Gudi. (Sálmur 127:3) Man tað vera av gloymsku? Nei, tí hon nevnir tveir føðingardagar, ið vórðu hildnir – tann hjá einum farao í Egyptalandi og tann hjá Heródesi Antipasi. **(Les Fyrstu Mósebók 40:20-22; Markus 6:21-29.)** Men báðir føðingardagarnir verða settir í ringt ljós, serliga tann seinni, har Jóhannes Doypari varð hálshøgdur.

10 Eitt leksikon skrivar soleiðis um tað at halda føðingardag: „Fornkirkjan metti siðin at vera heidnan." (*Den Store Danske Encyklopædi*) Teir gomlu grikkarnir hildu til dømis, at hvørt menniskja hevði ein verndaranda, sum var hjástaddur, tá ið viðkomandi bleiv føddur, og síðani ansaði

---

10, 11. Hvussu mettu tey fyrstu kristnu føðingardagshald, og hví?

„HEILAGIR" DAGAR OG SATANISMA

Tað er vert at leggja til merkis, at tann týdningarmesti dagurin hjá átrúnaðarligu rørsluni, ið verður rópt satanisma, er føðingardagurin. Satanistar halda, at hvørt einstakt menniskja er ein gudur, um viðkomandi velur at meta seg sjálvan sum ein gud. So tá ið teir halda sín egna føðingardag, er tað sum at hátíðarhalda føðingardagin hjá einum gudi. Tey flestu menniskju halda helst, at ein slík áskoðan er víðgongd og sjálvsøkin. Kortini sigur ein bók um føðingardagar: „Aðrir heiligdagar gleða hjartað, men føðingardagar gleða eg'ið." – *The Lore of Birthdays.*

Teir næst „heilagastu" dagarnir hjá satanistunum eru valborgarmessunátt og halloween. Ein orðabók lýsir valborgarmessunátt sum „kvøldið fyri 1. mai, tá ið hildið verður, at heksir flúgva til ein avráddan fundarstað". – *Merriam-Webster's Collegiate Dictionary.*

eftir honum ella henni. Hesin andin „hevði eitt gátuført samband við tann gudin, ið hevði føðingardag sama dag sum nýfødda barnið“, sigur ein bók um føðingardagar. (*The Lore of Birthdays*) Føðingardagar hava eisini leingi verið tætt knýttir at stjørnuspá og stjørnuspáfrøði.

11 Umframt at Guds tænarar í forðum ikki vildu halda føðingardag vegna heidna og okkulta upprunan, hevði tað eftir øllum at døma eisini nakað við teirra lívsáskoðan at gera. Hví kunnu vit siga tað? Tí teir vóru eyðmjúkir og lítillátnir og hildu ikki sína komu í heimin hava so stóran týdning, at hon skuldi hátíðarhaldast.* (Mika 6:8; Lukas 9:48) Nei, teir góvu Jehova dýrd og takkaðu honum fyri ta dýrabaru gávuna, sum lívið er.# – Sálmur 8:4, 5; 36:10; Opinberingin 4:11.

12 Jehova goymir øll, sum doyggja trúføst, í sínum minni, og teirra framtíðar lív er tryggjað. (Job 14:14, 15) Í Prædikaranum 7:1 stendur: „Betri er gott navn enn góð olja, og betri er deyðadagurin enn føðingardagurin.“ At vit hava eitt „gott navn“ hjá Gudi merkir, at Jehova hevur tokka til okkum vegna okkara trúføstu tænastu. Tað er vert at leggja til merkis, at einasti minningardagurin, kristin hava fingið boð um at halda, ikki hevur samband við eina føðing, men ein deyða – nevniliga deyðan hjá Jesusi. Hansara dýrabara „navn“ er lykilin til okkara frelsu. – Hebrearabrævið 1:3, 4; Lukas 22:17-20.

---

* Sí rammuna „’Heilagir’ dagar og satanisma“ á síðu 150.

Í Lógarsáttmálanum var ásett, at ein kvinna skuldi lata Gudi eitt syndoffur, tá ið hon hevði átt. (3 Mósebók 12:1-8) Hetta lógarkravið var ein álvarsom áminning um, at foreldur geva børnunum syndina í arv. Henda vitanin hjálpti ísraelsfólki at hava røttu áskoðanina á barnsburð og kann eisini hava verið orsøkin til, at tey ikki tóku heidnu føðingardagssiðirnar til sín. – Sálmur 51:7.

---

12. Hvussu kann deyðadagurin vera betri enn føðingardagurin?

PÁSKIRNAR – FJALD FRUKTBÆRISDYRKAN

13 Hóast páskirnar skulu eitast at verða hildnar, tí Jesus reis upp frá deyðum, hava tær í roynd og veru røtur í følskum átrúnaði. Hvussu ber tað til dømis til, at harur og egg verða sett í samband við páskirnar? Eitt leksikon sigur, at egg „hava verið ein eyðkend ímynd um nýtt lív og uppreisn frá deyðum", meðan haran og kaninin leingi hava verið ímyndir um fruktbæri. (*Encyclopædia Britannica*) Ein bók um høgtíðir sigur: „Fleiri siðir og siðvenjur eru knýttar at páskunum. *Páskareggið* er nokk tað, ið er mest kent. ... Fyrikristnar siðvenjur eru helst knýttar at egginum sum verandi fruktagott, heilsugott og okkurt, sum skuldi verja ímóti óndum." (*Højtider og fester,* Kristian Jensen) Tí eru páskirnar í veruleikanum fruktbærishalgisiðir fjaldir í hátíðarhaldinum til minni um uppreisn Kristusar.*

14 Man Jehova góðtaka, at andstyggiligir fruktbærishalgisiðir verða nýttir til at minnast, at sonur hansara reis upp frá deyðum? Als ikki! (2 Korintbræv 6:17, 18) Í roynd og veru gevur Bíblian hvørki boð um ella heimild til at hátíðarhalda minnið um uppreisn Jesusar. Og verður tað so gjørt samstundis við, at heidnir páskasiðir verða fylgdir, er tað dupult trúloysi.

UPPRUNIN TIL HALLOWEEN

15 Halloween verður hildin 31. oktober og er eyðmerkt av heksum, trøllum og øðrum andskræmiligum skepilsum. Navnið er ein ensk stytting av All Hallows Eve, alla-

---

* Enska navnið fyri páskir, Easter, hevur verið sett í samband við Eostre, ella Ostaru, sum er anglosaksiska gudinnan fyri lýsing og vár. Hon var eisini ein fruktbærisgudinna. „Á mánanum átti hon eina haru, sum elskaði egg, og av og á var [gudinnan] avmyndað við einum haruhøvdi," sigur ein handbók. – *The Dictionary of Mythology.*

13, 14. Hvaðani stava nógvir páskasiðir?

15. Hvør er upprunin til halloween, og hvat er vert at leggja til merkis í sambandi við, nær henda høgtíðin verður hildin?

halgannaaftan. Halloween stavar frá teimum gomlu keltunum í Bretlandi og Írlandi. Tann fullmánan, sum var tættast við 1. november, hildu teir høgtíðina samain, sum merkir „endin á sumrinum“. Teir hildu, at forhangið millum jarðiska heimin og yvirnatúrliga heimin varð drigið frá á samain, og at andaverur, góðar og óndar, reikaðu um á jørðini. Hildið var, at sálirnar hjá teimum deyðu komu aftur til bústað sín á jørðini, og tí settu familjurnar mat og drekka fram til hesar gestirnar úr andaheiminum í vón um at blíðka teir. So tá ið børn summastaðni lata seg í sum spøkilsi ella heksir og ganga hús úr húsi og hótta við at gera fortreð, um tey ikki fáa okkurt góðgæti, eru tey uttan at vita tað við til at halda teimum gomlu samain-siðunum á lívi.

HALT BRÚDLEYPIÐ ÓDÁLKAÐ

16 Skjótt skal „rødd brúðgóms og brúðar ... ikki hoyrast meiri í [Bábylon hini stóru]“. (Opinberingin 18:23) Hví ikki? Millum annað vegna hennara okkultu gerðir, sum kunnu dálka eitt hjúnaband longu á brúdleypsdegnum. – Markus 10:6-9.

17 Siðirnir eru ymiskir úr landi í land. Nakrir siðir, sum kanska tykjast meinaleysir, kunnu hava røtur í bábylonskum siðum, ið skulu eitast at geva brúðarparinum ella gestunum góða eydnu. Ein siður er til dømis at kasta rís ella okkurt annað eftir brúðarparinum. Hesin siðurin hevur møguliga røtur í tí trúnni, at matur kundi blíðka illar andar og forða teimum í at skaða brúðrina ella brúðgómin. Haraftrat hevur rís leingi verið sett í samband við fruktbæri, lukku og langt lív. Tað er greitt, at tey, sum vilja halda seg í kærleika Guds, skýggja sovorðnar óreinar siðir. – **Les Seinna Korintbræv 6:14-18.**

16, 17. (a) Hví eiga kristin pør, sum ætla at giftast, at kanna staðbundnar brúdleypssiðir við bíbilskum meginreglum í huga? (b) Hvat skulu sonn kristin hugsa um í sambandi við siðir sum at kasta rís ella okkurt annað eftir einum brúðarpari?

18 Tey, ið tæna Jehova, sleppa sær eisini undan verðsligum atburði, sum kann oyðileggja tann virðileikan, ið eigur at vera karmurin um brúdleyp og brúdleypsveitslur. Og tey gera einki, sum kann særa samvitskuna hjá øðrum. Til dømis halda tey ikki talur, sum bera dám av særandi sarkasmu ella onkrum ónærisligum, og tey bera ikki fram grovt skemt ella annað, ið kann gera brúðarparið og onnur illa við. (Orðtøkini 26:18, 19; Lukas 6:31; 10:27) Tey hava heldur ikki sera fínar og ævintýrkendar móttøkur ella brúdleypsveitslur, sum spegla „stoltleika lívsins" heldur enn lítillæti. (1 Jóhannes 2:16) Um tú ert í holt við at fyrireika títt brúdleyp, mást tú ikki gloyma, at Jehova vil, at tú skalt líta aftur á henda serliga dagin við gleði, ikki við sorg.*

AT SKÁLA – EIN ÁTRÚNAÐARLIGUR SIÐUR?

19 Ein vanligur siður í brúdleypum og í aðrari samveru er at skála. Ein bók um alkohol og mentan frá 1995 sigur: „At skála ... er helst ein leivd frá heidnum drykkjuofrum í forðum, har tey ofraðu ein heilagan drykk til gudarnar ... aftur fyri eitt ynski – eina bøn, sum endaði við orðunum 'leingi livi' ella 'góða heilsu'." – *International Handbook on Alcohol and Culture.*

20 Gaman í seta nógv í dag ikki tað at skála í samband við nakað átrúnaðarligt ella við pátrúgv. Men siðurin at lyfta vínglasinum upp í loft kann metast sum ein bøn til „himmalin" – eina yvirnatúrliga makt – fyri at fáa eina signing á ein hátt, ið ikki samsvarar við tað, Bíblian sigur. – Jóhannes 14:6; 16:23.#

---

* Sí tær tríggjar greinirnar um brúdleyp og ymiska samveru í *Vagttårnet,* 15. oktober 2006, síðurnar 18-31.

\# Sí *Vagttårnet,* 15. februar 2007, síðurnar 30-31.

---

18. Hvørjar meginreglur í Bíbliuni skulu bæði tey, sum fyrireika brúdleyp, og tey, sum eru bjóðað, hugsa um?

19, 20. Hvat sigur ein verðslig kelda um upprunan til at skála, og hví er hetta ikki ein siður fyri sonn kristin?

„TIT, IÐ ELSKA HARRAN, HATIÐ HITT ILLA“

21 Normarnir á okkara døgum gerast alsamt lægri – eitt rák, sum Bábylon hin stóra annaðhvørt beinleiðis ella óbeinleiðis fremur. Nakað, sum speglar hetta rákið, er, at nøkur lond á hvørjum ári skipa fyri karnevalum,ið fevna um ónærisligan dans, og sum kanska enntá hálova samkynda lívsstílinum. Hevði tað verið hóskandi hjá teimum, sum elska Jehova, at tikið lut í ella hugt at slíkum tiltøkum? Høvdu tey, um so var, víst, at tey veruliga hata tað ónda? (Sálmur 1:1, 2; 97:10) Tað hevði verið nógv betri at tikið eftir hugburðinum hjá sálmaskaldinum, sum bað: „Vend eygum mínum burtur frá at hyggja eftir fáfongd.“ – Sálmur 119:37.

22 Tá ið hátíðarhald verða hildin, sum eru óhóskandi fyri sonn kristin, mugu vit ansa væl eftir, at okkara atburður ikki fær onnur at halda, at vit taka lut í hátíðarhaldinum. Paulus skrivaði: „Annaðhvørt tit tí eta ella drekka – ella hvat tit gera – so gerið alt Gudi til dýrd!“ (1 Korintbræv 10:31; sí rammuna „Tak skilagóðar avgerðir“ á síðunum 158-159.) Men er tað greitt, at ein siður ella eitt hátíðarhald ikki hevur nakað við falskan átrúnað at gera, ikki hevur politiskan ella tjóðskaparligan dám og ikki gongur ímóti nakrari bíbilskari meginreglu, kunnu vit sjálv gera av, um vit vilja taka lut í tí. Tá ið vit taka eina avgerð, eiga vit samstundis at hugsa um kenslurnar hjá øðrum, so vit ikki fáa tey at snáva.

DÝRMET GUD Í ORÐI OG GERÐ

23 Nógv meta í høvuðsheitum væl umtóktar høgtíðir sum eitt høvi hjá familju og vinum at hittast. So um

---

21. Hvørjum væl umtóktum tiltøkum sleppa sonn kristin sær undan, hóast tey ikki hava átrúnaðarligan uppruna, og hví?

22. Nær kunnu vit við okkara samvitsku gera av, um vit vilja taka lut í einum hátíðarhaldi ella ikki?

23, 24. Hvussu kunnu vit bera góðan vitnisburð um rættvísu normarnar hjá Jehova?

SONN TILBIÐING GEVUR STØRSTU GLEÐINA

Jehova er hin lukkuligi Gud, og hann vil, at hansara tænarar skulu vera lukkuligir. (1 Timoteus 1:11) Henda sannroyndin sæst í skriftstøðunum niðanfyri.

„Gávumild sál trívst, og tann,ið leskar onnur, verður leskaður sjálvur." – Orðtøkini 11:25.

„Glatt hjarta hevur gestaboð samt og javnt." – Orðtøkini 15:15.

„Eg dugdi at síggja, at einki er teimum betri enn at gleða seg og hava tað gott, so leingi sum tey liva. Tó, eisini tað at eta og drekka og njóta hitt góða mitt í øllum strevinum – eisini tað er hvørjum menniskja gáva frá Gudi." – Prædikarin 3:12, 13.

„Komið higar til Mín, øll tit,ið strevast og hava tungt at bera – Eg [Jesus] skal geva tykkum hvílu! Tí ok Mítt er gagnligt, og byrði Mín er løtt." – Matteus 11:28, 30.

„Tit skulu skilja sannleikan, og sannleikin skal gera tykkum fríar." – Jóhannes 8:32.

„Ein og hvør gevi, eftir sum hann setur sær fyri í hjartanum, ikki av óhugi ella av tvingsli – tí Gud elskar glaðan gevara!" – 2 Korintbræv 9:7.

„Ávøkstur Andans er: Kærleiki, gleði, friður, ... mildleiki, góðska." – Galatiabrævið 5:22.

„Ávøkstur ljóssins vísir seg jú í allari góðsku og rættvísi og í øllum sannleika." – Efesusbrævið 5:9.

onkur av órøttum heldur, at okkara bíbilska støðutakan er kærleiksleys ella víðgongd, kunnu vit vinaliga greiða frá, at Jehova vitnum dámar væl at hugna sær saman við familju og vinum. (Orðtøkini 11:25; Prædikarin 3:12, 13; 2 Korintbrævi 9:7) Vit gleðast um at vera saman við okkara kæru alt árið, men av tí at vit elska Gud og hansara rættvísu normar, vilja vit ikki dálka slíkar hugnaligar løtur við siðum, sum honum als ikki dámar. – Sí rammuna „Sonn tilbiðing gevur størstu gleðina“ á síðu 156.

24 Tað hevur riggað væl hjá summum Jehova vitnum at vísa teimum, sum hava sannan áhuga, nøkur dømi úr 16. kapitli í bókini *Hvat lærir Bíblian veruliga?** Vit mugu tó minnast til, at endamálið er at vinna hjørtu, ikki kjak. Latið okkum tí vísa virðing, vera mild og hava talu, sum „altíð [er] dámlig, kryddað við salti“. – Kolossebrævið 4:6.

25 Sum tænarar hjá Jehova eru vit væl upplýst. Vit vita, hví vit trúgva og gera ymiskt, og hví vit ikki taka lut í ávísum siðum og høgtíðum. (Hebrearabrævið 5:14) Tí mugu tit foreldur læra tykkara børn at hugsa um og brúka meginreglurnar í Bíbliuni. Tað styrkir teirra trúgv, hjálpir teimum at brúka Bíbliuna til at svara spurningum um trúnna og vissar tey um, at Jehova elskar tey. – Esaias 48:17, 18; 1 Pætur 3:15.

26 Øll, sum tilbiðja Gud „í anda og sannleika“, sleppa sær ikki bara undan at halda óbíbilskar høgtíðir, men leggja seg eisini eftir at vera ærlig í øllum. (Jóhannes 4:23) Nógv halda, at tað ikki ber til at vera ærligur í dag. Men sum vit fáa at síggja í næsta kapitli, eru Guds leiðir altíð tær bestu.

---

* Jehova vitni hava givið út.

25, 26. Hvussu kunnu foreldur hjálpa børnunum at fáa sterkari trúgv og størri kærleika til Jehova?

TAK SKILAGÓÐAR AVGERÐIR

Av og á kunnu støður taka seg upp, sum royna okkara kærleika til Jehova og okkara fatan av bíbilskum meginreglum. Hugsa til dømis um eina systur í samkomuni. Maður hennara, sum ikki er Jehova vitni, bjóðar henni kanska við til eina máltíð hjá skyldfólki ein verðsligan heiligdag. Nøkur Jehova vitni taka kanska við góðari samvitsku av einum sovorðnum tilboði, meðan onnur ikki gera tað. Tekur ein tænari hjá Jehova við eini slíkari innbjóðing, má hansara atburður týðiliga vísa, at hann ikki heldur høgtíðina og bert er komin við fyri at njóta eina máltíð saman við skyldfólki.

Tað hevði verið skilagott, um áðurnevnda systirin frammanundan virðiliga nevndi fyri manni sínum, at ein keðilig støða kundi tikið seg upp, um skyldfólkini fylgja ávísum siðum, sum hon ikki vil taka lut í. Maðurin velur kanska heldur at vitja skyldfólkini ein annan dag. – 1 Pætur 3:15.

Hvat um maðurin, eftir at hann hevur hoyrt frágreiðingina hjá konuni, heldur fast uppá, at hon skal koma við honum? Hon kemur kanska til ta niðurstøðu, at tað áliggur honum, sum hevur leiðsluna í familjuni, at syrgja fyri mati til húskið. (Kolossebrævið 3:18) Og í hesum førinum verður máltíðin etin hjá hansara skyldfólki. Samveran gevur henni kanska enntá høvi at fortelja um sannleikan. Einki er galið við matinum, fyri tað um hann verður etin í sambandi við eina høgtíð. (1 Korintbræv 8:8) Hon metir tað kanska sum eina vanliga máltíð og tekur ikki lut í sjálvari høgtíðini, eitt nú við ymiskum heilsanum, sangum, at skála og so framvegis.

Eitt annað, sum vit eiga at hugsa um, er, hvussu tað ávirkar onnur, um vit eru við til eina tílíka samveru. Ein kona, sum er Jehova vitni, eigur at hugsa um, at onnur, sum hoyra, at hon er farin at vitja verðslig skyldfólk í sambandi við eina høgtíð, kunnu taka tað illa upp. – 1 Korintbræv 8:9; 10:23, 24.

Hon má eisini hugsa um henda spurningin: Fer familjan at noyða hana at slaka? Ynskið um at sleppa undan eini keðiligari

støðu hevur stórt vald. Tí er tað umráðandi, at hon frammanundan hugsar væl og virðiliga um støðuna og eisini um, hvat hennara egna bíbliuvanda samvitska sigur henni. – Ápostlasøgan 24:16.

Skal eg taka ímóti einum ágóða í sambandi við jólini?

Ein arbeiðsgevari velur kanska at geva starvsfólkunum eina gávu ella ein ágóða um jóltíðir. Skal eitt Jehova vitni vísa eini slíkari gávu frá sær? Ikki endiliga. Tað kann vera, at arbeiðsgevarin als ikki hugsar, at tey, sum taka ímóti ágóðanum, halda jól. Hann gevur kanska bara øllum starvsfólkunum eitt sindur av vinninginum hjá fyritøkuni. Tað kann eisini vera, at ágóðin verður givin fyri at vísa takksemi fyri arbeiðið, sum er gjørt í árinum, og sum ein eggjan til at halda fram við tí góða arbeiðinum. Arbeiðsgevarin gevur kanska øllum starvsfólkunum – jødum, muslimum og øðrum – eina gávu, uttan mun til um tey halda jól ella ikki. At ein gáva verður givin í sambandi við eina høgtíð ella hevur navn eftir eini høgtíð, vil tí ikki endiliga siga, at eitt Jehova vitni ikki kann taka ímóti henni.

Sjálvt um gávan verður givin í sambandi við eina átrúnaðarliga høgtíð, merkir tað ikki, at roknað verður við, at móttakarin hevur somu átrúnaðarligu áskoðan. Ein arbeiðsfelagi ella eitt skyldfólk sigur kanska við eitt Jehova vitni: ’Eg veit, at tú ikki heldur hesa høgtíðina, men eg vil kortini geva tær hesa gávuna.’ Um hann ikki fær ringa samvitsku av tí, velur hesin tænarin hjá Jehova kanska at taka ímóti gávuni og at takka fyri uttan at nevna nakað um høgtíðina. (Ápostlasøgan 23:1) Møguliga kann hann eina aðra ferð, tá ið tað er minni sannlíkt, at tað verður tikið illa upp, fólkaliga greiða frá sínari sannføring.

Men hvat um tann, sum gevur gávuna, bert ger tað fyri at vísa, at tænarin hjá Jehova ikki hevur so sterka trúgv ella fer at slaka fyri at fáa ein materiellan ágóða? Tá er avgjørt best at siga nei takk. Vit vilja sjálvandi vísa Jehova Gudi óskerdan kærleika. – Matteus 4:8-10.

Verið ærlig í øllum

„Vit vilja fegin bera okkum rætt at á allan hátt.“ — HEBREARABRÆVIÐ 13:18.

EIN mamma og lítli sonur hennara fara út úr einum handli. Knappliga steðgar drongurin á og sær heilt skelkaður út. Í hondini hevur hann eitt lítið leikutoy úr handlinum. Hann gloymdi at leggja tað aftur ella at spyrja mammu sína, um hann kundi sleppa at fáa tað. Ørkymlaður hyggur hann upp á mammu sína. Hon roynir at sissa hann og fer við honum inn aftur í handilin, so hann kann leggja tað aftur og siga orsaka. Tá ið hann ger tað, verður mamman sera glað og stolt av honum. Hví?

2 Foreldur verða altíð glað, tá ið tey síggja, at børnini skilja, hvussu umráðandi tað er at vera ærligur. Og tað sama er galdandi fyri okkara himmalska Faðir, sum er „sannorðaður“. (5 Mósebók 32:4) So hvørt sum vit búnast andaliga, gleðist hann um at síggja, at vit leggja okkum eftir at vera ærlig. Av tí at vit fegin vilja gleða hann og halda okkum í hansara kærleika, siga vit sum Paulus ápostul: „Vit vilja fegin bera okkum rætt at á allan hátt.“ (Hebrearabrævið 13:18) Latið okkum kanna fýra týðandi dømi um, nær tað kann vera serliga avbjóðandi at vera ærligur. Síðani fara vit at kanna nakrar av signingunum, vit fáa afturfyri.

ÆRLIG SJÁLVRANNSAKAN

3 Okkara fyrsta avbjóðing er at læra at vera ærlig, tá ið vit

---

1, 2. Hví gleðir tað Jehova, tá ið vit leggja okkum eftir at vera ærlig? Lýs við einum dømi.
3-5. (a) Hvussu ávarar Bíblian okkum um vandarnar við at lúgva fyri sær sjálvum? (b) Hvat kann hjálpa okkum at gera eina ærliga sjálvrannsakan?

rannsaka okkum sjálv. Av tí at vit eru ófullkomin, hava vit lyndi til at lúgva fyri okkum sjálvum. Til dømis segði Jesus við tey kristnu í Laodikea, at tey hildu seg vera rík, meðan tey í roynd og veru vóru andaliga 'fátæk, blind og nakin' – av sonnum ein syrgilig støða. (Opinberingin 3:17) At tey soleiðis lumpaðu seg sjálv, gjørdi bert støðuna vandamiklari.

4 Tú minnist kanska ávaringina hjá lærisveininum Jákupi: „Um onkur heldur seg dýrka Gud – og heldur ikki tungu sína í teymum, men dárar hjarta sítt – gudsdýrkan hansara er til einkis.“ (Jákup 1:26) Hugsaðu vit sum so, at vit kundu misnýtt tunguna og samstundis tænt Jehova á rættan hátt, høvdu vit bert lumpað okkum sjálv. Okkara gudsdyrkan hevði verið nyttuleys, ja, púra burturspilt. Men hvat kann hjálpa okkum, so vit ikki koma inn á eina so skaðiliga leið?

5 Í teimum undanfarnu ørindunum samanber Jákup sannleikan í Guds orði við eitt spegl. Hann mælir okkum til at skoða inn í fullkomnu lóg Guds og gera tær neyðugu broytingarnar. **(Les Bræv Jákups 1:23-25.)** Bíblian kann hjálpa okkum at gera eina ærliga sjálvrannsakan og at skilja, hvat vit mugu gera fyri at betra okkum. (Sorgarsongirnir 3:40; Haggai 1:5) Vit kunnu eisini venda okkum til Jehova í bøn og biðja hann rannsaka okkum og hjálpa okkum at síggja, hvar vit eru á skeivari leið, og hvat vit kunnu gera við tað. (Sálmur 139:23, 24) At vera óærligur er ein svikafullur veikleiki, og tí mugu vit hava somu áskoðan á henda veikleikan, sum okkara himmalski Faðir hevur. Í Orðtøkunum 3:32 stendur: „Hin falski er HARRANUM andstygd, men hini sannhjartaðu eru næstu vinir Hansara.“ Jehova kann hjálpa okkum at fáa somu áskoðan sum hann og at síggja okkum sjálv, eins og hann ger. Minst til tað, Paulus segði: „Vit vilja *fegin* bera okkum rætt at.“ Sum nú er, eru vit ófullkomin, men vit ynskja inniliga og stremba eftir at vera ærlig.

ÆRLIG Í FAMILJUNI

6 Eitt, sum eigur at eyðkenna eina familju, ið tænir Jehova, er, at øll í henni eru ærlig. Tí mugu maður og kona tosa opið og ærliga við hvørt annað. Særandi og óreinur atburður, eitt nú at vísa einum øðrum enn hjúnafelaganum romantiskar kenslur, at hava loyniligt parlag á internetinum ella at hyggja at pornografi eigur als ikki at koma fyri í einum hjúnabandi. Nøkur, sum tæna Jehova, hava boriið seg soleiðis at og fjalt tað fyri sínum óseka maka. Tað er at vera óærligur! Legg til merkis, hvat hin trúfasti Dávid kongur segði: „Eg siti ikki hjá lygnarum og komi ikki saman við følskum menniskjum." (Sálmur 26:4) Um tú ert giftur, mást tú ongantíð fáa ein atburð, sum freistar teg at fjala nakað fyri tínum maka.

7 Tá ið foreldur skulu læra børnini, hvussu gott tað er at vera ærligur, er tað skilagott at brúka dømi úr Bíbliuni. Nøkur vánalig dømi eru Akan, ið stjól og royndi at fjala út yvir tað; Gehazi, sum leyg fyri at fáa materiellan vinning; og Judas, ið stjól og óndskapsfullur leyg fyri at skaða Jesus. – Josva 6:17-19; 7:11-25; 2 Kongabók 5:14-16, 20-27; Matteus 26:14, 15; Jóhannes 12:6.

8 Nøkur góð dømi eru Jákup, sum bað synirnar fara aftur við

At vit eru ærlig hjálpir okkum at lata vera við at gera nakað, sum vit kundu havt hug at fjala

6. Hví mugu maður og kona altíð vera ærlig, og hvørjum vandum sleppa tey sostatt undan?
7, 8. Hvørji dømi í Bíbliuni kunnu hjálpa børnum at virðismeta tað at vera ærligur?

pengunum, teir høvdu funnið í sekkjunum, tí hann hugsaði, at talan kundi vera um eitt mistak; Jefta, sum helt sítt lyfti, hóast tað kravdi nógv bæði av honum og dóttur hansara; og Jesus, sum djarvur segði einum óndum harkaliði, hvør hann var fyri at uppfylla eina profeti og fyri at verja sínar vinir. (1 Mósebók 43:11; Dómararnir 11:30-40; Jóhannes 18:3-11) Hesi fáu dømini kunnu geva foreldrum eina hóming av ríka lærdóminum í Guds orði, sum kann hjálpa teimum at læra síni børn at elska og virðismeta tað at vera ærligur.

9 Foreldur hava eina týðandi skyldu, tá ið talan er um slíka undirvísing. Paulus ápostul spurdi: „Tú, sum soleiðis lærir annan, lærir tú ikki teg sjálvan? Tú, sum prædikar, at tey skulu ikki stjala, stjelur tú?“ (Rómbrævið 2:21, *Dahl/Viderø*) Nøkur foreldur gera børnini í ørviti við at læra tey at vera ærlig, meðan tey sjálv eru óærlig. Tey rættvísgera kanska smástuldur og smáar lygnir við umberingum sum: 'Tað er vanligt, at fólk taka sovorðið við sær heim,' ella: 'Eg pellaði bara.' Men at stjala er at stjala, uttan mun til hvussu nógv tann stolni luturin er verdur, og at lúgva er at lúgva, uttan mun til hvat lygnin snýr seg um, og hvussu lítil ella stór hon er.* **(Les Lukas 16:10.)** Børn uppdaga beinanvegin hykl, og hykl er veruliga nakað, sum kann skaða tey. (Efesusbrævið 6:4) Men tá ið tey síggja, at foreldrini eru ærlig, er tað ógvuliga sannlíkt, at tey eisini fara at gleða Jehova, so hvørt sum tey vaksa til í hesum óærliga heimi. – Orðtøkini 22:6.

ÆRLIG Í SAMKOMUNI

10 Vit hava góðar møguleikar at vísa, at vit eru ærlig,

---

* Er onkur í samkomuni, sum hevur til vana at bera fram óndar lygnir – eyðsæð fyri at særa onnur – kann tað hava við sær, at teir elstu mugu seta eina dómsnevnd at taka sær av málinum.

---

9. Hvørjum mugu foreldur sleppa sær undan, um tey vilja læra síni børn at vera ærlig, og hví er tað týðandi at vera ein góð fyrimynd?
10. Hvat mugu vit hava í huga, tá ið vit tosa við okkara trúarfelagar?

SATANSKAR LYGNIR UM ÁLVARSLIGAR SYNDIR

Tá ið tað snýr seg um álvarsligar syndir, eru nakrar vandamiklar lygnir, sum Satan vil hava okkum at trúgva. Tíbetur eru Guds tænarar ikki óvitandi um 'svikaálop Djevulsins'. (Efesusbrævið 6:11) Her eru trý dømi um satanskar lygnir:

„Syndir kunnu fjalast." Jehova sær í veruleikanum alt, vit gera. „Alt er nakið og bert fyri eygum hansara, sum vit standa til svars fyri." (Hebrearabrævið 4:13, *Dahl/Viderø*) Tá ið nú Jehova veit alt, og vit skulu standa honum til svars, hví skuldu vit so gjørt ilt verri við at fjala eina álvarsliga synd fyri hansara tænarum á jørðini? – Sí eisini Seinnu Sámuelsbók 12:12.

„Tú kanst ikki líta á teir elstu, so sig einki við teir." Hin óndi Akab kongur rópti Elias: „Fíggindi mín!" (1 Kongabók 21:20) Elias var ein profetur hjá Jehova í Ísrael og kundi tí hjálpt Akabi at fingið fyrigeving. Í kristnu samkomuni eru teir elstu „gávur", sum Jesus hevur givið okkum. (Efesusbrævið 4:8, 11) Hóast teir elstu eru ófullkomnir, 'vakja teir yvir' okkum, tað vil siga hava áhuga fyri, hvussu tað gongur okkum andaliga. (Hebrearabrævið 13:17) Teir eru ikki okkara fíggindar. Nei, tað er við teimum, Jehova hjálpir okkum.

„Tú verjir ein vin við at hjálpa honum at fjala sínar syndir." Sannleikin er tann, at vit tvørturímóti skaða syndaran við at hjálpa honum at fjala sínar syndir. Álvarsligar syndir eru tekin um, at vit eru sera illa fyri andaliga, og at fjala tær er sum at fjala álvarslig sjúkueyðkenni

fyri einum lækna. (Jákup 5:14, 15) Tann, sum hevur misbrotið seg, er kanska bangin fyri at verða rættleiddur, men rættleiðing er tekin um kærleika Jehova og kann enntá bjarga lívinum hjá viðkomandi. (Orðtøkini 3:12; 4:13) Ein, sum heldur fram at synda, kann eisini skaða onnur í samkomuni. Vit vilja ikki stuðla viðkomandi í at ávirka onnur við tí skeiva hugburðinum, sum fekk hann at synda. (3 Mósebók 5:1; 1 Timoteus 5:22) Tí mugu vit tryggja okkum, at hann fortelur teimum elstu, hvat hann hevur gjørt.

tá ið vit koma saman við trúarfelagum. Sum vit lærdu í 12. kapitli, mugu vit ansa væl eftir, hvussu vit brúka gávuna at tosa, serliga tá ið vit eru saman við okkara andaligu brøðrum og systrum. Vanligt prát kann so lætt broytast til slatur, ja enntá til útspilling. Um vit siga øðrum frá leysasøgum, eru vit kanska við til at spjaða eina lygn. Tí er tað nógv betri at hava tamarhald á tunguni. (Orðtøkini 10:19) Hinvegin vita vit kanska við vissu, at okkurt er satt, men fyri tað er tað ikki vist, at vit eiga at siga øðrum tað. Tað kann til dømis vera, at tað ikki kemur okkum við, ella at tað ikki er serliga vinaligt at tosa um tað. (1 Tessalonikabrævi 4:11) Nøkur fólk umbera kanska sína ófólkaligu talu við, at tey bara eru ærlig, men okkara tala eigur altíð at vera dámlig og vinalig. – **Les Kolossebrævið 4:6.**

11 Tað er serliga umráðandi, at vit eru ærlig við teir, sum ganga á odda í samkomuni. Nøkur, ið hava framt eina

11, 12. (a) Hvussu hava nøkur, sum hava framt eina álvarsliga synd, gjørt støðuna verri? (b) Hvørjar eru nakrar av lygnunum hjá Satani um álvarsligar syndir, og hvussu kunnu vit stríðast ímóti teimum? (c) Hvussu kunnu vit vísa, at vit eru ærlig, tá ið vit geva samskipanini hjá Jehova skrivligar upplýsingar?

álvarsliga synd, gera bara støðuna verri við at royna at káva út yvir tað, sum tey hava gjørt, og við at lúgva fyri teimum elstu í samkomuni, tá ið teir venda sær til teirra. Tey, sum bera seg soleiðis at, liva eitt dupultlív. Tey látast at tæna Jehova, meðan tey halda fram at synda álvarsliga. Í roynd og veru verður alt lívið hjá teimum ein lygn. (Sálmur 12:3) Onnur siga teimum elstu nakað av sannleikanum, men fjala týðandi upplýsingar. (Ápostlasøgan 5:1-11) At vera óærligur á henda hátt kemur ofta av at trúgva lygnunum, sum Satan fremur. – Sí rammuna „Satanskar lygnir um álvarsligar syndir" á síðunum 164-165.

12 Tað er eisini umráðandi at vera ærligur, tá ið vit geva samskipanini hjá Jehova skrivligar upplýsingar. Til dømis ansa vit væl eftir at skriva røttu tølini, tá ið vit boða frá okkara tænastu. Á líknandi hátt eiga vit altíð at geva ta røttu myndina av okkum sjálvum, til dømis okkara heilsustøðu, tá ið vit fylla út umsóknir um tænastuframíhjárættindi. **– Les Orðtøkini 6:16-19.**

13 Vit mugu eisini vera ærlig við okkara trúarfelagar, tá ið talan er um handilsviðurskifti. Brøður og systrar í samkomuni gera kanska av og á handilsligar avtalur sínámillum. Tað er umráðandi, at tey ikki blanda sovorðin mál við tilbiðingina, eitt nú við at tosa um tey í ríkissalinum ella í boðanini. Hetta er eisini galdandi í sambandinum millum ein arbeiðsgevara og ein arbeiðstakara. Seta vit ein bróður ella eina systur í starv hjá okkum, mugu vit ansa væl eftir at fara ærliga við teimum og rinda teimum ta avtalaðu lønina til tíðina og geva teimum teir ágóðarnar, ið vit eru komin ásamt um, ella sum lógin ásetur. (1 Timoteus 5:18; Jákup 5:1-4) Og um vit hinvegin arbeiða fyri ein bróður ella eina systur, mugu vit syrgja fyri at gera tað arbeiðið, vit fáa løn fyri. (2 Tessalonikabræv 3:10) Vit vænta ikki at

---

13. Hvussu kunnu vit vísa okkara trúarfelagum, at vit eru ærlig í handilsviðurskiftum?

HVUSSU ÆRLIGUR ERI EG?

Meginregla: „HARRI, hvør skal vera gestur í tjaldi Tínum? ... Tann, ið livir ólastandi, ger tað, ið rætt er, og talar sannleik í hjartanum.“ – Sálmur 15:1, 2.

Spyr teg sjálvan

■ Hví er tað umráðandi, at eg altíð sigi satt? – Orðtøkini 6:16, 17.

■ Hvussu kann eg 'leggja lygnina av' í sambandi við skrivligar prótvtøkur, og tá ið eg skal fylla út sjálvuppgávuna ella onnur oyðubløð til myndugleikarnar? – Efesusbrævið 4:25; Esaias 28:15; Matteus 22:17-21; Rómbrævið 13:1-7.

■ Hvussu kann eg bæði við mínari talu og mínum atburði vísa, at eg eri eitt ærligt starvsfólk? – Orðtøkini 11:1; Efesusbrævið 4:28; Kolossebrævið 3:9, 10.

■ Hvussu kundi kærleiki til pengar gjørt tað torført hjá mær at vera ærligur? – Sálmur 37:21; 1 Timoteus 6:9, 10.



fáa serligar sømdir, bara tí vit hava somu trúgv, sum skuldi okkara arbeiðsgevari havt skyldu at geva okkum eyka frídagar ella aðrar fyrimunir, sum hinir starvsfelagarnir ikki fáa. – Efesusbrævið 6:5-8.

14 Hvat um handilsmálið fevnir um eitt slag av felags váða, eitt nú at gera eina íløgu ella at taka eitt lán? Í Bíbliuni er ein týðandi og nýtilig meginregla: Skriva alt upp! Tá ið Jeremias til dømis keypti eitt jarðarstykki, læt hann eitt skjal gera í tveimum eintøkum, sum vitni staðfestu. Skjalið varð goymt á einum tryggum staði, so tað bar til at taka tað fram aftur. (Jeremias 32:9-12; sí eisini Fyrstu Mósebók 23:16-20.) Tá ið vit gera handilsligar avtalur við okkara trúarfelagar, er tað ikki tekin um misálit, at vit skriva allar upplýsingarnar á eitt skjal, sum báðir partar og vitni skriva undir. Tvørturímóti forðar tað fyri misskiljingum, vónbroti og enntá ógvisligum ósemjum. Allir tænarar hjá Gudi, sum hava handilsligt virksemi sínámillum, mugu minnast til, at tað ongantíð er vert at seta einleikan og friðin í samkomuni í váða fyri tílíkt virksemi.* – 1 Korintbræv 6:1-8.

ÆRLIG UTTAN FYRI SAMKOMUNA

15 Sonn kristin skulu ikki bara vera ærlig í samkomuni. Paulus segði: „Vit vilja fegin bera okkum rætt at á *allan* hátt.“ (Hebrearabrævið 13:18) Okkara Skapari heldur tað vera sera umráðandi at vera ærligur í øllum handilsviðurskiftum. Taka vit bara Orðtøkini, so verða falskar vektir og lodd nevnd fleiri ferðir. (Orðtøkini 11:1; 20:10, 23)

* Í uppískoytinum á síðunum 222-223 verður viðgjørt, hvat kann gerast, um trupulleikar stinga seg upp í handilsviðurskiftum.

14. Hvørji fyrivarni mugu vit taka, um vit gera handilsligar avtalur við okkara trúarfelagar, og hví?

15. Hvussu metir Jehova óærligar handilshættir, og hvussu meta sonn kristin hetta vanliga rákið?

Í forðum var tað vanligt at brúka vektir og lodd, tá ið vørur vórðu seldar og keyptar. Vøran varð vigað og somuleiðis pengarnir, ið vøran varð keypt fyri. Óærligir handilsmenn brúktu tvey sløg av loddum og eina óneyva vekt fyri at lumpa og snýta viðskiftafólkini.* Jehova hatar slíka svikagerð! Skulu vit verða verandi í hansara kærleika, mugu vit halda okkum langt burtur frá øllum óærligum handilshættum.

16 Satan stjórnar hesum heimi, og tí kemur tað ikki óvart á okkum, at so nógv menniskju eru óærlig. Vit kunnu hvønn dag verða freistað at vera óærlig. Tá ið fólk søkja arbeiði, er tað vanligt, at tey lúgva og gera ov nógv av í umsóknini, millum annað við sjálv at skriva síni viðmælisbrøv og geva eina skeiva mynd av sínum arbeiðsroyndum. Nógv fólk geva skeivar upplýsingar, tá ið tey fylla út oyðubløð um skatt, trygging, at flyta millum lond og líknandi, fyri at fáa tað, tey vilja hava. Nógvir næmingar snýta, tá ið teir eru til roynd. Og skulu teir skriva stíl ella líknandi, stjala teir kanska okkurt, sum teir finna á internetinum, og lata tað inn, sum høvdu teir sjálvir skrivað tað. Og tá ið fólk hava við svikafullar embætismenn at gera, royna tey ofta at mutra teir fyri at fáa tað, tey vilja hava. Hetta er tað, vit kunnu vænta í einum heimi, har so nógv eru „góð við seg sjálv, peningakær, ... uttan kærleika til hitt góða“. – 2 Timoteus 3:1-5.

17 Sonn kristin hava sett sær fyri ikki at gera nakað slíkt. Men eitt, sum av og á kann gera tað til eina avbjóðing at vera ærligur, er, at tað tykist at gangast teimum væl, sum

---

* Teir brúktu eitt slag av loddum til at keypa við og eitt annað at selja við og tryggjaðu sær sjálvum ágóðan í báðum førum. Nakrir brúktu eisini eina vekt, har annar armurin var longri ella tyngri fyri at snýta viðskiftafólkini.

16, 17. Á hvønn hátt eru nógv fólk óærlig í dag, og hvat hava sonn kristin sett sær fyri at gera?

bera seg óærliga at, og at tey enntá hava ávísar fyrimunir í hesum heimi. (Sálmur 73:1-8) Hinvegin kunnu sonn kristin kanska fáa fíggjarligar trupulleikar, tí tey vilja vera ærlig „á *allan* hátt". Loysir tað seg at vera ærligur? Ja, avgjørt! Men hví? Hvat gott spyrst burtur úr at vera ærligur?

VIT VERÐA SIGNAÐ, TÁ IÐ VIT ERU ÆRLIG

18 Tað er torført at nevna nakað, sum hevur størri virði í lívinum enn at vera kendur sum ein, ið er ærligur og álítandi. (Sí rammuna „Hvussu ærligur eri eg?" á síðu 167.) Og hugsa tær – øll kunnu fáa eitt sovorðið umdømi! Tað er ikki treytað av evnum, ríkidømi, útsjónd, bakgrund ella nøkrum øðrum, sum tú ikki sjálvur hevur ávirkan á. Og kortini eru tað bert fá, ið ogna sær tann sjáldsama skattin, sum eitt gott umdømi er. (Mika 7:2) Nøkur háða teg kanska, tí tú ert ærligur, men onnur virðismeta tað við at líta á teg og virða teg. Tað hevur enntá gagnað nógvum Jehova vitnum fíggjarliga at vera ærlig. Nøkur hava fingið loyvi at verða verandi í starvi, tá ið óærlig starvsfólk eru blivin koyrd. Onnur hava fingið arbeiði í fyritøkum, har stórur tørvur var á ærligum arbeiðsfólki.

19 Antin nakað slíkt hendir í tínum føri ella ikki, fært tú at síggja, at tað at vera ærligur hevur uppaftur størri signingar við sær. Tú kanst gleðast um eina reina samvitsku. Paulus skrivaði: „Tað líta vit á, at vit hava góða samvitsku." (Hebrearabrævið 13:18) Haraftrat leggur okkara himmalski Faðir altíð til merkis tað góða, tú gert, og hann elskar ærlig menniskju. **(Les Sálm 15:1, 2; Orðtøkini 22:1.)** Ja, eru vit ærlig, hjálpir tað okkum at verða verandi í kærleika Guds, og tað er størsta lønin, vit kunnu fáa! Latið okkum nú kanna eitt evni, ið er tongt at hesum, nevniliga, hvørja áskoðan Jehova hevur á arbeiði.

---

18. Hví hevur tað stórt virði at vera kendur sum ein, ið er ærligur?
19. Hvussu kann tað ávirka okkara samvitsku og okkara samband við Jehova, um vit eru ærlig í øllum?

Gleð teg um títt arbeiði

'Njótið hitt góða mitt í øllum strevinum.'
– PRÆDIKARIN 3:13.

NÓGVUM í dag dámar als ikki arbeiðið hjá sær. Og av tí at tey hava langar arbeiðsdagar í einum starvi, sum ikki gevur teimum nakra gleði, er tað strævið at fara frá húsum hvønn morgun. Hvat kann fáa tey, sum hava tað so, at broyta hugburð og fáa størri áhuga fyri sínum arbeiði, ja, gerast nøgd við tað?

2 Bíblian eggjar okkum til at hava røttu áskoðanina á arbeiði. Hon sigur, at arbeiði og tað, sum kemur burturúr, er ein gáva. Sálomon skrivaði: „At eta og drekka og njóta hitt góða mitt í øllum strevinum, ... tað er hvørjum menniskja gáva frá Gudi.“ (Prædikarin 3:13) Jehova, sum elskar okkum og altíð vil okkum tað besta, vil, at vit skulu vera nøgd við okkara arbeiði og gleðast um tað, sum kemur burturúr. Skulu vit halda okkum í hansara kærleika, mugu vit hava somu áskoðan á arbeiði sum hann og fylgja hansara meginreglum. – **Les Prædikaran 2:24, 25; 5:17.**

3 Í hesum kapitlinum fara vit at viðgera fýra spurningar: Hvussu kunnu vit gleðast um okkara arbeiði? Hvat slag av arbeiði kunnu sonn kristin ikki fáast við? Hvussu kunnu vit hava javnvág millum okkara verðsliga arbeiði og okkara andaliga virksemi? Og hvat er týdningarmesta arbeiðið, vit kunnu hava? Men fyrst skulu vit hyggja

---

1-3. (a) Hvat halda nógv um sítt arbeiði? (b) Hvørja áskoðan eggjar Bíblian okkum til at hava á arbeiði, og hvørjar spurningar fara vit at viðgera í hesum kapitlinum?

nærri at teimum báðum ídnastu arbeiðarunum í alheiminum – Jehova Gudi og Jesusi Kristi.

JEHOVA OG VERKSTJÓRI HANSARA ARBEIÐA

4 Jehova er arbeiðarin fram um allar. Í Fyrstu Mósebók 1:1 stendur: „Í upphavi skapti Gud himmal og jørð.“ Tá ið Gud var liðugur við sítt skapanarverk á jørðini, segði hann, at tað var „sera gott“. (1 Mósebók 1:31) Við øðrum orðum var hann fullkomiliga nøgdur við sítt arbeiði. Jehova, hin lukkuligi Gud, gleddist uttan iva um at arbeiða. – 1 Timoteus 1:11.

5 Okkara arbeiðssami Gud gevst ongantíð at arbeiða. Langa tíð eftir, at jørðin og alt á henni var skapt, segði Jesus: „Faðir Mín arbeiðir líka til nú.“ (Jóhannes 5:17) Hvat hevur Faðirin gjørt? Úr bústaði sínum í himli hevur hann verið sera virkin í at leiðbeina og taka sær av menniskjunum. Hann hevur fingið til vegar ein 'nýggjan skapning', kristin, sum eru gitin av andanum og skulu stjórna saman við Jesusi í himli. (2 Korintbrævið 5:17) Hann hevur arbeitt við at fullføra sína ætlan við menniskjunum, so tey, sum elska hann, kunnu fáa ævigt lív í einum nýggjum heimi. (Rómbrævið 6:23) Jehova man vera sera nøgdur við úrslitið. Milliónir hava tikið ímóti boðskapinum um Ríkið. Gud hevur drigið tey, og tey hava broytt sítt lív fyri at verða verandi í hansara kærleika. – Jóhannes 6:44.

6 Jesus hevur altíð verið íðin í sínum arbeiði. Áðrenn hann kom niður á jørðina sum menniskja, var hann sum „verkstjóri“ Guds við til at skapa alt, „tað í Himlunum og tað á jørðini“. (Orðtøkini 8:22-31; Kolossebrævið 1:15-17) Meðan Jesus var á jørðini, helt hann fram at arbeiða. Longu sum ungur lærdi hann at arbeiða við timbri

---

4, 5. Hvussu sæst tað í Bíbliuni, at Jehova er arbeiðssamur?
6, 7. Hvussu kunnu vit siga, at Jesus altíð hevur verið sera íðin í sínum arbeiði?

og bleiv kendur sum „træsmiðurin“. (Markus 6:3) Tað var eitt arbeiði, sum kravdi nógva orku og fjølbroytt hegni, serliga tá ið hugsað verður um, at hvørki sagvirki, timburhandlar ella elektrisk amboð vóru til tá í tíðini. Dugir tú at ímynda tær, hvussu Jesus fór at skaffa sær timbur – kanska við at fella trøini og draga timbrið til staðið, har hann skuldi arbeiða við tí? Sært tú fyri tær, hvussu hann bygdi hús – gjørdi sperrur og setti tær upp, gjørdi hurðar og eisini møblar? Jesus visti uttan iva av egnum royndum, at eitt arbeiði, sum er væl gjørt, gevur satt nøgdsemi.

7 Jesus var einastandandi ágrýtin í síni boðan. Í trý og eitt hálvt ár var hann fullkomiliga upptikin av hesum sera týðandi arbeiðinum. Av tí at hann vildi bera so nógvum sum gjørligt boðskapin um Ríkið, spilti hann ikki tíðina. Hann fór tíðliga upp og arbeiddi til seint út á kvøldið. (Lukas 21:37, 38; Jóhannes 3:2) Hann ferðaðist „gjøgnum býir og bygdir og prædikaði og kunngjørdi evangeliið um ríki Guds“. (Lukas 8:1) Jesus ferðaðist hundraðtals kilometrar til gongu eftir støvutum gøtum fyri at bera fólki gleðiboðskapin.

8 Gav tað Jesusi gleði at vera íðin í boðanararbeiðinum? Ja, avgjørt! Hann sáddi sannleiksfræ um Ríkið og læt eftir seg markir, ið vóru búnar at heysta. At arbeiða fyri Gud gav Jesusi so stóra styrki, at hann var villigur at leypa matin um fyri at gera arbeiðið liðugt. (Jóhannes 4:31-38) Hugsa tær, hvussu nøgdur hann man hava verið, tá ið hann móti endanum av síni tænastu á jørðini kundi siga við Faðir sín: „Eg havi gjørt Teg dýrmætan á jørðini við at fullføra verkið, sum Tú hevur givið Mær at gera.“ – Jóhannes 17:4.

9 Eingin ivi er um, at Jehova og Jesus eru bestu fyrimyndirnar í at gleðast um sítt arbeiði. Okkara kærleiki til

---

8, 9. Hvat fekk Jesus at gleðast um sítt arbeiði?

Jehova gevur okkum hug at verða „eftirfylgjarar Guds“. (Efesusbrævið 5:1) Okkara kærleiki til Jesus eggjar okkum til at „fylgja eftir í fótasporum Hansara“. (1 Pætur 2:21) Latið okkum nú kanna, hvussu vit kunnu gleðast um okkara arbeiði.

HVUSSU KUNNU VIT GLEÐAST UM OKKARA ARBEIÐI?

10 Tey flestu sonnu kristnu mugu hava eitt verðsligt arbeiði. Vit vilja øll, at okkara arbeiði skal geva gleði og nøgdsemi, men tað kann vera torført, um vit hava eitt starv, sum okkum ikki dámar. Hvussu kunnu vit gleðast um okkara arbeiði undir slíkum umstøðum?

11 *Vit mugu hava rætta hugburðin.* Tað ber ikki altíð til at broyta umstøðurnar, men vit kunnu broyta hugburð. Hugsa vit um Guds áskoðan á arbeiði, kann tað hjálpa okkum at fáa rætta hugburðin. Hevur tú eitt húski at syrgja fyri, kanst tú til dømis hugsa um, at arbeiðið hjá tær, uttan mun til hvussu eintáttað tað er, ger teg føran fyri at nøkta materiella tørvin hjá tínari familju. Tað er ikki av lítlum týdningi hjá Gudi, at tú syrgir fyri tínum nærmastu. Hansara orð sigur, at tann, sum ikki syrgir fyri sínari familju, „er verri enn ein vantrúgvandi“. (1 Timoteus 5:8) Viðurkennir tú, at títt arbeiði tænir tí endamáli at liva upp til eina ábyrgd frá Gudi, verður tað lættari hjá tær at kenna eina ávísa gleði og nøgdsemi, sum tínir starvsfelagar kanska ikki kenna.

12 *Vit mugu vera arbeiðssom og ærlig.* Leggja vit nógva orku í og læra, hvussu vit kunnu gera okkara arbeiði til lítar, kann tað hava nakað gott við sær. Arbeiðsgev-

---

10, 11. Hvat kann hjálpa okkum at hava rætta hugburðin til okkara arbeiði?

12. Hvat gott spyrst burturúr, um vit eru arbeiðssom og ærlig?

Fylgja vit bíbilskum meginreglum, verður tað lættari hjá okkum at gleðast um okkara arbeiði

arar virðismeta ofta tey, sum eru arbeiðssom og dugnalig. (Orðtøkini 12:24; 22:29) Sum sonn kristin mugu vit eisini vera ærlig í okkara arbeiði – ikki stjala pengar, tilfar ella tíð frá okkara arbeiðsgevara. (Efesusbrævið 4:28) Sum vit sóu í undanfarna kapitlinum lønir tað seg at vera ærligur. Álit verður ofta víst starvsfólkum, sum eru kend fyri at vera ærlig. Uttan mun til um okkara arbeiðsgevari varnast, at vit eru arbeiðssom ella ikki, kunnu vit gleðast um at „hava góða samvitsku“ og vita, at vit gleða okkara Gud, sum vit elska. – Hebrearabrævið 13:18; Kolossebrævið 3:22-24.

13 *Vit mugu minnast, at okkara atburður kann prísa Gudi.* Tá ið vit hava góðan atburð á arbeiðsplássinum, er tað uttan iva nakað, onnur leggja til merkis. Harvið kunnu vit „prýða læru Guds, Frelsara okkara". (Titus 2:9, 10) Ja, okkara góði atburður kann fáa onnur at síggja, hvussu dámlig okkara trúgv er, og geva teimum hug at kanna hana nærri. Hugsa tær, hvussu glaður tú hevði verið, um ein starvsfelagi vísti áhuga fyri sannleikanum, av tí at tú vart ein góð fyrimynd á arbeiðsplássinum. Størsta lønin er tó at vita, at okkara góði atburður prísar Jehova og gleðir hansara hjarta. – **Les Orðtøkini 27:11; Fyrra bræv Pæturs 2:12.**

VIT MUGU DUGA Á AT SKYNA, TÁ IÐ VIT VELJA STARV

14 Bíblian fer ikki í smálutir um, hvat slag av verðsligum arbeiði er í lagi, og hvat ikki er. Men tað merkir ikki, at vit kunnu taka ímóti einum og hvørjum starvi, líkamikið hvat tað fevnir um. Bíblian kann hjálpa okkum at velja eitt starv, sum Gudi dámar, heldur enn eitt, sum honum ikki dámar. (Orðtøkini 2:6) Tá ið vit skulu taka avgerðir um arbeiði, mugu vit hugsa um tveir týðandi spurningar.

15 *Krevur hetta arbeiðið í sjálvum sær, at vit gera nakað, sum Bíblian fordømir?* Guds orð sigur týðiliga, at tað er skeivt at stjala, lúgva og at gera avgudar. (2 Mósebók 20:4; Ápostlasøgan 15:29; Efesusbrævið 4:28; Opinberingin 21:8) Vit taka ikki við einum starvi, sum krevur, at vit gera slíkt. Okkara kærleiki til Jehova hevði ongantíð loyvt okkum at tikið ímóti einum arbeiði, sum fevnir um at gera nakað, ið gongur ímóti Guds boðum. – **Les Fyrsta bræv Jóhannesar 5:3.**

---

13. Hvat kann okkara góði atburður á arbeiðsplássinum hava við sær?
14-16. Hvørjar týðandi spurningar mugu vit hugsa um, tá ið vit skulu taka avgerðir um arbeiði?

SKAL EG TAKA VIÐ STARVINUM?

Meginregla: „Gerið alt Gudi til dýrd!“ – 1 Korintbræv 10:31.

Spyr teg sjálvan

- Krevur arbeiðið, at eg skal gera nakað, sum Guds orð beinleiðis fordømir? – 2 Mósebók 20:13-15.
- Hevði hetta arbeiðið gjørt meg samsekan í onkrari skeivari gerð? – Opinberingin 18:4.
- Fevnir starvið bara um eina samfelagsgagnliga tænastu, sum í sjálvum sær ikki gongur ímóti Guds boðum? – Ápostlasøgan 14:16, 17.
- Hvussu kann tað ávirka onnur, um eg taki við starvinum? Kann tað særa samvitskuna hjá teimum? – Rómbrævið 14:19-22.
- Hvussu kann tað ávirka mína familju kensluliga og andaliga, um eg taki við einum starvi í útlandinum og lati familjuna vera eftir heima? – Efesusbrævið 5:28 – 6:4.

16 *Hevði hetta arbeiðið gjørt okkum samsek í onkrari skeivari gerð ella eggjað øðrum til at gera nakað skeivt?* Hugsa um eitt dømi. At arbeiða í einari móttøku er ikki í sjálvum sær skeivt. Men hvat um onkur bjóðaði einum tænara hjá Jehova eitt slíkt starv á eini fosturtøkuklinikk? Tað er rætt, at starvið ikki hevði kravt, at viðkomandi beinleiðis var við til at fremja fosturtøkurnar. Men hevði hansara starv har ikki stuðlað virkseminum á einari

klinikk, sum hevur til endamáls at fremja fosturtøkur – nakað, sum beinleiðis er í stríð við Guds orð? (2 Mósebók 21:22-24, *NW*) Vit, sum elska Jehova, vilja ikki verða sett í samband við nakað, sum Bíblian fordømir.

17 Nógv ivamál um arbeiði kunnu verða loyst við gjølla at hugsa um svarini til teir báðar høvuðsspurningarnar í stykki 15 og 16. Haraftrat eru nøkur onnur viðurskifti, vit mugu hugsa gjølla um, tá ið vit skulu taka avgerðir um arbeiði.* Vit kunnu ikki vænta, at trúgvi og skilagóði tænarin skal áseta reglur um hvørja einstaka støðu,

* Fleiri upplýsingar um, hvørji viðurskifti vit skulu hava í huga í sambandi við arbeiði, eru at finna í *Vagttårnet,* 15. apríl 1999, síðurnar 28-30, og í *Vagttårnet,* 15. oktober 1982, síðu 22.

17. (a) Hvørji viðurskifti kunnu vit hugsa um, tá ið vit skulu taka avgerðir um arbeiði? (Sí rammuna á síðu 177.) (b) Hvussu kann samvitskan hjálpa okkum at taka avgerðir, sum gleða Gud?

Vit vísa, at vit elska Jehova, tá ið vit raðfesta boðanararbeiðið fremst í okkara lívi

sum kann taka seg upp. Tí er tað umráðandi, at vit duga á at skyna. Sum vit fingu at vita í 2. kapitli, mugu vit venja og brýna okkara samvitsku við at kanna, hvussu vit kunnu brúka Guds orð í okkara dagliga lívi. Tá ið okkara 'sansar at skilja millum gott og ilt' verða vandir við 'nýtslu', kann samvitskan hjálpa okkum at taka avgerðir, sum gleða Gud og gera okkum før fyri at verða verandi í hansara kærleika. – Hebrearabrævið 5:14.

VIT MUGU VARÐVEITA RØTTU ÁSKOÐANINA Á ARBEIÐI

18 At varðveita andaligu javnvágina er ikki lætt nú á „síðstu døgum" við torførum tíðum. (2 Timoteus 3:1) Tað kann ofta vera ringt at finna eitt arbeiði og verða verandi í tí. Sum sonn kristin vita vit, hvussu týðandi tað er at vera arbeiðssamur fyri at uppihalda familjuni. Men eru vit ikki varin, kann trýst á arbeiðsplássinum ella smittandi materiella tankagongdin í heiminum órógva okkara andaliga virksemi. (1 Timoteus 6:9, 10) Latið okkum vita, hvussu vit kunnu varðveita røttu áskoðanina á arbeiði og „døma um, hvat beinast er". – Filippibrævið 1:10.

19 *Vit mugu hava fult álit á Jehova.* **(Les Orðtøkini 3:5, 6.)** Hevur hann ikki uppiborið eitt sovorðið álit? Hann hevur jú umsorgan fyri okkum. (1 Pætur 5:7) Hann veit betur enn vit, hvat okkum tørvar, og hann fær altíð hjálpt okkum. (Sálmur 37:25) Tí eiga vit at taka tað til okkum, sum hansara orð minnir okkum á: „Atferð tykkara veri uttan peningakærleika, verið nøgd við tað, sum tit hava! [Gud] hevur jú sjálvur sagt: 'Eg skal als ikki sleppa tær og als ikki fara frá tær.'"

---

18. Hví er tað ikki lætt at varðveita andaligu javnvágina?
19. Hví hevur Jehova uppiborið okkara fulla álit, og hvørjum sleppa vit undan, um vit líta á hann?

„AVGERÐIN GAV MÆR EITT LÍV Í GLEÐI OG NØGDSEMI“

„Eg skaraði framúr í skúlanum og vann fullan lestrarstuðul til ein væl kendan privatskúla í New York. Lestrarvegleiðararnir á skúlanum vildu endiliga hava meg at søkja inn á fleiri væl umtókt fróðskaparsetur. Eg fekk at vita, at eg var sloppin inn á nøkur av teimum, og eg fekk enntá lestrarstuðul til eitt tað mest kenda fróðskaparsetrið í USA. Men eg tók ikki við tilboðnum av tveimum orsøkum. Eg dugdi at síggja siðiliga vandan í at búgva á einum næmingaheimi, og eg vildi fegin vera pionerur.

Nú havi eg verið pionerur í meira enn 20 ár. Eg havi havt úr at gera í nógvum ymiskum tænastugreinum – tænt, har tørvurin er stórur, hjálpt til við at byggja ríkissalir og verið við í neyðhjálpararbeiði. Í løtuni havi eg ta gleði at hjálpa til í einum fremmandamæltum bólki í New York.

Tá ið eg líti aftur á mína tíð í fulltíðartænastuni, síggi eg, hvussu nógvar signingar eg havi fingið. Avgerðin, eg tók, hevur givið mær eitt lív í gleði og nøgdsemi. Eg hevði ikki viljað býtt tað, eg havi upplivað, og vinaløgini, eg havi fingið, um við nakað annað.“ – Zenaida.

(Hebrearabrævið 13:5) Nógvir fulltíðartænarar hava sannað, at Gud nøktar teirra tørv. Seta vit okkara fulla álit á, at Jehova tekur sær av okkum, sleppa vit undan at stúra ov nógv fyri, hvussu vit skulu uppihalda familjuni. (Matteus 6:25-32) Og verðsligt arbeiði fær okk-

um ikki at forsøma okkara andaliga virksemi, eitt nú at boða tey góðu tíðindini og at koma á møti. – Matteus 24:14; Hebrearabrævið 10:24, 25.

20 *Vit mugu halda eygað frískt.* **(Les Matteus 6:22, 23.)** At halda 'eygað frískt' vil siga at liva eitt einfalt lív. Sonn kristin hava eygað savnað um eitt – at gera Guds vilja. Er okkara eyga frískt, leggja vit ikki alla orku í at fáa eitt væl lønt starv ella eitt lív í størri marglæti. Vit royna heldur ikki alla tíðina at skaffa okkum tær nýggjastu og bestu nýtsluvørurnar, sum lýsingafólk vilja hava okkum at halda, at vit ikki kunnu liva uttan. Hvussu kunnu vit halda fram at savna okkum um at gera Guds vilja? Vit mugu ikki seta okkum í óneyðuga skuld. Vit eiga heldur ikki at fløkja lívið við materiellum ognum, sum krevja nógva tíð og orku. Latið okkum fylgja ráðunum í Bíbliuni um at vera nøgd við „føði og klæði". (1 Timoteus 6:8) Vit mugu stremba eftir at liva eitt so einfalt lív sum gjørligt.

21 *Vit mugu seta okkum andalig mál og royna at røkka teimum.* Av tí at tað er avmarkað, hvussu nógv vit kunnu náa í lívinum, mugu vit raðfesta. Annars kann okkurt, sum hevur minni at siga, fara við dýrabarari tíð og skúgva tað, sum hevur meira at siga, til viks. Hvat eiga vit at raðfesta fremst í okkara lívi? Fremsta málið hjá nógvum í heiminum er at nema sær hægri útbúgving, sum kann geva teimum eina lønandi yrkisleið. Men Jesus eggjaði sínum lærisveinum til at halda fram at 'søkja Guds ríki fyrst'. (Matteus 6:33) Ja, sum sonn kristin seta vit Guds ríki fremst í okkara lívi. Okkara lívsháttur – avgerðirnar vit taka, málini vit seta og tað vit fáast við – eigur at vísa,

---

20. Hvat vil tað siga at halda eygað frískt, og hvussu kunnu vit halda fram at gera tað?
21. Hví mugu vit raðfesta, og hvat skulu vit raðfesta fremst?

at Ríkisins áhugamál og Guds vilji hava meira at siga hjá okkum enn tað materiella og verðsliga.

VIT MUGU VERA ÍÐIN Í BOÐANINI

22 Av tí at vit liva so nær endanum, mugu vit savna okkum um týdningarmesta arbeiðið av øllum – at boða gleðiboðskapin og gera lærisveinar. (Matteus 24:14; 28:19, 20) Eins og okkara fyrimynd, Jesus, vilja vit eisini hava fullan lut í hesum lívbjargandi arbeiðinum. Hvussu vísa vit, at hetta arbeiðið hevur nógv at siga fyri okkum? Meginparturin av Guds tænarum tekur av heilum huga lut í boðanararbeiðinum sum samkomuboðarar. Nøkur hava lagt síni viðurskifti soleiðis til rættis, at tey kunnu vera pionerar ella trúboðarar. Nógv foreldur, sum viðurkenna, hvussu umráðandi tað er at seta sær andalig mál, hava eggjað børnunum til at gera fulltíðartænastuna til yrkisleið. Gleðast ídnir boðarar um at vera við í arbeiðinum at læra onnur um Guds ríki? Ja, avgjørt! At tæna Jehova av heilum huga gevur gleði, nøgdsemi og nógvar signingar. – **Les Orðtøkini 10:22.**

23 Nógv av okkum mugu arbeiða langar dagar fyri at uppihalda familjuni. Minst til, at Jehova vil, at vit skulu gleðast um okkara arbeiði. Tá ið okkara hugburður og atburður samsvara við hansara áskoðan og meginreglur, kunnu vit gerast nøgd í okkara arbeiði. Men latið okkum tó seta okkum fyri ongantíð at lata verðsligt arbeiði órógva okkara týdningarmesta arbeiði – at boða tey góðu tíðindini um Guds ríki. Raðfesta vit hetta arbeiðið fremst í okkara lívi, vísa vit, at vit elska Jehova og halda okkum í hansara kærleika.

22, 23. (a) Hvat er týdningarmesta arbeiðið hjá sonnum kristnum, og hvussu vísa vit, at hetta arbeiðið hevur nógv at siga fyri okkum? (Sí rammuna á síðu 180.) (b) Hvat hevur tú sett tær fyri viðvíkjandi verðsligum arbeiði?

Standið Djevulinum og svikaálopum hansara ímóti

„Standið Djevulinum ímóti, so skal hann flýggja frá tykkum!“ — JÁKUP 4:7.

TÚ HEVUR allarhelst hoyrt nógvar dópsfyrilestrar á okkara stevnum, um tú hevur tænt Jehova í nógv ár. Men uttan mun til hvussu ofta tú hevur verið til staðar við tílík høvi, verður tú helst kensluliga ávirkaður, hvørja ferð løtan kemur, tá ið tey, sum sita á fremstu rað, reisa seg upp at svara dópsspurningunum. Og seinni tá ið tey koma upp úr vatninum, fer eitt suð av spenningi gjøgnum áskoðararnar, sum síðani vísa sína gleði við at klappa hjartaliga. Tárini fylla kanska eyguni, meðan tú eygleiðir hesi dýrabaru menniskjuni, sum hava valt at tæna Jehova. Slíkar løtur gleða hjartað!

2 Vit síggja kanska bara dóp nakrar fáar ferðir um árið, meðan einglarnir nógv oftari kunnu gleðast um at síggja fólk verða doypt. Ímynda tær, hvussu stór „gleði [er] í Himli“, tá ið túsundtals menniskju um allan heimin hvørja viku koma upp í samskipan Jehova. (Lukas 15:7, 10) Eingin ivi er um, at einglarnir fegnast um henda vøksturin! – Haggai 2:7.

„DJEVULIN GONGUR UM SUM BRØLANDI LEYVA“

3 Sum ein týðiligur mótsetningur til hetta eygleiða aðrir andaskapningar dóp í stórari vreiði. Tað loypir øði í Satan og illu andarnar at síggja øll hesi menniskjuni venda

1, 2. Hvør gleðist, tá ið dópur er?
3. Hví gongur Satan um sum ein „brølandi leyva“, og hvat roynir hann at gera?

hesum spilta heiminum bakið. Satan tvíhelt jú um, at eingi menniskju tæna Jehova av berum kærleika, og at eingin fór at vera trúfastur undir ógvisligum royndum. **(Les Job 2:4, 5.)** Hvørja ferð onkur velur at víga sítt lív til Jehova, vísir tað, at Satan fer skeivur. Tað er, sum fær hann ein frammaná fleiri túsund ferðir um vikuna árið á tamb. Ikki løgið, at hann „gongur um sum [ein] brølandi leyva og leitar eftir, hvørjum hann fær gloypt". (1 Pætur 5:8) Henda 'leyvan' er altrá eftir at gloypa okkum andaliga og harvið skaða ella enntá oyðileggja okkara samband við Gud. – Sálmur 7:2, 3; 2 Timoteus 3:12.

4 Hóast vit altso hava ein ógvuliga óðan fígginda, nýtist

4, 5. (a) Hvørjar tvær týðandi avmarkingar hevur Jehova sett Satani? (b) Hvørjum kunnu sonn kristin vera vís í?

Hvørja ferð onkur vígir sítt lív til Jehova og verður doyptur, vísir tað, at Satan fer skeivur

okkum ikki at vera alt ov bangin. Hví ikki? Tí Jehova hevur avmarkað valdið hjá hesi 'brølandi leyvuni' í tveimum førum. Hvussu tá? Fyrst hevur Jehova boðað frá, at ein 'stórur skari' av sonnum kristnum fer at yvirliva komandi 'stóru trongdina'. (Opinberingin 7:9, 14) Av tí at profetiirnar hjá Gudi altíð ganga út, má sjálvt Satan vita, at hann ongantíð fær gloypt øllum Guds tænarum.

5 Tann seinna avmarkingin sæst í einum grundleggjandi sannleika, sum ein av Guds trúføstu tænarum í forðum bar fram. Azarja profetur segði við Asa kong: „HARRIN er við tykkum, táið tit eru við Honum." (2 Krønikubók 15:2; **les Fyrra Korintbræv 10:13.)** Nógvar frásøgur í Bíbliuni vísa, at tað ongantíð lukkaðist Satani at gloypa Guds tænarum, tá ið teir hildu seg nær til Gud. (Hebrearabrævið 11:4-40) Á okkara døgum kunnu tey, sum halda seg nær til Gud, eisini standa Djevulinum ímóti og enntá sigra yvir honum. Ja, Guds orð sigur: „Standið Djevulinum ímóti, so skal hann flýggja frá tykkum!" – Jákup 4:7.

EIN BARDAGI „VIÐ ANDAHER ÓNDSKAPARINS"

6 Tað ber ikki til hjá Satani at vinna bardagan, men hann kann vinna á okkum sum einstaklingar, um vit ikki eru á varðhaldi. Satan veit, at hann fær gloypt okkum, um hann kann fáa okkara samband við Jehova at vikna. Hvussu roynir hann at gera tað? Við ógvisligum, persónligum og svikaligum álopum. Latið okkum kanna hesar stríðsætlanirnar hjá Satani.

7 *Ógvislig álop.* Jóhannes ápostul segði: „Allur heimurin liggur í hinum illa." (1 Jóhannes 5:19) Í hesum liggur ein ávaring til øll sonn kristin. Av tí at Satan longu hevur gloypt øllum tí gudleysa mannaheiminum, fær hann nú savnað seg um at herða síni álop á tey, sum higartil

6. Hvussu berjist Satan við hvønn einstakan av okkum?
7. Hví herðir Satan síni álop á fólkið hjá Jehova?

hava staðið honum ímóti – fólkið hjá Jehova. (Mika 4:1; Jóhannes 15:19; Opinberingin 12:12, 17) Hann er í øðini, tí hann veit, at tíðin, hann hevur, er stutt. Og tí hevur hann hert trýstið. Í dag standa vit andlit til andlits við hansara síðstu ræðuligu roynd at oyðileggja okkara samband við Gud.

8 *Persónlig álop.* Paulus ápostul ávaraði sínar trúarfelagar: „Hjá okkum stendur bardagin ... við andaher óndskaparins í himmalrúminum." (Efesusbrævið 6:12) Grikska orðið, sum her er umsett 'bardagi', merkir bókstavliga „glíming" og lýsir ein dyst mann móti manni. Við hesum orðinum vísti Paulus sostatt, at vit øll persónliga eru í bardaga við óndar andar. Uttan mun til um vit búgva í einum landi, har trúgvin á illar andar er vanlig ella ikki, mugu vit ongantíð gloyma, at vit, í hvussu er frá tí løtuni vit víga okkara lív til Jehova, so at siga seta okkara føtur á glímingarmottuna. Tí er tað ikki so løgið, at Paulus fleiri ferðir eggjaði teimum kristnu í Efesus til at standa stinn. – Efesusbrævið 6:11, 13, 14.

9 *Svikaráð.* Paulus áminnir tey kristnu um at standa „svikaálopum Djevulsins" ímóti. (Efesusbrævið 6:11) Legg til merkis, at Paulus nýtir fleirtal. Óndir andar brúka ikki bara eitt, men nógv ymisk svikaráð – og við góðari grund. Gjøgnum tíðina hava nakrir av Guds tænarum klárað at staðið ímóti eini ávísari roynd, men givið eftir fyri eini aðrari. Tí eygleiða Djevulin og illu andarnir neyvt atburðin hjá hvørjum einstøkum av okkum fyri at finna út av, hvar vit eru veikast. Síðani gera teir sær dælt av einum og hvørjum veikleika, sum kann skaða okkara samband

---

8. Hvat meinti Paulus við, tá ið hann segði, at vit eru í 'bardaga' við óndar andar?
9. (a) Hví brúka Satan og illu andarnir ymisk „svikaálop"? (b) Hví roynir Satan at spilla okkara hugsanarhátt, og hvussu kunnu vit standa honum ímóti? (Sí rammuna á síðunum 192-193.) (c) Hvat svikaálop fara vit nú at kanna?

við Gud. Men tíbetur eru vit ikki óvitandi um nógvar av mannagongdunum hjá Djevulinum, tí vit kunnu lesa um tær í Bíbliuni. (2 Korintbræv 2:11) Fyrr í hesi bókini hava vit umrøtt nakrar av hesum snerrunum, eitt nú materialismu, ringan felagsskap og kynsligt siðloysi. Latið okkum nú kanna eitt annað svikaálop hjá Satani – spiritismu og onnur sløg av okkultismu.

AT FÁAST VIÐ OKKULTISMU ER EIN SVIKAGERÐ

10 Tey, sum fáast við okkultismu, koma beinleiðis í samband við illar andar. Nøkur sløg av okkultismu eru spádómur, gandur, at rúnabinda og at tosa við tey deyðu. Sum vit vita, metir Jehova spiritismu og onnur sløg av okkultismu sum nakað „viðurstyggiligt“. (5 Mósebók 18:10-12; Opinberingin 21:8) Av tí at eisini vit mugu 'skýggja hitt illa', er tað óhugsandi, at vit nakrantíð skuldu roynt at fingið samband við óndar andamaktir. (Rómbrævið 12:9) Tað hevði verið ein andstyggilig svikagerð móti okkara himmalska Faðir, Jehova.

11 Men nettupp tí, at tað at fáast við okkultismu er andstyggiligt trúloysi móti Jehova, roynir Satan alt, hann er mentur, at lokka nøkur av okkum í ta felluna. Hvørja ferð Satan fær lokkað ein av Guds tænarum at fáast við okkultismu, vinnur hann stórsigur. Hví? Hugsa um hesa samanberingina: Um tað bar til at fáa ein hermann at rýma úr og svíkja sína egnu herdeild fyri at fara yvir í fíggindaherin, hevði herovastin hjá fíggindanum verið ovurfegin. Hann hevði kanska enntá víst svíkjaran fram sum eitt steyp so at siga fyri at háða fyrrverandi herovastan hjá hesum hermanninum. Á líknandi hátt hevði ein tænari hjá Gudi,

---

10. (a) Hvat er okkultisma? (b) Hvussu metir Jehova spiritismu og onnur sløg av okkultismu, og hvussu metir tú tað?

11. Hví hevði Satan vunnið stórsigur, um hann fekk okkum at fáast við okkultismu? Lýs við einum dømi.

sum fór at fáast við spiritismu ella onnur sløg av okkultismu, vitandi og við vilja svikið Jehova og beinleiðis givið seg undir Satan. Ímynda tær, hvussu tað hevði frøtt Satan at víst henda svíkjaran fram sum eitt krígssteyp! Hevði nakar av okkum viljað latið Satan vunnið ein slíkan sigur? Avgjørt ikki! Vit eru ikki svíkjarar.

SATAN BRÚKAR SPURNINGAR TIL AT SÁA IVA

12 So leingi sum vit hava andstygd fyri okkultismu, fer tað ikki at lukkast Satani at lokka okkum í ta fellúna. Tí veit hann, at hann má broyta okkara hugsanarhátt. Hvussu ger hann tað? Hann roynir at villleiða Guds tænarar, soleiðis at nøkur at enda „kalla hitt ónda gott og hitt góða ónt". (Esaias 5:20) Fyri at gera tað vendir Satan ofta aftur til eina av sínum væl royndu mannagongdum – at seta spurningar fyri at sáa iva.

13 Legg til merkis, hvussu Satan brúkti hesa mannagongdina í forðum. Í Edens urtagarði spurdi hann Evu: „Segði Gud *veruliga,* at tit ikki mugu eta av einum og hvørjum træi í urtagarðinum?" Einaferð á døgum Jobs, tá ið einglarnir høvdu fund í himli, setti Satan spurningin: „Man Job óttast Gud *fyri einki?"* Og tá ið Jesus fór undir sína tænastu á jørðini, bjóðaði Satan honum av við at siga: *„Ert Tú* Sonur Guds, so sig, at hesir steinar skulu verða breyð!" Hugsa tær, at Satan í døminum við Jesusi vágaði sær at spotta júst tey somu orðini, sum Jehova sjálvur hevði sagt umleið seks vikur frammanundan: „Hesin *er* Sonur Mín, hin elskaði, sum Eg havi tokka til." – 1 Mósebók 3:1, *NW*; Job 1:9, *Dahl/Viderø*; Matteus 3:17; 4:3.

---

12. Hvørja mannagongd brúkar Satan til at ávirka okkara áskoðan á okkultismu?
13. Hvussu hevur Satan brúkt spurningar til at sáa iva?

14 Í dag brúkar Satan líknandi svikaráð í eini roynd at sáa iva um, hvørt okkultisma veruliga er skaðilig. Tíverri hevur hann havt eydnu við at ávirka nøkur sonn kristin. Tey eru farin at seta spurnartekn við, um ávís sløg av okkultismu veruliga eru so skaðilig. (2 Korintbræv 11:3) Hvussu kunnu vit hjálpa teimum at broyta hugsanarhátt? Hvussu kunnu vit tryggja okkum, at svikaráðini hjá Satani ikki ávirka okkum? Fyri at svara hesum spurningunum fara vit at kanna tvey øki, sum Satan á sniðfundigan hátt hevur dálkað við okkultum ískoyti – undirhald og sjúkuviðgerð.

SATAN GER SÆR DÆLT AV OKKARA YNSKJUM OG TØRVI

15 Serliga í vesturheiminum verður tað meira og meira vanligt, at fólk fáast við spiritismu, gandakynstur og onnur sløg av okkultismu. Í filmum, bókum, sjónvarpssendingum og telduspølum verður okkultisma oftari og oftari lýst sum nakað stuttligt, spennandi og meinaleyst. Filmar og bøkur, sum hava eina søgugongd, ið leggur dent á okkultismu, er nakað, sum er vorðið sera væl umtókt. Tað er týðiligt, at illu andarnir hava havt eydnu við at lítilsgera vandan við okkultismu. Hevur hetta rákið ávirkað Guds tænarar? Ja, tað hevur ávirkað hugsanarháttin hjá nøkrum. Hvussu tá? Eftir at ein bróðir hevði sæð ein film um tað okkulta, segði hann: „Eg hugdi at filminum, men eg *framdi* ikki okkultismu.“ Hví er ein slík niðurstøða vandamikil?

16 Hóast munur er á at fremja okkultismu og at hyggja

---

14. (a) Hvussu brúkar Satan svikaráð til at sáa iva um okkultismu? (b) Hvat fara vit nú at kanna?
15. (a) Hvussu meta nógv í vesturheiminum okkultismu? (b) Hvussu hevur heimsins áskoðan á okkultismu ávirkað nakrar av Guds tænarum?
16. Hví er tað vandamikið at velja undirhald, ið snýr seg um tað okkulta?

at okkultismu, merkir tað sjálvsagt ikki, at tað er vandaleyst at hyggja at sovorðnum. Hví ikki? Tað er áhugavert at hugsa um, at einki í Guds orði bendir á, at Satan og hansara illu andar eru førir fyri at lesa okkara tankar.* Tí mugu illu andarnir, sum áður nevnt, neyvt eygleiða okkara atburð – harímillum hvat vit velja til undirhald – fyri at finna út av, hvat vit hugsa, og fyri at uppdaga onkran andaligan veikleika hjá okkum. Tá ið tað sæst á einum tænara hjá Gudi, at honum dámar filmar ella bøkur, sum snúgva seg um andamanarar, gand, at vera settur av illum andum ella líknandi okkult evni, sendir hann ein boðskap til teir illu andarnar. Hann vísir teimum í roynd og veru, hvar hann er veikur. Illu andarnir kunnu tá gera sær dælt av hesum veikleikanum og herða glímingina við viðkomandi, inntil teir so at siga hava lagt hann niður á glímingarmottuna. Nøkur, sum hava fingið áhuga fyri okkultismu við at hyggja at undirhaldi, ið týðiliga lýsir tílíkt, eru so við og við sjálv farin at fáast við okkultismu. **– Les Galatiabrævið 6:7.**

17 Satan roynir ikki bara at gera sær dælt av okkara hugi til undirhald, men eisini av okkara tørvi á sjúkuviðgerð. Hvussu ger hann tað? Tá ið heilsan hjá einum tænara hjá Gudi bara versnar, hóast hann hevur roynt alt møguligt fyri at blíva frískur, kann hann gerast mótfallin. (Markus 5:25, 26) Hetta kann geva Satani og illu andunum møguleika at misnýta støðuna. Illu andarnir royna kanska at freista tann sjúka til í vónloysi at velja viðgerðir ella

* Lýsandi heitini, sum verða brúkt um Satan (andstøðingur, útspillari, svíkjari, freistari, lygnari), vísa ikki, at hann er førur fyri at kanna okkara hjarta og sinni. Men Jehova verður hinvegin lýstur sum tann, ið „roynir hjørtuni“, og Jesus sum tann, ið „rannsakar nýru og hjørtu“. – Orðtøkini 17:3; Opinberingin 2:23.

17. Hvat svikaálop roynir Satan kanska at brúka fyri at misnýta støðuna hjá teimum sjúku?

mannagongdir, sum fevna um okkurt slag av 'gandi', ella okkultismu. (3 Mósebók 19:26) Lukkast hetta svikaálopið hjá illu andunum, kann sambandið, tann sjúki hevur við Gud, gerast veikari. Hvussu kann tað tað?

18 Jehova gav ísraelsfólki, sum fingust við „gand", hesa ávaringina: „Hvussu nógv tit so rætta út hendurnar, lati Eg eyguni aftur fyri tykkum; hvussu nógv tit so biðja, hoyri Eg ikki." (Esaias 1:15) Vit vilja sjálvsagt ikki gera nakað, sum kundi forðað okkara bønum og hjálpini frá Jehova – serliga í eini tíð við sjúku. (Sálmur 41:4) So um okkurt bendir á, at ein ávís mannagongd, sum skal staðfesta ella viðgera eina sjúku, fevnir um nakað okkult, eiga sonn kristin at halda seg frá slíkum.* (Matteus 6:13) Tá kunnu tey vera vís í, at Jehova hjálpir teimum. – Sí rammuna „Er talan veruliga um okkultismu?" á síðu 194.

Vit mugu leita okkum hjálp hjá Jehova, tá ið vit eru sjúk

SØGUR UM ILLAR ANDAR

19 Meðan nógv í vesturlondum undirmeta valdið hjá Satani, er tað øvuta galdandi aðrastaðni í heiminum. Har

---

* Fleiri upplýsingar eru at finna í greinini „En helbredstest for dig?" í *Vagttårnet,* 15. desember 1994, síðurnar 19-22, og í greinini „Hvad siger Bibelen? Har det nogen betydning hvilken lægebehandling man vælger?" í *Vågn op!* 8. januar 2001, síðurnar 26-27.

---

18. Hvørjum mannagongdum halda sonn kristin seg frá, og hví?
19. (a) Hvat hevur Djevulin fingið nógv at halda um valdið, hann hevur? (b) Hvørjum søgum eiga sonn kristin at halda seg frá?

VIT MUGU ANSA OKKUM FYRI SVIKUM SATANS!

Satan, sum er ein meistari í sviki, hevur í fleiri túsund ár „blindað hugsanir hinna vantrúgvandi". (2 Korintbræv 4:4) Hann hevur eisini verið eirindaleysur í síni roynd at spilla hugsanarháttin hjá Guds tænarum. Hví? Tí Satan veit, at tað, vit hugsa, ávirkar tað, vit gera. Hann veit, at um hann kann reingja okkara hugsanarhátt, kann hann fáa okkum at gera nakað skeivt. – Jákup 1:14, 15.

Minst til, hvussu Satan villleiddi Evu. Paulus ápostul skrivaði: „Eg eri ræddur fyri, at eins og ormurin dáraði Evu við svikum sínum, soleiðis eisini hugsanir tykkara skulu spillast og vendast burt frá ... Kristusi." (2 Korintbræv 11:3) Við eini snildari slangu tøldi Satan Evu og fekk hana á vandaleið. Hann royndi at spilla hennara sinni og harvið reingja hennara hugsanarhátt – og tað riggaði. Av tí at hon lurtaði, broyttist hennara áskoðan, soleiðis at tað, sum ikki var loyvt, gjørdist lokkandi. Tá ið so hennara sinni var spilt, var tað lætt at lokka hana í synd. – 1 Mósebók 3:1-6; Opinberingin 12:9.

Satan er ikki broyttur. Málið hjá honum er tað sama, nevniliga at spilla sinnið, sum síðani leiðir í synd. Satan hevur skipað tað soleiðis, at politikkur, átrúnaður, handil og undirhald eru við til at spjaða hansara villleiðandi boðskapir. (Jóhannes 14:30) Hann hevur havt eydnu við at reingja hugsanarháttin hjá meginpartinum av menniskjunum, soleiðis at tey hava broytt hugburð og áskoðan. Atburður, ið einaferð varð mettur sum synd – eitt nú samkyndur lívsstílur, at liva saman uttan at vera gift og at fáa børn uttan fyri hjúnabandið – verður nú í tíðini ofta hildin at vera í lagi ella enntá ráðiligur. Hvussu væl hevur tað riggað hjá Satani at villleiða menniskjuni? Bíblian sigur: „Allur heimurin liggur í hinum illa." – 1 Jóhannes 5:19.

Sum sonn kristin eru vit á ongan hátt tryggjað móti svikum Satans. (1 Korintbræv 10:12) Satan veit, at tíðin, hann hevur,

er stutt, og tí er hann serliga íðin eftir at villleiða fólkið hjá Gudi, og hann ger tað „í stórari vreiði“. (Opinberingin 12:12) Ansa vit ikki eftir, kunnu villleiðandi boðskapirnir frá Satani og øll tey, sum hann brúkar til at „leiða í villu“, spilla okkara hugsanarhátt og lokka okkum í synd. – Titus 1:10.

Hugsa til dømis um, hvørja áskoðan heimurin hevur á hjúnabandið. Bíblian lærir, at hjúnabandið er heilagt og bindandi. (Matteus 19:5, 6, 9) Filmar og sjónvarpssendingar lýsa ofta hjúnabandið sum eina fyribils avtalu, ið lætt kann brótast. Vit mugu ansa eftir, at henda satanska villleiðingin ikki spillir okkara hugsanarhátt. Annars kundi tað rongt okkara áskoðan og fingið okkum at hugsa, at tað ikki hevur so stóran týdning at halda lyftið, vit hava givið okkara hjúnafelaga. Tá ið vit hava trupulleikar í hjúnalagnum, kunnu vit kenna okkum freistað at leita eftir umsorgan og stuðli uttan fyri hjúnabandið. Tá kann tað tykjast lættari at fáa tætt samband við ein annan – møguliga ein starvsfelaga ella trúarfelaga. Loyva vit okkum at fáa romantiskar kenslur fyri viðkomandi, kann tað henda, at vit verða freistað at synda.

Eitt annað dømi er sjálvræðisandin, sum gjøgnumsúrgar heimin hjá Satani. Nógv eru ’hugmóðig og uppblást’. (2 Timoteus 3:2, 4) Um ein slíkur andi hevði spilt okkara hugsanarhátt, kundi okkara áskoðan á tað at vera undirgivin og at akta verið rongd. Ávirkaður av hesum andanum kundi ein bróðir kanska físt eftir vegleiðingini frá teimum elstu. (Hebrearabrævið 12:5) Ein systir kundi sett spurnartekn við leiðsluskipanina hjá Gudi. – 1 Korintbræv 11:3.

Vit kunnu vera takksom fyri, at Jehova ávarar okkum um mannagongdirnar hjá Satani. (2 Korintbræv 2:11) Latið okkum seta okkum fyri ongantíð at loyva satanskari villleiðing at gera innrás í okkara hugsanarhátt. Skulu vit halda okkum í kærleika Guds, mugu vit ’tráa eftir tí, sum omanfyri er’. – Kolossebrævið 3:2.

hevur Djevulin fingið nógv at trúgva, at hann hevur størri vald, enn hann í veruleikanum hevur. Nøkur menniskju eru so bangin fyri illum andum, at tað fyllir allan gerandisdagin hjá teimum. Søgur um kraftargerðir hjá illum andum eru ógvuliga vanligar. Nógvum dámar væl at siga frá sovorðnum søgum, og fólk verða hugtikin av teimum. Eiga vit at spjaða slíkar søgur? Nei, vit, sum tæna hinum sanna Gudi, vilja av tveimum týðandi orsøkum einki hava við tílíkt at gera.

20 Í fyrra lagi fremur tað áhugamálini hjá Satani at fortelja søgur um kraftargerðirnar hjá illu andunum. Hvussu tá? Bíblian staðfestir, at Satan er førur fyri at gera kraftargerðir, men hon ávarar eisini um, at hann nýtir 'lygn og svik'. (2 Tessalonikabrævi 2:9, 10) Av tí at Satan er svíkjarin av øllum svíkjarum, veit hann, hvussu hann kann ávirka sinnið hjá teimum, sum eru hugtikin av

---

20. Hvussu kundi onkur, kanska óætlað, spjatt villleiðandi boðskapir frá Satani?

ER TALAN VERULIGA UM OKKULTISMU?

Meginregla: „Verk holdsins eru opinber, tey eru ... gandur, ... tvídráttur, flokkadráttur, ... tey, sum slíkt gera, skulu ikki arva ríki Guds." – Galatiabrævið 5:19-21.

Spyr teg sjálvan

- Hava nakrir av siðunum, sum eg fylgi, samband við falskar trúarlærur? – 2 Korintbrævi 6:16, 17.
- Brúki eg nakrar lutir, sum beinleiðis eru knýttir at okkultismu? – Ápostlasøgan 19:19.
- Havi eg tryggjað mær, at sjúkuviðgerðin, eg velji, ikki fevnir um okkurt slag av gandi? – 3 Mósebók 19:26.

okkultismu, og hvussu hann kann fáa tey at trúgva nøkrum, sum ikki passar. Kanska trúgva hesi fólkini veruliga, at tey hava sæð og hoyrt okkurt, og síðani fortelja tey sínar upplivingar, sum vóru tær sannar. Oftari søgurnar verða fortaldar, meira ógvisligar verða tær. Um ein tænari hjá Gudi tók tílíkar søgur uppaftur, hevði hann í roynd og veru gingið ørindi Djevulsins – „faðir lygnarinnar“. Hann hevði spjatt villleiðandi boðskapir frá Satani. – Jóhannes 8:44; 2 Timoteus 2:16.

21 Í seinna lagi eigur ein tænari hjá Gudi, sjálvt um hann fyrr í tíðini veruliga hevur upplivað okkurt við illum andum, ikki at undirhalda sínar trúarfelagar við slíkum. Hví ikki? Vit verða mint á at hava „eyguni vend á Jesus“, sum er høvuðsmillumgongumaður og fullkomari trúarinnar. (Hebrearabrævið 12:2) Ja, vit eiga at hugsa mest um Jesus, ikki Satan. Tað er vert at leggja til merkis, at meðan Jesus var á jørðini, sat hann ikki og fortaldi lærisveinunum søgur um illar andar, hóast hann hevði kunnað sagt nógv um, hvat Satan er førur fyri og ikki. Hann legði í staðin dent á boðskapin um Ríkið. Tí taka vit eftir Jesusi og ápostlunum og lata okkara samrøður verða miðsavnaðar um „stóru verk Guds“. – Ápostlasøgan 2:11; Lukas 8:1; Rómbrævið 1:11, 12.

22 Tað er satt, at Satan brúkar ymiskar kraftargerðir, harímillum okkultismu, í eini roynd at oyðileggja okkara samband við Jehova. Men hata vit hitt illa og halda fast við hitt góða, sleppur Satan ikki at ávirka okkara avgerð um at halda okkum frá øllum slagi av okkultismu. **(Les Efesusbrævið 4:27.)** Hugsa tær, hvussu stór 'gleðin verður í Himli', um vit halda fram at „standa [okkum] móti svikaálopum Djevulsins“, inntil hann ikki er til longur! – Lukas 15:7; Efesusbrævið 6:11.

---

21. Hvat lata vit okkara samrøður verða miðsavnaðar um?
22. Hvussu kunnu vit áhaldandi vera orsøk til 'gleði í Himli'?

„Uppbyggið tykkum á heilagastu trúgv tykkara“

„Uppbyggið tykkum á heilagastu trúgv tykkara, ... og haldið tykkum soleiðis í kærleika Guds!“ – JUDAS 20, 21.

TÚ STRÍÐIST við at byggja okkurt stórt. Byggingin hevur verið áleiðis í eina tíð og fer at halda fram langt inn í framtíðina. Higartil hava avbjóðingar verið í arbeiðinum, men tað hevur tó verið nøktandi. Sama hvat hendir, hevur tú sett tær fyri ongantíð at gevast ella at seta ferðina niður, tí dygdin í tínum arbeiði fer at ávirka títt lív, ja enntá tína framtíð. Hví tað? Tí tú ert bygningurin, sum er í gerð!

2 Lærisveinurin Judas nevndi, at vit mugu byggja okkum sjálv upp. Tá ið hann eggjaði teimum kristnu til at 'halda seg í kærleika Guds', segði hann eisini í sama viðfangi, hvussu tey skuldu gera: „Uppbyggið tykkum á heilagastu trúgv tykkara.“ (Judas 20, 21) Hvussu kanst tú byggja teg sjálvan upp og styrkja trúnna, so tú kanst halda teg í kærleika Guds? Latið okkum viðgera tríggjar síður av andaligu byggiverkætlanini hjá tær.

HALT FRAM AT STYRKJA TRÚNNA Á RÆTTVÍSU KRØVINI HJÁ JEHOVA

3 Fremst av øllum mugu vit styrkja okkara trúgv á Guds lóg. Meðan tú hevur kannað hesa bókina, hevur tú lisið, hvat Jehova krevur av okkum í sambandi við atburð.

1, 2. Hvørjari byggiverkætlan ert tú við í, og hví er tað so umráðandi, at dygdin í tínum arbeiði er góð?
3-5. (a) Hvat vil Satan hava teg at halda um krøvini hjá Jehova? (b) Hvørja áskoðan eiga vit at hava á krøvini hjá Gudi, og hvussu eigur hetta at ávirka okkum? Lýs við einum dømi.

Hvussu dámar tær hesi krøvini? Satan vil fegin villleiða teg, so tú heldur, at lógirnar, normarnir og meginreglurnar, sum Jehova hevur sett, eru strangar og enntá kúgandi. Hesi svikaráðini hevur hann nýtt líka síðan, tey vístu seg at rigga so væl heilt afturí Edens urtagarði. (1 Mósebók 3:1-6) Fara hansara svikaráð at villleiða teg? Tað veldst um, hvønn hugburð tú hevur.

4 Vit kunnu lýsa tað við hesum døminum: Meðan tú spákar tær ein túr í eini hugnaligari viðarlund, sært tú eitt høgt og sterkt hegn, sum byrgir ein part av viðarlundini av. Landslagið hinumegin er sera vakurt. Í fyrstuni heldur tú kanska, at hegnið er ein óneyðug avmarking av tínum frælsi og forðar tær í at fara, hvar tú vilt. Men tá ið tú hyggur ígjøgnum tað, varnast tú eina glúpska leyvu, sum lúrir eftir einum fongi. Nú skilir tú, at hegnið er ein verja! Man eitt vandamikið villdjór lúra eftir tær beint nú? Guds orð ávarar okkum: „Verið edrú, vakið! Mótstøðumaður tykkara, Djevulin, gongur um sum brølandi leyva og leitar eftir, hvørjum hann fær gloypt.“ – 1 Pætur 5:8.

5 Satan er eitt glúpskt villdjór. Men Jehova vil ikki, at vit skulu gerast fongur hjá Satani, og tí hevur hann givið okkum lógir, sum verja okkum ímóti teimum nógvu ’svikaálopunum’ frá hinum ónda. (Efesusbrævið 6:11) So hvørja ferð vit grunda um Guds lógir, eiga vit at meta tær sum eitt prógv um, at okkara himmalski Faðir elskar okkum. Tá skilja vit, at lógirnar eru ein kelda til tryggleika og gleði. Lærisveinurin Jákup skrivaði: „Tann, sum skoðar inn í fullkomnu lóg frælsisins – og heldur á við tí, ... skal vera sælur í verki sínum.“ – Jákup 1:25.

6 At fylgja Guds boðum er besti mátin at styrkja trúnna á Lóggevaran og vísdómin í hansara lógum. Til dømis fevnir „lóg Kristusar“ um boðini hjá Jesusi um at læra onnur

6. Hvør er besti mátin at styrkja trúnna á Guds rættvísu lógir og meginreglur? Nevn eitt dømi.

„alt, ið [hann hevur] boðið“. (Galatiabrævið 6:2; Matteus 28:19, 20) Guds tænarar fylgja eisini boðunum um at koma saman fyri at tilbiðja Jehova og uppbyggja hvønn annan. (Hebrearabrævið 10:24, 25) Boðini hjá Gudi fevna eisini um at biðja ofta til Jehova og av hjartanum. (Matteus 6:5-8; 1 Tessalonikabræv 5:17) Tá ið vit fylgja hesum boðunum, skilja vit enn betur, at Jehova hevur givið okkum tey, tí hann elskar okkum. Akta vit tey, fáa vit størri gleði og nøgdsemi, enn vit fáa nakra aðrastaðni í hesum heimi, ið er fullur av trupulleikum. Verður tú ikki styrktur í trúnni á Guds lógir, tá ið tú grundar um, hvussu tað hevur gagnað tær at liva samsvarandi teimum?

7 Nøkur bera av og á ótta fyri, at tað kann gerast ov torført at halda seg til lógirnar hjá Jehova, sum árini ganga. Tey eru bangin fyri, at tey onkursvegna koma at svíkja Gud. Um tú einaferð skuldi hugsað soleiðis, mást tú minnast til hesi orðini: „Eg eri HARRIN Gud tín, sum lærir teg at gera tað, ið er tær til gagn, sum leiðir teg vegin, ið tú skalt ganga. Hevði tú viljað givið boðum Mínum gætur! Tá

7, 8. Hvussu uggar Guds orð tey, ið bera ótta fyri, at tey ikki eru før fyri at verða verandi rættvís, sum árini ganga?

skuldi friður tín verðið sum áin, og rættvísi tín sum havsbylgjurnar.“ (Esaias 48:17, 18) Hevur tú nakrantíð veruliga hugsað um, hvussu uggandi hesi orðini eru?

8 Her minnir Jehova okkum á, at tað gagnar okkum at akta hann. Hann lovar okkum tvær signingar, um vit gera tað. Tann fyrsta er, at okkara friður verður djúpur, ríkur og støðugur sum ein á. Tann næsta er, at okkara rættvísi verður sum aldan. Tá ið tú stendur við sjóvarmálan og hyggur at aldunum, sum bróta inn ímóti landi ein fyri og onnur eftir, fært tú helst eina mynd av onkrum varandi. Tú veitst, at tær fara at halda fram at bróta í óteljandi øldir. Jehova sigur, at tín rættvísi kann vera líka varandi. So leingi sum tú roynir at vera trúfastur móti honum, fer hann ikki frá tær. **(Les Sálm 55:23.)** Verður tín trúgv á Jehova og hansara rættvísu krøv ikki styrkt, tá ið tú hoyrir hesi frálíku lyftini?

STREMBA EFTIR AT GERAST BÚGVIN

9 Ein onnur síða av tínari byggiverkætlan verður nevnd í hesum íblástu orðunum: „Latið okkum ... ganga fram til hitt fullkomna [búnaskap, *NW*].“ (Hebrearabrævið 6:1) Tað er sera gott, at vit sum Guds tænarar seta okkum fyri at gerast andaliga búgvin. Sum nú er, ber ikki til hjá menniskjum at gerast fullkomin, men tað ber til at gerast búgvin. Harumframt gevur tað størri gleði at tæna Jehova, so hvørt sum tú búnast. Hvussu tá?

10 Ein búgvin tænari hjá Gudi er andaliga sinnaður. Hann hevur somu áskoðan sum Jehova. (Jóhannes 4:23) Paulus skrivaði: „Tey, sum eftir holdinum eru, tráa eftir tí, sum av holdinum er; men tey, sum eftir Andanum eru, tráa eftir hinum andaliga.“ (Rómbrævið 8:5) Ein holdligur hugburður gevur lítla gleði, tí ein, sum hevur ein

---

9, 10. (a) Hví er tað gott, at ein Guds tænari setur sær fyri at búnast andaliga? (b) Hví gevur ein andaligur hugburður gleði?

sovorðnan hugburð, er ofta sjálvglaður, stuttskygdur og materialistiskur. Ein andaligur hugburður gevur harafturímóti stóra gleði, tí tá verður hugsað mest um Jehova, hin lukkuliga Gud. (1 Timoteus 1:11) Tann, sum er andaligur, vil fegin toknast Jehova og varðveitir enntá gleðina undir royndum. Orsøkin er, at royndir geva honum møguleika at vísa sítt sakloysi og prógva, at Satan er ein lygnari. Soleiðis gleðir hann sín himmalska Faðir. – Orðtøkini 27:11; **les Bræv Jákups 1:2, 3.**

11 Skulu vit gerast andaliga búgvin menniskju, má venjing til. Hugsa um hetta ørindið: „Hin fasta føðin er fyri vaksin, fyri tey, sum við temjing hava vant sansarnar til at skilja gott frá illum.“ (Hebrearabrævið 5:14, *Dahl/Viderø*) Tá ið Paulus tosaði um at 'venja' sansarnar til at skilja gott frá illum, brúkti hann eitt grikskt orð, sum eyðsýniliga bleiv brúkt innan ítrótt í Grikkalandi í fyrstu øld, tí tað kann endurgevast 'vandur upp sum ein fimleikari'. Hugsa síðani um, hvat ein slík venjing fevnir um.

12 Kroppurin hjá einum nýbornum barni er ikki vandur. Eitt pinkubarn er til dømis ikki fört fyri at skilja, hvar armarnir og beinini eru í mun til restina av kroppinum. Av tí sama flagsar tað tilvildarliga við ørmunum, sum av og á raka tað í andlitið, og barnið verður illa við og ónøgt. Sum tíðin gongur, verður kroppurin vandur. Barnið fer at grulva, síðani at ganga og at enda dugir tað eisini at renna.* Men hvussu við einum fimleikara? Tá ið tú sært ein fimleikara leypa høgt upp í loft og snara sær við yndi og neyvleika,

* Granskarar siga, at vit menna ein serligan sans, sum sigur heilanum, hvar teir ymisku kropslutirnir eru. Hesin sansurin ger okkum til dømis før fyri at klappa, meðan vit blunda. Ein kvinna, sum misti henda sansin, var av hesi orsøk hvørki før fyri at standa, ganga ella sita.

11, 12. (a) Hvat segði Paulus um „sansarnar til at skilja gott frá illum“, og hvat merkir orðið, sum er umsett 'at venja'? (b) Hvørja venjing má kroppurin hava fyri at búnast og gerast fimur?

Kroppurin hjá einum fimleikara verður vandur við nýtslu

ivast tú ikki í, at hann hevur fult tamarhald á sínum kroppi. Dugnaskapurin hjá hesum fimleikaranum er ikki bara komin av sær sjálvum, nei, hann hevur vant í óteljandi tímar. Bíblian sigur tó, at sovorðin kropslig venjing er „nyttulig til lítið“. Andalig venjing hevur nógv størri týdning. – 1 Timoteus 4:8.

13 Í hesi bókini hava vit viðgjørt nógv, sum kann hjálpa tær at venja tínar sansar til at skilja gott frá illum, soleiðis at tú kanst verða verandi trúfastur móti Jehova sum eitt andaligt menniskja. Umhugsa í bøn, hvussu tú kanst brúka Guds meginreglur og lógir í tínum dagliga lívi. Hvørja ferð, tú skalt taka eina avgerð, er gott at spyrja: ’Hvørjar bíbilskar lógir ella meginreglur kann eg brúka í hesum førinum? Hvussu kann eg fylgja teimum? Hvat hevði glett mín himmalska Faðir?’ **(Les Orðtøkini 3:5, 6; Bræv Jákups 1:5.)** Tá ið tú tekur avgerðir á henda hátt, venur tú tínar sansar enn meira til at skilja gott frá illum. Slík venjing hjálpir tær at blíva eitt andaligt menniskja og at halda fram at vera tað.

14 Hóast vit kanska longu eru búgvin, ber altíð til at vaksa andaliga. Vøkstur er treytaður av føði. Tí segði Paulus: „Hin fasta føðin er fyri vaksin.“ Skalt tú byggja tína trúgv upp, mást tú blíva við at fáa tær av føstu andaligu føðini. Tá ið tú brúkar tað, sum tú lærir, er tað vísdómur. Bíblian sigur um vísdóm: „Av øllum dýrgripum

---

13. Hvussu kunnu vit venja okkara sansar til at skilja gott frá illum?
14. Hvat slag av matarlysti mugu vit hava fyri at vaksa andaliga, men hvørji fyrivarni mugu vit taka?

er eingin sum hann." Tí mugu vit læra okkum at tráa eftir dýrabaru sannleikunum, sum Jehova gevur okkum. (Orðtøkini 8:11; 1 Pætur 2:2) Men fyri tað um vit fáa størri kunnskap og vísdóm frá Gudi, eiga vit ikki at gerast sjálvglað ella hástór. Vit mugu rannsaka okkum sjálv regluliga, so stoltleiki ella onkur annar veikleiki ikki festur røtur og fer at vaksa í okkara hjarta. Paulus skrivaði: „Rannsakið tykkum sjálvar, um tit eru í trúnni, roynið tykkum sjálvar!" – 2 Korintbræv 13:5.

15 Eini hús verða kanska liðug, men arbeiðið heldur fram. Viðlíkahald og ábøtur mugu gerast, og kanska verður tað neyðugt at byggja uppí, tá ið umstøðurnar broytast. Hvat er neyðugt, um vit skulu búnast og verða verandi andaliga sinnað? Fremst av øllum kærleiki. Kærleikin til Jehova og okkara trúarfelagar má halda fram at vaksa. Hava vit ikki kærleika, verður alt, vit gera, og allur okkara kunnskapur nyttuleysur. (1 Korintbræv 13:1-3) Við kærleika kunnu vit gerast búnir tænarar hjá Gudi og halda fram at vaksa andaliga.

LAT VÓNINA, JEHOVA GEVUR, STANDA FREMST Í TÍNUM HUGA

16 Latið okkum viðgera eina síðu aftrat av tíni byggiverkætlan. Skalt tú byggja teg sjálvan upp sum ein sannan lærisvein hjá Jesusi, mást tú verja tín hugsanarhátt. Satan, sum stjórnar hesum heimi, er ein meistari í at fáa fólk at geva eftir fyri neiligum tonkum, svartskygni, misáliti og vónloysi. (Efesusbrævið 2:2) Ein slíkur hugsanarháttur er líka vandamikil hjá einum tænara hjá Gudi, sum soppur er í einum timburhúsi. Tíbetur hevur Jehova givið okkum eina verju, nevniliga vón.

---

15. Hví mugu vit hava kærleika, um vit skulu vaksa andaliga?
16. Hvønn hugsanarhátt birtir Satan uppundir, og hvørja verju hevur Jehova givið okkum?

17 Bíblian nevnir teir ymisku partarnar av andaligu herklæðunum, sum vit hava brúk fyri í bardaganum ímóti Satani og hesum heimi. Ein týðandi partur av herklæðunum er hjálmurin, „vón frelsunnar“. (1 Tessalonikabrævi 5:8) Ein hermaður á Bíbliunnar døgum visti, at hann ikki fór at klára seg serliga leingi í bardaga, um hann ikki var í hjálmi. Ein sovorðin hjálmur, sum ofta var gjørdur úr metali og settur oman á eina húgvu úr tøvdari ull ella úr leðri, vardi fyri teimum flestu sløgunum, so tey ikki gjørdu stórvegis skaða. Sum ein hjálmur verjir høvdið, kann vón verja títt sinni og harvið tín hugsanarhátt.

18 Jesus er størsta fyrimyndin í at varðveita vónina. Hugsa um alt tað, hann mátti líða seinastu náttina, hann var á jørðini sum menniskja. Ein góður vinur sveik hann fyri pengar. Ein annar noktaði at kennast við hann. Hinir fóru frá honum og flýddu. Hansara egnu landsmenn vrakaðu hann og vildu hava rómverskar hermenn at taka hann av døgum – enntá á sera pínufullan hátt. Tað er ikki ov nógv sagt, at Jesus var fyri størri royndum, enn nakar av okkum kann hugsast at koma fyri. Hvat hjálpti honum? Svarið er at finna í Hebrearabrævinum 12:2, har vit fáa at vita, at Jesus tolin leið „fyri gleðina, ið fyri Honum lá, ... og legði einki í vanæruna – og situr nú við høgru síðu hásætis Guds“. Jesus misti ongantíð „gleðina, ið fyri Honum lá“, úr eygsjón.

19 Hvør gleði lá fyri Jesusi? Jú, hann visti, at helt hann út, var hann við til at halga heilaga navn Jehova. Hann fór at geva størsta prógvið nakrantíð um, at Satan er ein lygnari. Eingin onnur vón kundi givið Jesusi størri gleði! Hann visti eisini, at Jehova ríkliga fór at signa hann fyri hansara

---

17. Hvussu lýsir Guds orð, at vón hevur stóran týdning?
18, 19. Hvussu var Jesus ein fyrimynd í at varðveita vónina, og hvussu kunnu vit taka eftir honum?

trúfesti – at ein undursom tíð, har hann aftur fór at vera saman við Faðir sínum, lá beint fyri framman. Jesus hevði hesa gleðiríku vónina fremst í huga undir øllum sínum royndum. Tað mugu vit eisini hava. Ein gleði liggur eisini fyri okkum. Jehova gevur hvørjum einstøkum av okkum tann framíhjárættin at vera við til at halga hansara stóra navn. Vit kunnu prógva, at Satan er ein lygnari við at velja Jehova sum okkara Fullveldisharra og halda okkum trygg í hansara kærleika, uttan mun til hvørjar royndir og freistingar koma.

20 Jehova er ikki bara villigur at løna sínum trúføstu tænarum, nei, hann hevur *hug* at gera tað. (Esaias 30:18; **les Malakias 3:10.)** Hann gleðist um at geva sínum tænarum tað, sum teir av røttum ynskja sær. (Sálmur 37:4) Savna tí hugan um vónina, ið liggur fyri tær. Slaka ongantíð fyri neiliga, spilta og bronglaða hugsanarháttinum í gamla heiminum hjá Satani. Kennir tú á tær, at heimsins andi er um at sníkja seg inn í títt sinni ella hjarta, mást tú biðja inniliga til Jehova um at fáa 'frið Guds, sum stígur upp um alt vit'. Hesin friðurin frá Gudi verjir títt hjarta og sinni. – Filippibrævið 4:6, 7.

---

20. Hvat kann hjálpa tær at varðveita ein jaligan og vóngóðan hugsanarhátt?

21 Vit hava av sonnum eina frálíka vón. Um tú hoyrir til ’stóra skaran’, sum fer at ’koma út úr hini stóru trongdini’, kanst tú hugsa um, hvussu gott lívið skjótt fer at verða. (Opinberingin 7:9, 14) Tá ið Satan og hansara illu andar eru burtur, fert tú at kenna ein lætta, sum er ringur at ímynda sær nú. Ja, hvør av okkum hevur nakrantíð upplivað eitt lív við *ongari* ávirkan frá spilta heimi Satans? Tá ið henda ávirkanin er burtur, verður tað sera gleðiligt at vera við til at gera jørðina til eitt paradís við Jesusi og hansara 144.000 himmalsku samstjórnarum á odda. Tað vekur av sonnum gleði at hugsa um, at øll sjúka og brek verða burtur, at vit kunnu taka ímóti okkara kæru, sum koma upp úr grøvunum, og at vit kunna liva lívið, soleiðis sum Gud ætlaði tað! So hvørt sum vit vaksa fram til fullkomileika, nærkast ein enn størri løn – „dýrdarfrælsi Guds barna“. – Rómbrævið 8:21.

22 Jehova vil, at tú skalt fáa størri frælsi, enn tú yvirhøvur kanst ímynda tær. Hetta frælsið er treytað av lýdni. Er tað ikki alt stríðið vert at akta Jehova dag um dag? Halt tí fram at byggja teg sjálvan upp á tína heilagastu trúgv, so tú kanst halda teg í kærleika Guds um allar ævir!

21, 22. (a) Hvørja frálíka vón gleðast tey um, sum hoyra til ’stóra skaran’? (b) Hvat gleðir tú teg mest til, og hvat hevur tú sett tær fyri?

UPPÍSKOYTI

EVNI **SÍÐA**

Hvussu skulu vit bera okkum at í sambandi við ein, sum er útihýstur? **207**

Nær eiga kvinnur at hava okkurt á høvdinum – og hví? **209**

At heilsa flagginum, fara á val og gera borgaraliga tænastu . . **212**

Blóðúrdráttir og viðgerðarhættir **215**

Ven teg av við at nøkta teg sjálvan **218**

Hvat sigur Bíblian um hjúnaskilnað og sundurlesing? **219**

Hvussu loysa vit handilsligar ósemjur? **222**

Hvussu skulu vit bera okkum at í sambandi við ein, sum er útihýstur?

Tað voldir okkum stóra sorg, tá ið ein í familjuni ella ein góður vinur verður útihýstur úr samkomuni vegna eina synd, sum hann ella hon ikki angrar. Okkara støðutakan til ta leiðbeiningina, Bíblian gevur um hetta, kann vísa, hvussu góð vit eru við Gud, og hvussu trúføst vit eru móti hansara skipan.* Latið okkum kanna nakrar spurningar, sum stinga seg upp í hesum sambandi.

Hvussu skulu vit bera okkum at í sambandi við ein, sum er útihýstur? Bíblian sigur: „Um onkur, ið kallast bróðir, er siðloysingur, havisjúkur, avgudadýrkari, baktalari, drykkjumaður ella ránsmaður, so skulu tit ikki umgangast slíkan, nei, ikki so mikið sum eta saman við honum.“ (1 Korintbræv 5:11) Um tann, sum „ikki [verður] verandi í læru Kristusar“, lesa vit: „Takið ikki ímóti honum í húsum tykkara og biðið hann ikki vælkomnan! Tí tann, ið biður hann vera vælkomnan, fær lut við honum í óndu verkum hansara.“ (2 Jóhannes 9-11) Vit hava hvørki andaliga ella sosiala samveru við tey, sum eru útihýst. Í *Vagttårnet,* 15. november 1981, síðu 16, stendur: „Bara tað at siga ’Hey!’ við onkran, kann vera fyrsta stigið til eina samrøðu og kanska enntá eitt vinalag. Høvdu vit viljað tikið hetta fyrsta stigið við at heilsa upp á ein, sum er útihýstur?“

Er tað veruliga neyðugt at halda seg púrasta frá viðkomandi? Ja, av fleiri orsøkum. Í fyrsta lagi snýr tað seg um trúfesti móti Gudi og hansara orði. Vit akta ikki bara Jehova, tá ið tað er lætt, men eisini tá ið tað av álvara er torført. Okkara kærleiki til Gud fær okkum at akta øll hansara boð, tí vit vita, at hann er rættvísur og góður, og at hansara lógir bert eru til gagn. (Esaias 48:17; 1 Jóhannes 5:3) Í øðrum lagi kann tað, at vit halda okkum burtur frá einum syndara, sum ikki angrar,

* Bíbilsku meginreglurnar um útihýsing eru eisini galdandi fyri tey, sum sjálv hava kvett sambandið við samkomuna.

verja okkum og restina av samkomuni, so vit ikki verða dálkað andaliga og siðiliga. Og tað verjir eisini góða umdømið hjá samkomuni. (1 Korintbræv 5:6, 7) Í triðja lagi kann okkara fasta avgerð um at fylgja bíbilskum meginreglum gagna tí útihýsta. Við at stuðla avgerðini hjá dómsnevndini kunnu vit kanska ávirka hjartalagið hjá einum syndara, sum higartil ikki hevur tikið ímóti hjálpini frá teimum elstu. At hann ikki longur kann vera saman við familju og vinum, kann hjálpa honum at skilja, hvussu álvarsliga hann hevur syndað og at taka stig til at koma aftur til Jehova. – Lukas 15:17.

Hvat um ein í familjuni verður útihýstur? Av tí at familjubondini eru sera sterk, kann okkara trúfesti móti Jehova í slíkum førum veruliga koma at standa sína roynd. Hvussu skulu vit bera okkum at í sambandi við ein í familjuni, sum er útihýstur? Tað ber ikki til at nevna eina og hvørja støðu, ið kann koma fyri, men latið okkum kanna tvær grundleggjandi støður.

Í summum førum býr tann útihýsti framvegis saman við síni nærmastu familju. Familjubondini verða ikki slitin, fyri tað um ein verður útihýstur, og tí kann dagliga familjulívið halda fram. Men við sínum atburði hevur viðkomandi valt at slíta andaliga bandið millum seg og sína trúgvandi familju. Tí kunnu tey trúføstu í familjuni ikki longur hava andaligan felagsskap við hann. Til dømis kann tann útihýsti, um hann er hjástaddur, tá ið familjan kannar Bíbliuna saman, ikki taka lut í tí. Men er tann útihýsti ómyndigur, hava foreldrini enn ábyrgd at undirvísa og uppala hann. Tí kunnu tey velja at leiða ein bíbliulestur við honum.* – Orðtøkini 6:20-22; 29:17.

Í øðrum førum býr tann útihýsti ikki saman við síni nærmastu familju. Hóast tað onkra hendingaferð kann gerast neyðugt at hava eitt ávíst samband við viðkomandi vegna onkur familjuviðurskifti, má samveran haldast á minstamarkinum. Tey trúføstu í familjuni leita ikki eftir umberingum fyri

---

* Fleiri upplýsingar um ómyndig børn, sum búgva heima og eru útihýst, eru at finna í *Vagttårnet,* 1. oktober 2001, síðurnar 16-17, og 15. november 1988, síðu 20.

at hava samband við ein í familjuni, sum er útihýstur og ikki býr heima. Teirra trúfesti móti Jehova og hansara samskipan fær tey tvørturímóti at halda fast við bíbilsku skipanina um útihýsing. Tað besta, tey kunnu gera fyri tann útihýsta, er at vera trúføst móti hesi skipanini, tí tað kann hjálpa honum at fáa gagn av rættleiðingini, hann hevur fingið.* – Hebrearabrævið 12:11.

* Fleiri upplýsingar um, hvussu vit skulu bera okkum at í sambandi við útihýst í familjuni, eru at finna í *Vagttårnet,* 15. apríl 1988, síðurnar 26-31, og 15. november 1981, síðurnar 18-23.

Nær eiga kvinnur at hava okkurt á høvdinum – og hví?

Nær og hví eigur ein kvinna at hava eitt turriklæði ella okkurt líknandi á høvdinum sambært Bíbliuni? Latið okkum kanna, hvat Paulus ápostul fekk íblástur frá Gudi til at skriva um hetta evnið. Hann gevur okkum ta vegleiðing, okkum tørvar, so vit kunnu taka góðar avgerðir, sum æra Gud. Í Fyrra Korintbrævi 11:3-16 nevnir Paulus tríggjar síður, vit mugu hugsa um: (1) *andaliga virksemið,* sum krevur, at ein kvinna hevur okkurt á høvdinum, (2) *støðurnar,* sum krevja tað, og (3) *orsakirnar* til, at hon skal fylgja hesi vegleiðingini.

Andaliga virksemið. Paulus nevnir tvey dømi: bøn og tað at profetera. (Ørindini 4, 5) Bøn merkir at venda sær virðiliga til Jehova. At profetera fevnir í dag um alla undirvísing í Bíbliuni, sum ein tænari hjá Gudi veitir. Men meinti Paulus, at ein kvinna skal hava okkurt á høvdinum, hvørja ferð hon biður ella undirvísir í Bíbliuni? Nei. Tað veldst um støðuna.

Støðurnar. Paulus nevnir tvey sløg av støðum – eina, sum hevur við familjuskipanina at gera, og eina, sum hevur við samkomuna at gera. Hann sigur: „Maðurin er høvur kvinnunnar. ... Og tann kvinna, ið biður ella profeterar við ongum á høvdinum, vanærir høvd sítt.“ (Ørindini 3, 5) Jehova hevur

álagt manninum at vera høvur, ella at ganga á odda í familjuni. Tekur ein kvinna, uttan at vísa hóskandi virðing fyri myndugleikanum hjá manninum, ábyrgdaruppgávur á seg, sum Jehova hevur givið manni hennara, vanvirðir hon mann sín. Um hon til dømis má leiða ein bíbliulestur, meðan maður hennara er hjástaddur, viðurkennir hon hansara myndugleika við at hava okkurt á høvdinum. Tað ger hon, antin hann er doyptur ella ikki, tí hann hevur leiðsluna í familjuni.* Skal hon biðja ella undirvísa, meðan doypti sonur hennara, sum er ómyndigur, er til staðar, eigur hon somuleiðis at hava okkurt á høvdinum, ikki tí hann hevur leiðsluna í familjuni, men vegna myndugleikan doyptir brøður í samkomuni hava.

Paulus nevnir tað, sum hevur við samkomuna at gera, við at siga: „Hevur onkur hug at trætast um hetta – vit hava ikki slíkan sið, samkomur Guds heldur ikki!" (Ørindi 16) Doyptir brøður hava fingið uppgávuna at ganga á odda í samkomuni. (1 Timoteus 2:11-14; Hebrearabrævið 13:17) Bara menn verða tilnevndir at vera elstar og samkomutænarar, og teir hava fingið ta ábyrgd frá Gudi at røkta hansara fylgi. (1 Pætur 5:1, 2) Viðhvørt kunnu umstøðurnar tó krevja, at ein systir tekur eina uppgávu á seg, sum ein skikkaður doyptur bróðir vanliga tekur sær av. Til dømis noyðist hon kanska at leiða eitt boðanarmøti, tí eingin skikkaður doyptur bróðir er til staðar ella hevur møguleika at gera tað. Tað kann eisini vera, at hon leiðir ein avtalaðan bíbliulestur, meðan ein doyptur bróðir er hjástaddur.# Av tí at undirvísingin í roynd og veru fer fram vegna samkomuna, hevur hon okkurt á høvdinum, tí hon viðurkennir, at hon ger nakað, sum ein bróðir vanliga tekur sær av.

Tó eru nógvar síður av okkara tilbiðing, sum ikki krevja, at ein systir skal hava okkurt á høvdinum. Tað er eitt

---

* Ein gift systir biður vanliga ikki hart saman við doypta manni sínum. Men hon kann gera tað undir óvanligum umstøðum, eitt nú um maðurin vegna sjúku ikki fær tosað longur.

Tað er *ikki* neyðugt, at ein systir hevur nakað á høvdinum, tá ið hon leiðir ein avtalaðan bíbliulestur, meðan ein *ódoyptur* mannligur boðari, sum hon ikki er gift við, er hjástaddur.

nú ikki neyðugt, tá ið hon ger viðmerkingar á møtunum, fylgist við manni sínum ella einum øðrum doyptum bróður hús úr húsi, ella tá ið hon lesur ella biður saman við sínum ódoyptu børnum. Aðrar støður kunnu sjálvsagt taka seg upp, og ivast ein systir í, hvat hon skal gera, má hon kanna málið nærri.* Ivast hon enn, og sigur hennara samvitska henni, at hon má hava okkurt á høvdinum, er tað ikki skeivt, sum vit síggja á myndini.

Orsakirnar. Í ørindi 10 finna vit tvær orsakir til, at ein systir eigur at fylgja kravinum um at hava okkurt á høvdinum: „Kvinnan [eigur] at hava á høvdinum tekin uppá undirgivni – fyri einglanna skuld.“ Legg fyrst til merkis orðingina „tekin uppá undirgivni“. Tá ið ein kvinna hevur okkurt á høvdinum, vísir hon, at hon viðurkennir myndugleikan, sum Jehova hevur givið doyptum brøðrum í samkomuni. Soleiðis vísir hon Jehova Gudi kærleika og trúfesti. Ein onnur orsøk liggur í orðunum „fyri einglanna skuld“. Hvønn týdning hevur tað fyri hesar veldigu andaskapningarnar, at ein kvinna hevur okkurt á høvdinum?

Einglarnir eru áhugaðir í at síggja, hvussu øll í samskipanini hjá Jehova, bæði í himli og á jørðini, vísa virðing fyri guddómligum myndugleika. Harumframt gagnar tað teimum at síggja ófullkomin menniskju ganga undan sum góð fyridømi í hesum sambandi. Teir skulu jú eisini geva seg undir leiðsluskipanina hjá Jehova – nakað, sum nógvir einglar í forðum ikki gjørdu. (Judas 6) Einglarnir síggja kanska dømi um, at ein systir, sum hevur fleiri royndir, størri vitan og er gløggari

* Fleiri upplýsingar eru at finna í *Vagttårnet,* 15. februar 2015, síðu 30; 15. juli 2002, síðurnar 26-27, og 1. juni 1977, síðurnar 260-263.

enn ein doyptur bróðir í samkomuni, kortini gevur seg undir hansara myndugleika. Í summum førum er kvinnan ein salvað systir, sum seinni verður samarvingi Kristusar. Ein slík kvinna fær einaferð eina hægri støðu enn einglarnir og skal stjórna saman við Jesusi í himli. Hetta er ein frálík fyrimynd hjá einglunum at eygleiða! Tað er av sonnum ein framíhjárættur hjá øllum systrum at vísa eyðmjúkleika og lýdni við sínum trúfasta og undirgivna atburði, meðan milliónatals trúfastir einglar eygleiða tær.

At heilsa flagginum, fara á val og gera borgaraliga tænastu

At heilsa flagginum. Jehova vitni meta tað at boyggja seg fyri ella at heilsa flagginum, ið ofta verður gjørt í sambandi við, at ein tjóðsangur verður spældur, sum eina átrúnaðarliga gerð. At gera hetta vísir, at roknað verður við bjarging frá landinum ella leiðarunum í tí og ikki frá Gudi. (Esaias 43:11; 1 Korintbræv 10:14; 1 Jóhannes 5:21) Ein leiðari, sum skipaði fyri einum slíkum hátíðarhaldi, var Nebukadnezar kongur í fortíðar Bábylon. Fyri at vísa fólkinum, hvussu hátt hevjaður hann var, og hvussu íðin hann var í síni gudsdyrkan, læt hesin veldigi stjórnarin eina risastóra standmynd gera. Síðani bað hann sínar tegnar boyggja seg fyri henni, meðan tónleikur, eitt slag av tjóðsangi, varð spældur. Men tríggir hebrearar, Sadrak, Mesak og Abed-Nego, noktaðu at boyggja seg fyri standmyndini, hóast tað hevði deyðarevsing við sær. – Dániel, kapittul 3.

Á okkara døgum er flaggið „størsta trúarímyndin fyri tjóðskaparkensluna og fremsti tilbiðingarluturin“, skrivaði søgufrøðingurin Carlton Hayes. „Menn fara úr hattinum, tá ið flaggið kemur framvið. Til at lovprísa flagginum skriva yrkjarar fagnaðarkvæði, og børn syngja.“ Hann legði aftrat, at tjóðskaparkenslan eisini hevur sínar „heiligdagar“,

eitt nú 4. juli í USA, og eisini síni „halgimenni og hetjur“ og síni „tempul“, ella minnismerki. Í sambandi við eitt alment hátíðarhald í Brasil segði ein høgur hernaðarembætismaður: „Fólk æra og tilbiðja flaggið ... eins og føðilandið verður tilbiðið.“ Eitt leksikon segði einaferð: „Flaggið er heilagt eins og krossurin.“ – *The Encyclopedia Americana*.

Í eini nýggjari útgávu av áðurnevnda leksikon stendur, at tjóðsangir „lýsa fosturlandskærleika og fevna ofta um eina bøn til Gud um at leiða og verja fólkið ella leiðararnar hjá tí“. Tí eru tey, sum tæna Jehova, ikki órímilig, tá ið tey meta tjóðskaparlig hátíðarhald, eitt nú at heilsa flagginum og syngja tjóðsangir, sum átrúnaðarlig. Í einari viðmerking um, at børn hjá Jehova vitnum nokta at fagna flagginum ella at svørja trúskapareiðin í amerikanskum skúlum, stendur soleiðis í einari bók: „Hægstirættur hevur í fleiri rættarmálum umsíðir staðfest, at hesi dagligu ritualini hava átrúnaðarligan dám.“ – *The American Character*.

Hóast Jehova vitni ikki vilja taka lut í hátíðarhaldi, sum tey halda vera óbíbilskt, virða tey avgjørt rættin hjá øðrum at gera tað. Tey virða eisini fløgg sum tjóðarímyndir og viðurkenna sitandi stjórnir sum „yvirvøld“, ið virkar sum „tænari Guds“. (Rómbrævið 13:1-4) Tí fylgja Jehova vitni áminningini um at biðja „fyri kongum og øllum, ið høgt eru sett“. Men vit gera tað, „fyri at vit kunnu liva stilt og friðarligt lív í øllum gudsótta“. – 1 Timoteus 2:2.

Luttøka í politiskum valum. Sonn kristin virða rættin hjá øðrum at fara á val. Tey mótmæla ikki, at val verða hildin, og tey geva seg undir valdu myndugleikarnar. Tó eru tey púra uttanveltað í sambandi við politisk viðurskifti. (Matteus 22:21; 1 Pætur 3:16) Hvat eigur eitt Jehova vitni at gera, sum býr í einum landi, har valluttøka er eitt krav, ella at tað er illa dámt, tá ið onkur ikki fer til valhølini? Við tí í huga, at Sadrak, Mesak og Abed-Nego fóru so langt sum at møta upp í Duradalinum, kundi eitt Jehova vitni undir líknandi umstøðum valt at farið til valhølini, um samvitskan loyvdi tí. Viðkomandi ansar kortini væl eftir ikki at slaka í sambandi við sína

uttanveltaðu støðu. Hann ella hon eigur at hugsa um hesar seks meginreglurnar:

1. Lærisveinarnir hjá Jesusi eru „ikki av heiminum". – Jóhannes 15:19.

2. Sonn kristin umboða Kristus og hansara ríki. – Jóhannes 18:36; 2 Korintbræv 5:20.

3. Kristna samkoman er sameind í trúgv, og øll í henni eru knýtt saman í kristnum kærleika. – 1 Korintbræv 1:10; Kolossebrævið 3:14.

4. Tey, sum velja ein ávísan politikara, hava samábyrgd av tí, hann ger. – Legg til merkis meginreglurnar, sum liggja í orðunum í Fyrru Sámuelsbók 8:5, 10-18 og í Fyrra Timoteusbrævi 5:22.

5. Jehova metti ynskið hjá ísraelsfólki um at fáa eitt menniskja til kong sum eitt tekin um, at tey høvdu vrakað hann. – 1 Sámuel 8:7.

6. Sonn kristin eiga frítt at kunna tosa við fólk um Guds ríki, uttan mun til hvørja politiska sannføring hesi fólkini hava. – Matteus 24:14; 28:19, 20; Hebrearabrævið 10:35.

Borgaralig tænasta. Í summum londum verður kravt, at hertænastunoktarar skulu gera onkra borgaraliga tænastu í eitt tíðarskeið. Skulu vit taka eina avgerð í eini tílíkari støðu, mugu vit nevna tað í okkara bønum, kanska tosa við ein búnan trúarfelaga um tað og síðani samvitskufull taka avgerðina eftir tí, sum vit eru komin fram til. – Orðtøkini 2:1-5; 11:14.

Guds orð biður okkum „vera yvirvøldini og teimum, ið valdið hava, undirgivin, at vera lýðin og til reiðar til alt gott verk, ... vera mild [rímilig, *NW*]". (Titus 3:1, 2) Við hesum í huga kunnu vit seta okkum sjálvum nakrar spurningar: 'Noyðist eg, um eg sigi ja til at útinna hesa borgaraligu tænastuna, at slaka í sambandi við mína uttanveltaðu støðu ella at hava við falskan átrúnað at gera?' (Mika 4:3, 5; 2 Korintbræv 6:16, 17) 'Verður tað, um eg geri hetta arbeiðið, torført hjá mær at røkja mínar bíbilsku skyldur, ella forðar tað mær enntá í at liva upp til tær?' (Matteus 28:19, 20; Efesusbrævið

6:4; Hebrearabrævið 10:24, 25) 'Kundi hetta arbeiðið hinvegin gjørt tað møguligt hjá mær at víðkað um mítt andaliga virksemi, kanska soleiðis at eg kann byrja í fulltíðartænastuni?' – Hebrearabrævið 6:11, 12.

Kemur ein sannur kristin til ta niðurstøðu, at hann við góðari samvitsku kann útinna borgaraliga tænastu heldur enn at fara í fongsul, eiga hansara trúarfelagar at virða avgerðina. (Rómbrævið 14:10) Men um hann kemur til ta niðurstøðu, at hann ikki vil útinna eina slíka tænastu, eigur henda avgerðin eisini at verða vird. – 1 Korintbræv 10:29; 2 Korintbræv 1:24.

Blóðúrdráttir og viðgerðarhættir

Blóðúrdráttir. Hesir verða vunnir úr teimum fýra høvuðslutunum í blóðinum, sum eru: reyðir blóðkroppar, hvítir blóðkroppar, blóðplátur og blóðvæta. Til dømis innihalda reyðir blóðkroppar proteinið blóðreyða (hæmoglobin). Heilivágur, sum er framleiddur úr blóðreyða frá menniskjum ella dýrum, hevur verið brúktur til at viðgera sjúklingar við bráðfeingisblóðtroti ella ógvisligum blóðmissi.

Í blóðvætu – sum er 90 prosent vatn – eru nógv hormon, ólívrunnin sølt, kveikar (ensym) og føðsluevni, harímillum mineral og sukur. Í blóðvætu eru eisini storkningarevni, mótevni til at vinna á sjúku og protein, eitt nú albumin. Immunglobulin, ið verður givið sum innspræning móti ávísum sjúkum, er vunnið úr blóðvætu frá fólkum, ið longu eru órinin fyri smittuevnunum. Úr hvítum blóðkroppum ber til at framleiða interferonir og interleukinir til at viðgera ávísa virussmittu og krabbasjúkur.

Kunnu sonn kristin góðtaka viðgerð, sum fevnir um at nýta blóðúrdráttir? Av tí at Bíblian ikki fer í smálutir hesum viðvíkjandi, má hvør einstakur við góðari samvitsku fyri Gudi taka sína egnu avgerð. Nøkur vilja als ikki hava nakran úrdrátt, tí tey hugsa sum so, at Guds lóg til ísraelsfólk kravdi, at blóðið av einum dýri skuldi „renna út á jørðina". (5 Mósebók 12:22-24)



Onnur, sum heldur ikki vilja hava flutning av fullblóði ella teimum fýra høvuðslutunum í blóðinum, taka kanska ímóti viðgerð, sum fevnir um at nýta ein blóðúrdrátt. Tey koma kanska til ta niðurstøðu, at úrdrátturin, sum er vunnin úr blóði, einaferð á leiðini heldur uppat at umboða lívið hjá tí menniskjanum ella dýrinum, sum blóðið er tikið av.

Tá ið vit skulu taka avgerðir um blóðúrdráttir, eiga vit at spyrja okkum sjálv: 'Eri eg greiður yvir, at eg, um eg sigi nei til allar blóðúrdráttir, eisini sigi nei til ávísan heilivág, ið kann basa sjúkum ella fáa blóðið at storkna og harvið steðga bløðing? Dugi eg at greiða einum lækna frá, hví eg góðtaki ella ikki góðtaki summar blóðúrdráttir?'

Viðgerðarhættir. Hesir fevna millum annað um at tynna blóðið (hæmodilutión) og at endurvinna blóðið (cell-saver). Tá ið blóðið verður tynt, verður nakað av blóðinum leitt úr kroppinum, býtt um við eftirgjørda blóðvætu og seinni leitt aftur í sjúklingin. Í sambandi við at endurvinna blóðið, verður blóð, ið sjúklingurin annars hevði mist undir skurðviðgerð, sogið upp og leitt aftur í kroppin. Blóðið verður sogið upp úr einum sári ella eini holu í kroppinum, reinsað ella sílað og síðani leitt aftur í sjúklingin. Av tí at tað kann vera ymiskt frá lækna til lækna, hvussu hesar viðgerðirnar verða framdar, eiga vit at finna út av, hvat læknin ætlar sær at gera.

Tá ið vit skulu taka avgerðir um hesar viðgerðarhættirnar, kunnu vit spyrja okkum sjálv: 'Verður nakað av mínum blóði

fört út úr kroppinum, og verður blóðstreymurin kanska enntá steðgaður eina løtu, kann eg so við góðari samvitsku siga, at hetta blóðið enn er ein partur av mær, og at tað tí ikki er neyðugt at „lata tað renna út á jørðina“? (5 Mósebók 12:23, 24) Hevði tað nívt mína bíbliuvandu samvitsku, um nakað av mínum egna blóði varð fört út úr kroppinum, tillagað og fört inn aftur í kroppin? Eri eg greiður yvir, at um eg nokti alla

SPURNINGAR TÚ KANST SETA LÆKNANUM

Um tú skalt leggjast undir skurð ella hava viðgerð, sum kann fevna um nýtslu av blóði, mást tú tryggja teg løgfrøðiliga, eitt nú við at fylla út oyðublaðið *Boðskriv og fulltrú viðvíkjandi læknaviðgerð,* sum er gjørt fyri at verja teg, so tú ikki fært blóðflutning. Haraftrat kundi tú sett læknanum nakrar spurningar.

- Tú kundi til dømis spurt: Vita øll, sum skulu hava við mína sjúkuviðgerð at gera, at eg eri eitt Jehova vitni og tí undir ongum umstøðum vil hava *flutning av blóði ella nøkrum av teimum fýra høvuðslutunum í blóðinum* (reyðum blóðkroppum, hvítum blóðkroppum, blóðplátum og blóðvætu)?
- Mælir onkur tær til at taka heilivág, sum inniheldur blóðúrdráttir, kundi tú spurt: Hvussu stór nøgd av blóðúrdrátti er í heiliváginum? Hvussu nógv av hesum heilivági skal eg ætlandi hava í senn, og á hvønn hátt?
- Loyvir tín samvitska tær at taka ímóti einum blóðúrdrátti, kundi tú spurt: Hvørjir eru vandarnir? Hvørjir aðrir møguleikar eru fyri viðgerð?

Áðrenn tú tekur avgerð um, hvat tú skalt gera, mást tú leggja málið fram fyri Jehova í bøn. Hann lovar at geva okkum tann neyðuga vísdómin, um vit í trúgv halda fram at biðja um hann. – Jákup 1:5, 6.

læknaviðgerð, har mítt egna blóð verður nýtt, so sigi eg eisini nei til blóðroyndir, at blóðið verður reinsað (hæmodialysu) og til nýtslu av hjarta-lungnamaskinu?'

Vit mugu sjálv gera av, hvussu vit vilja, at okkara egna blóð verður viðfarið undir skurðviðgerð. Tað sama er galdandi í sambandi við kanningar og viðgerðir, ið fevna um at taka eina lítla nøgd av okkara egna blóði og møguliga tillaga tað og síðani spræna tað innaftur.

Ven teg av við at nøkta teg sjálvan

Sjálvsnøktan er ein ringur vani, sum fremur ein sjálvsøknan atburð, bronglar sinnið og skaðar andaligu heilsuna.* Ein, ið nøktar seg sjálvan, kann eisini fara at meta onnur, sum vóru tey bara til fyri at nøkta kynsliga tørvin hjá honum. Hjá einum slíkum persóni hevur tað kynsliga einki við kærleika at gera, tað er bara nakað, sum gevur stutta njóting og lættir kynsliga øsing. Men tað lættir bara fyribils. Við sjálvsnøktan verða teir jørðisku limirnir ikki doyvdir, tá ið talan er um „siðloysi, óreinsku [og] girndarbruna", teir verða tvørturímóti stimbraðir. – Kolossebrævið 3:5.

Paulus ápostul skrivaði: „Elskaðu míni, ... latið okkum reinsa okkum frá øllum, ið ger okkum órein – á holdi og á anda – og soleiðis fullføra heilaggering í gudsótta!" (2 Korintbræv 7:1) Er tað eitt stríð hjá tær at fylgja hesi leiðbeiningini, mást tú ikki missa mótið. Jehova er altíð „til reiðar at fyrigeva" og hjálpa. (Sálmur 86:5; Lukas 11:9-13) Tínar skuldarkenslur og tínar royndir at sleppa vananum – hóast tú onkuntíð dettur aftur í gamla lagið – vísa, at tú hevur rætta hugburðin. Minst eisini til, at „Gud [er] størri enn hjarta okkara og veit alt". (1 Jóhannes 3:20) Jehova sær meira enn okkara syndir, hann sær alt menniskjað, sum tað er. Hann kennir okkum og lurtar við samkenslu eftir okkara inniligu

* *Sjálvsnøktan* vil siga at øsa kynsgøgnini fyri at fáa kynsligan fulnað.

bønum um miskunn. Tí mást tú ongantíð troyttast av at biðja eyðmjúkar og ærligar bønir til Gud, eins og eitt barn,ið fer til pápa sín, táið tað er komið illa fyri. Jehova fer at geva tær eina reina samvitsku. (Sálmur 51:3-14, 19; Esaias 1:18) Tú mást sjálvandi taka stig til at fylgja tí, sum tú hevur biðið um. Til dømis mást tú sleppa tær undan øllum sløgum av pornografi og eisini ringum felagsskapi.*

Heldur tú fram at hava trupulleikar við sjálvsnøktan, mást tú ikki aftra teg at tosa við ein, sum er andaliga búgvin, kanska pápa tín ella mammu tína ella ein góðan vin.# – Orðtøkini 1:8, 9; 1 Tessalonikabræv 5:14; Titus 2:3-5.

---

* Nógvar familjur hava tikið tað fyrivarnið at seta telduna í eitt felagsrúm. Haraftrat keypa nakrar familjur forrit,ið síla óynskt tilfar frá. Hav eisini í huga, at tað ber til at fara á internetið við snildfonum og líknandi, og at einki forrit,ið sílar óynskt tilfar frá, er púrasta álítandi.

Nøkur ítøkilig uppskot um, hvussu tað ber til at venja seg av við at nøkta seg sjálvan, eru at finna í greinini „Unge spørger: Hvordan kan jeg komme af med denne vane?“ í *Vågn op!* november 2006, og í bókini *Unge spørger — Svar der duer*, bind 1, síðurnar 178-182.

Hvat sigur Bíblian um hjúnaskilnað og sundurlesing?

Jehova væntar, at tey, sum gifta seg, halda hjúnabandslyftið. Táið hann sameindi fyrsta mannin og kvinnuna í hjúnabandinum, segði hann: „Maðurin ... heldur seg til konu sína, og tey bæði verða eitt hold.“ Seinni tók Jesus orðini uppaftur og legði aftrat: „Tað, sum tí Gud hevur bundið saman, má menniskja ikki skilja sundur.“ (1 Mósebók 2:24; Matteus 19:3-6) Jehova og Jesus meta altso hjúnabandið sum eitt lívlangt samband,ið bert slitnar, táið annar hjúnafelagin doyr. (1 Korintbræv 7:39) Av tí at hjúnabandið er ein fyriskipan frá Gudi, er hjúnaskilnaður eitt álvarsligt stig at taka. Satt at siga hatar Jehova hjúnaskilnaðir, sum ikki hava bíbilskt grundarlag. – Malakias 2:15, 16.

Hvat er sambært Bíbliuni eitt loyviligt grundarlag fyri hjúnaskilnaði? Jehova hatar hjúnabandsbrot og kynsligt siðloysi. (1 Mósebók 39:9; 2 Sámuel 11:26, 27; Sálmur 51:6) Ja, hann hevur so stóra andstygd fyri kynsligum siðloysi, at hann loyvir fólki at skiljast á hesum grundarlagi. (Ein viðgerð av, hvat kynsligt siðloysi fevnir um, er at finna í 9. kapitli, stykki 7.) Jehova gevur tí óseka hjúnafelaganum rætt at velja, um hann ella hon vil verða verandi hjá tí seka hjúnafelaganum ella søkja um hjúnaskilnað. (Matteus 19:9) Um ein ósekur hjúnafelagi tí velur at lata seg skilja, er tað ikki nakað, Jehova hatar. Men kristna samkoman fer tó ikki at eggja nøkrum til at søkja um hjúnaskilnað. Nøkur viðurskifti kunnu kanska fáa tann óseka makan at verða verandi hjá tí seka, serliga um hesin veruliga hevur angrað. Undir øllum umstøðum mugu tey, sum hava bíbilskt grundarlag fyri at lata seg skilja, sjálv taka avgerðina og góðtaka avleiðingarnar, ið tað kann hava við sær. – Galatiabrævið 6:5.

Nøkur *sera álvarslig* viðurskifti hava fingið nakrar tænarar hjá Gudi at lata seg sundurlesa ella skilja frá einum hjúnafelaga, hóast viðkomandi ikki hevur framt kynsligt siðloysi. Í slíkum førum ásetur Bíblian, at tann, sum velur at fara, skal 'verða verandi ógiftur ella koma til sættis' við hjúnafelagan. (1 Korintbræv 7:11) Ein tænari hjá Gudi, ið velur at gera hetta, er ikki leysur at leita sær eftir einum øðrum at gifta seg við. (Matteus 5:32) Latið okkum nevna nakrar heilt serligar umstøður, ið nøkur hava mett sum grundarlag fyri sundurlesing.

Tá ið maðurin við vilja forsømir at uppihalda familjuni. Ein familja kann gerast sera fátæk og mangla tað mest neyðuga til lívsins uppihald, um maðurin ikki syrgir fyri sínum, hóast hann er førur fyri tí. Í Bíbliuni stendur: „Hevur onkur ikki umsorgan fyri ... húsfólki sínum – hann hevur avnoktað trúnna og er verri enn ein vantrúgvandi." (1 Timoteus 5:8) Vil ein tílíkur maður ikki broyta seg, má konan gera av, um hon noyðist at verja seg sjálva og børnini við at lata seg sundurlesa. Teir elstu eiga sjálvsagt at kanna málið væl,

um ein bróðir verður ákærdur fyri at nokta at uppihalda síni familju. Vil ein maður ikki syrgja fyri familjuni, kann hann verða útihýstur.

Tá ið lív og heilsa eru í vanda av harðskapi. Ein hjúnafelagi, sum fremur harðskap, kann fara so ógvisliga fram, at lív og heilsa hjá makanum kemur í vanda. Er tann, sum fremur harðskap, ein tænari hjá Jehova, skulu teir elstu í samkomuni kanna ákærurnar fyri at vita, um tær eru sannar. Illsinnisherðindi og harðligur atburður kunnu elva til útihýsing. – Galatiabrævið 5:19-21.

Tá ið andaliga heilsan er í álvarsligum vanda. Ein hjúnafelagi roynir kanska í heilum at forða makanum í at tilbiðja Gud ella roynir enntá at noyða viðkomandi at bróta Guds boð á onkran hátt. Er hetta støðan, má tann hótti hjúnafelagin gera av, um einasti møguleikin at „lýða Gud meir enn menniskju“ er at lata seg sundurlesa. – Ápostlasøgan 5:29.

Í øllum málum, har støðan er so álvarslig, sum vit júst hava umrøtt, eigur eingin hvørki at royna at sannføra tann óseka hjúnafelagan um at lata seg sundurlesa ella at verða verandi hjá hjúnafelaganum. Andaliga búgvin vinfólk og elstar kunnu veita stuðul og bíbilska leiðbeining, men tey vita ikki um alt, sum gongur fyri seg millum mann og konu. Tað er bara Jehova, sum sær tað. Ein gift kona, sum tænir Gudi, ærir hvørki Jehova ella hjúnabandið, um hon fær trupulleikarnar í hjúnalagnum at ljóða verri, enn teir eru, bara tí hon vil sleppa frá at búgva saman við manni sínum. Hetta er eisini galdandi fyri mannin, um hann ger tað sama. Jehova sær, hvat býr undir eini og hvørji roynd at verða sundurlisin, uttan mun til hvussu fólk royna at fjala út yvir tað. Ja, „alt er nakið og bert fyri eygum hansara, sum vit standa til svars fyri“. (Hebrearabrævið 4:13, *Dahl/Viderø*) Men er talan um eina sera vandamikla støðu, ið heldur fram, eigur eingin at hava at einum tænara hjá Gudi, sum velur at lata seg sundurlesa, tí hann eingi onnur ráð veit sær. Tá ið samanum kemur, skulu vit „jú øll standa fyri dómstóli Guds“. – Rómbrævið 14:10-12.

Hvussu loysa vit handilsligar ósemjur?

Sum vit síggja í Fyrra Korintbrævi 6:1-8, tosaði Paulus ápostul um rættarmál millum trúarfelagar. Tað harmaði hann, at nøkur kristin í Korint 'fingu seg til at søkja dóm hjá hinum órættvísu'. (Ørindi 1) Paulus nevndi góðar grundir til, at Guds tænarar ikki eiga at stevna hvønn annan fyri rættin, men heldur loysa sínar ósemjur innanhýsis í samkomuni. Latið okkum kanna nakrar av grundunum til, at henda vegleiðingin varð givin, og síðani hyggja at nøkrum fáum dømum, sum vegleiðingin ikki endiliga fevnir um.

Hava vit eina handilsliga ósemju við ein trúarfelaga, mugu vit fyrst og fremst royna at loysa málið á ein hátt, ið Jehova kann góðtaka, og ikki bara sum vit sjálv halda vera best. (Orðtøkini 14:12) Sum Jesus vísti á, er frægast at loysa eina ósemju skjótast gjørligt, áðrenn hon vindur upp á seg og verður til eitt stríð. (Matteus 5:23-26) Men tíverri verða nøkur sonn kristin so stríðshugað, at tey leggja ósemjurnar fyri dómsvaldið. Paulus segði: „Tað er longu skeivt hjá tykkum, at tit hava sakir hvør við annan." Hví? Ein týðandi orsøk er, at slík rættarmál ofta geva fólki eina skeiva mynd av samkomuni og Jehova Gudi. Tí taka vit hesi orðini hjá Paulusi til okkum: „Hví líða tit ikki fyrr órætt!" – Ørindi 7.

Paulus vísti eisini á, at nógvar ósemjur kunnu loysast við at brúka ta skipanina, Gud hevur givið samkomuni, nevniliga elstaskipanina. Teir elstu kenna bíbilsku sannleikarnar væl og hava harvið ognað sær vísdóm. Paulus segði, at teir eru 'førir fyri at greiða sakir millum brøður í tímiligum viðurskiftum'. (Ørindini 3-5) Jesus vísti, at ósemjur, sum fevna um álvarsligar syndir, eitt nú útspilling og svik, eiga at verða loystar við at fylgja eini mannagongd, ið fevnir um trý stig. Fyrst mugu partarnir, sum málið viðvíkur, sjálvir royna at loysa ósemjuna. Verður ósemjan ikki loyst við at

fylgja hesum stignum, mugu eitt ella tvey vitni dragast inn í málið. Og verður ósemjan heldur ikki loyst við at fylgja tí stignum, má málið leggjast fram fyri teir elstu í samkomuni. – Matteus 18:15-17.

Allir elstar eru sjálvsagt ikki løgfrøðingar ella handilsmenn, og tað er heldur ikki neyðugt. Teir siga ikki, hvussu handilsligar ósemjur millum brøður skulu loysast, men royna heldur at hjálpa teimum at fylgja Bíbliuni og at koma ásamt um eina friðarliga loysn. Er talan um sera torgreidd mál, leita teir sær kanska ráð hjá fylkisumsjónarmanninum ella deildarskrivstovuni hjá Jehova vitnum. Kortini eru nøkur dømi, sum leiðbeiningin hjá Paulusi ikki endiliga fevnir um. Hvørji kundu tey verið?

Í summum førum er eitt rættarmál bara eitt einfalt formsmál, í øðrum førum er tað løgfrøðiliga neyðugt, uttan at nakað sjálvsøkið ella óvinaligt býr undir. Til dømis kann eitt rættarmál vera einasti mátin at fáa hjúnaskilnaðarváttan, foreldramyndugleika, uppihaldspening, tryggingarendurgjald, at koma upp í part millum kreditorarnar í sambandi við húsagang og at fáa staðfest eitt testamenti. Ein bróðir kann eisini í ávísum føri meta, at tað er neyðugt at seta fram mótkrav fyri at verja seg sjálvan í einum rættarmáli.*

Verða slík rættarmál førd á friðarligan hátt, eru tey ikki endiliga í stríð við andan í leiðbeiningini hjá Paulusi.# Men ein tænari hjá Gudi eigur kortini at hugsa mest um at halga navn Jehova og fremja frið og einleika í samkomuni. Jesu lærisveinar eru fremst av øllum kendir fyri at vísa kærleika, og „kærleikin ... søkir ikki sítt egna“. – 1 Korintbræv 13:4, 5; Jóhannes 13:34, 35.

---

* Í sjáldsomum førum kann tað henda, at ein tænari hjá Gudi fremur eina álvarsliga brotsgerð móti einum trúarfelaga. Tað kundi eitt nú verið neyðtøka, ógvisligt álop, morð ella grovur stuldur. Kemur slíkt fyri, er tað rætt av einum tænara hjá Gudi at melda málið til myndugleikarnar, hóast tað kann hava rættarmál við sær.

Fleiri upplýsingar eru at finna í *Vagttårnet,* 15. mars 1997, síðurnar 17-22, og 15. oktober 1991, síðurnar 25-28.

Vilt tú vita meira? Vitja **www.jw.org**
ella set teg í samband við Jehova vitni.